

RI



Na

Telephone: +47

LØGTINGS TIDINDI

1965

LØGTINGSTÍÐINDI

1965

TÓRSHAVN 1967

dagprent

INNIHALDSYVIRLIT

OLAVSØKUTINGIÐ 1965

	bls.
Tingsetingin	1
Tingmenningir	1
Frágreiðing frá løgmanni	3
Tingnevndir	182

LANDSFYRISETIÐ

Alment kunngerðarblað	82
Broytingar í heimastýrislógini	82
Landsstýrismál	164
Fyrispurningur til løgmann Hákun Djurhuus	379
Fyrispurningur til ríkisumboðsmannin	380
Fyrispurningur til landsstýrismann E. Patursson	381

LØGTINGIÐ

Nýval til Føroya løgting	30
Broytingar í lóg um Føroya løgting	97

FIGGJARMÁL

Figgjarløgtingslóg 1966/67	19
Skattafriar avskrivingar	32
Broyting í lógini um landsskatt og kommunuskatt	140
Stuttleikagjald	187
Frígoymsla	204
Broyting í skattalógini	215
Eykafiggjarløgtingslóg 1965/66	305
Serstakt innflutningsgjald	333
Broyting í toll-lógini	335

HEILSUMÁL

Broyting í lóg um kynsjúku 133

KIRKJUMÁL

Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 232

KOMMUNUMÁL

Broyting í reglunum um kommunal val 170
Kanning av kommunalu lóggávuni 230
Ábyrgd av láni til Tórshavnar kommunu 211
Ábyrgd av láni til Klakksvíkar kommunu til vatn 294

LÁNSÁBYRGDIR OG LANDSKASSAMÁL

Veðhald av lánum til smærri ídnaðarvirki 34
Veðhald av láni til p/f Clupea 38
Veðhald av láni til p/f Kambur 61
Útróður í Grønlandi 132
Veðhald av láni til SEV 218
Veðhald fyri láni til gerð av ringnót 229
Veðhald av lánum til sildamjøl og sildaolju á goymslu 329

MENTAMÁL v.m.

Bygging av Landsbóka- og Skjalasavni 178

RÍKISLÓGIR v.m.

Kunngerð av 2 ríkislógum 63
Fyriskipan um loftferðslu 161
Broyting í straffilógini 176
Nýggj patentlóg 206
Ymisk kunngerðarmál 246
Ymisk kunngerðarmál 247
Ymisk kunngerðarmál 358
Kunngerðarmál 360
Kunngerðarmál 377

RÚSDREKKALÓGIN

Broyting í rúsdrekkalógini 296

SAMFERÐSLUMÁL

Umskráseting av motorakfarum 114
Havnarverkið í Fuglafirði 165
Eykastudningur til summar havnir 167

Vegagerð millum Húsar og Mikladals 207
Studningur til bryggju í Tórshavn 238
Útbygging av havnini í Leirvík 243
Vegir og lendingar 250
Eykastudningur til havnina í Skopun og Skálavík 283
Brúgv um Hvannasund 299
Studningur og ábyrgd av láni til havnargerð norður við Strond 330

SJÓVINNUMÁL

Sjómannsløgtingslóg 107
Stuðul til keyp av hekkutrolara 150
Stuðul til bygging av farmaskipum 156
Broyting í reglingerðini hjá lønjavningargrunninum 199
Endurnýgging av skipanini um minstuløn v.m. 200
Broyting í lóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum 210
Hvíldartíð á føroyskum fiskiskipum 235
Lóg um manning av skipum 256
Útróðrarstudningur (flattmingur) 287
Agnstudningur til línufiskiskap 289
Rentustudningur 292
Býti av bjargingarløn 300
Broyting í lóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum 357

SJÚKRAHÚSMÁL

Avhending av grundstykkjum til Suðuroyar sjúkrahús 237

SKÓLAMÁL

Góðkenning av handilsskúlum 35
Kvøld- og ungdómsskúlar 101
Skúlalæknaskipan 116
Bygging av skúlum og læararahúsum 208

TELEFONMÁL

Broyting í telefongjøldum 121
Lán til Telefonverkið 349

TRYGGINGARMÁL

Lívstryggingarvirki 65
Broyting í lóg um Vanlukkutrygging 193

ÚTLENDSK MÁL

Føroyskt umboð í Norrøna ráðnum 134
Limaskapur í EFTA 361

ÚTVARPIÐ

Útvarp av løgtingsfundum 149
Útvarp Føroya 346

VAL v.m.

Val av monnum og nevndum 182

VINNA v.m.

Broyting í lærlingalógini 214
Almennur partapeningur til slovnsetan av vinkjum 285
Partapeningur í p/f Suður-Fisk í Vági 302
Broyting í lóg um frítíð við løn 374

Ólavsökutingið 1965

Ár 1965 ólavsøkudag kl. 13 var Føroya løgting sett. Tingformaðurin frá seinastu tingsetu, Samuel Petersen lýsti, at ólavsøkutingið 1965 var sett sambart skriv frá løgmanni d. 3. juli s. á.

Tingmenninir eru:

Hans Lützen, Klaksvík, ff.
Johan Simonsen, Klaksvík, tf.
Poul Jacob Olsen, Klaksvík, jv.
Samuel Petersen, Klaksvík, sj.
Johan Poulsen, Strendur, sb.
Reinhold Thomsen, Norðagøtu sb.
Frederik Hansen, Søldarfirði tf.
Hans J. Ellingsgaard, Eiði tf.
J. Fr. Øregaard, Gøtu, jv.
Poul Petersen, Tórshavn, ff.
Hans Iversen, Kvívík, sb.
Sigurð Joensen, Tórshavn, tf.
Leon Joensen, Sørvági, sb.
Haldor Hansen, Sørvági, jv.
Vilhelm Nielsen, Sandavági, ff.
Trygve Samuelsen, Tórshavn, sb.
Marius Johannesen, Tórshavn, sj.
Hanus við Høgadalsá, Tórshavn, tf.
Kjartan Mohr, Tórshavn, fb.
Jacob Lindenskov, Tórshavn, jv.
Knút Wang, Tórshavn, ff.
Sigfried Skaale, Tórshavn, ff.
Erlendur Patursson, Tórshavn, tf.
Johan P. Davidsen, Sandi, jv.
Johan H. Danbjørg, Porkeri, jv.
Peter Mohr Dam, Tvøroyri, jv.
Dion Nolsøe, Vági, jv.
Andreas Djurhuus, Vági, sb.
Niels Holm Jacobsen, Hvalba, ff.

Formaðurin bað K. Wang og Haldor Hansen vera fyribils skrivarar.
Formaðurin legði fram skriv frá fólkaflokkinum, framburðsflokk

innum og tjóðveldisflokkinum, og Hanus við Høgadalsá, dagf. 28. juli 1965, at teir vóru gingnir saman til val av tingfyrisæti og tingmevnum.

So fór fram val av formansskapi.

Eftir uppskoti frá Poul Petersen var Samuel Petersen valdur til tingformann og eftir uppskoti frá P. M. Dam var J. Fr. Øregaard valdur til varaformann.

Eftir uppskoti vóru K. Wang og Jákup Lindenskov valdir til tingskrivarar.

Tingformaðurin bað tingmenn rópa eitt 9 fallt hurra fyri kongi og eitt 3 fallt fyri Føroyum.

— — —

At taka sess á tingi sum varamenn samtykti tingið:

28. august 1965 Jens Pauli Joensen í Skopun fyri Erlend Paturssson, 26. apríl 1966 Peter Christiansen í Tórshavn fyri Sigfried Skaale, 2. mai s.á. Oliver Schrøter í Hvalba fyri Dion Nolsøe og 10. s.m. Gunnar Poulsen í Sumba fyri P. M. Dam.

Frágreiðing frá lögmanni 1965

Eftir fornum siði og løgtingslóg nr. 1 dagsett 13. mai 1948 um stýrisskipan í sernálum er í dag Føroya løgting sett, og løgtingssetan 1965/66 er byrjað.

Frá einum meiriluta á hesum høga tingi hevur tingformaðurin borið fram álitisváttan til sitandi landsstýri, og boðar hon frá, at teir sonu stjórnarflokkar, sum higartil í hesum valskeiði hava havt ábyrgdina av landsins stýri, eisini framyvir standa undir hesi ábyrgd.

Ta tíð, ið farin er aftur um bak, síðani hesir stjórnarflokkar 1. januar 1963 settu sitandi landsstýri, kenna vit, men vit kenna ikki hinu, ið er fyri framman, og sum tær ætlanir, vit seta okkum fyri at útinna, skulu verða týðandi partur í.

Hesar ætlanir bera í sær framhaldandi áthygging av okkara samfelagi á stjórnarliga økinum, í líggjarmálum, búskaparmálum, sosialmálum, samferðslumálum, vinnulívsmálum, mentunarmálum og øðrum málum, samsvarandi teimum hugsjónum, ið eru politiska støðið undir okkara arbeiði og virksemi her á løgtingi, og sum framdar á fólkaræðisligari grund skulu verða við til at tryggja fólki okkara tívilig kor og skapa grøðisliga tilveru hjá okkum sum tjóð.

Á so mongum arbeiðsøki er tað so, at settir verða settningar fyri tí, ið ætlanin er at røkka í vissum tíðarskeiði. Soleiðis er mannagongdin á tí politiska arbeiðsøkinum. Teir flokkar, ið átaka sær ábyrgdina av landsins stýri, gera av sínamillum, hvussu arbeiðssettningurin skal vera og seta samsvarandi hesum «út í korti».

ARBEIÐSSETNINGURIN

Tá teir flokkar, ið standa aftan fyri sitandi landsstýrið tóku seg saman í politiska samgongufylking fyri 2 árum og 7 mánaðum síðani, var

gjørdur slíkur arbeiðssetningur. Forvitnisligt er tað kanska í dag at taka hann fram og í stuttum vísa á, hvat ið higartil hevur spurst burturúr.

Arbeiðssetninguriu var í 5 bólkum:

I Stjórnarviðurskifti
II Fíggjar- og vinnulívsmál
III Socialmál
IV Mentunarmál
V Onnur mál

I. STJÓRNARVIÐURSKIFTI

Hesin partur var í 12 greinum, og er uppskot av landsstýrinum lagt fyri løgtingið í løgtingsmáli nr. 80/1964: Broytingar í heimastýrislógini, ið svara til innihaldið í 10 av hesum greinum.

Tær 2 síðstu greinirnar, 11 og 12, eru viðvíkjandi landsstýrisins sýtingarrætti, fíggjarnevndarinnar avgerðum í fíggjarmátum, tá tingið ikki er saman, og avgerðarmyndugleika hjá millumtinganevndum. Við eykafíggjarlógini er støði lagt undir fíggjarnevndarheimildini og verður avgerð um, at landsstýrið ongan sýtingarrætt hevur og millumtinganevndarinnar avgerðarmyndugleiki, at fastseta við lóg í hesi tingsetuni.

II. FÍGGJAR- OG VINNULÍVSMÁL

Hesin partur var í 6 greinum:

1. gr. Fíggjarliga støða hins almenna og fíggjarliga viðurskifti landsins verða kannað.

Hetta er gjørt m.a. við setanini av búskaparráðinum, og hava vit nú egnan tjóðarrokuskap at miðja okkum eftir, tá avgerðir um fíggjarmát skulu verða tiknar.

2. gr. Í vinnulívinum verður bygdur upp nútiðarhóskandi og rationellur framleiðsluútbúnaður.

Her kann verða vist á síðstu veiðiførini, ið bygd eru í Føroyum, og sum liggja á oddu millum veiðifør hjá øðrum fiskitjóðum, hvat nútíðarhóskandi og rationellum framleiðsluútbúnaði viðvíkir.

Hetta sama ger seg galdandi viðvíkjandi flaka- og sildaverksmiðjum, ið eru í gerð og konservesverksmiðju, ið ætlan er gjørd fyri.

3. gr. Virkað verður fyri at tryggja og økja inntøkumøguleikar vinnustattanna við framleiðsluøking, rationellum rakstrarháttum og við hartil neyðugum tiltøkum í handils- og prismálum.

Leiðin, ið hildin hevur verið í handils- og prismálum Føroya útfluttningi viðvíkjandi, hevur verið hon, at roynt hevur verið í samarbeiði við útfluttningsvinnuna at samskipa okkara útflutning, so eitt órímiliga stórt og spjatt útboð ikki skal hava kunnað trýst prísin. Í stórum hevur hetta eydnast, so valla nakrantíð fyrr hevur útfluttningsvinnan staðið so sameind sum í dag, og er prísvøksturin prógv fyri góðum úrsliti. Hesin prísvøkstur saman við teimum framleiðsluøkjandi og rationellu rakstrarháttum, ið okkara nýggjasti framleiðslutúbúnaður hevur gjørt og fer at gera, hevur tryggjað og økt inntøknmøguleikar vinnustattanna.

4. gr. Sjómarks- og sjóverjumálini verða loyst eftir samtyktum løgtingsins.

Av hesum er sjómarksmálið loyst eftir samtykt løgtingsins við løgtingslóg um fiskiveiðu á landleiðini nr. 12 dagsett 14. mars 1964. Sjóverjumálið er til viðgerðar og umhugsnar í landsstýrinum og hjá fíggjarnevnd Løgtingsins og er á tí fíggjarlógaruppskoti, ið lagt verður fram nú, sett 1. milj. kr. av til bygging av verjuskipi umfram 2 milj. kr., ið stóðu á seinastu løgtingsfíggjarlóg undir lántøku. Ætlandi verður endalig støða í hesum máli tikin í heyst, og skipið útboðið til byggingar í Føroyum.

6. gr. Nýggj skattalóg verður framd í hesi tingsetu.

Við løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt nr. 50 dagsett 2. juli 1963 var henda grein avgreidd.

III. SOCIAL MÁL

Hesin partur var í 3 greinum:

1. gr. Sociallujálpar og socialtryggingarskipanin verður bøtt soleiðis, at altíð er tryggjað gomlum og avlamnum og øðrum óvinnuførum, eins og teimum, ið hava mist uppihaldara sín, sámulig og livilig kor.
Tá sitandi landsstýrið tók við, vóru útreiðslurnar á fíggjarløgtingslógini hjá farna landsstýri settar til 6.164.000 kr.

Á tí fíggjarlógaruppskoti, ið verður lagt fram í hesi tingsetu, eru sonnu útreiðslur settar til 9.400.500 kr.
— ein hækking uppá 50 %.

Socialmálini eru felagsmál, og beint nú er nevnd sett niður við føroyskum og danskum limum og skal henda nevnd kanna galdandi sociallóggávu við tí í hyggju at gera ábøtur, har tað verður hildið neyðugt.

2. gr. Almenn lívstrygging fyri alt landið og føroysk lívstrygging.

Uppskotið um føroyska lívstrygging liggur hjá tinginum, og viðviðvíkjandi almennari sjúkratrygging kemur hetta mál til viðgerðar í áðurnevndu socialnevnd, ið ger uppskot at leggja fyri landsstýrið, ið síðani kemur til løgtingið við málinum.

3. gr. Húsalánsgrunnur settur á stovn.

Við løgtingslóg um húsalánsgrunn nr. 49 dagsett 30. mai 1964 er hesin grunnur settur á stovn og er í arbeiði í dag við 2 milj. kr. í stovnsfæði.

IV. MENTUNARMÁL.

Hesin partur var í 2 greinum:

1. gr. Allur skúlaskapur á føroyskar hendur.
À landsstýrisfundi 7. august 1961 var soljóðandi samlykt gjørd: ..... Samstundis varð samlykt at seta nevnd at gera uppskot til føroyska skúlaskipan, og á fundi 5. november var nevndin sett við hesari manning: Johan Djurhuus, skrivstovustjóri, Arnbjørn Mortensen, rektari, Ludvig Peterson, lærari, Edmund í Garði, lærari, Johs. Næss, lærari, Jóan P. Joensen, sáli, skúlaráðgevari, Tummas Nygaard, cand. mag. og Johs. Rasmussen, jarðfræðingur, mag. scient.
2. gr. Førdur verður upphyggjandi mentunarpolitikkur á føroyskari grund, skúlunum verður sum skjótast útvegaðar føroyskar lærubøkur.
Sjevnt verður móti stovnseting av kerdum háskúla. Til at byrja við verða lærustólar settir í føroyskum máli og føroyskari søgu.

Við samlykt løgtingsins í løgtingsmáli nr. 50/1961: Um Fróðskaparsetur Føroya er lærdur háskúli settur á stovn í Føroyum, og er henda avgerð ein hin týdningarmiklasta, ið løgtingið hevur

tikið í okkara tíð, serliga gleðilig og álugaverd varð henda avgerð í tí, at so at siga eitt sameint løgting stóð aftan fyri hana.

Slík gongd í virksemínum við útgávu av føroyskum lærubókum, sum nú er, hevur ongantíð fyrr verið, og eigur tað arbeiði, ið lararanir og aðrir leggja úr hondum á hesum øki, allan stuðul og hevur uppiborið tokk. Við hesum og øktum studningsveitingum á tí listaliga økinum hevur verið og verður framyvir førdur uppbyggjandi mentunarpolitikkur á føroyskari grund.

VIÐ ONNUR MÁL

Hesin partur var í 3 greinum:

1. gr. Sett verður marknaðarmálanevnd undir fyrisæti landsstýrisins og við luttøku frá vinnu- og fakfeløgum; endaligar avgerðir í marknaðarmálum eru hjá løgtinginum.

Henda grein stóðst av, hvør støða okkara skal vera í marknaðarmálum, uppskot hesum viðvíkjandi er til viðgerðar á tingi, og hevur landsstýrið útvegað tilfar í hesu mnáli, ið verður latið teirri tingnevnd, sum hevur hetta mál til umhugsunnar.

2. gr. Vallógin verður kannað og uppskot sett fram til broytingar

Hetta uppskot liggur hjá tinginum, og hevur tingið samtykt broyting í vallógini til Havnar býarstýrið, ið svarar til ley broytingaruppskot, sum landsstýrið hevur lagt fram viðvíkjandi løgtingsvallógini og vallóg til kommununat.

3. gr. Mátini viðvíkjandi deyðarevsing, herskyldu og herúfbúgving verða loyst eftir samtyktum løgtingsins.

Á hesum støði eru nevndu mál avgreidd til ríkisstýrið skrivliga, samstundis sum landsstýrið eisini munnliga, seinast á fundi 17. mai 1965 millum statsministuran og løgmann, hevur havt høvi til at ført sini sjónarmið fram fyri ríkismyndugleikunum. I skrivi dagsett 1. juli 1965 verður sagt landsstýrinum frá og vist til fundin 17. mai 1965 millum statsministaran og løgmannin, og skriv av 28. november 1964 frá Føroya landsstýri til ríkisumboðsmannin, at innanríkisministeriið hevur gjøgnumført eina unsitingarliga uýskipan, sum tryggjar føroyingum at sleppa undan verjuskyldu.

Á 17. mai fundinum segði løgmaður, at hann ikki kundi góðtaka tað sjónarmið, ið lá sum grund undir nýskipanini, ið her var gjørd, tí stigið, ið her var tikið, var umsitingarligt, og eftir lógini kundi tað lætt verða broytt umsitingarliga, uttan at føroyingar kundu ávirka broytingina, soleingi lógin stóð óbroytt.

Ikki er løtan í dag til at gera gjøllligari sammetingar millum «arbeiðssettningin» og tey úrslit endalig og ávegis, ið her eru vist á, men tað, ið fört er fram, gevur eina sanna mynd av hesum parti av teirri leið, ið rógvin er, síðani «sett varð út í kortið.»

Frá okkara veljarum fingu vit tey ráðini við á ferð: farið varliga fram, og verða vit at fylgja hesum ráðum, so vit royna at hava fast undir fótum fyri hvørt stigið, ið tikið verður framyvir.

Mál uttan fyri samgongusetningin.

Landsstýrið hevur viljað stuðlað allari vinnu: fiskivinnu, landbúnaði og iðnaði á slíkan hátt, at framleiðslan verur økt, og at øllum vinnuførum fólki verur tryggjað arbeiði við góðum inntøkumøguleikum og undir arbeiðsviðurskiftum, sum eru javngóð og tey, sum valda í okkara grannalondum.

Tað er út frá hesum sjónarmiði, lógin um 44 tíma vanliga arbeiðsviku varð sett í gildi. Arbeiðsvikan er nú komin niður á 45 tímar og frá 1. apríl 1966 verður hon 44 tímar.

Arbeiðsløn fyri fiskaarbeiði, sum var lægri enn fyri vanligt arbeiði, er verðin broytt soleiðis, at nú verður latin sama løn fyri bæði arbeiði.

Við teirri bráðu uppbygging, sum nú fer fram uppi á landi, er neyðugt, at arbeiðið verður soleiðis lagt til rættis, at bæði hann, ið ger arbeiðið, og hann, ið eigur tað, fær sum mest burtur úr. Eftir uppskoti frá Tórshavnar Handverksmeistarafelag og við undirtøku frá Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Reiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur landsstýrið gjørt fyrireikingar soleiðis, at feløgini í september kunnu fáa serkøna hjálp til at leggja sær lag á at útrokna akkordir.

Ásamandi at tann fólkapensjón, sum nú verður latin, mangan er nóg so lítil at liva av, hevur landsstýrið við løgtingslóg nr. 18 frá 26. apríl 1965 um Eykapensjónsskipan sett niður eina nevnd at gera fyrireikingar til eina slíka eykapensjónsskipan. Slík skipan sett í verk vil bøta munandi um korini hjá óarbeiðsførum fólki.

Landbúnaðurin.

Tey bøttu líkindini at fáa pening til útbygging í landbúnaðinum hava økt framleiðsluna serstakliga av mjólk. Fyrireikingar til eina miðstøðusølu av eplum eru komnar vel áleiðis. Til at bøta um framleiðslumøguleikarnar hevur landsstýrið við heimild frá Føroyna løgtingi sett nevnd, sum skal gera uppskot um nýggja jarðarlóggávu.

Í fyrsta hálvári av 1965 varð framleiðslan av mjólk til Havnar økt við 20 %.

Á fundi í Havn mánadagin millum umboð fyri Búnaðarfelagið, Bóndafelagið og Mjólkaforsýningina gav Mjólkaforsýningin lyfti um at útbyggja søluapparatið, so tað verður tíðarhóskandi og fært fyri at kunna taka ta vaksandi framleiðsluna.

Bruttotjóðarúrtøkan hjá landbúnaðinum var í 1963 5 % av allari bruttotjóðarúrtøkuni.

Ídnaður og handverk.

Føroyski ídnaðurin og føroyskt handverk er í jøvnum vøkstri. Nýggjar ídnaðar- og handverksfyritøkur koma undan kavi, og tær, ið eru, hava úr at gera. Í 1963 gav handverk og ídnaður sløk 11 % av okkara bruttotjóðarúrtøku.

Skipasmiðjurnar arbeiða fyri fullari kraft og hava arbeiði ár framyvir. Bygd eru í hesum ári 3 farmaskip og eitt fiskifar, og standa fleiri 20 tons bátar í gerð á teim smærru skipasmiðjunum.

Frá føroyskum vinnufelag er tilboð komið um at seta 1 - 1,2 milj. kr. í sildaverksmiðjuna í Fuglafirði og gera arbeiðsorku sildaverksmiðjunnar munandi størri. Samráðingar fara nú fram millum partarnar, og verður semja kemur partapeningurin hjá sildaverksmiðjuni upp á um 1,8 milj. kr. í inngoldnum partapeningi.

Tjóðarrokuskapurin fyri 1963.

Á øðrum sinni leggur búskaparráðið nú fram tjóðarrokuskap fyri Føroyar. Fyrstu ferð var í fjor á Ólavsøku, tá tjóðarrokuskapurin fyri 1962 varð framlagdur.

Tjóðarrokuskapurin gevur eina heildarmynd í tølum av samfelagsbúskapinum. Í grovum linjum verður víst í sameinaðum yvirlíti av mongum serstøkum talupplýsingum, hvat ið fyriferst búskapurliga í samfelagi okkara í ávisum tíðarskeiði.

Tey lýhningarmiklastu heitini í tjóðarroknskapinum fyri 1963 sammenn við tølini í 1962 geva hesar talmyndir:

Bruttotjóðarúrtøkan var í 1963 316,0 milj. kr. ímóti 264,6 milj. kr. í

1962 í ársprísum, ið gav ein vøkstur uppá 51,4 milj. kr. ella 19,4 % í ársprísum.

Bruttofaktoriuntøkan var í 1963 295,8 milj. kr. ímóti 243,2 milj. kr. í 1962, ein vøkstur upp á 52,6 milj. kr. ella 21,6 % í ársprísum.

Einstaklingsnýtslan var í 1963 225,2 milj. kr. ímóti 179,4 milj kr. í 1962, ein vøkstur upp á 45,8 milj. kr. ella 25,5 % í ársprísum.

Bruttouppsparingin er í 1963 útroknað til 56,6 milj. kr. Umleið 34,9 milj. kr. í einstaklingsuppsparing og umleið 21,7 milj. kr. í uppsparing hjá tí almenna, og er hetta ein vøkstur upp á 4,1 milj. kr. í bruttouppsparingini frá 1962, men er í hesi bruttouppsparing, ið er umleið 18 % av bruttotjóðarúrtøkuni ikki roknað við gávum og áreiðslum *danska ríkiskassans.*

Í sluttum sagt geva hesar talmyndir prógv fyri mannandi hækkaðum livifóti.

Gjaldjavni, bruttoiløgur og bruttouppsparing fyri 1964.

Tann fyribils gjaldjavni, ið búskaparráðið hevur gjort fyri 1964 sigur okkum, at í 1964 hava Føroyar økt skuldina mótvegis útlondum við 27,8 milj. kr., men har eiga vit at minnast til, at vit samstundis hava økt goymslurnar av útflutningsvørum við 11 milj. kr., so veruliga skuldøkingin er 16,8 milj. kr.

Vøru- og tænastuviðmrskifti, tilsamans við 38,6 milj. kr. frá danska statinum, hava givið 198,6 milj. kr. í inntøku og 226,3 milj. kr. í útreiðslu, ið gevur í halli 27,7 milj. kr., meðan skuldin av kapitalfloorskuyvirlitinum vísir 27,8 milj. kr. og verður fyribils hildið at vera rettað talið.

Samanløgdu bruttoiløgurnar vóru 133,1 milj. kr. í 1964 og vóru av hesum mettar 25,1 milj. kr. til umvælingar av føstum fæðeingi, nýiløgur 97,0 milj. kr. og øking í fiskagoymslum og øðrum goymslum 11,0 milj. kr.

Fyribilstølini viðvíkjandi gjaldjavnanum og bruttoiløgunum vísa, at samlaða bruttouppsparingin í samfelagnum í 1964 hevur verið 105,3 milj. kr. í ársprísum ímóti 90,6 milj. kr. í 1963, um tað, ið danski staturin letur, verður tikið við sum inntøka. Verður tað ikki tikið við, er føroyska uppsparingin 66,7 milj. kr. í 1964 í ársprísum ímóti 56,6 milj. kr. í 1963.

Høguætlan framgvir.

Hvussu figgjarligu møguleikarnir framgvir fara at roynast, er ilt at siga í dag, men tað skeest ikki burtur, «at hann dregur á luftinum», sum teir gomlu vóru vanir at taka til, tá ivi kundi verða um veðurlikindini.

Kreditrubbanin í Danmark, ið liggur okkum næst, og skeivleiki í

gjaldjavnvágini í U.S.A. og øðrum loudum, kann seta sjógv, ið rokkur at okkum.

Men sum líkiodini eru, hava vit sett okkara íløguætlun framyvir í 1965 og 1966 við hesum tølum:

	1965	1966
Vinnulívsíløgur	35,3 milj. kr.	32,1 milj. kr.
Húsabygging	23,0 milj. kr.	23,0 milj. kr.
Almennar íløgur	46,2 milj. kr.	48,8 milj. kr.

Henda íløguætlan skuldi tryggja fremhaldandi útbygging av okkara samfelagi við umleið 104,5 milj. kr. í 1965, 103,9 milj. kr. í 1966 og 109,3 milj. kr. í 1967.

Almenn fíggjartøl.

Á fíggjar- og cykafíggjarlógunum verða sett útreiðslu- og inntøkutølini hjá løgtinginum fyri eitt ár ísenn, og gevur landskassarokuskapurin grannskoðaður ta endaligu støðumyndina fyri árið.

Við eftirsettu tølum skal her verða givið eitt stutt yvirlit av, hvussu til stendur:

Upptikin landskassalán		
(restskuld pr. 23/7 1965)		26.385.441,09
Avdráttar- og renluútreiðslur á fíggjarløgtingslóg 65/66:		
Avdráttir	3.500.000,00	
Rentur	2.250.000,00	5.750.000,00
Ábyrgdir pr. 11/12-1964		92.637.502,24
Rakstraravlopið á landskassarokuskapinum 1964/65 er fyribils mett til umleið ..... brutto		7.000.000,00
Herav er ætlanin at seta av:		
Í grunn til byggjan av vaktarskipi	1.000.000,00	
At seta av til at ganga ímóti tapum av útláni, veðhaldi v.m.	2.000.000,00	3.000.000,00
Eftir umleið		4.000.000,00

Kontoin: Sett av til at gangga ímóti tapum av útláni v.m. vísir aftaná flyting av avlopinum frá 1964/65		8.071.361,85
Av endaliga avlopinum skal sambert lóg 50 % í grunn til endurnýggging skipaflotans		2.000.000,00
ið áðrenn hesa flyting vísir ..... um	15.000.000,00	
Herav er brúkt ..... gott	11.000.000,00	
so hann eigur aftaná flytingina .. umleið	2.700.000,00	
Restin		2.000.000,00
at flyta til kapitalkonto landskassans, ið aftaná hesa flyting vísir		13.800.000,00
Kommununurnar skyldaðu í millumrokning við landskassan við lok av fíggjarárinum 1964/65 (pr. 31/3-65) ..		1.913.098,13
Herav er goldið síðani		628.632,21
Soleiðis at safdoin pr. 23/7-65 er		1.284.165,92

Av teimum lánum, ið tikin eru, hava vit goldið avdrátt og rentu rettstundis samsvarandi lánitreytirnar.

Skattakrevjingin varð umlogd 1. april 1964 og hevur henda nýggja skipan nú virkað í stívliga eitt ár.

Tá skipanin varð logd til rættis varð roknað við, at eftirstoðurnar skuldu skuldu heldst ikki farið upp um 20 % og varð skipanin gjord hareftir.

Nú fyrsta árið er av, vísir seg, at eftirstoðurnar veruliga bert vóru 12,23 % ella 4.080.000 kr. av samlaðari álikning 33,3 milj. kr. í landts- og kommununskatti.

Umfram ker 29,3 milj. kr., sum innkravdar eru gjognum gjaldstovuna av skatti fyri árið 1964/65 hevur gjaldstovan fingið um 1,6 milj. kr. inn av gomlum eftirstoðum samstundis sum kommununurnar hava fingið um 3,5 milj. kr. inn av sínum gomlu eftirstoðum.

Gjaldorkan hjá fólki má sigast at hava verið góð og viljin at rinda skatt eisini, tí inngingið er um 1 milj. kr. meira í skatti, enn álíknað varð fyri árið 1964/65.

Kommununrnar hava enn 3 - 3½ milj. kr. útistandandi.

Kommununrnar eru at kalla allar ajour við sínum lánum og somuleiðis við millumrokningini við landskassan.

Nú er við at vera komið upp undan við grannskoðanini av kommununrokukskapunum og fara so at vera líkindi til at lata mann feroast millum kommununurnar, kommunustýrunum til leiðbeiningar á yvirsan hátt.

Nevnast kann, at:

pr. 1/4 1964 var skattaeftirstøðan bert av kommunuskatti ca. 6,7 milj. kr. og

pr. 1/4 1965 var skattaeftirstøðan bæði av lands- og kommunuskatti 4.080.000 kr.

SAMFERÐSLUMÁL

Vegabygging:

Í farna tingárinum eru hesi vegastrekki fullførd ella at kalla fullførd:

Vegurin Fútakleti-Oyragjógv og atloguberggjan við Oyragjógv; hesi tiltøk hava bøtt almikið um ferðasambandið við Vágarnar; bryggjan við Oyragjógv hevur soleiðis gjørt tað møguligt at sela inn annað og fiðurhóskandi fæ í rutuna um Vestmannasund í staðin fyri «Ólav».

Vegurin Haldórsvík-Langasandur, og farið er undir at byggja vegin frá Streymnesi til Langasands.

Sunnari og norðari partur av Oggjarvegnum, tilsamans 8,5 km; fyri at fáa hampuligan havuðsveg millum Norð- og Suðurstreymoy førvar nú bert, at tann parturin, Nato hevur bygt, verður breiðkaður.

Farið er undir at breiðka ella umbyggja tey fyri ferðsluna hættisligastu og tvørligastu strekki á vegnum millum Kollafjørð og Vestmanna, so vegirnir norðan fyri kunnu taka ta stóru ferðslu, ein má rokna við verður, tá ið Oggjarvegurin verður opnaður.

Arbeiðið við gerð av bergholinum í Borðoynni gongur eftir ætlanini.

Vegurin Húsavík-Dal verður helst fullførdur í hesum árinum, og breiðkingin av *Vuannasands-Viðareiðisvegnum* verður at halda fram.

Um vegabyggingina sum heild kann sigast, at higartil hevur verið lagdur størri dentur á at útbyggja veganetið t.e. binda partarnar, sum vóru, saman til eindir, og fáa fleiri og fleiri bygdir upp í hesar eindir; hildið verður framvegis á við hesi útbygging; men í komandi árum verður helst neyðugt at leggja meira dent enn higartil á at bøta um teir vegir, vit hava, serliga við at breiðka og umbyggja teir týðningarmestu av teim og at fara undir at asfaltera veglreyðirnar.

Havnir.

Eftir øllum at dømna skulu havnabyggingarnar sambert 10 ára ætlanina 1959/68 kunna fullførast innan fyri hetta tiðarskeið. Higartil er komið so langt áleiðis, at byggingarnar í Klakksvík, Fuglafirði, Leirvík, Gøtu, Sjóvar kommunu, Vestmanna, Skopun, Sandi, Hvalba og Porkeri eru

ella helst verða fullførdar í ár. Av teim ætlaðu byggingum í Runavík, Skála, Miðvági og Tvøroyri eru størri ella minni partar framdir. Tað er soleiðis bert í 4 bygdum eina einki er bygt.

Síðan benda 10 ára havnaætlan varð samtykt í 1958 er lønar- og prislagið almikið broytt, hetta ger at tær byggingar, sum eftir eru, vera vel kostnaðarmiklari, enn roknað var við, tá ið játtanin varð veitt. Eisini er síðan 1958 hent tað, at menn eru farnir undir at seta upp størri iðnaðarvirkir fyri at skapa møguleika fyri øktari úrtøku í okkara fiskivinnu, hetta førir so afluir við sær, at neyðugt er at taka stórligari til í útbyggingini av ávísum havnum enn upprunaliga ætlað.

Av hesum grundum verður neyðugt at veita uppískoytisjáttanir til nakrar av havnunum.

Flúgvupláss.

Leinging av flogvøllinum í Vágum við 120 m er í gerð, og verður arbeiðið helst fullført í ár. Møguleiki skuldi so verið fyri at nýtt flogfor, sum taka vel fleiri ferðafólk enn tey flogfør, sum í løtuni verða nýtt.

Strandfaraskip.

Nýggi «Smiril», ið stendur í gerð á Tórshavnar skipasmiðju, verður sambært sáttmála liðugur at taka í brúk um hesa tíð næsta ár.

Neyðugt verður at fara undir fyriveikingar til nýtt strandfaraskip til Sandoymna.

MENTUNARMÁL

Frá 1. april í ár er hitt skylduga fimatalið hjá lærarunum í Føroya skúla sett til 32 tímar um vikuna. Hetta varð samtykt av løgtinginum út frá tí sjónarmiði, at okkara lærarar eiga at hava at kalla sama umstøður sum lærarar í okkara grannalondum, sum longu áður hava fingið niðursett fimatal.

Men tað sum liggur aftan fyri, er sjálvandi tað, at vit vilja byggja upp ein fólkaskúla, sum skal standa javnbjóðis skúlum í øðrum londum, tí ongantíð verður gjørt ovmikið av, tá tað ræður um la uppvaksandi ættina. Og tíðin, vit liva í, krevur nógv av teim ungu.

Tí er tað eisini umráðandi, at likindini fyri útbúgving aftaná *barnaskúlan* verða tey bestu. Studentaskúlin í Hoydalum er partvís tikin í brúk. Nøkur klassarúm hava verið í brúki eina tíð og frá í vár eisini fimleikahøllin.

Nú er vænlandi, at skúlin allur verður liðugur at taka til brúks við

komandi skúlaári.

Fundarhøllin er liðug og hevur verið brúkt sum fundarhøli, mi víkingarfundirnir hava verið.

Gamla hús verður nú innrettað til næmingabústaðir og hetta skuldi verið liðugt til byrjan av komandi skúlaári.

Hetta vil hjálpa munandi upp á umstøðurnar hjá bygdanæmingum, sum koma til henda skúla.

Maskinskúlin byrjaði sítt fyrsta skeið 1. mars í ár.

Her fáa teir næmingar, sum hug hava til tað, høvi til at taka prógv, sum ger teir búnar til at sigla sum maskinmenn við øllum skipum í føroyska fiskiflotanum.

Hetta prógv verður eisini góðkent sum fyrireikingarskeið til hitt stóra maskinmeistaraprógvið, sum gevur rætt til at sigla við øllum skipum og um øll høv.

Fróðskaparsetur Føroya.

Stovnsetanin av fróðskaparsetrinum man vera ein hin størsta hending í føroyskari skúlasøgu. Við hesum kunnu vit siga, at grundarlagið er lagt til herdan húskúla í Føroyum.

Gleðiligt er hetta so mikið meira, at málið varð viðtikið á løglingi av øllum flokkum.

Setursráð er skipað og hevur tað viðtikið at seta Chr. Matras sum professara við fróðskaparsetrið frá 1. september í ár.

Eisini verður í nærmastu framtíð farið undir at byggja hús til fróðskaparsetrið og til aðrar stovnar, sum á ein ella annan hátt fáast við vísindaligt starv (fiskirannsóknarstovan og fiskiídnaðarstovan). Tað hevur vist seg, at tað eisini í okkara grannalondum er stórur áhugi fyri hesum tiltaki.

Tað kann verða vert at nevna, at í svarrøðu sini, lá ið 5. Víkingafundurin endaði í Hoydølum Ólavsøkuaftan, segði Peter Foot, professari, úr London, vegna luttakararnar í 5. Víkingafundinum, m.a.: «Vit vóna, at til, mi Fróðskaparsetrið er stovnað, fara at heita á okkum. Vit vilja vera fegnir at hjálpa tykkum, og -- alt, sum vit higartil hava skrivað, og alt, sum vit í framtíðini fara at skriva, skal verða sent tykkum!»

Sjómannaskúlin.

Løgtingsviðtøkan um, at landsstýrið fær heimild til umsitingarliga at skipa fyri tímatalinum hjá læraranum skúlans, fer at geva meira rettvíst lønarlag hjá læraranum á hesum skúla, sum so stóran týdning hevur í útbúgving av yvirmonnum á fiskiflotanum.

Tað er umráðandi, at tað eru vel at sær komnir menn, ið eru lærarar á hesum skúla, og er tað ein uppgáva hjá fyrisitingini at skipa so fyri, at tað ikki í framtíðini fer at skorta upp á lærarar við hóskandi lærdómi at taka við, tá teir eldru leggja frá sær.

Deyvaskúlin.

Tá læraraíbúðin í húsum landsins úti á Skansa ikki verður nýtt longur, hevur landsstýrið latið skúlan har úti fyri *deyv og talubrekaði* fáa øll húsini at ráða yvir, har teir ætla at hýsa børnum, sum av bygd koma til skúlan. Hetta er gjørt fyri at styðja henda skúla, sum so stóran týðning hevur fyri á ein ella annan hátt tilaftúrskomin børn.

Skúlabygging.

Tað hevur onganlið áður verið so nógv skúlabygging í okkara landi, sum hesi seinastu árini.

Nógvir nýggir skúlar eru bygdir og eldri skúlar eru umbygdir og moderniseraðir við góðum úrslitli. Tilbygging og viðkan av skúlum fer støðugt fram, og málið er, at øll børn skulu kom at ganga *í skúla* undir góðum umstøðum.

Kvøld- og ungdómsskúlaundirvisingin.

Um hetta týðningarmikla mál varð uppskot lagt fram í næstseinastu tingsetu; men tá var viðtikið at senda kommunnum tað til ummælis.

Málið varð aftur lagt fram fyri tingið í seinastu setu, eftir at flestu kommunur høvdu givið tí viðmæli. Tað kom tíverri ikki aftur frá nevndini; men hetta er mál av so stórum týðningi fyri okkara ungdóm, at ikki slepst undan fyri ella seinni at fremja tað, antin so sum upp varð skotið av nevndini, ið tilevnaði tað, ella møguliga í broyttum líki.

Tekniskir skúlarnir hava onganlið áður havt so stórt menningatal, sum seinastu árini og var tað eitt stórt framstig — sum eisini týðuliga gevur seg til kennar — at dagsskúli varð fingin í lag.

At tekniski skúlin í Havn hevur fingið skúlaheim knýtt at skúlanum hevur hin allarstørsta týðning fyri teir avbygdakerlingar, sum søkja til skúlan. (Tá nýggja lógin kemur í gildi, fær skúlin nógv rúmligari umstøður rakstrinum viðvíkjandi).

Nevnt kann verða, at ein flokkur í hesum skúla í ár hevur lokið prógv til «teknisk forroynd» (Teknisk forprøve) og tað er fyrsta ferð, at hetta prógv er tikið í Føroyum.

Í hesum sambandi kann eisini verða nevnt, at tað á einum skúla í landinum er tikið prógv frá 9. skúlaári. Eitt er at ivast í, at fleiri skúlar

fara undir hesa undirvising, sum kann koma at fáa stóran týdning fyri tann ungdóm, sum ikki fer á prøvskúla.

Viðv. bygging av bóka- og skjalasavni:

Hetta er eitt mál, sum má verða fremt í nærmastu framtíð, lá plásstrot á hesum báðum søvnum virkar heilt nívandi.

Uppskot um bygging frá nevnd, sum hevur arbeitt við hesum máli, varð lagt fyri tingið í seinastu setu.

Viðtikið varð at fara undir detailprojektering, og landsstýrið hevur valt serstaka byggjinevnd at hava málið um hendir.

UTTANLANDASAMRÁÐINGAR

Í september 1964 var føroysk samráðingarnevnd: løgtingsmaður Frederik Hansen, løgtingsmaður Marius Johannesen, løgtingsmaður J. Fr. Øregaard, fyrrv. løgmaður Chr. Djurhuus, stjóri Heini á Trøðni, skrivstovufulltrúi Gunnar Gunnarsson og løgmaður Hákun Djurhuus í Grønlandi og tingaðust við grønlendska landsráðið um tann fiskirættarsáttmála, ið skuldi ganga út í 1967.

Tað eydnaðist føroysku samráðingarnevndini at fáa sáttmálan framlongdan og í vissum førum munandi bøttan. Komandi summar kemur grønlendska landsráðið at vitja í Føroyum.

Í november 1964 var føroysk samráðingarnevnd: stjóri Sofus Olsen, stjóri Aksel Hansen, skrivstovustjóri Johan Djurhuus og løgmaður Hákun Djurhuus í Hamborg og tingaðust við Vestur-Týskaland um landingarrætt av ferskfiski.

Úrslitið av hesum samráðingum var, at føroyingar sluppu inn á vesturtýska ferskfiskamarknaðin, og sáttmáli var gjørdur hesum viðvíkjandi millum partarnar.

Í mai 1965 luttóku skrivstovustjóri Johan Djurhuus og løgmaður Hákun Djurhuus á millumlandanorðsjóarfundi í Moskva. Her vórn vunnar sømdir í okkara kravi um økta meskuvídd hjá fiskiførum, ið royna á okkara leiðum, og eisini aðrar sømdir.

Millum bretsku fiskivinnuna og føroysku útflutningsvinnuna vóru samráðingar um kvotaskipanina uttan úrslit í London á sumri og nu heystið 1964.

15. juli vóru hesar samráðingar uppafturtiknar í London eftir bretskari áheitan til føroysku myndugleikarnar og vóru partarnir samdir um at hava ein fund aftur at í september.

Teir, ið samráddust, umboðandi okkara útflutning, vóru: Sofus Olsen,

stjóri, Dánjal Niclasen, stjóri Hans Pauli Johannesen, stjóri og Aksel Hansen, stjóri.

Undir øllum hesum samráðingum hava vit føroyingar fingið fullan stuðul av dansku myndugleikunum og danska uttanríkisráðnum, og tað takka vit fyri.

Úrslitið, Marius Johannesen, háskúlastjóri, fekk undir samráðingunum í Reykjavík fyri stuttum, har føroyski norrønafelagsskapurin kom upp í felagsnorrønunevndina javnbjóðir norrønafelagsskapunum í hinum norðurlondunum, eiga vit at verða fegnir um.

Tá eg endaði fyrstu løgmansrøðu mína var tað við orðum, ið søgdu frá sonnu vón og hugsan, sum eg havi í dag:

At tað má eydnast okkum, ið hava ta beinleiðis ábyrgdina av landsins stýri, og í minnilutu, ið hevur sína óbeinleiðis ábyrgd, saman ella partvís saman at leggja úr hondum slíkt arbeiði í tingsetuni, ið nú er byrjað, at tað má verða fólki okkara at gagni, mentunarliga, vinnuliga, sosialt og tjóðskaparliga.

Ein royndur sannleiki er hesin, at figgjarliga frælsi er stoðið undir øllum øðrum frælsi. Vit eiga at leggja okkum hesi orð í geymu og húsavi so, at vit ikki missa úr eygsjón sum stavnhald tað teljandi og upplyggjandi í okkara figgjarviðurskiftum, ið eitur
sparivilji og sparsemi.

Vit koma at hava brúk fyri hesum altararvi í komandi tíðum, um vit skulu vinna figgjarligt frælsi.

I. Fíggjarlögtingslóg 1966-1967

Ár 1965, 27. august legði løgmaður fram uppskot til fíggjarløgtingslóg 1966/67 (smbr. skjal 2).

Í viðgerð 15. februar 1966 og 23. mars legði fíggjarnevndin fram broytt uppskot (smbr. skjal 2) við soljóðandi

ÁLITI:

Hetta mál var av løgmanni Háskun Djurhuus fyri landsstýrið lagt inu á ting 27. august 1965 og var undir 1. viðgerð 15. februar 1966 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fleiri fundum viðgjørt fíggjarlógaruppskotið og hevur fíngið til vega nýggjar útrokningar, har hildið var, at broytingar kundu verða hendar, síðani uppskotið av landsstýrinum var sett saman í juli mánaða í fjør.

Jóhan Djurhuus, skrivstovustjóri, hevur verið fíggjarnevndini til hjálpar undir viðgerðunum, eins og formaðurin hevur samráðst við stjóran á gjaldstovuni og stjóran fyri líkningarráðið um ymsar spurningar. Somuleiðis hevur ríkisumboðið vísl nevndini vælvild við ymsum nýggjum útrokningum.

Umframt sjálvt uppskotið, hevur nevndin viðgjørt nýggjar tilráðingar frá landsstýrinum ella umsóknir, sum annaðhvørt beinleiðis eru sendar fíggjarnevndini ella av løgtinginum eru vístar í fíggjarnevndina.

Limir av fíggjarnevndini hava havt høvi til at fáa upplýsingar um mál, ið teir hava ynskt, eins og mál hava verið fyriløgd flokkunum, har ið hetta var ynskt ella var hildið at hava tydning.

Viðvíkjandi uppskotinum frá landsstýrinum verður vísl til tær viðmerkingar, sum standa í «fylgiskjølum til fíggjarløgtingslógina 1966/67» og í hesum álitið vera fyri tað mesta bara gjørdar viðmerkingar til tær broytingar, sum eru gjørdar til landsstýrisins uppskot.

Inntøkur.

Sum sæst er ein broyting hend í uppsetingini av fíggjarlógini, við lað at fólkapensjónsskattur og avlamisgjald eru flutt sum minuspostar í grein 19, og verður nærri greitt frá hesum undir nevndu grein.

Vart verður gjørt við, at í grein 2 í landsstýrisins uppskoti er ein samanteljingsfeilur uppá 500.000 kr. og at endatalið undir inntøkum tí er skeivt. Fyri alla samanteljingina hevur hetta at týða, at mununin á síðu 23 skuldi havt verið 597.317 kr. íslaðin fyri 97.317 kr.

Hækkingin í útreiðslunum er eftir nýggju uppsetingini kr. 2.181.260,

men hartil kemur, sum áður nevnt, at fólkapensjónsskattur og avlamisgjald er flutt burtur av inntøkusíðuni, hetta skal tí takast við, somuleiðis, at løgtingið hevur samlykt at gjøld við sølu av motorakførum fara úr gildi, og fellur tí grein 3-7 — kr. 150.000,— burtur.

Aftrat landsstýrisins uppskoti skulu tí útvegast stívar 1,7 milj. kr. — ella ÷ umtalaða feil í grein 2 — stívar 1,2 milj. kr.

Aftaná at hava fingið fyrilagt spurningin um hægri inntøkur til landskassan hevur stjórin á gjaldstovuni í brævi til fíggjarnevndina svarað fylgjandi 8. mars í ár:

«Vísandi til samroðu um landskassainntøkur verður við hesum sagt frá, at eftir nú fyriliggjandi grundarlagi verður mett, at skattur og tollur í fíggjarárinum 1966/67 fer at geva landskassanum:

§ 1. *Skattir:*

1. Vanligur skattur		21.000.000,—
§ 2. *Toll- og framleiðslugjøld:*		
1. Innflutningstollur		32.650.000,—
2. Framleiðslugjøld:		
1. Øl og sodavatn	700.000,—	
2. Sjokoláta o.ll.	150.000,—	850.000,—
		33.500.000,

Fíggjarnevndin hevur tó hildið seg kunnað havt eina meira optimístiska meting sambært galdandi inntøkulógir og hevur sett landsskattin 2 milj. kr. hægri enn í landsstýrisins uppskoti og toll- og framleiðslugjøld 2,2 milj. kr. meira enn í landsstýrisins uppskoti.

Við broyttu uppstillingini verður so grein 1 eftir nevndarinnar uppskoti tilsamans 22,6 milj. kr. ella 125.000 kr. minni enn í landsstýrisins uppskoti og tollur og framleiðslugjøld tilsamans 31.150.000 kr. ella 2,2 milj. kr. meira enn í landsstýrisins uppskoti.

Í grein 3 gongur punkt 7 út (150.000 kr.) og punktini 8 og 9 verða 7 og 8.

Aðrastaðir í inntøkuuppskotinum eru ongar broytingar, so at samanteldu inntøkurnar eftir hesum uppskoti verða 57.521.000 kr.

Fíggjarnevndin heldur ikki verða neyðugt at broyta galdandi inntøkulógir fyri at kunna svara til tey í uppskotinum nevndu tøl, men tað vil verða hætlisligt at samtykkja hægri útreiðslur, enn tær í uppskotinum nevndu, uttan at hetta álvarliga skal ganga út yvir landskassans likvidilet ella at neyðugt verður við nýggjum inntøkulógum.

Ó t r e i ð s l u r.

Undir hvørjari høvuðsgrein sær eru gjørdar viðmerkingar til tær broytingar, sum hendar eru í mun til landsstýrisins uppskot, uttan har talan er um vanligar lønreguleringar, har hesar ikki hava verið tiknar við í landsstýrisins uppskoti, og verður her talan um 2 dýrtíðarviðbøtur og 5 eykaviðbøtur, ið mettar eru til 2% hækking í meðal, og er roknað við hesum; viðvíkjandi læraralønunum hava tær 5 viðbøturnar verið viðroknaðar, so hør kemur hækkingin av øðrum orsøkum.

Landsstýrið hevur í brævi 8. februar 1966 til figgjarnevndina skotið upp, at serlønir (honorar) á figgjarlógini fáa part í leim sátlmálaviðbótum, sum tænastumenn og aðrir hava fingið og annars javning eftir prístagnum. Her er talan um fáar postar á figgjarlógini við tað, at summar serlønir verða longu hækkaðar eftir hesum reglum, og er tí henda umrokning tikin við.

Grein 10: Løgtingið.

Undir hesi grein eru umfram fyrrnevndar reguleringar gjørd ein umrokning av samsýningum til landsskattanevndina.

Martin Joensen, formaður Havnar arbeiðsmannafelags hevur sent løgtinginum brev, sum er vist í figgjarnevndina, har hann mælir til at taka av ta skattareglu, at tingmenn ikki gjalda skatt av allari tingmannalønini, og um neyðugt í staðin lata meira av løn. Endaliga støða er ikki tikin til hetta mál, men talað hevur verið um at taka henda spurning upp til viðgerðar á breiðari grundarlag, soleiðis at tann umvegis stuðul politisku flokkarnir fáa á henda hátt, verður latin eftir øðrum reglum.

Løgtingsmálið um kunngerðartiðindi, sum er í lógarnevndini, er ikki avgreitt enn, men peningur er avsettur eins og árini frammanundan.

Í mun til landsstýrisins uppskot er grein 10 hækkað við 15.000 kr. til kr. 812.000.

Grein 11: Landsumsitingin.

Umfram tær í inngangínum nevndu reguleringar av løunum og serløunum, eru her hendar hesar broytingar í mun til landsstýrisins uppskot:

Til landsstýrisskrivstovuna eru undir skrivstovuhaldi játtaðar 10.000 kr. eyka til nýtt kartotek.

Líkningarráðið hevur biðið um at fáa sett aftrat 1 ovening og 1 tilkomið fólk, orsakað av vaksnudi arbeiði. Hetta er tikið við, eins og meirútreiðsla til prenthutir.

Roknað er við eini hægri samsýning til kommunalu manntalsskrivararnar, tí at henda samsýning hevur ikki verið regulerað síðani 1919.

Gjaldstovudeildin í Runavík er nú farin undir at virka, men støða

er ikki enn tikin til spurningin, um tey harlil roknaðu starvsfólk eru nóg nógv.

Í mun til landsstýrisins uppskot er grein 11: landsumsitingin, hækkað við 118.500 kr. til 4.013.514.

Grein 12: Heilsumál.

Í hesi grein eru hendar stórar broytingar, og kemur hetta av fylgjandi orsøk.

Tá landsstýrisins uppskot er lagt fram á ólavsøku, er ikki fíggjarætlan fyri sjúkahúsini løgd, og roknað hevur tí verið við tølunum frá fyrru fíggjarlógini.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini fingið hesar fíggjarætlanir, sum eru býttar út til limirnar og her eru stórar hækkingar.

Sum tað sæst eru broytingarnar eisini hendar viðvíkjandi tuberklastøðini, nakað meira til læknar og ljósmøður.

Stýrið fyri Hvíldarheimið NAINA hevur í brevi 10. februar í ár biðið um eina cykastuðul uppá 40.000 kr. til at seta húsini í stand við — umfram vanligan rakstrarstuðning. Nevndin mælir til at játta hesar 40.000 kr.

Eftir umsókn frá Tannlæknastovuni hjá Tórshavnar Kommunuskúla er undir 12-10 játtaðar 7.000 kr. til leiðbeining í tannrøkt.

Í mun til landsstýrisins uppskot er hetta grein hækkað við 1.018.069 (harav sum nevnt mest til sjúkahúsini) til kr. 5.245.165.

Grein 13: Samferðslumál.

Undir viðgerðini av hesi grein var eisini Havna- og veganevnd løgtingsins boðað til fundar.

Til nýggjar vegir og brýr eru avsettar 300.000 kr. meira og til breiðkan av brúm 200.000 kr. meira.

Annars verður víst til viðmerkingar hesum viðvíkjandi í áliti frá havna- og veganevndini.

Víst var á ta mógv økta útbygging, sum goldin verður undir 13-3: lendingum, og eru her 400.000 kr. settar aftrat.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt løgtingsmál viðvíkjandi uppískoyti til ávísar havnaætlanir og stuðning til víðkan av Fuglafjarðar havn. Hesi mál eru samtykt og økta gjaldið fyri komandi fíggjarár 505.000 kr. tiknar við undir havnagerðir.

Eftir uppskoti í nevndini eru 100.000 kr. settar av sum nýtt pkt. 6 til týping av streymínum, soleiðis at peningur er til tær kanningar, ið áður eru samtyktar á tingi.

Tað hava ikki í nevndini verið ommur uppskot um hækkingar av útreiðslunum til samferðslumál.

Í mun til landsstýrisins uppskot hækkar hendu grein við kr. 1.505.000 til kr. 11.005.000.

Grein 14: Skúlamál.

Eftir nýggjari útrokning frá skúlastjórnini eru lønir fólkaskúlans hækkaðar við 380.000 kr., sum tó ikki stava frá einstakum lønarhækkingum, men av nýggjari útrokning av tí tørvi, ið verður til lærarar í fíggjarárinum.

Til skúlabarnaflutning eru settar av 10.000 kr. afturat.

Viðvíkjandi studentaskúlanum er fingin nýggj fíggjarrætlan, men tølini eru ikki munandi broytt í uppskotinum til fíggjarlóg, uttan har talan er um ein møguligan hjálparmann afturat og fyrr játtaða skrivstovuhjálp til fyristøðumannin.

Viðvíkjandi Føroya sjómansskúla stavar broytingin umfram lønareguleringnu eisini frá broyttari lønarskipan.

Klakksvíkar sjómansskúli hevur søkt um at fáa goldið ávisan part av rakstrinum sum studning úr landskassanum. Nevndin hevur gingið hesum á møti við at hækka studningin við 30.000 kr., men heldur annars, at eina fasta skipan kann ikki støða takast til, fyrreun tað fyriliggur góðkend reglugerð ella lóg fyri skúlan.

Studningur til kvøldskúlar er hækkaður við 15.000 kr. Skúlastjórnin hevur mett, at øktu útreiðslurnar til hetta mál í fíggjarárinum verða 45.000 kr., um løgtingsmálið um ungdóms- og kvøldskúlar verður samtykt. Hetta mál er tó ikki avgreitt enn, og sjálvt um tað verður samtykt, heldur nevndin, at 15.000 kr. svara til tørvin í hesum fíggjarárinum.

Eftir umsókn frá ISF mælir nevndin til at hækka studningin til felagið við 10.000 kr.

Studningur til lærlingar er settur til 100.000 kr. sum hann var í fíggjarárinum 1965/66. At hann í landsstýrisins uppskoti er settur til 50.000 kr. er komið av misgá, av tí at vel av peningi var í grunninum, men tað nógva av hesum peningi er nú útgoldin í studningi.

Til skúlabarnaferðir uttanlands eru avsettar 5.000 kr. aftrat, næmingastudningur til listanemm 1000 kr. aftrat, og til Meginfelag Føroyskra Studenta 3.000 kr. afturat. Hesum studningum ræður landsstýrið fyri.

Skúlastjórnin hevur mett tørvin á studningi til skúlabygging í fíggjarárinum at fara og verða 900.000 kr. og mælir til at seta av 250.000 kr. afturat teimum 650.000 kr., sum standa í landsstýrisins uppskoti. Hetta skuldi so svara til ríkiskassans part, sum eisini er 20%. Hertil er tó at siga, at tað er so mikið av peningi í skúlabyggigrunni, at hann við 650.000 kr. á fíggjarlógini svarar til tørvin í fíggjarárinum.

Fíggjarnevndin hevur fingið til viðgerðar løgtingsmál nr. 40/1965: Bygging av skúlum og skúlahúsum. Eftir uppskoti í hesum máli, skuldi

landskassans partur í bygging av skúlum og skúlahúsum verið trýfaldaður til 60 %, og tá er skilliga ikki nóg mikið avsett, men hð hevur einki uppskot verið, meðan figgjarlógin var viðgjørd, um at seta meira pening av í figgjarárinum 1966/67.

Í mun til landsstýrisins uppskot veksur grein 14 við 581.000 kr. til kr. 8.421.340,— .

Grein 15: Vísind, bóknentir og list:

Umfram fyrr umtalaðar reguleringar eru hendar hesar broytingar:

Møttur rakstrarstudningur til bygdabókasøvn er hækkaður við 10.000 kr., soleiðis at nú kann verða latið í studningi upp til 3 kr. pr. íbúgva.

Atgongupeningurin til Føroya fornminnissavn er avlikin.

Undir Náttúrugripasavninum er komin nýggj grein 7-2: Aðrar lønir kr. 22.500, meðan leys hjálp er minkað við 7.000 kr.

Eftir umsókn er játtað Tórshavnar musikkskúla 1.000 kr. afturat orsakað av serliga nógvari vitjan av musikkønum fólki í ár.

Til landsstýrið at ráða yvir eru settar 25.000 kr. afturat. Heruppií er roknað við studningi til Norrøna felagið vegna stevnuna, sum verður í Føroyum í summar, eins og møguligur studningur til film um torvarbeiði. Av tí, at hetta arbeiðið flest allar staðir í Føroyum er avlagt, heldur nevndin, at tað hevur áhuga at eiga ein film um hetta fyrr so týdningarmikla gerandisarbeiði føroyinga.

Á figgjarlógini 1965/66 vóru avsettar 25.000 kr. til úlvarpsgrunn, við tí viðmerking, at útvarpið skuldi seta av líka nógv. Fyri tað fyrsta hevur útvarpið søkt um at fáa hækkað útvarpsgjaldið til rakstur og hartil er so stórur tørvur á kanningum, fyri at vita, hvat ið kann gerast fyri at fáa útvarpið at hoyrast um alt landið, at nevndin heldur tað verða neyðugt at seta hendu pening av uttan mun til, hvat útvarpið sjálvt kann avseta. Uppskot er tí um at taka viðmerkingina burtur, við teirri nýggju viðmerking, at tær kr. 25.000 á figgjarlógini 1965/66 eisini verða avsettar uttan freytir.

Umsókn er frá Fróðskaparsetrinum um at fáa játtaðar 15.000 kr. til upplskoytisbind til føroysk/donsku orðabókina. Hetta er gingið á møti við at hækka § 15-9-13 við 15.000 kr., so at hesin peningur samanlagdur fer til útgávu av orðabókum og í grunn, herundir so eisini dansk/føroyska orðabókin.

Sum nýggj § 15-9-16 verða á figgjarlógini settar 20.000 kr. av til búrúm á Fróðskaparsetrinum, í tilmæli sum meiriluti figgjarnevndarinnar hevur undirritað uttan fyrivarni, verður, aftaná at greitt er frá treytunum fyri at fáa hesi búrúm, sagt:

«Vísandi til omanfyristandandi loyva vit okkum at mæla tinginum til, at Føroya løgting á komandi figgjarlóg (1966/67) játtar 20.000 kr.

til keyp av tí fyrsta av umtalaðu búrúmum, og til minnis um, at tað 6. mai í ár eru 100 ár síðani Jóannes Patursson var borin í heim, verður hetta búrúm skýrt «Bóndans stova». Tað verða ongar serligar treytir lagdar við uttan tær, at teir ið granska føroyskt mál og føroyska søgu skulu eiga fyrsta rætt at búgva í «Bóndans stovu.»

Bræverið er býtt út til allar tinguenn.

Í mun til landsstýrisins uppskot er grein 15 hækkað við 103.800 kr. til 1.073.733 kr.

Grein 16: Fiskivinna og sigling.

Sum nýtt pkt. 15 í hesi lóg er eftir áheitan frá landsstýrinum settur 80.000 kr. til projektering av sildaídnaða og hermetikkvirki.

Við lóg eru áður játtaðar 100.000 kr. til hetta endamál, seinni við samtykt av fíggjarnevndini hækkað til 130.000 kr. — hesar 30.000 kr. eru tó ikki allar nýttar.

Tað er á løgtingi mál um at hækka studningin til ísæting av kraftblokki og er vist á fiskivinnunevndina. Tað hava ikki undir viðgerðini í fíggjarnevndini verið uppskot um at hækka studningin til grunnin til endurnýggjing av skipaflotanum, harav eisini verður goldin studningur til kraftblokkar. Heldur ikki uppskot um at hækka aðrar studningar.

Í mun til landsstýrisins uppskot hækkar grein 16 við 88.000 kr. til kr. 9.269.700.

Grein 17« Landbúnaður og matrikulering.

Undir hesi grein eru umframt vanligar reguleringar bert ein broyting. Fíggjarnevndin hevur frá landsstýrinum fingið brev dagsett 8. mars í ár:

«Landsstýrið hevur frá Føroya Jarðarráð fingið soljóðandi brev dagsett 7. mars í ár:

«Føroya Búnaðarfelag og Føroya Bónlafelag hava vent sær til ráðið við umsókn um stuðul til stovnan av eini sølumiðstóð fyri landbúnaðarvørur, og hevur ráðið skilt av teim samráðingum, sum fórdar hava verið um hetta mál, at landsstýrið er sinnað at stuðla tilik tiltøk um fíggjarløgtingslógina og at geva Føroya Jarðarráð heimild at lána til idnaðarlig endamál.

So stett skal ráðið biðja um at fáa kr. 50.000,- um árið í 5 fylgjandi ár avsettar um fíggjarløgtingslógina, og um at fáa broytt lóg um landbúnaðarins fruma av 21. mai 1937 soleiðis, at Føroya jarðarráð verður givin neyðug heimild at stuðla idnaðarlig búnaðartiltøk.»

Landsstýrið skal mæla til at umbidni stuðul verður veittur.

Teknningar og kostnaðarætlan til sølumiðstøðina eru gjørdar, og ætla feløgini sjálvi at skaffa ein egnpening, sum svarar til 20 % av stovnskostnaðinum. Meginparturin av hesum egnpeningi er longu tøkur.

Søluniðstøðin er metti at kosta eu. 600.000 kr., og hevur hon kuldagoymslu til 400-500 t. av eplum, grønmeti og fruktum.»

Fíggjarnevndin hevur hækkað 5-1 við 50.000 kr. til hetta endamál.

Grein 17 er í mun til landsstýrisins uppskot hækkað við kr. 68.800,- til kr. 1.893.900,-.

Grein 18: handil, idnaður o. tl.

Mesta hækkingin í hesi grein stendst av studningi til SEV, sum skilst av fylgjandi brævi dagsett 25. november 1965 til fíggjarnevndina frá landsstýrinum:

«Eftir fylgisskjali nr. 90 til § 18-1-2 í uppskotinum til fíggjarlogtingslóg 1966/67 hevur landsstýrið skotið upp, at tann kapital- og reotustudningur til elfelagið S.E.V., landsstýrið er komið í afturhond við eftir løgtingslógunum nr. 19 frá 15. maí 1962 og nr. 23 frá 22. maí 1962 tilsamans 858.000 kr. verður býttur yvir fíggjarárini 1966/67 og 1967/68 við ávikavist 405.000 kr. og 453.000 kr.

Felagið hevur nú vent sær til landsstýrið um at fáa henda studningin útgoldnan í hesum fíggjarárinum vegna likviditetsstøðuna.

Landsstýrið heldur seg tó ikki hava heimild at ganga felagnum á møti, men hevur hin vegin samtykt, at nevndi reststudningur, allur sum hann er, verður tikin við á fíggjarlógini 1966/67.

Vísandi hertil skal landsstýrið mæla til, at konto § 18-1-2 í fíggjarlógaruppskotinum 1966/ 67: Studningur til S.E.V. verður at hækka frá 1.020.100 kr. til 1.473.100 kr.»

Viðvíkjandi hækking av grein 18-3-1 verður víst til nýggja viðmerking til hesa grein.

Lønirnar og útreiðslurnar til seningsmannaskipanina eru ajourførdar.

Brev til Føroya landsstýri frá Klakksvíkar ferðamannafelag um studning er fyrivist nevndini, og møguligur stuðul verður at lata um grein 18-8.

Í mun til landsstýrisins uppskot hækkar henda grein við 440.500 kr. til 1.813.300 kr.

Grein 19: Almenn forsorg.

Her er gjørd ein broyting í uppsetingini av landsstýrisins uppskoti viðvíkjandi fólkapensjón og avlamispensjón, við tað at her er alt talið tikið við minus fólkapensjónsgjald, minus ríkisins part, minus kommunanna part. Sammetingin við landsstýrisins uppskot fest við at at leggja fólkapensjónsgjaldið afturat nettoupphæddini.

Við teirri sammeting er uppskotið frá fíggjarnevndini 592.000 kr. meira til fólkapensjón og 225.000 kr. meira til avlamispensjón enn í landsstýrisins uppskoti.

Barnastyrkur til stakar upphaldarar er hækkaður við 20.000 kr., barna-

forsorg við 15.000 kr., almenn forsorg við 60.000 kr., ellisheim við 2.000 kr., soleiðis at hesar upphæddir sammett við landsstýrisins uppskot, um uppsetingin var uppá sama máta, tilsamans eru kr. 916.000 kr. meira enn í landsstýrisins uppskoti.

Til Reyða kross eru avsettar 1000 kr. afturat.

Eftir at viðgerðin av fíggjarlógini var lokin, kom umsókn frá Alv v/ frú Karolinu Petersen um eyka studning. Nevndin hevur tí hækkað studningin til 50.000 kr., tó so, at hann um neyðugt verður útgoldin eftir landsstýrisins avgerð, og nevndin ræður til at málið verður kannað og eisini grundarlagið undir eini framtíðar studningsskipan til henda stovn.

Orsakað av teim frammanfyri nevndu broyttu uppsetingum verður henda grein í mun til landsstýrisins uppskot 1.550.000 kr. minni ella tilsamans kr. 7.850.000 kr.

I *greinunum hereftir í rakstrarætlanini* eru hert hesar broytingar:

Grein 20: Pensjónsútreiðslur hækkaðar við 4.000 kr. til 80.000 kr.

Grein 21: Broytt so at peningurin ikki fer í grunn. Hetta kann annars gerast, tá sløða verður tikin til avlop landskassans.

Grein 22: Aðvar og óvissar útreiðslur hækkaðar við 25.000 kr. til 117.000 kr. her er hugsað um fremmandar vitjanir í summar.

Grein 23: Grunnar: Hækkað við 60.000 kr. til 706.000 kr. Hetta kemst av, at studningurin til kirkjugrunnin er hækkaður við hesum 60.000 kr., og er her hugsað um umvæling av Kirkjubøar kirkju.

Flytingar á ognar- og kapitalkonti landskassans.

Her eru gjørdar tær broytingar, sum standast av broytingunum á rakstrarætlanini.

I fíggjarnevndini er mál um bygging av landsbóka- og -skjalasavni og er í landsstýrisins uppskoti undir flytingum á ognar- og kapitalkonti 1 milj. kr. til dispositión til hetta endamál.

Tá tað er løgtingið, sum avgerð um bygt verður ella ikki, mælir nevndin til, at henda 1 milj. kr. verður slandandi. Verður ikki bygt í fíggjarárinum, fellur heimildin burtur.

Vísandi til frammanfyristandandi viðmerkingar mælir meirilutin (Kjartan Mohr, Sámal Petersen, Hanus við Høgadalsá og Knút Wang) til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum, sum tað nú er broytt og uppafturprentað.

Minnilutin Andrias Djurhuus skal áfala:

Sambarf § 27 í fíggjarlógaruppskotinum (konto fyri yvirtøku av sermálum) er avsett 1,3 milj. kr. til yvirtøku av felagsmálum til sermál, uttan at siga tinginum frá, hvat tað er fyri mál, sum skulu yvirtakast.

Tá ið eg sjálvur eins og flokkur mín Sambandsflokkurin er ímóti yvirtøku í allari almindeligheit, kann eg ikki styðja eitt tíðki uppskot, men má mæla tingmonnum frá at stemma fyri hesari grein.

Harafturímóti skal eg mæla til, at tann peninganøgd, sum sambarf § 27 skal nýtast til yvirtøku, verður nýtt til onnur gagnlig tiltøk vinnulívinum til fremu.

Sambandsflokkurin heldur tað vera umráðandi, sum tíðirnar eru nú, at nýta alla okkara orku til at styrkja ein og hvønn grunn, sum hevur við fiskivinnu at gera, so man kann verða førur fyri at halda tann avreiðingarpreis, sum vit hava í dag og møguliga vaksið um hann.

Hetta er ikki minst áfrokandi nú, tá talan er um at fáa okkara linuskip at landa veiðina her á landi.

Okkara flokkur heldur eisini, at tað er púra skeivt í einari tíð sum hesari at yvirtaka mál, sum kunnu koma at verða nívandi byrðar fyri fólk okkara; og eitt skulu vit gera okkum klárt, at það, sum *verður* yvirtikið, tað er yvirtikið og har vendist ikki aftur.

Í samsvar hervið seti eg fram fylgjandi

Broytingaruppskot:

1. § 27. Í staðin fyri yvirtøku av sermálum

Konto for overtagelse af særanliggende

verður sett:

Grunnur fyri studning til heimaútróður.

Fonden for tilskud til hjemmefiskeri.

2. § 16-2-7:

Í staðin fyri studningur til heimaútróður.

Tilskud til hjemmefiskeri.

verður sett:

Studningur til grunn fyri heimaútróður.

Tilskud til fond for hjemmefiskeri.

2. og 3. viðgerð 25. mars 1966.

Formaðurin legði fram soljóðandi minnilutaálit frá Haldor Hansen og P. M. Dam:

Minnilutin (Haldor Hansen og P. M. Dam) viðmerkir, at hann er ikki fyri uppskoti um pening til yvirtøku, sum landið liggur í dag, men skjýtur upp, at peningurin, sum sambæri § 27 er settur av til yvirtøku verður nýttur sum eykastuðningur úr landskassanum til skúlabygging sammanber uppskot javnaðarflokksins, løgtingsmál nr. 40/1965: Bygging av skúlum og lærarahúsum.

Minnilutin skrivar undir við fyrivarni viðvikjandi fíggjarlógini í sini heild.

Broytingaruppskot
til

§ 27. Ístaðin fyri «Konto fyri yvirtøku av sermálum» «Konto for overtagelse af særanliggender»
verður sett:
«Eykastuðningur til skúlabygging» og í danska teksfini «Ekstratilskud til skolebyggeri».

Broytingaruppskotið frá sambandsflokkinum til § 27 fall 10—0.

Broytingaruppskotið til § 16 so stall burturdottið.

Broytingaruppskotið frá javnaðarflokkinum var sett undir atkvøðu við navnakall:

Ja atkvøddu: J. Lindenskov, P. M. Dam, Trygve Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, R. Thomsen, J. P. Davidsen, Hans Iversen og Dion Nolsøe.

Atkvøddu ikki: K. Wang, P. Petersen, S. Skaale, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, Kj. Mohr, E. Paturssøn, Hans Lützen, H. J. Ellingsgaard, S. Joensen, Johan Simonsen, Hannis v. Høgadalsá og S. Petersen.

Burtur: J. H. Danbjørg, J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen og Haldor Hansen.

Uppskotið fall 10—0.

§ 27 í fíggjarlógaruppskotinum var sett undir atkvøðu við navnakall:

Ja atkvøddu: K. Wang, P. Petersen, S. Skaale, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, Kj. Mohr, E. Paturssøn, Hans Lützen, H. J. Ellingsgaard, S. Joensen, Johan Simonsen, Hannis v. Høgadalsá og Samuel Petersen.

Nei atkvøddu: J. Lindenskov, P. M. Dam, Trygve Samuelsen, Leon

Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, R. Thomsen, J. P. Davidsen, Hans Iversen, Dion Nolsøe.

Burtur: J. H. Danbjørg, J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen og Haldor Hansen.

Uppskotið samtykt 15–10.
Fíggjarlógaruppskotið samtykt 15–0.

---

2. Nýval til Föroya lögting

Ár 1965, 28. august legði P. M. Dam løgtingsmaður fram soljóðandi

Vísandi til tað undir endanini av seinastu tingsetu av løgmanni givnu frágreiðing yvir fyri Føroya fólki og løgtingsmonnum, at hann helt landsstýrið ikki kunna halda fram, tí hann kendi seg ikki sum løgmann longur at hava meirilutan aftanfyri seg, loyva undirskrivaðu tingmenn sær at krevja ta demokratisku fylgju tikna av hesi løgmansins vanntreystislýsing til sitandi landsstýrissamgongu.

Av hesi lýsing má standast løgtingsval sum forleikur til nýtt landsstýri.

Víst verður eisini til skriving í stjørnarbløðunum «Dagblaðnum» og «14. September», harið gjølla verður greitt frá, hvussu lanmið, hefi, ónarbeiðsført og orkuleyst sitandi landsstýri hevur verið vegna óseinju millum landsstýrismenniuar.

Land og fólk okkara, ið eftir stjørnarflokkanna egna umdømi sostatt hava verið og eru í veruligum stjørnarloysi, tola ikki framhald av hesum ólagi.

Vit lýsa sostatt missálit til sitandi landsstýri og mæla til, at nýval verður at fara fram tann 8. november 1965 og seta fram uppskot um tað.

Hetta uppskot verður eisini sett fram sum móttuppskot til tað av Poul Petersen, Sigurð Joensen, Marius Johannesen og Kjartan Mohr undirskrivaða uppskoti um at veita sitandi landsstýri álitisváttan.

Uppskot til eykaløgtingsval.

§ 1.

Eykaløgtingsval verður at fara fram tann 8. november 1965.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Forslag til ekstra lagtingsvalg.

§ 1.

Ekstra lagtingsvalg afholdes den 8. november 1965.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

1. og 2. viðgerð 1. september 1965.

Uppskotið var sett undir atkvøðu við navnakall:

Ja atkvøddu: J. Lindenskov, J. H. Danbjørg, J. Fr. Øregaard, P. M. Dam, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, R. Thomsen J. P. Davidsen, Hans Iversen, Dion Nolsøe, Poul J. Olsen og Haldor Hansen.

Atkvøddu ikki: K. Wang, P. Petersen, S. Skaale, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, Kj. Mohr, Jens P. Joensen, Hans Lützen, Hans J. Ellingsgaard, S. Joensen, Johan Simonsen, H. v. Høgadalsá og S. Petersen.

Uppskotið fall 14—0.

3. Skattafríar avskrivingar

Ár 1965, 28. august legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um skattafríar eykaavskrivingar av skipum, ávísum bygningum, maskinum v. m.	lagtingslov om ekstraordinære skattefri afskrivninger på skibe samt visse bygninger, maskiner m.v.
§ 1.	§ 1.
Tær í løgtingslóg nr. 3 frá 2. februar 1956 um skattafríar eykaavskrivingar av skipum, ávísum bygningum og maskinum v.m., við seinni broytingum fyrisettu reglur verða óbroyttar galdandi fyri skattaárini 1967/68 og 1968/69 viðvíkjandi skipum, bygningum og maskinum v.m., sum útvegað eru ella sum sáttmáli er gjørdur um í tíðarskeiðinum 1. januar 1955 til 31. desember 1967.	De i lagtingslov nr. 3 af 2. februar 1956 om ekstraordinære skattefri afskrivninger på skibe samt visse bygninger, maskiner m.v. med senere ændringer fastsatte regler forbliver uændrede i kraft for skatteårene 1967/68 og 1968/69 vedrørende de skibe, bygninger og maskiner m.v., som er anskaffede eller kontraktede i tiden 1. januar 1955 til 31. december 1967.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinnan vegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í sambond við endurnýggjan av skipaflotanum samtykti løgtingið í 1965 at geva teimum monnum og felogum, sum útvegaðu sær nýggj skip, høvi til at fáa hesi niðurskrivað, meðan tey vóru nýggj, og áðrenn tær stóru umsitingarútreiðslurnar komu. Hetta varð gjørt við reglum um skattafría eykaavskriving av eintum parti av kostprisinum. Aftrat vórðu reglurnar víðkaðar til ikki bert at viðvíkja skipum, men eisini ávísum bygningum og maskinum.

Hesar reglur vórðu í 1957 og 1961 endurnýggjaðar at galda til 31. desember 1965.

Landsstýrið metir her nevndu reglur at hava sín parl í ti endurnýggging av skipaflotanum, sum farin er fram seinastu árini, og heldur tað vera av stórum týdningi, fyri at hildið verður fram við hesari endur-

nýgging, at tær higartil galdandi reglur um skattafría avskriving standa við.

Landsstýrið heldur beinast vera at avmarka tíðina fyri hesum reglum og hevur skotið upp, at lógin fyribils verður endurnýggjað fyri 2 ár og setur fram uppskot um hetta.

1. viðgerð 30. august og 31. legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir til at samtykkja uppskotið. P. M. Dam, J. Fr. Øregaard og Hænus við Høgadalsá tó við tí viðmerking, at hetta er bert galdandi fyri 2 ár aftrat og lógin tá kann takast til kanningar í góðari tíð.

Formaðurin legði fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

frá Andreas Djurhuus:

Í § 1 verður «1967/68 og 1968/69» broytt til «1967/68, 1968/69, 1969/70 og 1970/71» og «31. desember 1967» broytt til «31. desember 1969» í báðum tekstunum.

Broytingaruppskotið fall 6—0.
Lógaruppskotið samtykt 25—0.

4. Veðhald av lánum til smærri ídnaðarvirkir

Ár 1965, 28. august legði Karsten Hoydal landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veðhald av lánum til smærri ídnaðarvirki.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om garanti for lån til mindre industrivirksomheder.
§ 1.	§ 1.
Í § 1 í løgtingslóg nr. 14 frá 26. apríl 1965 um veðhald av lánum til smærri ídnaðarvirki verður gjørd henda broyting.	I § 1 i lagtingslov nr. 14 af 26. april 1965 om garanti for lån til mindre industrivirksomheder gøres følgende ændringer:
«500.000 kr.» verður broytt til «800.000 kr.».	«500.000 kr.» ændres til «800.000 kr.».
§ 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi beinanvegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir løgtingslóg nr. 14 frá 26. apríl 1965, jbr. løglingsmál nr. 44/1964, varð skipanin endurnýggjað fyri fíggjarárini 1965/66 – 1967/68 um, at landsstýrið hevur heimild at veðhalda fyri lánum til smærri ídnaðarvirki, samstundis sum hámarkið fyri veðhaldini hvørt árið varð hækkað frá 300.000 kr. til 500.000 kr.

Við teimum royndum, landsstýrið nú hevur, rokka 500.000 kr. ikki til, um fær umsóknir, ið liggja fyri og bíða, ið eru í umbúnað, og sum landsstýrið heldur hava almennan stuðul uppiborinan, skulu verða gingnar á møti.

1. viðgerð 30. august og 31. legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjørt málið saman við Karsten Hoydal, landsstýris-

manni, sum upplýsir, at tær umsóknir, ið liggja hjá virkisnevndini eru 8 í tali og uppá 419.000 kr. tilsamans.

Nevndin heldur tí, at um brúk verður fyri hesum peningi til týðandi virki, átti landsstýrisins heimild at verið samsvarandi og mælir tí til at broyta landsstýrisins uppskot eftir hesum tørvi.

Nevndin mælir tí einmælt til at samtykkja landsstýrisins uppskot við hesi broyting:

BROYTINGARUPPSKOT
(frá allari nevndini)

Í landsstýrisins uppskoti § 1, stk. 2 verða «800.000 kr.» broyttar til «950.000 kr.»	I landsstyrets forslag § 1, stk. 2 ændres «800.000 kr» til «900.0000 kr.»

2. og 3. viðgerð 1. september 1965.

Lógaruppskotið við broytingini frá nevndini samtykt við 29 atkv.

5. Góðkenning av handilsskúlum o. ö.

Ár 1965 28. august legði Niels Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

I

UPPSKOT
til samtyktar

Við heimild í § 19 í lóg nr. 191 frá 1. juni 1961 «om godkendelse af handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler og tilskud v.m. til disse skoler» verður henda lóg sett á gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan og við hesum broytingum.

1. I § 1 verður aftaná «undervisningsministeren kan» skotið inn «efter indhentet udtalelse fra landsstyret.»

2. I § 3 verður aftaná «undervisningsministeren kan» skotið inn «efter indhentet udtalelse fra landsstyret.»

3. I § 4, 1. stk. c. verður aftaná «undervisningsministeren» lagt afturat «efter indhentet udtalelse fra landsstyret.»

4. § 5, 4. stk. verður orðað soleiðis: «De kommunale tilskud udbetales lærlingeskolerne direkte af landskassen.»

5. § 5,5. stk. verður orðað soleiðis: «Landskassens udlæg af driftstilskud til lærlingeskolerne pålignes kommunerne efter hjemmestyrets nærmere bestemmelser.»

6. I § 7, 1. pkt. verður aftaná «undervisningsministeren» skotið inn «efter indhentet udtalelse fra landsstyret.»

7. I § 8 verður aftaná «undervisningsministeren fastsætter» skotið inn «efter indhentet udtalelse fra landsstyret.»

8. I § 11, 2. og 3. stk. verður aftaná «undervisningsministeren kan» skotið inn «efter indhentet udtalelse fra landsstyret.»

9. § 18, 1. stk. verður orðað soleiðis:
«Statstilskud og -lån efter reglerne i kap. II og III kan ydes med virkning fra den 1. april 1965.»

10. § 19 gongur út.

II

UPPSKOT
til

løgtingslóg um býti av kommununnar parti av útreiðslunum til lærlingalæruna.

§ 1.

Kommununnar partur av útreiðslunum til lærlingalæruna, jbr. § .... í kongaligari fyriskipan nr. .... frá .....
om .....

lagtingslov om fordeling af kommunernes andel af udgifterne til lærlingeuddannelsen.

§ 1.

Kommunernes andel af udgifterne til lærlingeuddannelsen, jfr. § .... i kongelig anordning nr. .... af .....
om .....

..... verður í fyrsta umfari at leggja út úr landskassanum og síðani at býta millum kommununrnar eftir heimstaðnum, lærlingarnir høvdu, tá teir byrjaðu skúlan.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1965.

..... udlægges af landskassen og reparteres senere på kommunerne efter lærlingernes hjemsted ved skolegangens begyndelse.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1965.

Viðmerking:

Viðlagda lóg nr. 191 frá 4. juni 1961 «om godkendelse af handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler og tilskud m.v. til disse skoler» er ikki galdandi í Føroyum, men kann eftir § 19 setast í gildi her við kongaligari fyriskipan.

Eftir lógini letur ríkiskassin stuðul bæði til rakstur og til bygging av hesum skúlum.

Til lærlingalærurna er ríkisstuðningurin til raksturin uppí 65 % og heraftanat lata ávarandi kommunnir 30% av hesum studningi. Eftir uppskotinum leggur landskassin kommununnar part út, og verður hann síðani kravdur inn aftur eftir heimstaðnum, lærlingarnir høvdu, tá teir byrjaðu skúlan. Til aðra læru er ríkisstuðningurin 100 %, táið læran endar við prógvi, sum er undir eftirliti ríkismyndugleikanna, og tá skúlin er sjálveigandi, t.d. Føroya Maskinskúli.

Byggistuðulin, lán sum er uttan rentu og avdrátt, er uppí 5/6 av virði skúlans.

Uppskotini bera onga útreiðslu fyri landskassan við sær.

Til uppskotið er serliga at viðmerkja, at eftir løgtingslóg nr. 25 frá 22. mai 1962 er landsstýrið heimilað at læna ella veðhalda fyri lánum til bygging av maskinskúla og at rinda tann partin av rakstrinum, ið ikki verður goldin í ríkisstuðningi ella frá privatum o.ø.

Skúlin er stovnaður sum sjálveigandi stovnur, viðtøkurnar eru góðkendar jbr. kunngerð nr. 63 frá 24. september 1964, og er skúlin byrjaður lærunna 1. mars 1965. Í fyrsta umfari eru hølið leigað á Føroya Sjómannasskúla og Tórshavnar Tekniska Skúla. Dentur verður lagdur á at læra til serligt maskinmeistaraprógv, lúkandi tey krav, sum nýggi fiskiflotin setur maskinmanningini. Prógvið hevur eisini fingið góðkenning frá ríkisstýrinum, bæði sum serligt prógv og sum aspirantskeið til maskinmeistaralærurna.

Viðløgd er lóg nr. 191 frá 4. juni 1961.

1. viðgerð 30. august og 31. legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir einmælt til at samtykkja landsstýrisins uppskot:

I Uppskot til samtyktar.

II Uppskot til løgtingslóg um býti av kommununnar parti av útreiðslunum til lærlingalærunna.

2. og 3. viðgerð 1. september 1965
I (uppskot til samtyktar) samtykt 23—0.
II (lógaruppskotið) samtykt 27—0.

---

6. Veðhald av láni til p/f. Clupea

Ár 1965, 28. august legði Samuel Petersen løgtingsmaður fyri Norðoya tingmenn fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til p/f Clupea.	lagtingslov om garanti for lån til p/f Clupea.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum til p/f Clupea, Klakksvík, sum tilsamans eru ikki hægri enn 90 % av kr. 5.200.000,—.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån til p/f Clupea, Klakksvik, som højst andrager 90 % af kr. 5.200.000,—.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi beinan vegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt eru í løtuni 14 fiskiskip útgjørd við kraftblokki til sildaveiðu. Av teimum eru tó enn nøkur í aðrari veiðu. Mett eftir veiðutølunum hjá íslendskum skipum við kraftblokki, og tá vit seta veiðunøgdina hjá føroyskum skipum nakað lægri uppá skipið, m.a. orsakað av møguligari longri siglingarleið, tá veiða hesi 14 skip umleið 300 tons av sild í saundøgrið.

Í løtuni eru tvær sildaverksmiðjur í gongd:

Í Gøtu er ein, sum arbeiðir í 24 tímar umleið	50 tons
Á Velbastað ein, sum arbeiðir í 24 tímar umleið	25 tons
tilsamans	75 tons
Í gerð er ein á Drelnesi, sum skal arbeiða í 24 tímar umleið ..	50 tons
tilsamans	125 tons
Og í umbúnað er at útvega ílagupening til eina í Fuglafirði, sum er ætlað at arbeiða í 24 tímar umleið	150 tons
tilsamans	275 tons

Vit hava so statt longu nú so nógv skip útgjørd við kraftblokki, at tey veiða størri nøgdir av sild, enn verandi og ellaðar sildaverðsmiðjur í landinum eru førar fyri at arbeiða. Og sum sildafiskiskapurin nú hevur tikið seg upp í so at sigu allar ættir uttanum okkum, er einki at ivast í, at ein stórur partur av veiðiflotanum verður útgjørdur við kraftblokki, ikki bara av teim nýggjaru stálskipunum, men eisini av teim eldru stóru træbyggdu bátunum.

Í stovnan er p/f Clupea, við heimstaðið í Klakksvík, og við tí endamáli, at byggja og reka sildaverksmiðju, sildafiskiskap og sølu og útflutning av øllum sildaframleiddum vørum.

Stovnararnir eru bræðurnir Erling, Trygvi og Hallur Laksáfoss, Klakksvík. Partapeningurin er ásettur til kr. 150.000, harav tekna stovnararnir kr. 300.000,—. Restin verður útboðin til tekningar í Norðoyum.

Klaksvíkar kommuna hevur givið málinum bestu undirtøku. Kommunufundur hevur verið um málið. Har varð samtykt, at kommuman fyri fyrst vil útvegn felagnum byggiøki millum Ánirnar og Strond. Har verður byggiøkið slættað og atløgubryggja gjørd út í sjógvin. Eisini var samtykt at biðja um løgtingsveðhald fyri kommununnar parti av hesum lánum, til útbygging av havnarlag.

Verksmiðjan er ætlað at arbeiða 250 tons av sild í samdøguri til bræðingar. Tilboð er fingið uppá allar neyðturviligar maskinur. Somuleiðis er kostnaðarætlan gjørd viðvíkjandi planering av hyggilendi, bygningum, sildapaunum, afløgubryggju og øðrum,ið neyðugt verður til tess at verksmiðjan verður tíðarhóskandi og rationel í rekstri.

Tann samlaði kostnaðurin av sildaverksmiðjuni er hesin:

Sildaverksmiðja í koyriklárum standi 250 tons um samdøguri, við tangum og annars alt tilbehoyr, t.d. 150 tons lossigreiðir um finan c.i.f. Klakksvík	2.500.000,–
Brensilstangi 500 m³	100.000,–
Bygningur 25 × 60 m við fundamenti, fyri maskinur og mjøllagur, somuleiðis fiskipaunar til rásild 1000 tons	1.075.000,–
Montering av el og maskinum	200.000,–
Sveising av tangum,	85.000,–
Uppsýn við arbeiði	60.000,–
Ymist at standa ímóti við	100.000,
Samlaði kostnaðurin til planering og afløgubryggju	1.000.000,–
	5.120.000,–

Ætlanin er at útvega byggipening á hendan hátt:

1. Egínpeningur, sum er partapeningur	450.000,–
2. A/S Atlas Stord vil levera 250 tons/24 tímar sildaverksmiðju í koyriklárum standi, við 1500 m³ sildnoljutanga og annars alt tilbehoyr c.i.f. Klakksvík fyri kr. 2.500.000,– til exportkredit yvir 5 ár við samlaðari rentu 9 % p.a. móti løgtingsveðhaldi og 15 % útgjald	2.125.000,–
3. A/S Dansk Shell vil levera Brolju tanga 500 m³ móti oljukontrakt	100.000,
4. A/S Atlas Stord bjóðar seg at fáa undirleverandør at levera takkonstruktiónir, klædning til bygging 25 × 60 m fyri kr. 300.000, –, bygt á líknandi hátt sum «Kósin», Klakksvík til exportkredit yvir 5 ár við samlaðari rentu 9 % p.a. móti løgtingsveðhaldi og 15 % útgjald	255.000, –
5. Føroyskir peningastovnar vilja lána til Klakksvíkar kommunu til eitt slíkt endamál móti løgtingsveðhaldi	1.000.000,–
	5.130.000,–

Rakstrarætlan í 100 dagar fyri 250 tons/24 tímar Sildaverksmiðju.

14 tons br.olja/dag á kr. 135/tons	1.900,-
1050 sekkir/dag á kr. 1,10	1.160,-
El 320 KW × 24 × 0,08 kr./kwt + fast gjald	770,—
2× 1 mann til lossing,	
3 × 6 menn til verksmiðjuna,	
3 × 1 mann til ketilpassing,	
ialt 23 menn á kr. 80,00/dag	1.810,
	5.670,—

250 tons sild/dag 20½ % mjøl = 51.250 kg/dag
250 tons sild/dag 18 % olja = 45.000 kg/dag
5670,00 oyru: 51250 kg mjøl = 11 oyru pr. kg framleitt mjøl.

Framleiðsluútreiðslur pr. ár 100 dagar		567.000,—
Keyp av rávørum frá 12/14 skipum á ca 2000 tons/skip = 25000 tons á 0,30 kr./kg		7.500.000,
Fastar lønir		250.000,—
Umvæling og viðlíkahald		150.000,—
Trygging av bygningi og maskinum		75.000,—
Tryggingar av lagri		4.000,—
Renta av kassakredit		75.000,
Renta av vørugoymslu		80.000,—
Leiga av grund frá kommununi		32.000,—
Vørugjald til Klakksvíkar havn		56.000,—
Reklama		60.000,
Almenn gjøld		67.400,
Samlaði exportkreditturr 2.800.000,— + 15 %		8.916.400,—
at avdraga yvir 5 ár	476.000,	
Renta við próv. 9%	214.200,	
Banklán kr. 1.200.000,—		
at avdraga yvir 10 ár	120.000,	
Renta við próv. 9%	108.000,—	
Samlaðar útreiðslur av lánum	918.200,—	918.200,
Samlaðar útreiðslur fyri árið		9.834.600,—
Søla av 5.125.000 kg. av mjøli á 1,30 kg/kr.	6.662.500,—	
Søla av 4.500.000 kg av olju á 1,00 kg/kr.	4.500.000,	
	11.162.500,—	

Samlaðar útreiðslur fyri árið 100 dagar	9.834.600,-
Avlop	1.327.900,

Tær ætlaðu maskinurnar, sum nevndar eru frammanfyri, og tað sum harfil hoyrir, fæst umleið 6 mánaðir aftaná at tað er umbiðið.

Ætlanin er at verksmiðjan skal vera klár at taka í nýtslu, tá sildaveiðan byrjar umleið 1. juni 1966. Longu nú liggja tvey av teim nýggju línuskipunum á Klakksvík, og er tað óvist um ley sleppa avstað aftur til saltfisk, orsakað av fólkatroti, hetta vísir, hvussu neyðugt tað kemur at verða, at leggja vinnuna yvir til sildaveiðu seinru helvt av árinum.

Vit undirritaðu tingmenn fyri Norðoyggjar, loyva okkum at leggja hetta mál fyri háttvirda tingið. Vit halda, at tað ætlaðu plássið er sera væl hóskandi til eitt virki, sum tað her nevnda. Sum sildagongdin hevur verið hesi árini, er tað eitt tað høgligasta plássi í Føroyum. Har er sum kunnugt atkomiligt bæði norðan- og sunnanífrá. Tá vit m.a. hugsa um bergholið, sum er í gerð á Borðoynni, so kenna vit okkum fullvísar í, at eitt slíkt virki fær fann størsta vinnuliga týdning fyri allar norðoyggjarnar, orsakað av teim samferðslulikiudum, sum bergholið skapar.

Sum skilst av málinum hevur tað størsta týdning, at tað kann fremjast skjótast møguligt, til tess at verksmiðjan kann standa klár at taka ímóti sildini, tá sildaveiðan byrjar aftur komandi summar. Og vit skjóta tí upp, at málið verður avgreitt frá tinginum nú beinan vegin, áðrenn tingið fer heim.

Málið er væl undirbygt, m.a. við tað, at virkisnevndin nú hevur arbeitt so mógv við slíkum máltum, og hevur lagt loyvdgott tilfar frá sær. Og rokna vit tí við, at tað, sum møguliga verður neyðugt at útvega av fleiri upplýsingum, kann útvegast beinanvegin, tá málið er til nevndarviðgerð.

Onnur tilboð av sama slag, frá øðrum maskinfabrikkum eru undir útarbeiðing í øðrum londum, og vænta vit, at tey koma til Føroya, ein av teim fyrstu dagunum, hetta skulu vit hava klárt, tá málið fer í nevnd.

1. viðgerð 31. august og 29. april legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Eftir § 1 í uppskotinum skal landskassin veðhalda fyri 90% av tí, tað kostar at seta á stovn sildaverksmiðju í Klakksvík hjá p/f Clupea, ella 90% av kr. 5.200.000.

Eftir uppskoti frá formanninum í figgjarnevndini vurð málið sent virkisnevndini til ummælis.

Viðheft álitinum eru hesi skjal:

Skjal I: Umhugsan frá Virkisnevndini dagfest 9. november 1965.
Skjal II: Uppliskoytisumnæli frá Virkisnevndini dagfest 13. april, 1966.
Skjal III: Bræv frá landsstýrinum til figgjarnevndina dagfest 7. mars 1966.
Skjal: IV: Skriv frá p/f Clupea, Klakksvík til figgjarnevndina, dagfest 22. mars 1966.

Hetta seinast nevnda bræv inniheldur aðra uppstilling av stovnsetingarkostnaðinum.

Við í málinum liggja:

1. Frágreiðing frá p/f Clupea um stovnseting av sildaverksmiðju við tekningum.
2. Frágreiðing frá Landsbyggifelaguum við tekningum viðvíkjandi atløgubryggju og havnarlag til sildaidnaðarvirki p/f Clupea, Klakksvíkar havn.

Eftir viðgerð av málinum hevur figgjarnevndin býtt seg í 3 minnilutar.

Við tað, at ein minniluti hevur tikið við uppskot um løgtingsveðhald til Suðuroya fiskiðnaða, er umsókn hesum viðvíkjandi, sum víst var í figgjarnevndina, løgd við í hesum máli.

Umsóknin er viðheft málinum sum skjal V.

Kostnaðarætlan og roknskapur eru viðløgd málinum.

Minnilutin (Kjartan Mohr, Hanus við Høgadalsá og Knút Wang) hevur hesar viðmerkingar:

Tá ið landsstýrið, ið nú situr, varð skipað, setti samgongan sær fyri at útbyggja sildaidnaðin á landi. Grundarlagið undir útbyggingini var fingið til vega í samarbeiði við Virkisnevndina og serfrøðingar. Samstundis fingu fleiri skip sær kraftblokk.

Afturat teimum sildaverksmiðjum, sum vóru, var verksmiðja bygd á Drelnesi og partafelag varð stovnað í Fuglafirði við tí endamáli at fáa upp sildaverksmiðju har. Løgtingið setti 100.000 kr. sum partapening í hetta virki við undirtøku av øllum flokkum. Tað gjørdist ikki neyðugt at útvega meira almennan pening frá føroyskari síðu, tí neyðugur peningur er útvegaður frá privatum og lán fingin uttan løgtingsábyrgd. Seinni var avgjørt at víðka verksmiðjuna í Fuglafirði frá 150 til 500 tons pr. samdøgur.

Minnilutin kundi havt ynskt, at sildaverksmiðja var fingin í lag av skipracigarunum sjálvum, men hetta eydnaðist ikki, og tá var ikki talan um aðra útbygging enn í Fuglafirði.

Fyri at royna møguleikarnar at landa sild til bræðingar í Føroyum,

veitti løgtingið eftir umsókn frá skipaeigarum, studning til Elíka sild, og hesar royndir eydnaðust vel.

Eftir umsókn frá sonu skipaeigarum samlykti landsstýrið og figgjarnevnd at veita studning til royndir eftir sild undir Føroyum í mánaðunum januar, februar og mars.

Tað sæst tí skilliga, at landsstýrið og landsstýrismeirilutin hava sýnt málinum viðvíkjandi sildaidnaðinum hin størsta áhuga, eins og arbeitl verður við máli um at seta á stovn stórt hermetikkvirki. Endalig avgerð um hetta er tó ikki tikin enn.

Landsstýrið hevur allatíðina virkað fyri at úthyggja sildaidnaðin á landi, so hvørt sum tørvur er til tess, og minnilutin tekur undir við tí sjónarmiði, at hesin ídnaður verður úthygdur, men við teim stóru krøvum sum í aðra mátar eru til úthygging á landi, má henda úthygging fara fram í sumum stevi við tørvi til tílíka úthygging og figgjarorku landskassans, har hann skal standa til svars fyri henni.

Sum sagt frá í viðheftu skjølum frá Virkisnevndini, heldur hon ikki, í mun til tey skip sum kunnu veiða sild til bræðingar, eina størri úthygging vera hráneyðuga beint nú.

Minnilutin vil tó í øllum føroum veita p/f Clupea sonu søndir, sum sildaverksmiðjuni í Fuglafirði og viðmæla sonu lánimøguleikar og annars tá tað er neyðugt studla úthygging, sum kann taka alla ta sild til bræðingar, sum føroysk skip veiða.

Vísandi til frammanfyrislaudandi setur minnilutin einki uppskot fram nú.

Minnilutin (P. M. Dam, Haldor Hansen og Andreas Djurhuus) ger hesar viðmerkingar:

Í tey seinastu 10-12 ár eru gjørd stór framstig við endurnýggingini av fiskiskipaflotanum, og hevur ta privata initiativið saman við dyggari styðjan frá tí almenna her vist eitt áræði, ið hevur givið eitt gott úrslit.

Fyri at fáa ta fullu nyttu av fiskiskipaflotanum eigur úthyggingin á landi at fylgja við, soleiðis at tað skapast møguleikar fyri produktivari samvinnu millum skipini og virkir á landi.

Eitt stig henda vegin er fyriliggjandi uppskot um sildaverksmiðju í Klukksvík og ætlanin hjá p/f Suðuroyar Fiskifdnaði, Tvøroyri, at gera sildaverksmiðjuna har størri. Tað almenna hevur við stovnanini styðja hesa seinnu fyritøku við at veðhalda fyri 80 % av láni upp í 1.050.000 kr., sí løgtingslóg nr. 31 frá 20. mai 1965, og hevur felagið nú sent umsókn um landskassaveðhald fyri láni til hesa viðkanina, ið ætlast at kosta 3.385.000 kr. Tað eigur at verða ein treyt fyri veðhaldinum, at partapeningurin hjá hesum felag, ið er kr. 250.000, verður hækkaður til kr. 500.000.

Minnilutin mælir tinginum til at samtykkja uppskotið til løgtingslóg um veðhald fyri láni til p/f Clupea við hesum

Broytingaruppskoti:

1. Í § 1 verður í báðum tekstunum «90 %» broytt til «80 %», og «kr. 5.200.000» broytt til «kr. 4.992.000».

Harumfram setur minnilutin fram

II. Uppskot til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til p/f Suðuroyar Fiskiidnaður.	lagtingslov om garanti for lån til p/f Suðuroyar Fiskiidnaður.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til p/f Suðuroyar Fiskiidnaður, sum er hægst 80 % av kr. 3.385.000,-. Veðhaldið er treytað av, at partapeningurin verður hækkaður til 500.000 kr.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån til p/f Suðuroyar Fiskiidnaður, der højst andrager 80 % af kr. 3.385.000. Garantien er betinget af, at aktiekapitalen forhøjes til kr. 500.000.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Ein minnilutti (Sánal Petersen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið í løgtingsmáli nr. 6/1965 við hesum

Broytingaruppskoti

§ 1. Tølini «90» % og kr. «5.200.000» verða broytt til «80» % og kr. «4.900.000».	§ 1. Tallene «90» % og kr. «5.200.000» ændres til «80» % og kr. «4.900.000».

Skjal I.

V I R K I S N E V N D I N

Nevndin til kannan av øktum virkismøguleikum
Det færøske egnsudviklingsudvalg

Tórshavn, 9. november 1965
Tlf. 2791

Føroya Landsstýri,
Tórshavn.

Viðv. umsókn um veðhald fyri láni til p/f Clupea, Klakksvík.
F.L. nr. 1218-2-7.

Nevndin hevur á fundi 29. september og 3. november í ár haft hetta mál til viðgerðar.

Á fyrsta fundi varð avgjørt, at hetta mál átti meira at verða viðgjørt sum eitt meginmál um úthúgvingina av sildaverksmiðjuídnaðinum í Føroyum sum heild, enn tað staka málið hjá p/f Clupea.

Við skulu tó fyrst gera nakrar viðmerkingar til løgtingsmálið:

1) Eftir løgtingsmálinum nr. 6/1965 snýr hetta seg um veðhald fyri láni til p/f Clupea uppá 90 % av 5,2 milj. kr. Í viðmerkingunum til málið stendur, at kostnaðurin til planering og atløgubryggju er 1 milj. kr. av teim 5,2 milj. kr., og á síðu 3 undir pkt 6 í finansieringsætlanini stendur, at peningastovnar vilja lána til Klakksvíkar kommunu móti løgtingsveðhaldi 1. milj. kr.

   Eftir hesum skilja vit, at hetta løgtingsmál fellur í 2 partar, ein veðhaldsætlan fyri p/f Clupea uppá 4,2 milj. kr., og ein fyri Klakksvíkar kommunu uppá 1 milj. kr.

2) Áðrenn p/f Clupea-málið varð lagt fyri lingið, var ein umskipan farin fram viðvíkjandi virkinum í Fuglafirði, soleiðis at felagið I/S Havsbrún varð stovnað við luta-peningi frá p/f Dagsbrún og tí upprunaliga sildaverksmiðjufelagnum p/f Havsild uppá tilsamans um 1,54 milj. kr., og orkan á virkinum økt frá upprunaliga 150 tons/samdøgur til 500 tons/samd.

   Í løgtingsmálinum nr. 6/1965 er uppgjørt, at samlaða framleiðsluorkan í Føroyum vil verða 275 tons/samd. í 1966, harav í Fuglafirði 150 ts. Hetta má søstalt broytast til 625 tons/samd. uttanfyri økingina í Fuglafirði.

3) p/f Clupea er ikki stovnað og ikki skráset. Virkisnevndin lekur van-

liga ikki avgerðir í málum, sum viðvíkja felagum, sum ikki eru skrásett og stovnað.

4) Eginpeningurin í felagnum er ætlaður alt ov lítil (450.000 kr.). Vit kunnu sum dømi leggja fram, at Egusudviklingsrádet fyri p/f Havsild, sum tá snúði seg um eitt 150-tonsa-virki, kravdi ein eginpening uppá umleið 800.000 kr., fyri at felagið kundi hava tøkan rakstrarpening umframt at finansiera 10 % av íleggingini.

I p/f Clupea er til 250-tonsa-virkið ætlaður ein partapeningur uppá 450.000 kr., sum hert er nógmikil til 10 % finansiering av íleggingini og einki til rakstrarpening.

Á teim fylgjandi síðum viðgera vit tað almenna málið viðvikjandi sildaverksmiðjum undir hesum stk.:

1. Útlit fyri tali av føroyskum nótaskipum í ídnaðarveiði.
2. Útlit fyri rávørunøgdum.
3. Útlit fyri 1966.
4. Rásildaprísur og rentabilitetur á sildaverksmiðjum.
5. Niðurløga.

Skjøl:

I. Føroysku nótaskipini 1965 og veiði teirra til 1.10.-1965.
II. Ætlanir hjá reiðarfaum um at fáa sær nótaútgerð ella ikki.
III. Íslendska summarsildaveiðan á Norður- og Eysturlandi 1963 og 1964.

1. Útlitið fyri tali av føroyskum nótaskipum í ídnaðarveiði.

Vísandi til skjal I eru í Føroyum 12 skip, ið hava nótaútgerð (til hetta hoyra m.a. spæl, sonar (asdic), kraftblokkur og nót).

Umframt hava vit eisini eftir ynski frá Fíggjarnevndini, spurt okkum fyri hjá reiðarium í Føroyum, sum hava stálfnuskip, hvørjar ætlanir tey hava um at fara í sildaveiði við nót:

Henda uppgerð (skjal II) sýnir:

13 skip, sum siga seg avgjørt ikki at fara í hesa veiði.
15 skip, sum siga seg onga ætlan hava um, at fara í nótaveiði.
12 skip, sum siga seg kanska fara í hesa veiði, men sum heild siga, at vilja bíða, til tað sæst, hvussu henda veiði tekur seg upp.
8 skip, sum hava positivar ætlanir um at fáa sær útgerðina.

Hesi hava øll uttan eitt — søkt landsstýrið um løgtingsveð-

hald fyri útgerð, og hitt 8. hevur útgerðina, men ikki ísettan kraftblokk.

12 skip, sum hava útgerðina.

Av tí, at nú er so langt útliðið, at skip, ið enn ikki hava avgjørt at fáa sær útgerðina, neyvan kunnu náa hetta til 1966, kunnu vit meta, at

í mesta lagi vilja í 1966 20 skip hava útgerðina.

Av hesum hava 12 útgerðina nú. Tá er at leggja dent á, at hetta merkir ikki, at øll 20 fara í ídnaðarveiði. Av teim 12, sum í 1965 royndu á Føroya-leiðini, vóru 7 í ídnaðarveiði, hini í aðrari veiði sum saltsild, frysting ella ísing.

Vit meta úr hesum, at *í 1966 verða helst um 15 skip í nótaveiði eftir ídnaðarsild* av høgst 20 møguligum.

2. *Útlitið fyri rávørunøgdum.*

Virkisnevndin hevur higartil, áðrenn tann føroyska nótaveiðin byrjaði rættiliga, bygt á íslendskar royndir frá árunum 1963 og 1964. Hetta er til skjals í skjal III.

Eftir hesum fiskaðu íslendsk skip (við landing í íslendskari havn):

Ár	støddarbólkur	veiðitíð	tons uppá skipið í meðal
1963	200—249 BRT	102 dagar	2220
1964	200—249 BRT	105 dagar	2480
—	250—300 BRT	96 dagar	2340

Vit hava mett, við øllum fyrivarni, at hetta kundi svara til eina veiðiorku hjá føroyskum skipum, sum landa í Føroynum, til um

2000 tons uppá skipið í eitt 100 daga skeið.

Eitt annað er, at veiðitiðin hjá føroyingum helst kann metast at vera longri enn hjá íslendingum, men hetta hevur ikki týdning í hesum sambandi, har vit arbeiði við veiði- og móttøkuorku á landi í givnum tíðarskeiðum, so vit halda fram við hesum 100-daga tíðarskeiði.

Í 1965 kom rættilig gongd á føroysku sildaveiðuna við nót, og í skjali I eru upplýsingar um hesa veiði. Eftir hesum fiskaðu 7 skip í meðal um 1500 tons av ídnaðarsild í Føroya-Íslands-leiðini í 120 dagar. Hetta svarar

til bert eini 1200 tons í eitt 100-daga skeið, altso væl minni enn okkara ætlaðu 2000 tons. Til hetta er at siga:

1) Tey 7 skipini hava ikki fullar royndir øll í nótaveiði.
2) Tað tíðarskeiðið, uppgerðin fevnir um (frá 1.6 til 30.9) roynist eisini hjá íslendingum heldur slakari enn tey seinastu undanfarnu 2 árini.
3) Okkara skip hava ikki tann flexibilitet enn, at tey t.d. hava roynt á Hetlandsleiðunum eftir norðurgangandi Norðsjóarsild, ta tíðina Islandssildin gekk óvanliga norðalaga.
4. Tey føroysku nótaskipini mistu nakað av fiskitíð í juni/juli, tí virkini í Føroyum ikki kundu taka undan, og skipini máttu partvís landa í Hirtshals.

3. *Útlitið fyri 1966.*

Sum nevnt í stk. 1 kann miðast móti, at flotin av nótaskipum í 1966 samlikiliga verður á mesta lagi um 20 skip, harav um 15 kunnu vøntast at fara eftir ídnaðarsild. Omanfyri er nevnt okkara met um 2000 tons uppá skipið, men at skipini hjá okkum í 1965 lógu í meðal um 1200 tons í eitt 100-daga skeið.

Framleiðsluorkan í landinum er:

Gøta	50	tons/samdøgur
Drelnes	50	tons/samdøgur
Velbastað	25	tons/samdøgur
1965:	125	tons/samdøgur

og til 1966 økt við:

Fuglafirði	500	tons/samdøgur
1966:	625	tons/samdøgur

Heuda orka er 100 % nýtilig, um landingaruar koma tolulíga regluliga. Koma tær ikki regluliga, men veiðin annars hin sama, krevst at virkini hava eina bóskandi *móttøkuorku* (í køstum ella tangum). Verður hetta ikki, minkar tann *effektiva* orkan á landi. Vit taka her fyrivarni um, at orkan á landi effektivt verður 80 % av teirri installeraðu orkuni á virkjunum.

Við hesum fortreytum kunnu vit seta upp hesa talvu um tað skipatalið, sum virkini kunnu taka undan í 1966 undir ymsum vilkorum:

	Veiðiorka uppá skipið	Framleiðsluorkan í 1966 í Føroyum (100 daga-skeið)	
	100-daga skeið	Installerað orka 62500 tons kann taka undan:	Effektiv orka 50000 tons (80%) kann taka undan:
Veiðiorka sum í 1965	1200 tons	52 skipum	42 skipum
Veiðiorka mett úr íslendskum royndum:	2000 tons	31 skipum	25 skipum

So statt kann føroyska framleiðsluorkan í 1966 ætlandi taka undan eini 25-30 skipum, sjálvt um tey fiska eins effektivt og tey íslendsku skipini hava gjørt.

4. Rásildaprísur og rentabilitetur á sildaverksmiðjum.

Fyri sildaverksmiðjur veldst meira um enn hjá flest øðrum fiskavirkjum, at orkan verður nýtt mest møguligt, tí tey eru í sjálvum sær sera eintáttaði og kunnu ikki skifta til aðrar framleiðslur ella nýta virkið til hjáframleiðslur.

At orkan verður nýtt væl fær soleiðis avgerandi týdning fyri rásildaprísin, sum virkini verða før fyri at geva, og harav aftur fyri fiskivinnuna sum heild.

So statt má fyri føroysku fiskivinnuna vera avgerandi, at fleggingarnar í virkini á landi (samanlagda framleiðsluorkan) samsvarar hampiliga við ta ætlaðu rávørumøgd, hesi virki skulu býta sínámillum.

Í fylgjandi talvu er sett upp, hvat føstu útreiðslurnar muna hjá einum nýggjum virki roknað pr. kg. rásild, tey taka imóti fyri virkir av ymsari stødd og við ymsari orkunýtnytt:

	500 tonsa-virki	250 tonsa-virki	50 tonsa-virki
Flegging, um	5.700.000 kr.	4.200.000 kr.	1.100.000 kr.
+ Fastar útreiðslur, 25%,	1.625.000 kr.	1.050.000 kr.	350.000 kr.
100% orka í 100 dagar	50.000 ts.	25.000 ts.	5.000 ts.
Fastar útreiðslur pr. kg. sild, tá orkan er í 100 dagar			
100 % nýtt:	3,25 oyru	4,2 oyru	7,0 oyru
50 % nýtt:	6,5 oyru	8,4 oyru	14,0 oyru
25 % nýtt:	13,0 oyru	16,8 oyru	28,0 oyru

Siga vil við hesum, at eilt virki nýtir orkuna 50 % (sum sannlíkiligt fyri Fuglafjørð á 1966) verða tær føstu útreiðslurnar um 6,5 oyru pr. kg. sild, men verður orkan í landinum økt so mikið, at (tey stóru) virkini tessvegna bert nýta orkuna t.d. 25 %, tá vaksa tær føstu útreiðslurnar eini 6-8 oyru pr. kg sild bæði hjá einum 500- og einum 250-tonsavirki, og hetta svarar til, hvat rásildaprísurin má minkast við, og hetta munar nógv á so biligan fisk sum sild.

Í hesum hava vit ikki tikið 50 tonsa-virkið uppí, sum hevur nógv hægri kostnaðarlegu, men uppá seg betri likindi at útvega sær ta minni rávørumøgdina, sum krevst.

Fastar útreiðslur eru soleiðis mettar: 9 % renta, 10 % avskriving ella avdrátt, 6 % til umsiting og viðlikahald, tilsamans 25 % av fleggiting.

5. *Niðurløga.*

Í 1966 kunnu í mesta lagi væntast, at 20 skip hava nótaútgerð.

Av hesum kunnu 15 skip ætlast at fara í veiði eftir ídnaðarsild.

Í 1966 vil framleiðsluorkan á landi samsvara við eini 25-30 skip, um meðalveiðan verður sum eftir íslendskum royndum í 1963 og 1964. Henda roknaða meðalveiði liggur væl omanfyri ta veiði, føroysku skipini fingu í 1965.

Tessvegna vil Virkisnevndin tilmæla, at avgerðir um øking av framleiðsluorkuni á landi eiga ikki at verða tiknar, fyrrenn fleiri skip kunnu væntast at fara í hesa veiði.

Vit ætla, at sjálvt um allur føroyski flotin, sum er hóskandi til hesa veiði (50-60 stállínuskip), fer í hesa veiði eftir ídnaðarsild, er bert neyðugt at økja um orkuna á landi við einum 500 tonsum pr. samdøgur. Tað er so stutt sera avmarkað, hvussu nógv einstøk virki kunnu koma í næst komandi árum, tí vit meta, at virkini eiga at hava eina orku uppá í minsta lagi um 250-500 tons pr. samdøgur hvørt.

Tað hevur stóran týdning fyri rásildaprísin, at orkan á landi samsvarar hampiliga við veiðiorkuna hjá skipunum (skipatalinum). Ein ov stór øking av orkuni á landi í úrtið kann trýsta rásildaprísin so mikið, at henda veiði fær ikki tann týdning fyri fiskivinnuna, sum menn høvdu væntað.

Vit leggja dent á, at fleiri skip enn tey nevndu 15-20 skipini fara neyvan at taka avgerð um at fáa sær nótaútgerð fyrrenn summarið 1966 er liðið. Verður hetta skipatalið tá so stórt, at framleiðsluorkan má økjast, kann tíðin gerast ov stutt til at greiða bæði finansiering og bygging til 1967. So stutt kann tað fáa týdning, um myndugleikarnir í góðari tíð gera fyrireikingar til at útvega finansieringsmøguleikar til øking av framleiðsluorkuni.

Meira alment vil Virkisnevndin halda, at landsstýrið og løgting áttu

at skapa støði undir eini fastari láni- ella veðhaldsskipan fyri storri idnaðarvirki, so at umsóknir eftir einari øllíkari føroyskari finansieringsskipan kundu fingið eina meiri greinliga viðgerð enn tað higartil hevur verið gjørligt.

Við hávirðing
n. v.
Hans Hansen (sign.)
skr.

skjøl

Undirskjal 1.

Føroysk nótaskip 1965 og veiði teirra av idnaðarsild til 1. 10. 1965.

Veiði 1965 pr. 30.9.1965 í

	Norðsjónum (mat/idnað)	Føroyaleið (frá 1.6.1965) (idnað)
1. Klettur		
2. Saturn	400 ts.	1300 ts.
3. Ingrid Pau	300 ts.	1000 ts.
4. Sildrekin		
5. Beinir	900 ts.	1450 ts.
6. Boðanes	500 ts.	2500 ts.
7. Brestir	600 ts.	1200 ts.
8. Grímur Kamban		1600 ts.
9. Kallsevni	650 ts.	1300 ts.
10. Ásur		
11. Kappin		
12. Ísborg		200 ts.
tilsamans:	3350 ts.	10550 ts.
uppá skipið:		1500 ts. uppá 120 dagar.

Ætlanir hjá reiðarlum um at fáa sær nótaútgerð ella ikki.

	Positivur møguleiki	kanska	onga ætlan	nei
Jógvan Norði				×
Columbus				×
Hans O. Højgaard				×
Vesturhavið Blíða				×
Havaldan				×
Óknin				×
Anna T.				×
Guðmundur			×	
Nim			×	
Þorkeningur		×		
Þorkerisnes		×		
Magnus á Gørðunum			×	
Petur á Gørðunum			×	
Jógvan á Gørðunum			×	
Venus		×		
Dagstjørnan				×
Jógvan S.				×
Pison				×
Kvikk				×
Sundabúgvin		×		
Nónhamar		×		
Ranafossur		×		
Gullfinnur		×		
Leikur		×		
Gamli Andrass				×
Strandingur			×	
Reynsatindur		×		
Óla Horn			×	
Tumunas við Kráir			×	
Vesturvón			×	
Eirikur Jallur		×		
Havsøki				×
Normagestur		×		
Hoyvíkingur			×	
Akraborg			×	
Jákup B.			×	
Klakkur			×	
Skúgvur	×			
Finnur Fríði	×			
Havørnin	×			
Tungufossur	×			
Varðberg	×			

Stella Karina	×			
Stella Maria	×			
Stella Kristina	×			
Norðingur			×	
Bakur			×	
Nólsoyar Páll		×		
Tilsamans 48 bátar	8	12	15	13

Undirskjal 3.

Íslendska summarsildaveiðan á Norður- og Austurlandi 1963 og 1964.

				Veiðinøgd			
1964 skipastødd	skipatal	Brt. meðal	meðal *fiskitíð* dagar	salt/fryst tunnur	mjøl mál	tons tils.	tons uppá skipið
undir 150 BRT	145	89	92	248.866	775.953	129.643	890
150 — 199 —	45	175	101	172.542	581.971	96.108	2.140
200 — 249 —	31	230	105	112.987	512.211	81.497	2.480
250 — 300 —	8	266	96	11.026	108.308	18.725	2.340
300 — —	1	300	118	4.024	25.758	3.879	3.880
Tilsamans 1964	233	147	96	579.145	2031.201	332.852	1.429
1963							
undir 150 BRT	174	81	81	127.600	713.300	138.720	800
150 — 199 —	34	171	94	131.900	296.800	53.190	1.570
200 — 249 —	18	232	102	99.900	222.200	39.990	2.223
Tilsamans 1963	226	109	87	659.100	1232.300	231.900	1.050

Skjal 11

VIRKISNEVNDIN

Nevndin til kannan av øktum virkismøguleikum
Det færøske egnsudviklingsudvalg

Tórshavn, 13. apríl 1966. Tlf. 2791.

Figgjarnevnd Føroya Løgtings,
Tórshavn.

Viðv. P/f Clupea-málinum.

Ávísandi samrøðu við formannin í figgjarnevndini skal hervið verða sagt frá, at arbeiðsnevnd virkisnevndarinnar hevur gjøgnumgingið og av nýggjum umhugsað tað skrív, ið varð latið úr houdum í málinum viðv. P/f Clupea, Klaksvík.

Nevndin er samd um, at fyritreytirnar fyri miðurløgum í nevnda skrivi ikki eru broytlar, og má nevndin sostatt standa við ta støðu, ið tá varð tikin, t.e. at tað í løtuni ikki eru møguleikar fyri at mæla til, at nýggj sildaverksmiðja verður sett á stovn.

Í sama sambandi loyvir nevndin sær at vísa á, at lánumsóknir um lán til føroysk virki eftir lógini um «egusudvikling» skulu viðgerast av virkisnevndini og fáa tilmæli hennara.

Nevndin er av teirri áskoðan, at tað er at nerva møguleikarnar fyri sakligari viðgerð og tilmæli, um umsóknir um lán eftir øðrum almennum lánskipanum sum t.d. við løgtingsábyrgd ikki fylgja sonnu treytum.

Undir viðgerðini av lánumsóknini til virki í Fuglafirði hevur nevndin so sakliga sum yvirhøvur gjørligt gjørt metingar um, hvørja rávørumøgd hetta virki fór at fáa, og hevur úttfrá hesum givið viðmæli um lán, sum er játtað úr statskassanum. Verður nú lán játtað til annað virki av sama slag, áðrenn virki í Fuglafirði nærkast ímóti at koyra við fullum kapaciteti, og harvið fær møguleikar fyri rentabiliteti, er tað greitt, at fyritreytirnar fyri tilsøgn um lán ikki eru til stoðar.

Tað er sjálvandi óvist, um hetta kann fáa fylgjur fyri ta givnu tilsøgnina, men er helst ikki óhugsandi.

Ein má tó ivaleyst rokna við, at slík framferð fer at gera tað trekari, at fáa lánumsóknir um lán eftir lógini um «egnsudvikling» igjøgnum,

um tann stovnurin ikki kann láta á givnar upplýsingar, og kann vænta at fyritreytirnar fyri lángeving kunnu verða broyttar á slíkan hátt sum frammanfyri umtalað.

Við hávirðing
VIRKISNEVNDIN

Leivur Gregersen (sign.)
fm.

FØROYA LANDSSTÝRI

Skjal III
F.L.j.nr. 1218-2-1.

Tórshavn, 7. mars 1966.

Í sambandi við skriv hiðani dagfest 25. november 1965 í málinum nr. 6/1965: Veðhald av láni til p/f Clupea, Klakksvík verður við hesum sagt frá, at landsstýrið frá I/S Havsbrún, Fuglafjørð hevur fingið soljóðandi skriv dagfest 25. f.m.:

«Á fundi í Havsbrún fann 23. februar varð samtykt at senda soljóðandi brev til Føroya landsstýri:

«Fyri einum 3 árum síðani fór Føroya landsstýri undir at gera ætlanir fyri at leggja støði undir eina sildaverksmiðju í Fuglafirði.

Tá Føroya landsstýri var liðugt við hesar kanningar, og fullfíggjaðar planir vórðu gjørdar, kallaði landsstýrið saman til fundar og heitti á fólk og felløg í faudinum um at setta pening í hesa fyritøku.

Landið gekk á odda og setti kr. 100.000,00 í partapeningi, Fuglafjarðar kommuna, felog í Fuglafirði og fuglfirðingar tóku undir, síðani kom Grønlandsfelagið og Føroya fiskimannafelag til, og teknað var tá um kr. 500.000,00 í partapeningi.

Í samráð við Føroya landsstýri og Virkisnevndina varð sokt um lán ella ábyrgd fyri láni frá Egnsudviklingsfonden.

Ábyrgd fyri lánið varð játtað til eina sildaverksmiðju, sum kundi viðgera eini 150 tons av sild um sumdøgrið, tó freytað av, at partapeningurin varð hækkaður til kr. 800.000,00.

P/f Havsild helt ongar møguleikar verða fyri at fáa hendu pening til vega so skjótt, at virkið kundi koma í gongd í 1966.

Samráðst varð so við felagið Dagsbrún um samgongu millum I/S Havsbrún við innskotspeningi 1,5 mill. kr., og sokt varð av nýggjum um financiering til eina størri verksmiðju. Ábyrgd varð givin frá statinum til eitt lán stóet 5.130.000 kr.

Farið varð undir at søkja lán av hesi stødd í føroyskum og danskum

peningastovnum. Eisini varð søkt um lán úr Bretlandi, men alt uttan úrslit.

Síðani varð aftur søkt til danska statin um kontant lán, og at enda varð hetta játtað til útgjaldingar, tá sildaverksmiðjan stóð liðug í Fuglafirði.

Eftir var nú at søkja um byggilán. Teir báðir faroysku bankarnir søgdu seg vilja geva byggilán móti løgtingsábyrgd, og treytað av, at staturin lat forskotslán.

Søkt varð til Føroya landsstýri um løgtingsábyrgd fyri byggiláni. Ongin heimild var til tess, og biðið varð tí um, at landsstýrið legði spurningin fyri fíggjarnevndina fyri at útvega sær heimild, men landsstýrið helt seg vegna fylgjurnar ikki kunna ganga umsóknini á møti.

Byggilán er síðani útvegað við forskotsláni frá statinum móti bankaábyrgd, og henda bankaábyrgd er givin móti privatari kautión.

Hetta mál, sum er tilrættalagt av Føroya landsstýri, og sum Føroya landsstýri hevur mælt stovnum, virkjum og fólki til at taka undir við, er soleiðis við at koma á mál, uttan at landið á nakran hátt veðheldur fyri teimum lánum, ið neyðug eru fyri at fáa virkið á stovn.

Orsøkin til, at so væl varð tikið undir við sildaverksmiðjuni, ið nú er við at verða bygd í Fuglafirði, er, at hon var væl løgd til rættis av Føroya landsstýri og Virkisnevndini, og at tað, ið gjørt er, kundi verða til gagn fyri landið, fyri teir, ið komandi summar fara at veiða sild til smeltingar, og harumframt at sildaverksmiðjan kundi geva eina rímiliga inntøku til teir, ið hava sett pening í virkið.

Tann umlegging frá saltfiskaveiðu til sildaveiðu, kom ikki at verða so stór, sum vit høvdu roknað við, av tí at tað í 1966 bert verða 16 skip, sum koma at veiða sild við kraftblokki, ikki meira enn 5 fleiri enn í 1965. Av hesum 16 skipunum má roknast við, at cirka 3 fara at veiða sild til saltingar. Nøkur av skipunum eru knýtt til verandi sildaverksmiðjur, soleiðis at vit neyvan kunnu rokna við at fáa meira enn 50% av tí sild, ið veidd verður við kraftblokki til smeltingar. Roknast kann við umleið 18.000 tonsum, og hetta er ikki meira, enn sildaverksmiðjan kann smelta í einar 30 dugar.

Um Føroya løgting nú tekur ábyrgd av láni til eina nýggja verksmiðju, áðrenn tað hevur vist seg, at vit fáa nóg nógva sild til ta verksmiðju okkara, sum skal í gongd í summar, so er grundarlagið og forútsetningarnir fyri sildaverksmiðjuni í Fuglafirði so nógv broyttir, at vit neyvan høvdu verið farnir undir hetta virkið, og tann vælvild, ið sýnd er fólagnum frá Føroya landsstýri, Virkisnevnd og Egnsudviklingsfonden, hevði ongin kunna roknað við, um tað tá var greitt, at eitt annað virki skuldi

setast á slovn, áðrenn tað hevði vist seg, at honda verksmiðja kundi fáa nóg mikið av sild til at hera seg.

Vit fóru undir sildaverksmiðjuna í Fuglafirði í álíti til, at grundarlagið fyri verksmiðjuni varð gjølla kannað av landsins kønu mannum. Vit ivast ikki í, at vit skulu fáa sildaverksmiðjuna í Fuglafirði at ganga, um ikki Føroya løgting ímóti øllum forútsetningum gevur løgtingsábyrgd fyri aðrar verksmiðjur, áðrenn nóg mikið av sild er til at føða tær verksmiðjur, sum verða í gongd í summar.

Um Føroya løgting tekur eitt líkt stig móti ráðum frá Virkisnevnd, so eru forútsetningarnir so nógv broytlir, at vit neyvan høvdu farið undir hetta virkið og at tán neyvan vildi verið givið felagnum.

Biðið verður um, at hetta bræv verður lagt fyri fíggjarnevnd Føroya løgtings.

Tá Virkisnevndin hevur givið sítt ummæli til ta umsókn, ið liggur frammi, er helst ikki neyðugt, at vit siga okkara hugsan um úrslitið av, at tvær nýggjar verksmiðjur koma, áðrenn sildaflotin er vorðin nóg stórur til at útvega rácvni til tær, sum verða í gongd í summar.

Nevndin í Havsbrún vildi fegin komið á fund við fíggjarnevnd Føroya løgtings, áðrenn avgerð verður tikin um ábyrgd fyri aðrari sildaverksmiðju.»

Karsten Hoydal
landsstýrismaður

/ *J. Djurhuus.*

Fíggjarnevnd Føroya Løgtings,her.

Sildaverksmiðjan
pf. Clupea, Klaksvík.

Skjal IV

p.t. Tórshavn, 22/3 1966.

Til Løgtingsins fíggjarnevnd, Tórshavn. —

Viðv. løgtingsmáli nr. 6/1965: Veðhald fyri láni til sildaverksmiðjuna pf. Clupea, Klaksvík.

Síðan hetta mál varð lagt fram á ting, og beint í fíggjarnevndina, hava ymiskar samráðingar farið fram, sum hava viðført nakrar broytingar í málinum.

Fyri tað fyrsta hevur Klaksvíkar kommuna vantykt, at hon sjálv, og ikki Clupea, søkir tingið um landskassaveðhald fyri láninum, og um vanligan studning til gerð av atløgubryggju í sambandi við sildafláðnaðarvirkið. Kommunan hevur tí lagt tað málið fram á ting sum eitt sjálvstøðugt tingmál.

Harnæst er at siga, at endaligar tingingar eru farnar fram viðvíkjandi keypi av maskinum, tangum og øðrum til virkið. Pf. Clupea hevur gjørt av at taka við einum tilboði frá A/S ATLAS STORD frá 4/3 1966, sum er ljálagt skrivi í ljósprenti.

Samlaða tilboðið er ab fabrik	2.637.100,–
Harumfram kemur:	
Farmagjald til Føroya og losning	120.000,–
Bygningur sambært hjálagdu teknningum og kostnaðarætlan	700.000,–
Fiskipaunur við tilhoyri	280.000,–
Uppsetan av maskinum, ketli og øðrum	120.000,–
El-inntleggingar, ároknað armatur og kaðal	100.000,
1 stk. 1500 m³ sildaoljutangi og 1 stk. 600 m³ sildaoljutangi, compl. við ventilum, pumpum og hitaleiðslum	350.000,
Innflutningsgjøld	150.000,–
Projektering og eftirlit av arbeiðinum	120.000,–
Rentutap í byggitíðini 9% av 3.500.000,–	315.000,–
Ymist at standa ímóti við 2% av 5.000.000	100.000,–
	4.992.100,–

Soleiðis sum sæst á 1. síðu í tilboðnum er eitt stórur partur av virkinum, harundir lossiamboð, pumpur, føðiapparat, inndampingsanlegg, centrifugur, myllur o.a. roknað til eina framleiðslu uppá 500 tons í 24 tímar. Tað sum trestar til at koma uppá hesa framleiðslu er eitt eins ketil og ein linia uppá 250 tons. Og kostnaðurin av tí verður umleið kr. 750.000,– (Tann nýggja liniu er innpunkterað á hjálagdu teknning). Av reynd er eitt vieki av hesari konstruktión tryggari í gongd og eru teir mistu arbeiðsdagar á árinum færri.

Viðmerkjast skal, at A/S Danske Shell hevur átikið sær at byggja og financiera omaufyri nevndu sildaoljutangar, sum kosta tilsamans kr. 350.000,– , móti at teir fáa landskassaveðhald fyri hetta. Pf. Clupea skal gjalda teimum peningin aftur við rentu 9 % p.a., í 10 ár (20 hálvársgjøld).

A/S Atlas Stord hevur bjóðað sær at gera takkonstruktión og klæðning til byggingarnar og sildapaunin, tilsamans kr. 390.000,– , móti at teir fáa landskassaveðhald fyri henda pening. Pf. Clupea skal gjalda teimum henda pening aftur við rentu 9% p.a. yvir 5 ár (10 hálvársgjøld).

Tað er ynskiligt, at landskassaveðhaldið verður orðað soleiðis, at Pf. Clupea kann transportera ávikavist kr. 350.000,– og kr. 390.000,– av veðhaldinum til A/S Atlas Stord og A/S Danske Shell.

Brennioljulaangar til verksmiðjuna verða sellir upp á havnaøkinum, 1500 m³ til Fuel oil og 600 m³ til Diesel oil. Hesar tangar, uppsetingina av teinum, girðing utlanum teir og annan kostnað álekur A/S Danske Shell sær sambæt treytum og sáttmála, sum vantigt er í sløkum formum.

Í upprunaliga uppskotinum er hægsta markið fyri landskassavøðhaldið sett til 90% av kr. 5.200.000,—. Sum sæst av tølunum frammanfyri verður hægsta markið 90% av kr. 4.992.100,—.

Pf. Clupea hevur nú samtykt at hækka partapeningin frá kr. 700.000, til kr. 1.000.000,—.

Sildaidnaðarvirkið Pf. Clupea
E. Laksafoss (sign.)

P/f Suðuroyar Fiskiidnaður
Tlf. 1360 — Posthox 232
Tórshavn

Skjal V.

Tórshavn, hin 20. april 1966.

Føroya løgting, her.

Undirritaða p/f Suðuroyar Fiskiidnaður, Tvøroyri, loyvir sær hervið at venda sær til háttvirda løgting um at fáa peningahjálp til at víðka um verandi sildaverksmiðju á Drelnesi við ca. 250 tons av sild til hræðinvøru um samdøgrið, soleiðis at verksmiðjan verður før fyri at bræða ca. 360 tons av sild um samdøgrið.

Tað hevur í vetur vist seg, at nógv sild stendur hesa tíðina á Suðuroyar- og Sandoyarbankanum og hevði tí ein størri verksmiðja í Suðuroynni givið nógv arbeiði og ligið vel fyri.

Upplýsast kann, at partaeigararnir í P/f Suðuroyar Fiskiidnaður eiga 6 kraftblokkaskip, sum ein kann rokna við fara at landa har.

Hjálagt er roknskapur og figgjarstøðan pr. 1/1-1966 fyri p/f Suðuroyar Fiskiidnaður.

Felagið hevur tikið ímóti sild síðani august mánaða 1965.

Eisini viðleggja vit ellað rakstrarroknskap og byggiroknskap.

Vísandi til byggiroknskapið søkja vit um veðhald fyri kr. 3.385.000,00.

2. viðgerð 11. mai 1966.

Broytingaruppskot I frá minnilutanum (P. M. Dam, Haldor Hansen og A. Djurhuus) var sett undir atkvøðu við navnakall:

Ja atkvøddu: J. Lindenskov, J. H. Dambjørg, Gunnar Paulsen,

Tr. Samuelsen, Leon Joensen, Johan Simonsen, Haldor Hansen og Samuel Petersen.

Atkvøddu ikki: K. Wang, P. Petersen, Petur Christiansen, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, Johan Poulsen, H. Iversen, V. Nielsen, Fr. Hansen, Kj. Mohr, E. Paturssen, J. J. Ellingsgaard, S. Joensen og H. v. Høgadalsá.

Burturstaddur: J. Fr. Øregaard.

Uppskotið fall 14-0.

Broytingaruppskot frá Minnilutanum (S. Petersen) 14-0.
Lógaruppskotið í framløguskrivinum fall 13—0.
Lógaruppskot II frá minnilutanum (P. M. Dam, Haldor Hansen og A. Djurhuus) fall 4-0.

---

7. Veðhald av láni til p/f. Kambur

Ár 1965, 30. august legði Løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg um veðhald av láni til p/f Kamb í Porkeri.

§ 1.

Landsstýrinum er heimill landskassans vegna at ganga í veð fyri láni uppí kr. 75.000, til p/f Kamb í Porkeri.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

til
lagtingslov om garanti for lån til p/f Kambur, Porkeri.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån op til kr. 75.000, til p/f Kambur, Porkeri.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

P/f Kambur í Porkeri sigur í umsókn sini frá 31. juli 1965, at m/s PORKENINGUR hevur verið fyri stórum óhappum síðani teir fingu skipið í 1961, sum hava havt stórar peningaligar útreiðslur við sær og eisini tíðarliss.

Fyrsta stóra óhappið var, at skipið søkk við bryggju í Vági. Tryggingin bar útreiðslurnar tá, men óvist er, hvat skaða tað kundi hava í aðrar mátar sum uppá motorin.

Annað óhappið var í 1963, tá krumtappturin brotnaði í havnini í Esbjerg. Hetta óhappið kostaði felagnum kr. 50.000,— í peningi og haraftrat ein sallfiskatúr.

Miðskeiðis í juli, táið PORKENINGUR var einar 400 fjórðingar úr Mikinesi á veg til Grønlands, brotnaði krumtapsaksulin og skipið mátti sleipast á Havnina til umvælingar.

Felagið hevur higartil rindað fallin gjøld sum rentur og avdrátt og er bert í eftirstøðu av kurstapslánum pr. 11/6-1965 og hýrur eru allar goldnar, men pening til motorumvælingina hevur felagið ikki.

Skipið stóð fyri 4. árs klassa 1. juli í ár, men høvdu fingið skotið hann út til januar 1966, mennúverður skipið klassað saman við umvælingini.

Felagið søkir so statt um veðhald av láni uppi kr. 75.000,— at afturrinda í 5 ár.

Á fundi 9. í hesum samtykti landsstýrið at leggja fram uppskot á ting og figgjarnevnd so skjótt fingið var viðtøkuført aftur.

So statt loyvir landsstýrið sær at leggja uppskot inn á ting við tilmæli.

1. viðgerð 31. august og sama dag legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Figgjarnevndin hevur havt fund um málið. Stjórin fyri felagið, Esnar Olsen, var á fundi. Undir viðgerðini kom fram, at tær í uppskotinum nevndu kr. 75.000,00 møguliga ikki koma at røkka.

Nevndin mælir einmælt til at samtykkja landsstýrisins uppskot við ti broyting, at í staðin fyri kr. 75.000,— verða settar kr. 85.000,—.

Av ti at henda heimild er ein hámarksheimild, tekur landsstýrið støðu til ta endaliga veðhaldi.

Broytingaruppskoti
(frá allari nevndini)

ad § 1. Á landsstýrisins uppskoti	ad § 1.
Ístaðin fyri «kr. 75.000,—» verður sett «kr. 85.000,—».	I stedet for «kr. 75.000,—» indsættes «kr. 85.000,—».

2. og 3. viðgerð 1. september 1965.

Uppskotið frá landsstýrinum við broyting frá nevndini samtykt við 29 atkvøðum.

---

8. Kunngerð av 2 ríkislógum

Ár 1965, 31. august legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Lóg nr. 150 av 21. apríl 1965 om ændringer í Lov om «Ungdommens uddannelsesfond's forvaltning og virksomhed».

Við hesi lóg verður § 4 a, stk. 1, í lógini um «Ungdommens uddannelsesfond», soleiðis sum henda var kunngjørd 23. juli 1961, broytt soleiðis, at kenslumálaráðharrin ella «Dansk studiefond» hansara vegna fyri statskassan kann geva studerandi tilsøgn um garanti fyri studiulán, sum tey taka í banka og sparikassa.

Í § 4 a, stk. 3, eru so gjøllari reglur givnar um hesa statskassaábyrgd, sum ikki má vera fyri meira enn kr. 1.500,— árliga.

Landsstýrið mælir til, at løgtingið samtykkir, at lógin verður kunngjørd.

Lógarnevndin hevur havt málið til viðgerðar og mælir til fylgjandi

Løgtingssamtykt.

Løgtingið samtykkir 6, at lóg nr. 150 frá 21. apríl 1965 verður kunngjørd at galda í Føroyum.

Lóg nr. 210 frá 7. juni 1958 om Eksaminer for Skibsmaskinmestre m.m.

Við hesi lóg eru krøvini til maskinistprógv, maskinmeistaraprógv og tað sum kallast «udvidet» maskinmeistaraprógv fastløgd og reglur givnar fyri prógvskipanina. Harnæst eru reglur givnar um góðkenning av skúlum og skúlaráð.

Landsstýrið vil virka fyri, at tað til øll prógvini verður lært føroyskt og at prógvtøka fer fram í føroyskum.

Landsstýrið mælir til, at lógin verður kunngjørd.

Lógarnevndin hevur havt málið til viðgerðar og mælir til fylgjandi

Løgtingssamtykt

Løgtingið samtykkir í, at «lov om Eksaminer for Skibsmaskinmestre m.m.» nr. 210 frá 7. juni 1958 verður kunngjørd at galda í Føroyum.

2. viðgerð 1. september 1965.

Uppskotini frá nevndini samtykt 27—0.

9. Lívstryggingarvirki

Ár 1966, 25. januar legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t
til

løgtingslóg um lívstryggingarvirki.	lagtingslov om livsforsikringsvirksomhed.
KAPITUL I.	KAPITEL I.
Almennar ásetingar.	Almindelige bestemmelser.
§ 1.	§ 1.
1. stk. Føroyskur lívstryggingarstovnur verður settur við einkarrætti at reka lívstryggingarvirki í Føroyum. Lívstryggingarstovnurin er ætlaður persónum, sum hava danskan heimarætt ella búsitandi í kongaríkinum Danmark, eisini persónum búsitandi í útlandinum, men hava annað tilknýti til kongaríkið. Stovnsins navn er «Føroya Lívstrygging.»	Stk. 1. Der oprettes en færøsk livsforsikringsanstalt med eneret til at drive livsforsikringsvirksomhed på Færøerne. Anstalten er bestemt for personer, der har dansk indfødsret eller er bosat i kongeriget Danmark, endvidere for personer, bosat i udlandet, men med tilknytning i øvrigt til kongeriget. Anstaltens navn er «Føroya Livstrygging».
2. stk. Umboð her fyri felóg, sum higartil hava rekt lívstryggingarvirki í Føroyum halda tær tryggingar, tey høvdu pr. , hóast hetta virkið kemur undir lívstryggingarstovnsins einarætt, men mugu ikki eftir henda dag nýtekna ella lækka lívstryggingarnar.	Stk. 2. Herværende agenturer for selskaber, der hidtil har drevet livsforsikringsvirksomhed på Færøerne, bevarer deres livsforsikringspartefølje pr. , uanset denne virksomhed falder ind under livsforsikringsanstaltens eneret, men må efter denne dato ikke nytegne, herunder forhøje disse livsforsikringer.
§ 2.	§ 2.
1. stk. Lívstryggingin rekur virki sitt við landskassaveðhaldi.	Stk. 1. Livsforsikringsanstalten udøver sin virksomhed under landskassens garanti.
2. stk. Stovnurin hevur formúgn sína fyri seg sjálvan. Hon má ikki blandast við landskassans.	Stk. 2. Anstalten har sin egen formue, der ikke må sammen-

3. stk. Stovnurin rindar sjálvur rakstrarútreiðslur sínar.

§ 3.

1. stk. Hjá lívstryggingarstovninum kann verða tryggjað øll sløg av lívstryggingum, eisini eftirsetu-renta, lívrenta, eftirlønar- (avlamis) trygging.

2. stk. Lívstryggingarstovnurin má ikki taka við endurtryggingum.

§ 4.

1. stk. Lívstryggingarstovnsins virki stjórnast av stýrinum fyri Tryggingarsambandinum Føroyar. Stjóri tryggingarsambandsins hevur sum forretningsførari dagligu leiðslunna av lívstryggingarstovninum.

2. stk. Hitt almenna tilsýnið við stovninum liggur hjá tveimum persónum, valdum atvikavist av løgtingi og landsstýri. Útreiðslurnar av tilsýninum verða goldnar av stovninum.

§ 5.

Stýrisins avgerðir um íseting av lívstryggingarstovnsins midlum at tryggja tryggingargrunninum skulu leggjast fyri landsstýrið til góðkenningar, uttan so at midlarnir verða nýttir til lánveiting móti pant í lívstryggingarstovnsins egnu tryggingarskjølum innanfyri afturkeypsvirðið.

§ 6.

1. stk. Við tekning av tryggingum, har lívstryggingarstovnurin er interesseraður í, at tann tryggjaði livur so longi sum møguligt,

blandes med landskassens.

Stk. 3. Anstaltens driftsudgifter afholdes af den selv.

§ 3.

Stk. 1. I livsforsikringsanstalten kan tegnes alle arter af livsforsikringer, herunder overlevelsesrenter, livrenter og pensions- (invaliditets) forsikringer.

Stk. 2. Livsforsikringsanstalten må ikke overtage genforsikringer.

§ 4.

Stk. 1. Livsforsikringsanstaltens virksomhed ledes af bestyrelsen for Tryggingarsambandið Føroyar. Direktøren for Tryggingarsambandið Føroyar har den daglige ledelse af livsforsikringsanstalten som dennes forretningsfører.

Stk. 2. Det offentlige tilsyn med anstalten føres af to henholdsvis af lagtinget og landsstyrets udpegede personer. Udgifterne ved tilsynet afholdes af anstalten.

§ 5.

Bestyrelsens beslutninger om anbringelse af livsforsikringsanstalten midler til dækning af forsikringsfonden skal indstilles til landsstyrets godkendelse, medmindre midlerne anvendes til ydelse af lån mod pant i livsforsikringsanstaltens egne policer indenfor tilbagekøbsværdien.

§ 6.

Stk. 1. Ved tegning af forsikringer, hvor det er i livsforsikringsanstaltens interesse, at den forsikrede lever så længe som

krevjast so fullfíggjaðar upplýsingar um heilsu- og onnur viðurskiftir, sum eftir stýrisins metan eru neyðugir. Tílíkir upplýsingar verða givnir av læknu í heilsuváttan á eyðublað frá livstryggingarstovninum.

2. stk. Tó kann stýrið við landsstýrisins samtykki avgera, at tryggingar av nærri greindum slagi og innanfyri nærri ásettar peningahæddir kunnu verða teknaðar uttan læknaváttan, men móti persónligari heilsuváttan.

§ 7.

Stýrið ásetur við landsstýrisins góðkenning tær gjøllari reglur um, hvussu stóra peningahædd lívstryggingarstovnurin kann hafda á egnum vágleika fyri sama persóns lív. Endurtryggingin skal altíð verða skipað soleiðis, at tað til tess svarandi tiltakstryggingargjald verður goymt hjá lívstryggingarstovninum.

§ 8.

Kemur ring umfarssjúka ella verða vil fyri óvardum hendingum, ið bera við sær ótta fyri, at gjaldfesti fyri einum tryggingarslag ella tryggingarbólki verður at bera stovninum tap við sær, kann stýrið við landsstýrisins samtykki krevja eykatryggingargjald fyri tryggingar, ið verða teknaðar undir tílíkum tíðum. Varir hetta longur enn tvey ár, kann ikki verða hildið fram við krevjing av eykatryggingargjaldi uttan serliga lógarheimild.

muligt fordres så udførlige oplysninger om helbredelsestilstand og øvrige forhold, som efter bestyrelsens skøn må anses fornødent. Sådanne oplysninger gives i en helbredsattest, udstedt af en læge på livsforsikringsanstaltens blanketter.

Stk. 2. Dog kan bestyrelsen med landsstyrets samtykke bestemme, at forsikringer af nærmere angivne forsikringsarter og indenfor nærmere fastsatte beløb kan tegnes uden lægeundersøgelse mod afgivelse af personlig helbredserklæring.

§ 7.

De nærmere regler for, hvor store beløb på samme persons liv livsforsikringsanstalten kan holde for egen risiko, fastsættes af bestyrelsen med landsstyrets godkendelse. Genforsikringen skal ordnes således, at den dertil svarende præmiereserve deponeres i livsforsikringsanstalten.

§ 8.

Skulle der indtræde en større epidemi eller andre uforudsete begivenheder, som lader befrygte, at tarifen for en forsikringsart eller forsikringsgruppe vil bringe livsforsikringsanstalten tab, kan bestyrelsen med landsstyrets samtykke forlange en tillægspræmie for forsikringer, der tegnes i en sådan periode. Strækker denne sig ud over 2 år, kan opkrævning af tillægspræmie dog ikke fortsætte uden særlig lovhjemmel.

§ 9.

1. stk. Fyri at gera tørvandi tryggitekniskar útrokningar og kunningar verður ein aktuarur at hava tilknýti til stovnin. Sum tílíkur kann bert verða tikin persónur, sum við tryggivísindi ella við matematiskum lærdómi og praktiskum arbeiði í livstryggingarvirki er búgvin til tess. Aktuarin verður settur og loystur úr starvinum av stýrinum við góðkenning av tilsýninum.

2. stk. Aktuarin hevur ábyrgdina fyri, at stovnurin heldur útrokningargrundarlag sítt, undir hesum reglurnar fyri afturkeypi av tryggingum og fyri láni móti pant í stovnsins egnu tryggingum, og hann hevur rætt av stovninum at krevja sær til handa allar upplýsingar, ið tørva fyri at taka við hesari ábyrgd. Tað liggur á aktuarinum uttan at dvølja á at siga tilsýninum frá hvørjum broti av felagsins útrokningargrundarlag.

§ 9.

Stk. 1. Til udførelse af de nødvendige forsikringstekniske beregninger og undersøgelser skal der ved anstalten være tilknyttet en aktuar. Som sådan kan kun antages en person, som gennem en forsikringsvidenskabelig eller matematisk uddannelse suppleret med praktisk erfaring i livsforsikringsvirksomhed er kvalificeret hertil. Aktuaren ansættes og afskediges af bestyrelsen med tilsynets godkendelse.

Stk. 2. Aktuaren har ansvaret for, at anstalten overholder sit beregningsgrundlag, herunder reglerne for tilbagekøb af forsikringer og for lån mod pant i anstaltens egne forsikringer, og han har ret til af anstalten at forlange alle oplysninger, som er nødvendige for overtagelsen af dette ansvar. Det påhviler aktuaren uopholdelig at gøre indberetning til tilsynet om enhver overtrædelse af selskabets beregningsgrundlag.

§ 10.

Lívstryggingarstovnsins starvsfólk og umboðsfólk hava tøgnskyldu viðvikjandi øllum tí, sum tey í virki sínum hjá livstryggingarstovninum fáa at vita um viðurskiftini hjá teimum tryggjaðu og teimum sum søkja at verða tryggjað.

§ 10.

Der påhviler livsforsikringsanstaltens personale og agentur tavshedspligt med hensyn til de forsikredes og de forsikringssøgendes forhold, som de i deres virksomhed for livsforsikringsanstalten får kendskab til.

KAPITUL II.
Framløga av roknskapi.

KAPITEL II.
Regnskabsaflæggelse.

§ 11.

1. stk. Á hvørjum ári ger stýrið roknskapin almannakunnugan. Roknskapurin skal hava rakstr-

§ 11.

Stk. 1. Bestyrelsen offentliggør hvert år regnskabet, som skal indeholde et driftsregnskab og en

arrokuskap og statusuppgerð eins og frágreiðing um lívstryggingarstovnsins virki og lívussu ognirnar eru settar í farna álmanakkaári.

2. stk. Rokuskapurin verður granskaður av tveimum grannskoðarum, sum landsstýrið velur. Grannskoðararnir skulu har afturat ansa eftir, at allar ognir stovnsins eru til samsvarandi teirri fyriskipan, sum landsstýrið hevur gjørt.

§ 12.

1. stk. Við uppgerðini av ársroknskapinum verður bókað: Tær obligatiónir, ið eru gjørdar ella garanteraðar av almennum mynd ugleika, tær ið eru gjørdar av kreditfeløgum ella hypotekfeløgum ella av øðrum góðkendum fleggingarstovnum, eins og tey virðisbrøv, ið eftir slagi sínum og tryggleika kunnu bólkast við nevndu obligatiónir. Henda bóking verður gjørd eftir hesum reglum: Um sett er afturgjaldingartíð, verður prísurin hægst settur javnt við virðið, ið ognað er til, kortini ikki hægri enn kursurin fyri úrtøku og heldur ikki omanfyri sølukursin á keypsdegnum. Er ikki sett nøkur afturgjaldingartíð, verða obligatiónirnar og virðisbrøvini bókað í mesta lagi til miðalskurðin av tí keypskursi, ið seinast er ritaður undan roknskaparsins árslok og av kursinum í tilsvarandi døgum á seinast undanfarnu inntil 9 árum, sum pappírini hava verið stovnsins ogn, men kortini ikki omanfyri pari. Virðispappírini sum verða givin undir sonnu deild, sonnu seriu og sama rentu-

statusopgørelse, samt beretning om livsforsikringsanstaltens virksomhed og midlernes anbringelse i det forløbne kalenderår.

Stk. 2. Regnskabet revideres af to af landsstyret udnævnte revisorer, der tillige kontrollerer tilstedeværelsen af anstaltens samlede formuebeholdning, alt i overensstemmelse med en af landsstyret udstedt instruks.

§ 12.

Stk. 1. Ved opgørelse af årsregnskabet opføres obligationer, som er udstedt eller garanteret af offentlige myndigheder samt obligationer, som er udstedt af kreditforeninger eller hypotekforeninger eller af godkendte finansieringsinstituter, samt værdipapirer, som efter deres art og den sikkerhed, de frembyder, kan stilles i klasse med de førnævnte obligationer, efter følgende regler: Såfremt der er fastsat en amortisationstid, opføres de højst til den pris, for hvilken de er erhvervet, dog ikke til højere kurs end den, hvortil de udtrækkes, og heller ikke over sælgerkursen på købsdagen. Såfremt der ikke er fastsat nogen amortisationstid, opføres de højst til gennemsnittet af den ved regnskabsårets slutning sidst noterede købekurs og kurserne på de tilsvarende dage i de nærmest forudgående indtil 9 år, i hvilke papirerne har været i anstaltens eje, dog ikke over pari. Værdipapirer, som er udstedt under samme afdeling, serie og rentefod, opføres dog til en fælles gennemsnitskurs.

fóli, verða tó bókað til ein felags meðalkurs.

2. stk. Partabrøv, ið eru fyri almennari kursmerkjan, mugu í mesta lagi verða bókað tilkeypskursin, ið verður merktur seinast við rokuskaparársins enda. Onnur partabrøv verða bókað í mesta lagi til virðið, ið er roknað eftir upplýsingum, ið innan rokuskaparársins enda liggja fyri viðvíkjandi avvarandi partafelag.

3. stk. Uttan so at virðið má haldast at liggja lægri, verða onnur virðisskjøl bókað til prísin, tey eru fingin fyri, men tó ikki yvir pari.

4. stk. Av stovnsins ársrokuskapi skal siggjast, hvørjar kursir virðispappír hansara eru sett til.

5. stk. Ognarpostir í fremmandum mynti mugu í mesta lagi verða bókaðir til kursin, sum verður merktur við rokuskaparársins enda. Skuldpostar í fremmandum mynti skulu í minsta lagi verða bókaðir til henda kursin.

6. stk. Fastognir mugu ikki verða bókaðar til hægri virði enn tað, ið ein av landsstýrinum fyriskipað metan kemur til.

7. stk. Tilsýnið kann áleggja at skriva niður bókað virðið av stovnsins ognum, um serligar umstøður eru fyri tí í einstøkum tilfellum.

§ 13.

1. stk. I statusuppgerðini skulu undir skuldunum serskilt verða tikin ein tryggingargrunnur av samlaða peninginum í:

a) Tiltaksviðurgjaldinum fyri tílíkum tryggingum við bonusi, ið

Stk. 2. Aktier, der er genstand for offentlig kursnotering, må højst opføres til den ved regnskabsårets slutning senest noterede købekurs og andre aktier højst til en værdi beregnet på grundlag af de ved regnskabsårets slutning senest foreliggende oplysninger angående det pågældende aktieselskab.

Stk. 3. Andre værdipapirer opføres, medmindre værdien må antages at være lavere, til den pris, hvortil de er erhvervet, dog ikke over pari.

Stk. 4. Det skal af anstaltens årsregnskab fremgå, til hvilke kurser dens værdipapirer er optaget.

Stk. 5. Aktivposter i fremmed mønt må højst opføres til den ved regnskabsårets slutning noterede kurs, og passivposter i fremmed mønt skal mindst opføres til denne kurs.

Stk. 6. Faste ejendomme må ikke opføres til højere værdi end den, der angives ved en vurdering foranstaltet af landsstyret.

Stk. 7. Når særlige omstændigheder i det enkelte tilfælde måtte tale derfor, kan tilsynet påbyde en nedskrivning af de bogførte værdier af anstaltens aktiver.

§ 13.

Stk. 1. I statusopgørelsen skal der under passiver særskilt optages en forsikringsfond bestående af summen af:

a) Erstatningsreserven, der omfatter sådanne forsikringsbeløb,

eru fráboðað og fallin til gjaldingar, men ikki goldin.
b) Tiltakstryggingargjaldinum av øllum virðum av tryggingum í umfari. Tiltakstryggingargjaldið skal í minsta lagi vera á hædd við munin millum kapitalvirðið og slovnsins skyldur sambart allar leypandi lívstryggingarsáttmálar (skuldir) og kapitalvirðið av tí av tryggingargjaldinum, sum tann tryggjaði skal rinda í framtíðini (ognir). Við tað reina tryggingargjaldið skilst tann partarin av tryggingargjaldinum, sum við íbirtan av tryggingarsáttmála sambart tágaldandi grundarlag fyri tryggingargjaldsins útrokning svarar til tann átikna vágleika. Sama grundarlag skal verða nýtt við útrokning av nevnda kapitalvirði. Til rindan av framtíðarrakstri av tryggingum, ið ikki longur verður goldið tryggingargjald fyri, verður tiltaks-tryggingargjald at innihalda uppiskoyti, sum er skotið upp av stovninum og góðkent av tilsýninum.

2. stk. Hevur stovnurin givið frá sær eina trygging í endurtrygging, er hann ikki við ásetanina av tryggingargrunninum skyldugur at viðrokna so mikið, sum endurtryggjað er, um so er, at yvirtøkufelagið setur eina av tilsýninum góðkenda trygd fyri tiltakstryggingargjaldið.

§ 14.

1. stk. Stovnurin kann í statusuppgerð sínu seta sum ogn kapitalvirðið upp í 30% av framtíðar uppiskoytinum til reintryggingargjald fyri tryggingar, ið

og dertil knyttede bonusbeløb, som er anmeldt og forfaldne til udbetaling, men endnu ikke er udbetalt.
b) Præmiereserven, der omfatter den samlede værdi af alle løbende forsikringer. Præmiereserven skal mindst udgøre et beløb så stort som forskellen mellem kapitalværdien af anstaltens forpligtelser efter samtlige løbende livsforsikringskontrakter (passivet) og kapitalværdien af de nettopræmier, som forsikringstagerne skal erlægge i fremtiden (aktivet). Ved nettopræmie forstås den del af forsikringspræmien, som ved forsikringskontraktens indgåelse efter det da gældende grundlag for præmieberegningen netop svarer til den overtagne risiko. Det samme grundlag skal anvendes ved beregning af de nævnte kapitalværdier. For forsikringer, for hvilke der ikke længere skal betales præmie skal præmiereserven indeholde et af anstalten foreslået og af tilsynet godkendt tillæg til bestridelse af deres fremtidige drift.

Stk. 2. Har anstalten afgivet en forsikring i genforsikring, er den ved fastsættelsen af forsikringsfonden ikke forpligtet til at medregne det genforsikrede beløb, såfremt der af det overtagende selskab er stillet en af tilsynet godkendt sikkerhed for præmiereserven.

§ 11.

Stk. 1. Indenfor beløbet af de omkostninger, som erhvervelsen af nye forsikringer har medført, kan anstalten i statusopgørelsen som aktiv opføre kapitalværdien

felagið hevur fyri egnu rokning, og sum við roknskaparársins enda eru í gildi, smbr. stovnsins tryggingartreytir. Hetta kapitalvirðið má vera innanfyri hæddina av umloysunum av ognini av nýggju tryggingunum. Tey uppiskoyti, sum á henda háit verða penganneld, mugu ikki fara uppum 7% av reina tryggingargjaldinum.

2. stk. Viðvíkjandi teimum tryggingum, ið vóru í gildi við seinasta roknskaparárslok er at siga, at ikki má verða penganett størri procentlutur av uppiskoytinum enn hann, sum ognin var sett til í nevnda ársroknskapi.

3. stk. Umrødda ogn kann nýtast til rindan av tryggingargrunninum, um hesi rindan er givið gætur við áselingum av stovnsins reglum fyri afturkeypi av tryggingarskjølum og veitan av fritryggingarskjølum.

§ 15.

Aftrat teimum í §§ 5 og 14, stk. 3, nevndu ognum kann til rindan av tryggingargrunninum nýtast uppí helmingin av teimum ognum, sum eru fey við roknskaparársins lok fallin, men ikki goldin tryggingargjøld.

§ 16.

1. stk. Ársyvirskotið verður at býta millum bonusgrunnin og tiltaksgrunnin soleiðis:

a) Alt yvirskotið skal falla til bonusgrunnin, um tiltaksgrunnurin er meira ella tað sama sum 5% av ogn og skuld (smbr. § 13, 1. stk.)

b) Løgd verða 10% av yvirskotinum til tiltaksgrunnin og hin

af indtil 30 % af de fremtidige tillæg til nettopræmierne for de ved regnskabsårets udgang efter anstaltens forsikringsbetingelser i kraftværende forsikringer, som selskabet holder for egen regning. De tillæg, som på denne måde kapitaliseres, må dog ikke udgøre mere end 7 % af nettopræmierne.

Stk. 2. For de forsikringers vedkommende, som var i kraft ved udgangen af det foregående regnskabsår, må ikke kapitaliseres større procentdel af tillæggene end den, hvormed aktivet var opført i nævnte års regnskab.

Stk. 3. Det her omhandlede aktiv kan anvendes til dækning af forsikringsfonden, forsåvidt der er taget hensyn dertil ved fastsættelsen af anstaltens regler for policernes tilbagekøb og ydelse af fripolicer.

§ 15.

Til dækning af forsikringsfonden kan udover de i §§ 5 og 14 stk. 3 nævnte midler anvendes indtil halvdelen af det aktiv som udgøres af de ved regnskabsårets slutning forfaldne, ikke betalte præmier.

§ 16.

Stk. 1. Årsoverskudet fordeles mellem bonusfond og reservefond således:

a) Dersom reservefonden er større end eller lig med 5 % af summen af aktiv og passiv (jfr. § 13 stk. 1), skal hele overskudet henlægges til bonusfonden.

b) Dersom reservefonden er mindre end 5 %, men større end

parturin av yvirskotinum til bonusgrunnin, um tiltaksgrunnurin er minni enn 5% av ogn og skuld, men meira ella tað sama sum 2%, fyri reinar rentutryggingar tó 2½%.

c) Er tiltaksgrunnurin minni enn 2% — fyri reinar rentutryggingar 2½% av ogn og skuld, skal, um yvirskotið røkkur, fyrst leggjast av til tiltaksgrunnin so nógvur peningur, at grunnurin fær nevndu stødd. Viðvíkjandi ti eftirverandi yvirskotinum verður at skipa sum undir b).

2. stk. Teir í 1. stk. nevndu procentpartar til tiltaksgrunnin kunnu skerjast í mun til tann procentpartin av tí í § 14 nevndu ogn, sum ikki er tikin við í stovnsins statusi.

3. stk. Tað sum tiltaksgrunnurin er meira enn tað í 1. stk. a) nevnda procent kann verða nýtt at leggja av til tiltakstryggingargjald, ið førvur er á. Vegna broyting í útrokningargrundarlagnum annars má tiltaksgrunnurin ikki verða minkaður uttan samtykki tilsýnisins, uttan so at førvur er á at rinda undirskotið.

§ 17.

1. stk. Vinningur og tap vera, táið søla og útføka av virðispappírum fer fram, at seta sum munur millum tann vunna pening og bókað virði á ávikjandi pappírum.

2. stk. Um vinningur er, táið stovnsins virðisskjøl verða upp gjørd, ella táið ognin økist í virði, ella táið virðispappír ella

eller lig med 2 %, for rene renteforsikringer dog 2½ %, af summen af aktiv og passiv, henlægges 10 % af overskudet til reservefonden og resten til bonusfonden.

c) Dersom reservefonden er mindre end 2 %, for rene renteforsikringer dog 2½ %, af summen af aktiv og passiv, skal der — såvidt overskudet strækker til — forlods henlægges til reservefonden et sa stort beløb, at denne får den nævnte størrelse, hvorefter der med restoverskudet forholdes som under b) angivet.

Stk. 2. De i stk. 1 nævnte procentdele for reservefonden kan reduceres med en procentdel svarende til den del af det i § 14 nævnte aktiv, der ikke måtte være optaget på anstaltens status.

Stk. 3. Beløb, hvormed reservefonden oversiger den i stk. 1 a) nævnte procentsats, kan benyttes til henlæggelse til præmiereserven, som er nødvendiggjort ved en ændring i beregningsgrundlaget. Iøvrigt må reservefonden ikke formindskes uden tilsynets samtykke, medmindre det er nødvendigt for at dække underskud.

§ 17.

Stk. 1. Ved salg eller udtrækning af værdipapirer bestemmes gevinst og tab som forskellen mellem det indvundne beløb og de vedkommende papirers bogførte værdi.

Stk. 2. Hvis der ved opgørelsen af anstaltens værdipapirer eller ved værdiforøgelse af faste ejendomme fremkommer en ge-

fastar ognir verða seld, verður hann at flyta til kursjavningargrunnin, hvørs ognir nýtast til at skriva niður stovnsins virðisskjøl ella føstu ognir, ella til rindan av tapi við sølu. Á sama hátt við vinningi við úttøku av virðispappíri.

vinst, eller hvis værdipapirer eller faste ejendomme sælges med gevinst, overføres denne til en kursreguleringsfond, hvis midler anvendes til nedskrivning af anstaltens værdipapirer eller faste ejendomme eller til dækning af tab ved realisation heraf. Der forholdes på samme måde ved gevinst ved udtrækning af værdipapirer.

Kapitul III.

Ufrokningargrundarlag, tryggingartreytir og bonus.

§ 18.

1. stk. Reglur fyri lívstryggingarstovnsins tekniska grundarlag, tryggingartreytum og bonusi og øðrum skulu verða góðkendar av landsstýrinum.

2. stk. Tryggingartreytirnar skulu setast í stovnsins tryggingarskjølum, soleiðis sum landsstýrið ásetur.

3. stk. Heilsuváttanir, ið verða givnar av læknum, ið undirsøkja, eins og heilsuváttan frá tí, ið ynskir trygging, skulu vera góðtiknar av landsstýrinum.

§ 19.

1. stk. Landsstýrið skal góðtaka allar broytingar av teimum undir § 18 nevndu viðurskiftum. Umsóknir um hesar broytingar vera av lívstryggingarstovnsins stýri sendar gjøgnum tilsýnið.

2. stk. Við umsóknini skulu fylgja ummæli frá aktuarinum, ið er knýttur til stovnin, sambart § 9.

3. stk. Ásetanir í tryggingar-

KAPITEL III.

Beregningsgrundlag, forsikringsbetingelser og bonus.

§ 18.

Stk. 1. Reglerne for livsforsikringsanstaltens tekniske grundlag, forsikringsbetingelser og bonus m.v. skal godkendes af landsstyret.

Stk. 2. Forsikringsbetingelserne skal optages i anstaltens policer i det omfang, landsstyret fastsætter.

Stk. 3. Landsstyret skal godkende de erklæringer, som skal afgives af den undersøgende læge og af den forsikringssøgende selv *angående dennes helbredstilstand.*

§ 19.

Stk. 1. Enhver ændring af de i § 18 nævnte forhold skal godkendes af landsstyret. Andragende herom indsendes af livsforsikringsanstaltens bestyrelse gennem tilsynet.

Stk. 2. Andragendet skal være bilagt med en udtalelse fra den til anstalten knyttede aktuar, jfr. § 9.

Stk. 3. Bestemmelser i forsik-

treytunum, ið geva tí tryggjaða størri rættindi enn tilsvarandi áseturnir, ið við broyting av treytunum vera galdandi í framtíðini, verða støðugt í gildi viðvíkjandi tryggingum, ið eru teknaðar, áðrenn broytingin kom í.

4. stk. Áselanir viðvíkjandi tryggingargjøldum og útrokning av endurkeypsvirðinum verða støðugt í gildi fyri tær tryggingar, sum tær higartil hava verið í gildi fyri, og tær nervast ikki av møguligum seinni broytingum.

§ 20.

1. stk. Maður kann tekna trygging í livstryggingarstovnsins deild fyri vána liv (brekað), um tær við søkingini um livstrygging givnu heilsuváttanir eru so vorðnar, at tryggingin kann ikki gevast eftir vanligum tryggingarfesti ella við smærri hækkingum.

2. stk. Við útrokning av tryggingargjøldum fyri slíkar tryggingar kunnu nýtast aðrir forútsetningar viðvíkjandi livsvánum, rentufóti og trygdar- og virkisuppískoyti, enn teir fyri livstryggingarstovnin annars galdandi og gerast broytingar í stovnsins tryggingartreytum.

3. stk. Viðvíkjandi livstryggingarstovnsins deild fyri brekað kann verða gjørd ein serlig endurtryggingarskipan samsvarandi reglunum í § 7.

ringsbetingelserne, der giver større rettigheder for de forsikrede end tilsvarende bestemmelser, som fremtidig bliver gældende ved en ændring af betingelserne, vedbliver stadig at bestå for forsikringer, tegnet før ændringens ikrafttræden.

Stk. 4. Bestemmelser vedrørende præmier og beregning af genkøbsværdier har vedblivende gyldighed for de forsikringer, for hvilke de hidtil har været gældende, og berøres ikke af eventuelle senere ændringer af disse bestemmelser.

§ 20.

Stk. 1. Såfremt de ved begæring om en livsforsikring afgivne helbredsoplysninger er af den beskaffenhed, at forsikringen ikke kan antages efter de sædvanlige tarifer eller med en mindre forhøjelse, skal der være adgang til at tegne forsikring i livsforsikringsanstaltens afdeling for mindre-gode liv.

Stk. 2. Ved beregningen af præmier for sådanne forsikringer kan anvendes andre forudsætninger med hensyn til levesandsynlighed, rentefod samt sikkerheds- og driftstillæg end de for livsforsikringsanstaltens øvrige forsikringer gældende samt foretages ændringer i livsforsikringsanstaltens forsikringsbetingelsen.

Stk. 3. For livsforsikringsanstaltens afdeling for mindregode liv kan træffes en særlig genforsikringsordning i overensstemmelse med reglerne i § 7.

§ 21.

Viðvíkjandi at sleppa undan rættargongu galda ásetaninar í § 116, smbr. § 117 í lóg nr. 129 frá 15. april 1930 um tryggingaravtalur.

§ 22.

1. stk. Er tryggingarskjal vorðið burtur, kann stýri lívstryggingarstovnsins eftir áheitan frá tí tryggjaða, ið yvirfyri tí hevur prógvað rætt sín til tryggingarskjalið, við 6 mánaðs ávaring kalla tryggingarskjalsins ihendihavara at koma til sín. Lýsingin, ið verður at seta í blaðið, sum góðkent er at taka almennar lýsingar í Føroyum, í fyrsta nummar í fjórðingsári skal geva tryggingarskjalinum nóg greitt merki við navni á tí tryggjaða (fyri hvørs lív lívstryggingin er teknað). Um ongin kemur aftaná tílíka lýsing, er tryggingarskjalið farið úr gildi, og stýrið letur so avvarandi fáa nýtt tryggingarskjal. Umloysurnar við lýsingini verða at rinda av tí, sum hevur yuskt hana.

2. stk. Kemur onkur til stýrið sambart lýsingina og kann friðalig skipan ikki fáast í lag, kann ikki nýtt tryggingarskjal krevjast, áðrenn rætturin hjá teimum fráboðaðu krøvum teirra millum eru avgjørd við dómi.

Kapitul IV.
Ymiskar ásetingar.

§ 23.

1. stk. Um tann tryggjandi og tryggjaði eru hvør sín, má lívs

§ 21.

Om frilagelse for retsforfølgning gælder bestemmelserne i § 116, jfr. § 117, i lov nr. 129 af 15. april 1930 om forsikringsaftaler.

§ 22.

Stk. 1. Er en livsforsikringspolice bortkommet, kan livsforsikringsanstaltens bestyrelse på begæring af den, som for bestyrelsen har godtgjort sin adkomst til policen, med 6 måneders varsel indkalde ihændehaveren til at melde sig. Indkaldelsen, der sker ved kundgørelse i det til optagelse af offentlige bekendtgørelser på Færøerne autoriserede blad, i det første nummer i et fjerdingår, skal indeholde en tilstrækkelig betegnelse af policen, dernæst navnet på den forsikrede (den, på hvis liv forsikringen er tegnet). Dersom ingen efter sådan kundgørelse melder sig, er policen uggyldig, og bestyrelsen udleverer da vedkommende en ny forsikringspolice. De med indkaldelsen forbundne omkostninger udredes af den, der har begæret den iværksat.

Stk. 2. Melder nogen sig efter bekendtgørelsen, og kan mindelig ordning ikke opnås, kan en ny police ikke kræves udstedt, førinden de anmeldte krav indbyrdes berettigelse er afgjort ved dom.

KAPITEL IV.
Forskellige bestemmelser.

§ 23.

Stk. 1. For så vidt forsikringstageren er en fra den forsikrede

tryggingarstovnurin ikki uttan samtykki frá ti tryggjaða tekna nakað slag av livstrygging, hvarvið hann ábyrgdar seg við deyða av ti tryggjaða at gjalda størri pening enn goldna tryggingargjaldið við rentum.

2. stk. Livstryggingarstovnurin má ikki tekna nakað slag av livstrygging, hvarvið hann bindur seg til at gjalda meira pening enn goldið tryggingargjald við rentum sum fylgjan av deyða, áðrenn tann tryggjaði er 8 ár.

3. stk. Livstryggingarstovnurin má ikki tekna livstrygging at galda í útlendskum mynti.

§ 24.

Hvør einstakur umboðsmaður fyri livstryggingarstovnin skal vera útgjørdur við prógvi um, hvør hann er, ella við fulltrú frá livstryggingarstovnsins forretningsførara.

§ 25.

Livstryggingarstovnurin er frítikin fyri allan beinleiðis skatt til landskassa og kommunur.

Kapitur V.
Reglur um revsingar og lógarinnar gildi.

§ 26.

Feløg ella umboðsdeildir,ið tekna livstryggingar móti ásetingum í § 1, verða revsað við bót.

forskellig person, må livsforsikringsanstalten ikke uden den forsikredes samtykke tegne nogen art af livsforsikring, hvorved den ved den forsikredes død forpligter sig til at udbetale større beløb end de indbetalte præmier med renter.

Stk. 2. Livsforsikringsanstalten må ikke tegne nogen art af livsforsikring, hvorved den forpligter sig til at udbetale større beløb end de indbetalte præmier med renter som følge af dødsfald, der indtræder før den forsikredes fyldte 8. år.

Stk. 3. Livsforsikringsanstalten må ikke tegne livsforsikringer lydende på betaling i udenlandsk valuta.

§ 24.

Enhver agent for livsforsikringsanstalten skal være forsynet med legitimation eller fuldmagt udstedt af livsforsikringsanstaltens forretningsfører.

§ 25.

Livsforsikringsanstalten er fritaget for enhver direkte skat til landskasse og kommune.

KAPITEL V.
Straffe- og ikrafttrædelsesbestemmelsen.

§ 26.

Selskaber eller agenturer, der tegner livsforsikring i strid med de i § 1 indeholdte bestemmelser, straffes med bøder.

§ 27.

Umboð ella onnur, sum vinnuliga arbeiða við tekuingum fyri livstryggingarstovnin og sum nýta órættar ella villleiðandi uppgávur, revsast við bót.

§ 27.

Agenter eller andre, der erhvervsmæssigt virker for tegning af forsikringer til livsforsikringsanstalten, og som herved anvender urigtige eller vildledende angivelser, straffes med bøder.

§ 28.

1. stk. Henda lóg kemur í gildi .....

2. stk. Tær undir kapitul III í lóg nr. 129 frá 15. apríl 1930 um tryggingaravtalur áseltu reglur galda eisini fyri livstryggingarstovnin eins og aðrar í nevndu lóg ásettar reglur eisini verða at nýta í livstryggingarstovninum, um tær eftir innihaldi sínum hóska, og tað í hesari lóg ella aðrari løgtingslóg eru ikki reglur um hesi viðurskiftir.

§ 28.

Stk. 1. Denne lov træder i kraft den .....

Stk. 2. De i kapitel III i lov nr. 129 af 15. april 1930 om forsikringsaftaler indeholdte bestemmelser gælder også for livsforsikringsanstalten, ligesom de i nævnte lov indeholdte øvrige bestemmelser også kommer til anvendelse på livsforsikringsanstalten, for så vidt de efter deres indhold kan det, og der ikke i nærværende lov eller andre lagtingslove er givet regler om de pågældende forhold.

Viðmerkingar:

Hetta mál var 1. mai 1962 lagt fram í løgtingssetuni 1961, jbr. Løgtingstíðindi 1961, bls. 320. Tað fekk 1. viðgerð og beint í lógarnevndnia, síðani hevur málið ikki verið til viðgerðar í løgtinginum.

Viðmerkingar landsstýrisins dagfest 2. mai 1962 eru soljóðandi:

«Í løgtingsmáli nr. 50/1960: Livstrygging, jbr. Løgtingstíðindi 1960 s. 209, samtykti løgtingið, at landsstýrið skuldi taka upp samráðingar við Tryggingarsambandið Føroyar um føroyska livstrygging, og at leggja málið fyri tingið aftur í næstu setu.

Samráðingarnar hava verið við tryggingarsambandið, og hevur hetta felag við sakkønari hjálp frá Einar Olsen, stjóra í livstryggingardeildini hjá tryggingarfelagnum Skandinavia, København, gjørt uppskot til løgtingslóg um livstryggingarvirki. Tað er hetta uppskotið við smávegis broytingum, sum við hesum verður lagt fyri løgtingið.

Við fyribils kunngerð nr. 14, 17. juni 1940, fekk Tryggingarsambandið Føroyar einarætt at tekna tryggingar í Føroyum frá 1. januar 1943, jbr. nú løgtingslóg nr. 24 frá 23. mars 1956. Livstryggingar vóru tó undantiknar einarættinum.

Fyriliggjandi uppskot hevur sína fyrimynd í «Statsanstalten for Livsforsikring», jbr. lógarkunngerð nr. 11, 15. januar 1951. Føroya livstrygging hevur fingið sama felagsligan status sum nevndi stovnur, samstundis sum royndt er at laga hana eftir skaðatryggingini her, har hetta letur seg gera. Reglur eru tó eisini tiknar frá lóg nr. 143, 13. mai 1959 «om forsikringsvirksomhed», og er har serliga hugsað um roknskaparførslu, §§ 11 og 13, kursjavningargrunnur § 17, stk. 2, útrokningargrundarlag, tryggingartreytir og bonus §§ 18 og 19.

Skotið verður upp, at Føroya livstrygging fær einarett at reka livstryggingarvirki í Føroyum. Hon er ætlað persónum, sum hava danskan heimarætt ella eru búsitandi í kongarríkinum Danmark, eisini persónum búsitandi í útlandinum, men við tilknýti til kongarríkið (§ 1). Tá ið ikki verður farið út um hesar persónar, so er tað lí, at tað helst er størri møguleiki at vurdera, hvønn vágleika stovnurin her tekur uppá seg. Landskassin veðheldur fyri virki hansara, tó hevur hann fornúgvna fyri seg, og má hon ikki blandast við landskassans (§ 2).

Stovnurin verður stjórnaður av stýrinum fyri tryggingarsambandinum, og er stjórin har forrætningsførari (§ 4).

Livstryggingin er frítikin fyri allan beinleiðis skatt til landskassa og kommunu (§ 25).

Viðvíkjandi spurninginum um frá hvørjum degi onnur feløg ella persónar missa rættin at tekna livstrygging, § 1, stk. 2, og frá hvørjum degi lógin fær gildi, § 28, stk. 1, verður mælt til at samráðast við tryggingarsambandið undir nevndarviðgerðini.»

Fyriliggjandi uppskot er óbroytt frá 1961 tingsetuni, tá ið § 7 er undantikin. Har er tikið burturúr, at endurtryggingin altíð, tá ið tilber, skal gerast hjá donskum (ella føroyskum) felag. Landsstýrið heldur, at tað má standa til tryggingina sjálva at taka støðu til, hvar hon endurtryggjar.

1. viðgerð 1. februar og 13. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Táið Tryggingarsambandið Føroyar varð stovnað við kunngerð nr. 14 frá 17. juni 1940, varð livstryggingin undantikin lí virksemi, sum Tryggingarsambandið ánnars fekk einarett til at røkja. Tað hevur mangur hildið, tað *hevði gagnað peningasparingini í landinum*, um ein innanlendis livstrygging var, og tað má ásannast, at táið føroysk livstrygging skal setast á stovn, so man vera neyðugt, at lílíkur stovnur hevur einkarrætt, eins og er við teimum ymisku deildunum undir Tryggingarsambandinum Føroyar.

Málið um livstrygging var borið fram á ting 1. mai 1962 og samtykti løgtingið tá, at landsstýrið skuldi kanna málið saman við Tryggingarsambandinum. Hetta varð gjørt á tann hátt, at Tryggingarsambandið sær til hjálpar tók ein tryggingarkønan duna, Einar Olsen, frá Skandinavia.

Føroya livstrygging verður alumennur sjálveigandi stovnur, stýrdur av stýrinum fyri Tryggingarsambandið Føroyar. Tað fyriliggjandi uppskotið til løgtingslóg, sum livstryggingin skal stýrast eftir, er gjørd eftir *reglunum fyri Statsanstalten for Livsforsikring*. Lóg nr. 147 frá 13. mai 1959 om forsikringsvirksomhed er — burtursið frá einstøkum greinum — ikki galdandi fyri tann nevnda danska tryggingarstovn og er heldur ikki galdandi fyri tryggingarvirkið í Føroyum. Løgtingslógaruppskotið miðar seg tó eisini eftir teirri nevndu donsku lógini frá 13. mai 1959.

Lógarnevndin hevur havt málið til viðgerðar. Undir nevndarviðgerðini hevur málið verið hjá Tryggingarsambandinum, sum einki hevur at viðmerkja til, at uppskotið verður sett í gildi í sínum núverandi skapi.

Lógarnevndin mælir so statt til at samtykkja uppskot landsstýrisins við fylgjandi broytingum:

§ 1, 1. stk. 2. punktum, fellur burtur í báðum textum.

í §1, stk. 2, verður sett inn í báðum textum: 1. januar 1967.

ad § 22, 2. stk.:

Føroyska textin fær hetta orðaljóð:

«Sigur nakar til sín eftir lýsingini og fæst ikki semja, kann nýtt tryggingarskjal ikki verða kravt, fyrrenn rettur teirra fráboðaðu krava er avgjørdur við dómi.»

ad § 23:

Føroyska textin fær hetta orðaljóð:

«Eru tryggingartakarin og tryggjaði hvør sín, má livstryggingarstovnurin ikki uttan samtykki frá tí tryggjaða tekna nakað slag av livstrygging, har hann ábyrgist at gjalda størri peningahædd enn goldið tryggingargjald við rentu við deyða hins tryggjaða.»

ad § 28:

Fyrsta stykkið verður soljóðandi:

«Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1967. Samstundis fer úr gildi í Føroyum «Lov nr. 183 frá 11. mai 1935 om tilsyn med pensionskasser», og í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um trygging verða í § 1 orðini «tá ið livstrygging er undantikin» strikað. Donsk text: «Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1967. Samtidig ophæves forsåvidt Færøerne angår lov nr. 183 af 11. maj 1935 om tilsyn med pensionskasser, hvorhos

ordene «bortset fra livsforsikring i løgtingslov af 28. marts 1956, § 1, stk. 1» udgår.

2. viðgerð 13. og 3. viðgerð 14. mai 1966.

Formaðurin legði fram 2 broytingaruppskot frá Haldor Hansen o. fl.

I

Gr. 4. 1. stk. verður orðað soleiðis:
Lívstryggingarstovnurin verður stýrdur av 3 mannanevnd, har umboðsmannaráð Tryggingarsambandsins velur ein, løgtingið ein og landsstýri ein. Síðstnevndi er formaður.
(dansk tekst .....)
Livsforsikringsanstaltens virksomhed ledes af en bestyrelse på 3 medlemmer, hvoraf et vælges af forsikringsforbundets repræsentantskab, et af lagtinget og et af landsstyret. Sidstnævnte er formand.

II

Ístaðin fyri broytingaruppskotið verður sett:
§ 4, 1. stk., 1. pkt. verður orðað soleiðis:
Lívstryggingarstovnurin verður stýrdur av 3 mannanevnd, har umboðsmannaráðið Tryggingarsambandsins velur ein, løgtingið ein og landsstýrið ein lim. Síðstnevndi er formaður. Teir verða valdir fyri 3 ár í senn, fyrstu ferð í 1966. Aftarval loyvist.

Dansk tekst:
Livsforsikringsanstaltens virksomhed ledes af en bestyrelse på 3 medlemmer, hvoraf eet vælges af forsikringsforbundets repræsentantskab, eet af lagtinget og eet af landsstyret.
Sidstnævnte er formand. De vælges for 3 år ad gangen, første gang i 1966. Genvalg er tilladt.

Broytingaruppskot (II) fall 13—0.
Broytingaruppskot (I) fall 2—0.
Landsstýrisins uppskot við broytingunum frá nevndini samtykt 29 atkv.

---

10. Alment kunngerðarblað

Ár 1966, 25. januar legði løgmaður fram soljóðandi:

Í løgtingssetuni 1963 legði landsstýrið fram uppskot til løgtingslóg um alment kunngerðarblað, jbr. Løgtingstíðindi 1963, bls. 38.

Málið fekk 1. viðgerð og varð beint í nevnd, men kom ikki tilmæli frá nevndini.

Í løgtingssetuni 1964 legði landsstýrið málið aftur fyri løgtingið og var aftur úrslitið tað, at málið aftaná 1. viðgerð varð verandi í nevnd.

Við hesum loyvir landsstýrið sær at endurnýggja framløguna frá 1963.

1. viðgerð 31. januar og málið beint í lógarnevndina.

---

11. Broytingar í heimastýrislógini

Ár 1966, 25. januar legði løgmaður fram soljóðandi:

Í løgtingssetuni 1964 legði landsstýrið fram uppskot til samtyktar um broytingar í heimastýrislógini, jbr. løgtingsmál nr. 80/1964.

Málið fekk 1. viðgerð og varð beint í nevnd, men kom ikki tilmæli frá nevndini.

Vísandi hertil loyvir landsstýrið sær at endurnýggja framlagunni frá 1964.

1. viðgerð 2. februar og 11. mai legði nevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

1965, 5. april legði landsstýrið inn á ting uppskot til broytingar í heimastýrislógini. Tað fekk 1. viðgerð 22. s.m. og beint í sevstaka 7 mannanevnd (smbr. løgtingsmál nr. 80/1964).

Við skrivi frá 16. desember 1965 legði landsstýrið aftur uppskot inn á ting.

Nevndin hevur býtt seg sundur í ein meirilutu og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hanus við Høgadalsá, Marius Johannesen, Kjartan Mohr og Poul Petersen) tekur undir við landsstýrisuppskoti og skilar til:

Broytingarnar í landsstýrisins uppskoti eru (smbr. eisini viðmerkingarnar til løgtingsmál nr. 80/1964).

ad 1) og 2) §§ 2 og 3:

Í hesum broytingunum liggur, at A málini eftir § 2 og B málini eftir § 3 ganga saman í ein og sama listan og kunnu gerast sermál eftir samtykt av løgtingi og landsstýri og skulu gerast tað eftir yvski frá ríkisvaldinum.

ad 3) § 7:

Henda broytingin hevur í sær sum tað stendur at lógfesta eina mannamongd sum nýtt hevur verið í seinastuni, men haraftrat, at góðkenning frá løgtingi og landsstýri er treyt fyri, at lógir og aðrar fyriskipanir yvirhøvur fáa gildi her á landi.

ad 4) § 8, stk. 3 og 4:

Eftir uppskotinum hevur henda broytingin í sær at geva føroyskum valdi rættindir at taka upp samráðingar og gera sáttmála við onnur lond í málum sum bert viðkoma føroyskum viðurskiftum, og í málum sum annars eisini viðkoma Føroymm rættindir at hava umboð í sendinevndum sum rikisvald seta.

ad 5) § 10:

Tað skuldi ongin grund verið lógfest, hvussu føroyingur er at eyðkenna, eftirsum serlóggávan hevur reglur bæði um valrætt, valføri v.m. Tað skuldi heldur ikki tørva tá tað ræður um pass, eftirsum førvandi eyðkennir skuldu fingist í almennligum reglum.

Tá ið tað stendur, at munur má ikki gerast á føroyingi og/ella øðrum donskum rikisborgara hvørki í lóg ella í fyrisiting, so er at siga, at tílík regla er ikki til í rikislóggávuni og tað skuldi annars kunna lisist av rikisborgararættinum at tað ikki ber til at gera mismun.

ad 6) § 11:

Føroyskt hevur í lógini fingið góðkenning sum høvuðsmálið. Hvussu danskt skal lærast er ein spurningur sum hoyrir undir serlóggávuna.

Hvussu danskt mál skal vera nýtt í almennum føroyskum viðurskiftum er ein spurningur sum stendur til føroyskt og danskt vald at gera sáttmála um.

ad 7) § 12:

Í hesi broytingini liggur spurningurin at fáa flagginum góðkenning og notifikatión sum havandi javnbjóðis rættindir við annara landa flogg.

Henda broytingin hevur sína grund í ivaspurningum og í øðrum sum prógvført hava, at flaggið hevur ikki tílíka góðkenning.

ad 8) § 14:

Til hesa broytingina er tað at siga aftrat, at «forfatningskommissionen» frá 9/2-1946 hevði tá longu havt spurningin frammi at mæla til at leggja niður landstingið og bert eitt kamar sum tað eitur í rikisdegnum og tessvegna kom henda reglan inn sum lyftigrein um minst 2 umboðs-

nemn á tí nýggja tinginum, so sum eisini fyrisett í grundlógini frá 5/6-1953:

ad 9) § 15:

Í hesi broytingini liggur bert tað sum tað stendur, at ríkisumboðsmaðurin fær sømstundis frásøgn um landsstýrisins avgerðir sum løgtingið.

Annars verður vist til viðmerkingarnar til uppskotið frá landsstýrinum.

Meiralutin í nevndini heldur sum landsstýrið, at lógini nr. 137 frá 23. mars 1948 um føroyskt heimastýri tørvar broytingar nett eftir, hvussu hon hevur roynst í verki hesi 20 árini hon hevur verið í gildi, serstakliga eru tað §§ 7, 8 stk. 3 og 4, og § 12 sum eftir okkara meting tørva eina greiða ari orðing og nakað meira rætfindir til løgting og landsstýri, broytingin til §§ 2 og 3 ger tað nakað lættari fyri báðar partar framyvir, §§ 10 og 14 eru sum fyrr sagt reglur sum nú ongan fýlning hava, eftirsum tær eru lógfestar í øðrum lógum, og §§ 11 og 15 ein náttúrlig broyting út frá tí sum sagt í lógini sjálvari, at føroyskt mál er høvuðsmálið og at ríkisumboðsmaðurin eftir broytingini verður settur javnbjóðis tinginum til tess at fáa frásøgn um landsstýrisins avgerðir.

Minnilutin (Poul Jacob Olsen og P. M. Dam) heldur fram:

Stjørnarskipanin av 23. mars 1948 er ryggurin í samfelag okkara. Hon verður tí, so leingi hon er í gildi, hin mest avgerandi táttur í tvinum hjá einstaklinginum eins og hjá allari tjóðini, og hon vil sjálvandi altíð koma at hava livandi áhuga, serliga hjá teimum, sum vóru uppi í leikinum, tá ið hon varð til.

Eyðvitað kann stjørnarskipanin tørva ábót og broyting samsvarandi tíðarinnar krøvum.

Javnaðarflokkurin hevur tí onga principiella mólstøðu móti mannligum broytingaruppskotum til stjørnarskipanina, og flokkurin kann væl hugsa sær at vera til viðgerð av uppskotum til broytingar, og um ein broyting kann prógvast at vera áleikandi neyðug fyri føroyingar og gott samlag millum Føroyar og Danmark, eigur hon sjálvandi at verða framd. Men ein og hvør broyting má verða væl og gjølla umhugsað, áðrenn hon fer fram. Stjørnarskipanarbroytingar eru ikki hvønndagsarbeiði.

Málið, menn settu sær við stjørnarskipanini, var einki minni enn at skapa eitt grundarlag og eina avgyrðing fyri loysn av tí tjóðskaparliga og stjørnarliga spurninginum, sum í endanum av 18. øld og í hesum

árhundraðinum hevði skapt eina rørslu, ið vóð frá aldargomlum at nýggjum livsrembingum og livslagi.

Hin tjóðskaparligi spurningurin má í sínum høvuðsheitum sigast at vera loystur viðvíkjandi rettarstøðu síni. Annað er hansara úlbygging og mýking. Har stendur á einstaklinginum meira enn á samfelagsskipanum. Men her er tað eisini, at størsti vansin er, tí tá ið hilt eggjandi - - veruliga ella óveruliga — trýstið utanífrá er burturi, verður vøksturin at standa og falla á teim eisku spírunum og teirra vøksturmegi, sum er í einum sjálvum, og hvørs lív er treytað av rembingini innaníverá.

Her skal nú í stuttum verða norðið við nakrar av teinum mest áleikandi spurningunum. Men hin kronologiska raðfylgjan av evnisviðgerðini verður ikki at fylgja landsstýrisins, men verða spurningarnir heldur havdir á lofti sum teir liggja í heildarmyndini:

1. Flaggið.

Flaggið er ein ikki hin minst áleikandi tjóðskapartátturin.

Menn, sum vóru við at seta í stjørnarskipanina, at føroyingar skulu fáa góðtikið flagg sítt uttan fyri sum innan fyri Føroya mark, hildu málið vera greitt alla staðni, ið menn skiltu ella vistu um føroyska og danska avgerðina flagginum viðvíkjandi. Her var ikki talan um nakrar avmarkingar ella skerjingar. Tað er sligið fast, at flaggið og føroyingurin kunnu ikki skiljast.

Sagt er, at ongar internationalur reglur og lógir eru fløggum og flaggi viðvíkjandi. Men talan er um flaggsiðir og vananýtslu av fremmanda tjóða fløggum. Soleiðis verður í flestum londum flaggað fyri fremmandum tjóðum og ríkjum á teirra gevuløtum, eins og tá ið talan er um umboð á vitjan til fundar og stevnur og aðrar samkomur landa millum.

Siðir viðvíkjandi privatari nýtslu av fremmandum flaggi eru flestu staðir ógvuliga rúmligir og frisinnaðir.

Tað er ikki at ívast í, at allar misskiljingar viðvíkjandi heimild at nýta føroyska flaggið á almennum fundum, stevnum og øðrum samkomum í fremmandum londum við góðum vilja og samarbeiði frá føroyskari og danskari síðu *kunnu rettast innanfyri heimastjórislógina.* Men her er einki tvíbýti: føroyska flaggið eigur at verða drigið á stong, har ið maður møtir sum føroyingur fyri føroyingar, Føroyar, tá ið annars flaggið verður.

Donsku studenturnir og føroyska flaggið.

Minnilutin ívast heldur ikki í, at flaggmisskiljingar, sum hava staðist føroysku og donsku studentunum millum viðvíkjandi føroyskari umboðan á norðurlendskum eins og alheims studentastevnum og fundum, vel

kunnu greiðast, so føroyingar verða tiknir sum serstøk tjóð og mentunareind í sama mun som hinar norðurlendsku tjóðirnar og aðrar tjóðir.

Málið er í dag hjá øllum fraelslyntum tjóðum at fylkja skyldar tjóðir í eina samskipan eins og hent er við Skotlandi og Englandi, norðurstatunum í Amerika og skyldum státum og tjóðum mangar aðrastaðni í verðini, nú seinast við teimum «seks».

Men tað er ikki talan um, at tjóðir í hesum samgongum ikki verða umboðnðar av sínum studentum á studentastevnum og fundum innanfyri samgonguna ella á fundum av studentum frá størri stats- og tjóðnøkjum. Minnilutanum er ið hvussu er ikki kunnugt, at tær her umtalaðu samgongur hava skert ta fullu góðkenning av flaggfraelsi og raetti teirra einstaku tjóðini. Ætlanin við teirri friviljaðu samgongu av tjóðum er at menna bæði tað andaliga og vinnuliga livið og tjóðskapin hjá teirri einstøku tjóðini. Um tað ikki var, vildi aldri nakrantið verðið talan um friviljaða samgongu um mál og málsøki og raettindi av almenniskaligari náttúru hvør hjá aðrari.

Tað er við fullum raetti hildið fram, at føroyingar eru ikki minni serstøk tjóð og sjálvstøðug deild innanfyri eitt ríki enn t.d. Skotland er innanfyri bretska samveldið. Og skotskir studentar eru góðkendir sum eins góð tjóðareind sum bretsku studentarnir. Hvør teirra hevur tí sjálvstøðugt umboð á alheims- og øðrum studentafundum, stevnum og samkomum.

Flaggið og norðurlendska ráðið.

Tvær reisur upp í røkur er á fundi Norðurlendska ráðsins føroyska flaggið ynskt fylgt føroyingunum at veitra millum hini 5 norðurlendsku fløggini sum tekin uppá góðkenning av føroyingum sum hin sætta norðurlendska tjóðin.

Men báðu ferðirnar vóru vit føroyingar ikki nóg væl skiltir av okkara norðurlendsku brøðratjóðunum, at flaggið kundi verða drigið á stong.

Tó nú tykist riva fyri eygum á teim flestu innanfyri norðurlendska ráðið. Hin danska pressan hevur sum heild tikið undir við tí føroyska flagginum millum hini 5 norðurlendsku fløggini, tí menn viðganga, at føroyingar eru ein serstøk norðurlendsk tjóð við egnum máli, mentum og øllum tjóðareyðkennum.

2. *Føroyar sum limur í Norðurlendska ráðnum.*

Á fundi í Norðurlendska ráðnum hevði formaður Føroya javnaðarflokks ynski uppi um, at Føroyar sum hin sætta norðurlendska tjóðin skuldi verða limur í Norðurlendska ráðnum. Sama ynski er nú eisini borið fram av Føroya landsstýri.

Javnaðarflokkurin er heilur og heitur fyri hesum máli, *ið eftir flokksins tykki væl kann verða loyst uttan broyting av heimastýrislógini.*

3. Serligt føroyskt pass.

Vit hava eitt serligt føroyskt pass. Men nú er spurningurin reistur at broyta tað, so strokið verður tað, sum vísir á okkara statsborgarligu støðu.

Menn halda, at skrásetna av einum tílíkum passi krevur broyting av okkara stjørnarskipanar § 10.

Eftir minnilutans tykki er tað neyvan neyðugt at broyta stjørnarskipanina fyri at gera eitt nýtiligt serligt føroyskt pass. Tað er einki at ivast í at við samráðing við ríkisstjørnina kunnu vit fáa tað ítkindapass, ið vit eru nøgdir við.

Teir menn, ið vilja hava broytingina av passinum soleiðis sum av landsstýrinum skotið upp, skylda gjølla at kanna, hvussu ið verður at gangast okkara landsmonnum, ið skulu nýta passið har, ið Føroyar eru heilt ókendar — tað eru tær tessverri eru nógva staðni. Passið hevur jú ta høvuðsuppgávu at opna landamarkini, so ein kann ferðast ólarnaður. Tað kann lættliga verða ivamál hjá monnum, hvør ið ein er, um landið, ein kemur frá er teimum ókunnugt, og tað annars einki annað kent hagmerkið er á passinum.

Men tað er eyðsæð, at passið fyrst og fremst skal vísa og strika undir, at berarin av tí er føroyingur.

Ábyrgdarmenn skylda, áðrenn teir fremja hesa umrøddu broyting, at gera landsmonnum okkara fullkomuliga greitt, hvussu ið støðan kann verða aftaná eina møguliga broyting samsvarandi landsstýrisins uppskoti um, at í passinum skal bara standa «føroyingur» og «Føroyar» uttan orð um ríkisborgaraskapin.

Føroyskt pass er eins og frímerki eitt langtrøkkandi boð frá føroyska tjóðini. Tað røkkur so langt, sum føroyingar ferðast, og tað er kring tann víða knøtt. Tað hevur tí sín nationala týdning at skipa passið, føroyingurin nýtir, soleiðis, at tað vísir monnum, hvar ið vit liva og eru til sum fólk. Men aðaluppgávan hjá passinum er sum sagt at gera tað lett og liðiligt at ferðast landa millum. Henda uppgáva má ikki skerjast.

So ókunnugar sum Føroyar enn eru í nógvum verðaldarpørtum er at kvíða fyri, at eitt føroyskt pass uttan eisini at siga frá ríkisborgarskapinum kemur at volda monnum trupulleikar har, ið vit eru ókendir.

Minnilutin heldur tað ikki vera vert at koma sær út fyri tílíkan trupulleika og skjýtur tí upp, at *«Føroyingur» og «Føroyar» verða sett á passið so ásýnliga sum av landsstýrinum sett upp, men at ríkisborgar-*

skapurin eisini skal kunna siggjast á passinum. Hetta er vist neyðugt fyri teir og tær sum ferðast — neyðugt enn eina fitta lið.

4. Uttanríkissamráðingar og umboðan.

Vit hava, sum sagt í landsstýrisins uppskoti, rætt til samráðingar um serlig føroysk uttanríkismál, men við danska uttanríkisráðsins «introduktion» og góðkenning av úrslitinum.

Eingin broyting í stjørnarskipanini leikar tí á her. Forútsetingin í samráðingunum við útlendingar um føroysk áhugamál gloymir la neyðugu trygd og tryggjan í sær viðvíkjandi okkara samráðingarrætti.

Og vit hava, sum er, høvi at geva umunæli í uttanríkis sungongumálum, áðrenn lógir teimum viðvíkjandi eins og viðvíkjandi traktatum, konventiónum og øðrum avtalum við fremmandar tjóðir verða settar í gildi. *Her áleikar tí heldur ikki nøkur broyting av stjørnarskipanini.*

Í sambandi við viðgerðina av spurninginum um umskipan ella yvirtøku av uttanríkismálunum skylda vit at viðmerkja, at tað er ein royndur lutur, at tað hevur havt alstóran týdning fyri gott úrslit av samráðingum, ið føroyingar hava við aðrar tjóðir um okkara uttanríkis áhugamál sum fiski- og vinnumál, har undir handilsmál, at danir eru við til «introduseringar» og við góðum ráðum, til hjálpar og vegleiðingar á ymsan hátt. Teir eru jú vandir, kønir og gamlir í gøtuni uttanríkismálum viðvíkjandi.

Galdandi stjørnarskipan heimilar at fáa settan mann í uttanríkisráðið við teirri uppgávu serliga at taka sær av føroysku uttanríkisinteressum. Ein rættur maður her kundi lagt grundarlag fyri einum føroyskum sjálvstøðugum arbeiðandi parti av einum «deparlementi».

Javnaðarmenn og Louis Zachariasen vildu tá við tað sama fáa mannin settan. Men semja fekst ikki um hesa setan. Og síðani hevur eitki uppskot um mannin verið frammi.

Aftrat hesum rætti til mann í uttanríkisráðnum gevur stjørnarskipanin rætt til á egnan kostnað at seta mann (menn) á danskar ambasadur, konsulatir og gesantskapir, har ið vit halda tørvur er á tilíkum manni (monnum) til í samarbeiði við danska umboðið at røkja føroysk uttanríkis áhugamál. Her er serliga talan um handilsmál og boðan frá øllum tí í útlandinum, ið maður kann halda vera av týdningi og áhuga fyri einstøkar føroyingar, feløg, samtøkur eins og fyri Føroyar í sini heild. Men higartil hava vit ikki nýtt hesa rætt til nakran mun uttan við setan av Skarðhamar í Bretlandi. Og í sini lið varð Hans Dalsgaard settur sum umboðsmaður í Íslandi. Men hóast Hans Dalsgaard gjørdi eitt dygdargott arbeiði og hevði besta lovorð á sær í Íslandi bæði hjá føroyingum um og øðrum, varð sessurin niðurlagdur. Interessurnar hjá føroyingum

í Íslandi eru vaksandi. Afturløka av føroyska umboðsmannininum hiðani er lí ring at skilja. Hin danska ambasadan hevur gott orð á sær hjá føroyingum, ið vilja ísland til vinnu. Men tað er eyðsæð, at tað vildu dugna føroyingum enn betri, at føroyingur var har uppi við sínum málkunnleika og serkunnleika til føroysk viðurskifti.

Tað má sigast at vera eitt mistak, at føroyska umboðsstarvið á Íslandi varð niðurlagt.

Tað var eitt framstig at fingið:

a) *Serkønan mann í utanríkisráðið* á statsins kostnað,

b) *men á donsku umboðsstovurnar í útlandinum*, har ið vit halda tilík umboð hava sertigan týðning fyri føroyingamna áhugamál í útlandinum. Hesir verða settir á okkara egna kostnað sambært stýrisskipanina.

At tíst hendu táttin í okkara framtíðar arbeiðsskrá, hugsaðu menn, vildu tannig at havi almiklan týðning fyri land og fólk okkara, so stall sum okkara lív meiri og meiri er treytað av góðum handils- og øðrum viðurskiftum úteftir.

Utanríkisráðið, ambassadur, gesantskap og konsulátir vildu við húsarúmd, skrivstovuhjálp og øllum sínum kunnleika til tey yntsu fremmandu londini verið okkara mannum til alla møguliga hjálp.

Okkum kemst, at hetta dubbingararbeiði til búnaskap í utanríkistænasta fyrst má verða gjørd til lítar, eins og samráðingar við danir um fyrimunirnar at leggja á annan bógn fyrst megu fara fram, áðrenn talan kann verða um stórbroyting í stjørnarskipanini fyri at kunna heill ella lutliga yvirtaka utanríkismál Føroyum viðvíkjandi.

Fyrsta málið utanríkisliga er sjálvandi at skapa føroyingum tu sterkastu støðuna, álit, besta skilið og handalagið til samráðingar um okkara áhugamál, hvørji tey so eru, og hvar ið tey so kunnu stinga sig upp. Og tað er eyðsæð, at tað í mongum tilfelli kann vera veldugur fyrimunur at fáa stuðul og vegleiðing frá mannum og slovnum, sum ígjøgnum oldir hava vunnið sær kunnleika til fremmandu londini, síð teirra og skikkir, fólks teirra lyndi og lívskrav, keypiorku og søkutrongd, vinnuliv og samarbeiðsmøguleikar okkum viðvíkjandi.

Tað er ávist, at danir í summum førum kunnu hava interessur í framleiðslu og handli utanríkisliga, sum ikki ganga á sama bógv sum okkara.

Hetta er eyðvitað rætt.

Men tað vil vist vanliga verða, sum royndir vístu í samráðingunum viðvíkjandi útflytingini av fiskimarkinum hjá føroyingum andvegis Bretlandi: Hóast harðliga hildið fram, at danir í Stóra Bretlandi hevdu aðrar interessur enn okkara, ja interessur, sum beinleiðis gingu ímóti

okkara interessum, visti teir seg at vera menn til at dugna okkum og leggja alla áherðslu á at fremja fiskimarkskrav. Teir gjørdu tað so vel, at sjálvt menn og flokkar, sum hevdu verið hvassastir móti heimastýris sljørnarlagnum, ikki bara takkaðu, men gjørdu tann danska leiðarin av stríðnum fyri føroyska fiskimarkið út á 12 mil út frá beinum grundlinjum til føroyskum riddara fyri meguarverk sítt fyri Føroyar, hin hægsti heiður og mesta tøkk, sum givin eru nøkrum manni frá føroyskari síðu. Men hetta verður ikki sagt fyri, at vit skulu lita meiri á annar, verið tað seg danir ella hvør tað so skal vera, enn á okkum sjálvan. Tvørturímóti. Vit skulu altíð vera varnir, vaknir og ansa eftir, at okkara áhugamál ikki verða sett til viks fyri aðrar interessur. Longu av hesum grundum eiga vit at hava mannin í uttanríkisráðið og menn á ymsu donsku almennu umboðsstovurnar. Hetta takið eigur at verða tikið, og tað annars frammanfyri umrødda dubbingararbeiðið til uttanríkisrøktina eigur at verða gjørt, áðrenn farið verður viðari enn gangast kann innanfyri heimastýrislógina.

Fyri at vera varnir og fara hóliga fram í uttanríkismálunum talar eisini tann veruleiki, at uttanríkistátturin í umsitingini er hin dýrasti, um røktin av áhugamálum okkara har skal vera góð.

At taka okkum fram ájavnt við hini londini í vinnu og mentum og øllum valferðarmálum krevur almikið av peningi, nógv meiri enn vit hava tøkan her á landi!

Jú størri yvirtøkur, vit fara undir, tess veikari verða vit at loysa uppgávurnar, ið leika á, bæði vinnuliga, sosialt og mentunarliga.

5. Avtøkan av føroysku fólkatingssessunum.

Bæði av principiellum og praktiskum grundum eru javnaðarmenn móti avtøkuni av føroysku fólkatingssessunum.

Strikandi undir tu demokratisku hugsjónina sum ókronkiliga halda javnaðarmenn fast um, at føroyingar skulu verða umboðaðir allastaðni har, ið lógir verða smiðaðar og bindandi avgerðir verða tiknar føroyskum interessum og interessuøkjum viðvikjandi, og teir ásanna, at tað hevur alstóran praktiskan og politiskan týdning, at føroyingar hava høvi at tala føroyingana vegna á danatingi, har sum sagt øgrynni av andaligum og figgjarligum áhugamálum hjá føroyingum verða viðgjørd og avgjørd.

6. Heilt føroyinganna.

Tað er í samljóð við hugsjón javnaðarmanna viðvikjandi bú- og mannarættindum, at maður vinnur hesi rætlindi ájavnt við fólkið í landinum, har ið hann setur búgv. Tí er tað í fullum samljóði við javn-

nðarmannastøðuna, tá ið stjórnarskipanin sigur, at dani fær búrættarliga heiti sum føroyingur, tá ið hann er fluttur til Føroyar at búgva, eins og føroyingurin fær búrættarliga heiti sum dani við øllum rætti su nidanir hava í Danmark, tá ið hann flytir til Danmarkar at búgva. Litir og fólkasløg skilja ikki í samlúskapi, men heiti menniskja javnsetur øll við sama búrætti sum landsmenn við sonu skyldum og rettindum.

Hjá okkum javnaðarmonnum býður ímóti at broyta stjórnarskipanina fyri at skráseta landsstýrisins orðalag av, hvat ið skilst við ein føroying í Føroyum. Hetta vildi verið aftur at laga garð manna millum har, ið hitt frælsa menniskja og mælastu hugsjónarmenn hava barst fyri at leggja skiljandi mark niður.

Bústaðurin gevur monnum við felags borgararætti, sum búgva á sama staði, felags fólkaheiti og ikki vøggan ella ættarlagið ella tann mannaheitsflokkan, ein áður hevur verið ein partur av. Her sjálvandi bara talan um ta búrættarligu flokkingina. Ættarliga og fólkalagsliga verður ein dani framvegis dani, um hann so flytur til annað fólk og land og fær borgararættin har. Sama er tilfelli vi ðeinum føroyingi, kinesara, amerikanara, ella hvat fyri maður, tað er, ið talan er um hevur fingið borgararætt aðrastaðni, hagar hann er fluttur og búsettur.

7. Serlig føroysk frímerki.

Um føroysk frímerki hevur verið talað sum eitt nationalt mál, tí frímerki hera Føroya navn so langt sum brøv okkara og postsendingar fara, og tað er langt, tí liðið av okkara monnum, sum sigla øll høv og ferðast kring allan jarðaknøttin, er stórt; og allastaðni har ið teir fara, okkara sjómenn og ferðandi fólk, fylgja brøv og postur teimum eftir frá Føroyum.

Grønlendingar hava teirra egnu frímerki. Tað ber tí til hjá okkum sum hjá teimum at skipa so fyri í postverkinum, at vit fáa okkara egnu frímerki. Her krevst eins og tilfelli var hjá grønlendingum serligar samráðingar við alheimspostskipanina. Men tær kunnu ikki volda okkum størri trupulleikar enn grønlendingum.

Hesin spurningur er reistur á danatingi, men er ikki løkin, og tað er einki at ivast í, at í sonu løtu spurningurin um serlig føroysk frímerki verður reistur av løgtinginum og landsstýrinum, verður tikið undir við honum niðri.

Frímerkini er tað nationala í postverkinum, og verður frímerkjaspurningurin greiddur, er óneyðugt at yvirtaka postverkið, tí her ræður tað, sum ræður í flestu yvirtøkuspurningum, at aðrar veldugar fíggjarligar og vinnuligar uppgávur krevja í løtuni og langa tíð fram eftir nógv meira

peniug, eun vit hava tøkan. Hetta ber við sær, at kostnaðarmiklar yvirtøkur mega bíða, til betri umstøður verða.

Annars er yvirtøka av postverkinum eitt av a-málunum, ið kunnu verða yvirtikin uttan at gera meiri enn at samlykkja tað á tingi og í landsstýri.

Sjálvandi verða samráðingar at fara fram um uppgerðina viðvíkjandi bygningum og øðrum fastognum postverksins her á landi. Tá ið menn feldu javnaðarmanna so skírda «rubb- og stubb støðnna» og samlyktu at gjalda statinum ognirnar til dagsvirði, verður tað at bera við sær, at hvørja ferð talan er um yvirtøku, megu menn leggja á borðið tað dagsvirði, statsins ognir hava her. Postverksins ognir, bygningar og annað, verður so statt at rindast statinum við fulla virðinum.

8. Verjuskipanin sum sermál ella felagsmál ella sum nú bara ríkismál?

Talað hevur verið um at taka verjuskipanina og loysa danir frá allari sjóverjuskyldu í Føroyum.

Tað er ikki ov nógv sagt, at hin besta sjóverja hjá okkum er meira áleikandi enn flestir av øðrum áleikandi stórum spurningum her á landi.

Men tað má tessverri sigast, at sjóverjan hevur ikki verið í lagi, tí allir útróðrarmenn vita, at fiskiljóvarnir, trolararnir, hava kunnað í stórum muni fiskað innan fyri, uttan at tað hevur borið til at tikið fleiri enn bara hendinga trolara onkuntið við langari tíð í millum. Bara eitt sjóverjuskip hevur verið og ofta fitta tíð innan í millum einki.

Men tað má eisini verða sagt, at hetta nýggja verjuskipið við helikoptara hevur munað nógv meiri enn nakað annað skip áður. Serliga hevur tað verið gleðiligt, at royni hevur verið *allíð* at hava eitt helikoptaraskip í Føroyum.

Men eitt skip er ongantíð nóg mikið, sjálvt um tað hevur helikoptara at senda út til «rekogniseringar».

Tingið hevur samtykt at byggja eitt vaktar- og bjarggingarskip at arbeiða saman við helikoptaraskipinum.

Hetta var klárt at fara til byggingar, tá ið seinasta landsstýrið fór frá. Men einki skip er bygt enn, hóast sitandi landsstýrið hevur óskerda heimild at lata tað byggja og um neyðugt at taka lán, um ikki nóg mikið av tøkum peningi er falur at gjalda við.

Harmiligt at tað hevur dráað og drálað soleiðis við byggingini av tí føroyska vaktar- og bjarggingarskipi, tí av rottum skuldi tað verið tøkt til nýtslu, tá ið fiskimarksspurningurin var greiddur.

Løgtingsins ynski var og er, at skipaðin á vaktar- og bjarggingarskipinum skal hava politimyndugleika. Men samlaert konventiónina av 1901 millum Stóra Bretland og Danmark skal inspektiónin vera hildin av

marinuni ella ið hvussu er av einum statsskipi,. Fyri at vit kunnu fáa politimyndugleika til okkara tilætlaða vaktar- og bjargingarskip,megu samráðingar takast upp millum bretar og danir um broyting av konventiónini, so okkum kann verða givin henda myndugleika. Men hesum spurningi sýnist sitandi landsstýrið ikki at hava tikið sær av.

Ísland, ið sum ein partur av tí danska ríkinum var undir nevndu konventión, hevði eina serskipan, so teir kundu taka lut í eftirsanini við fiskimarkinum. Samstundis, ið vit royna at fáa broytt konventiónina av 1901, eigur skipanin, íslendingar høvdu inspektiónini viðvíkjandi, at verða kannað, um hon fyribils kann verða nýtt hjá okkum, til less nevnda konventión er avtikin ella broytt, so hon ikki longur forðar dønum at skipa fyri óheftum politimyndugleika til føroyska skipið at vera við at verja fiskimarkið við Føroyar.

At veita hina hollastu verju av fiskimarkinum til vega er javnaðarmanna støða í sjóverjuspurninginum, og hetta er so stór uppgáva, at førvur er á, *at bæði danir og føroyingar taka hendur saman at loysa henda spurning.* Javnaðarmenn mæla tí til,

at hildið verður fram við donsku inspektiónini við helikoptaraskipinum,

at hitt umrødda føroyska vaktar- og bjargingarskip verður bygt sum skjótast til arbeiðis saman við helikoptaraskipinum,

at danastjórn verður biðin um beinanvegin at taka upp samráðingar við bretar um avtøku ella broyting av konventiónini av 1901, so hon ikki kann tarna, at føroyska skipið fær umrødda politimyndugleika.

at eggja øllum fiskimonnum at halda eygu við trolarunum og øðrum fiskiveiðitjóvum við Føroyar og boða avvarandi myndugleika frá, tá ið teir siggja skip váða sær inn um fiskimarkið at reka ólógligan fiskiskap.

Fyri á henda hátt at bøla um sjóverjuna nýtist ikki at brogta sjørnarskipanina.

Sum positivur úrdráttur av frammanfyristandandi spurningum verður sett fram uppskot samsvarandi (smbr. II).

Ein minniluti (Trygve Samuelsen) ger hesar viðmerkingar:

Uppskot landsstýrisins um broytingar í heimastýrislógini her formelt í sær ikki loysing frá ríkinum, í hvør fall ikki í fyrsta umfari, men broytingarnar gjøgnumgata heimastýrisskipanina soleiðis, at lítið og einki verður eftir.

Broytingar, sum landsstýrið skjýtur upp at gera, eru í stuttum hesar:

1. Tað verður eingin munur gjørdur viðvíkjandi yvirtøku av A-málum

og B-málum, t.v.s. at kalla øll fyri okkara samfelag týðandi málsøkir verða gjørd til principiel føroysk sermál, og kunna so statl yvirtakast av heimastýrinum, t.v.s. av løgtingi og landsstýri uer sum helst og uttan nakra samráðing við ríkismyndugleikarnar.

2. Føroyar yvirtaka heimanvegin ein part av uttanríkistænastuni, sjálvt um uttanríkismál eftir heimastýrislógini eru ríkismál.
3. Tann í heimastýrislógini tryggjaði líkarættur hjá øllum ríkisborgarum í Føroyum viðvkjandi valrætt og valføri v.m. verður strokin.
4. Reglurnar í heimastýrislógini um at danskt mál skal lærast í skúlunum og kunna nýtast í almennum viðurskiftum verða stroðknar.
5. Fólkatingsumboðini verða avtikin.

Fyriuttan hesar undir 1—5 nevndu broytingar innibeldur uppskot landsstýrisins broytingar í heimastýrislógini viðvíkjandi ríkislógum, passi, flagginum o.ø.

Sambandsflokkurin heldur, at tann ríkisrættarliga støða, sum núgaldandi heimastýrislóg fyrisetir, er tað uttasta mark, ið farast kann til í føroyskum stjórnarpolitikki, og kann flokkurin tí ikki ganga við til nakra broyting í heimastýrislógini, ið ger ta núverandi ríkisrættarligu støðu veikari. Eisini stendur tað sambandsflokkinum greitt, at uppskot landsstýrisins er eitt lið í ætlanum landsstýrisins og flokkum tess at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum. Grein 14 í heimastýrislógini sigur, at «Føroyar eru á ríkisdegnum umboðaðar við minst tveimum limum. So leingi ríkisdagurin er býttur í tvey núverandi tingini, eru Føroyar umboðaðar við einum limi í landstinginum, smbr. grundlógarinnar gr. 36, og tveimum limum í fólkatinginum.» Eftir grundlógini frá 5. juni 1953 er landstingið niðurlagt, og sambart gr. 28 hevur fólkatingið hægst 179 limir, harav 2 verða valdir í Føroyum. Minnilutin skjýtir tí upp, at nevndu gr. 14 í heimastýrislógini verður ajourført, so hon samsvarar grundlógina. (smbr. III).

I. Samsvarandi tí sum tilskilað er í álitinum setur meirilutin í nevndini fram soljóðandi:

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR

um fylgjandi broytingar í lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 um føroyskt heimastýri:

1) § 2.
Ordene «under A» udgår.

2) § 3.
Udgår.

3) § 7 affattes således:
«Love og andre retsforskrifter givet af de danske rigsmyndigheder træder i kraft på Færøerne når disse er tiltrådt af de færøske myndigheder.

På tilsvarende måde forholdes der med traktater og andre internationale overenskomster.»

4) § 8, stk. 3 og 4 affattes således:
«I anliggender, der udelukkende vedrører Færøerne, fører de færøske myndigheder forhandlinger og slutter aftaler med udlandet.

Hvor det drejer sig om anliggender der iøvrigt vedrører Færøerne, har de færøske myndigheder ret til at lade sig repræsentere, når rigets myndigheder fører forhandlinger og slutter aftaler med udlandet.»

5) § 10 affattes således:
«I et på færøerne for en Færing der udstedt pas anføres «Føroyingur» og «Føroyar».

6) § 11 affattes således:
«Det færøske sprog anvendes i alle offentlige forhold på Færøerne, dog kan dansk efter aftale mellem rigsmyndighederne og de færøske myndigheder anvendes på områder, der ikke er overtaget som færøske særanliggender.»

7) § 12 affattes således:
«Rigsmyndighederne meddeler andre stater anerkendelse af det færøske flag, som Færøernes officielle flag inden og udenfor Færøerne.

Rigsmyndighederne anvender på Færøerne Dannebrog også for skibenes vedkommende. Der skal være ret for private – såvel personer som selskaber, foreninger og institutioner – til på land at anvende Dannebrog.»

8) § 14.
Udgår.

9) § 15.
I stk. 2 sidste punktum udgår ordene «eller landsstyret».

II.

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR

(minnilutans Poul J. Olsen og P. M. Dam)

1. Danska ríkisstjórnin verður biðin um at lýsa ella á annan hátt at skipa fyri, at føroyinganna rettur at nýta flagg sítt allastaðni á sjógvi og á landi sum tjóðarmerki javnbjóðis øllum øðrum tjóðum verður øllum mannum kring knøttin kunnugur til virðingar og góðtakingar.

2. Heitt verður á donsku stjórnina um við fullum hugn at taka undir

við føroyingum í ynski teirra at verða limur í Norðurlendska ráðnum á jøvnum føri við himar norðurlendsku tjóðirnar.

3. Heitt verður á donsku stjórnina at skipa fyri, at pass føroyinganna verður skrivað soleiðis, at tað er ásýnligt og eyðsæð, at tann, ið tað viðvikur, er føroyingur við donskum ríkisborgaraskapi.

4. Sum skotið upp eiga føroyingar at gera brúk av rættinum at fáa serligt føroyskt umboð sett í danska uttanríkisráðnum og fáa mann (menn) á danskar umboðsstovur har, ið føroysk áhugamál sum handilsmál, vinnulívsmál og menningarmál leika á. Samstundis verður víst á yvir fyri ríkismyndugleikunum sum verandi náttúrligt og í samljóð við forútsetningarnar í stjørnarskipanini, at føroyingar verða umboðaðir í donsku uttanríkisnevndini.

5. Haldandi fram, at føroyingar sambært sátt demokrati eiga rætt og skyldu at vera umboðaðir alla staðni har, ið teirra áhugamál leika á, verður týdningurin av teirra umboðan á danatingi, har ið mong av áhugamálum teirra verða viðgjørd og avgjørd, undirstrikaður.

6. Sambært ta demokratisku hugsjónina um javnrætt allra landsins íbúgva til búskap, arbeiðis, andaliga og handaliga menning, landsins vernd og varðveiting, várkunnan og forsorg verður ásannað sum rætt, at menn bera heiti: føroyingur, dani, svii, brefi o.s.fr. eftir landinum, teir hava fest búgv í uttan mun til, um teir eru bornir aðra staðni og komnir haðani við arvarætti til rættindi, ið føðilandi gevur.

7. Skorðað verður á ta donsku stjørnina sum ynskiligt, at føroyingar verða at fáa serlig føroysk frímerki á sama hátt sum grønlendingar hava fingið serlig grønlendsk frímerki.

8. a) Hitt áður samtykta føroyska vaktar- og bjargingarskipið verður at byggja sum skjótast til arbeiðis saman við donsku sjóverjuni við Føroyar.

b) Heitt verður á donsku stjørnina beinanvegin at taka upp samráðingar við bretsku stjørnina um avtøku av konventiónini av 1901, so hon ikki kann førða ella tarna, at føroyska vaktar- og bjargingarskipi fær umrædda polilimyndugleika.

c) Eggjað verður øllum fiskimonnum og øðrum, ið fáa eyga á veiðitjóvar innan fyri føroyska fiskimarkið at siga avvarandi myndugleika frá.

III.

UPPSKOT

frá minnilutanum (Trygve Samuelsen):

§ 14 i hjemmestyrelsesloven affattes således:
«Færøerne er i folketinget repræsenteret ved to medlemmer, jfr. grundlovens § 28.»

2. viðgerð 13. og atkvøðugreiðsla 14. mai 1966.

Uppskot frá meiralutanum í nevndini (Hanus við Høgadalsá, Marius Johannesen, Kjartan Mohr og Poul Petersen)

punkt 1) fall 14—9.
punkt 2) fall 14—0.
punkt 3) & 4) samtykt 15—7.
punkt 5) fall 14—6.
punkt 6) & 7) samtykt 15—0.
punkt 8) fall 14—5.
punkt 9) samtykt 15—1.

Uppskotið frá minnilutanum (P. M. Dam og Poul J. Olsen) fall 7—0.

Uppskotið frá minnilutanum (Trygve Samuelsen) afturtikið.

---

12. Broytingar í lógini um Føroya løgting

Ár 1966, 25. januar legði løgmaður fram soljóðandi:

Í løgtingsskúmi 1963 legði landsstýrið fram uppskot til løgtingslóg um broytingar í lóg um Føroya løgting, jbr. Løgtingstíðindi 1963, bls. 87.
Málið fekk 1. viðgerð og varð beint í nevnd, men kom ikki tilmæli frá nevndini.

Í løgtingssetuni 1964 legði landsstýrið málið aftur fyri løgtingið og var úrslitið aftur tað, at málið aftaná 1. viðgerð varð verandi í nevnd.

Við hesum loyvir landsstýrið sær at endurnýggja framloguna frá 1963.

1. viðgerð 1. februar og 20. april legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Í hesum máli, sum var lagt fram av landsstýrinum 19. mars 1964 (løgtingsmál nr. 27/1963) og fekk 1. viðgerð 3. april 1964 og hevur verið framafturlagt í 1965 og 1966, hevur landsstýrið skotið upp at broyta valreglurnar soleiðis, at *listasamtak* verður heimilað, tó ikki í valinum av eykavaldum, og soleiðis at tað verða tær persónligu atkvøðurnar, ið telja í valinum millum valevnini á einum lista.

Harnæst fer valið eftir uppskotinum fram, eftir ríkislógini um fólkatingsval frá 28. mars 1956 í staðin fyri sum higartil eftir lógini frá 28. april 1916 við broytingum.

Viðvíkjandi valstøðum er uppskotið, at landsstýrið skal hava heimild til at ásetta fey við kunngerð og vídd teirra, ístaðin fyri sum higartil ríkismyndugleikarnir.

Við val til fólkatingið er ásett í ríkislógini, at stillaratalið skal vera frá 1 til 50. Landsstýrið skjýtur upp, at stillaratalið verður 1 til 10 við løgtingsval í staðin fyri sum higartil frá 5 til 10.

Eftir lógaruppskotinum skulu nú vallistarnir liggja frammi til alment eftirlit fyrstu vikuna, beint aftaná at løgtingsval er útskrivað.

Lógarnevndin hevur havt málið til viðgerðar og er samd um at mæla til broytingina viðvíkjandi teimum persónligu atkvøðunum og at mæla frá broytingini viðvíkjandi listasamtaki.

Nevndin viðmerkir annars viðvíkjandi landsstýrisuppskotinum:

ad 1: §§ 39-49 í fólkatingsvallógini viðvíkjandi brevatkvøðum eru har ikki tiknar við sum galdandi fyri løgtingsval, og tað man vera skeivt.

ad 2: Har man vera meint valdeildir og ikki valdømi.

ad 3: Har eigur at standa 3. 5. stk., ikki 3. 4. stk.

Ein minniluti hevur fylgjandi viðmerkingar:

Tað er eingin grund givin til at broyta reglurnar um talið á stillarunum, og tað man eingin grund vera til tess.

Í heimastýrislógini § 10, 2. stk. stendur í 1. pkt., at «Valgret og valgbarhed til organer, der henhører under det færøske Hjemmestyre, kan gøres afhængig af, at vedkommende er Færing», og í 2. pkt., at *«iøvrigt*

kan der ikke i lovgivning eller i forvaltning gøres forskel på Færinger og undre statsborgere».

Skal nøkur meining vera í hesi løgreglu má vera heimilt at skilja ímillum føroyingar og danir, hvat valrættur og valbæri viðvíkur.

Hetta tykist neyðugt nú, ið danir í stórum tali, eitt nú sum hermenn, eru staddir í Føroyum. Tað tykist lítið rímligt, at ein dani, bert hann kemur til Føroya og verður skrásettur á manntalsskrivstovuni, eisini skal koma ávallista og so kunna velja, stilla upp ella verða uppstillaður til føroyskt val.

Fyrsta treytin fyri valrætti í Danmark er, at viðkomandi hevur danskan rikisborgarrætt.

Til heimastýrislógin er avtikin ella broytt, og meðan føroyskur borgarrættur er ikki til, fáa vit ikki nýtt slíkt kriterium.

Men tað vil bøta um óskilið, um tann treyt — sum full heimild er til, og sum áður hevur verið við kommununval — at tað krevst, at veljari hevur búð tvey ár í Føroyum. Hetta vil ikki ráma føroyingar, sum koma úr útlondum, uttan so er, at teir ikki á ævuni hava búð 2 ár í Føroyum, og tað fer at vera rárt. Ei heldur rámar tað danir her, sum veruliga eru fasthúgvandi.

§ 12, 5. stk. tykist ógreið og hevur verið tulkað, sum best her til. Eftir seinasta løgtingsval varð hon av løgtinginum móti tjóðveldisflokksins atkvøðum tulkað soleiðis, at hesin fekk 6 løgtingsmenn og ikki 7. Minnilutin mælir til lógarbroytingar, so at lógin verður greið í hesum, tí tað sønir seg ikki, at tað skal atkvøðast á tingi um, hvussu nógvir tingmenn flokkur skal hava, hvønn tað so ránar næstu ferð.

Minnilutin heldur, at 19 ár er hóskiligari valaldur enn 21 ár.

Øll nevndin setur so statt fram fylgjandi

UPPSKOT

Landsstýrisuppskotið verður samtykt við hesum broytingum:

ad 1: Næstsíðsta pkt. fær hetta ískoyti:
«og sammeiðis §§ 39—49»,
donsk tekst: «samt §§ 39—49».

ad 2: Orðaljóðið verður broytt til: «Landsstýrinum er heimilt í kunngerð at áseta valdeildir og valstaðir»,
donsk tekst: «Landsstyret bemyndiges til at fastsætte valgdistrikterne og valgstederne».

ad 3: «3-4 stk.» verður broytt til «3-5 stk.» í báðum tekstum.

ad 5-9: fellur niður í báðum tekstum.

(Poul Petersen subsidiert)

Minnilutin Sigurð Joensen setur hareinframmt fram fylgjandi

BROYTINGARUPPSKOT

ad § 2: 1. stykki, 1. punktum fær hetta orðaljóð:

Valrætt og valbæri til løgtingið hevur maður og kvinna, sum hevur fylt 19 ár, hevur heimarætt og fastan bústað í Føroyum valdagin og samfelt ella samanlagt hevur havt fastan bústað í Føroyum í minst tvey ár, uttan so at hann ella hon er dømdur ella dømd sok í gerð, sum eftir almanna áskoðan er vanærandi og henda fylgja av dómínum er ikki burturdottin.

Donsk tekst:

Valgret og valgbarhed til lagtinget har enhver mand og kvinde, som har fyldt sit 19. år, har indfødsret og fast bopæl på Færøerne på valgdagen samt har haft fast bopæl på Færøerne i mindst to år været sig sammenhængende eller i flere perioder, medmindre vedkommende ved dom er fundet skyldig i en i den offentlige mening vanærende handling, uden at denne virkning af dommen er bortfaldet.

ad §5, 2. stk.:

Punkt 4 í landsstýrisins uppskoti fellur burtur, soleiðis at lógin verður, sum hon er.

ad § 12, 5. stk.:

3. punktum verður orðað soleiðis:

Samanlagda atkvøðutalið hjá hinum flokkunum verður harnæst býtt við meðalatkvøðutalinum, sum áðurnevndi flokkur hevur uppá tingmannin og soleiðis sæst, hvussu stórt tingmannatal hinir flokkarnir skuldu havt tilsammans; brot yvir ½ verður hækkað til 1.

Donsk tekst:

Med dette partis gennemsnitlige stemmetal pr. mandat deles de andre partiers stemmetal, og således udfindes det, hvor stort et antal mandater, der herefter burde tilfalde disse partier tilsammen, idet en brøk, der er over ½ forhøjes til 1.

2. viðgerð 22. aprfl.

Broytingaruppskot frá Sigurð Joensen:
ad § 2 og § 12, stk. 5 fullu 6—0,
ad § 5, stk. 2 fall 0—0.

Broytingaruppskot frá nevndini til § 1 í landsstýrisins uppskoti:
nd. stk. 1 samtykt 25—0.
— 2 samtykt 26—0.
— 3 samtykt 26—0.
stk. 5-9 fullu 6—0.

3. viðgerð s. d.

Uppskotið frá landsstýrinum so broytt samtykt 26—0.

---

13. Kvöld- og ungdómsskúlar

Ár 1966, 25. januar legði Niels Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi:

Í løgtingssetuni 1963 legði landsstýrið fram uppskot til samtyktar um at seta í gildi kongiliga fyriskipan «om ungdomsskoleundervisningen og aftenskoler m.v. på Færøerne», jbr. løgtingsmál nr. 46/1963 og Løgtingstíðindi 1963 bls. 159.

Løgtingið samtykti at senda landsstýrinum málið aftur, so kommununar kundu fáa høvi til at geva tí tilmæli.

Eftir at hetta var gjørt, legði landsstýrið málið aftur fyri løgtingið í løgtingssetuni 1964 við yvirliti yvir ummælini frá kommununum. Málið fekk 1. viðgerð og varð beint í nevnd, men kom ikki tilmæli frá nevndini.

Við hesum loyvir landsstýrið sær at endurnýggja framløguna frá 1963.

1. viðgerð 31. januar og 15. apríl legði skúlanevndin fram soljóðandi

ÁLIT:

Í 1961 setti Føroya Skúlastjórn nevnd niður til at kanna spurningin um kvøld- og ungdómsundirvísingina í Føroyum og koma við uppskoti um møguliga skipan í hesum máli. Nevndin var liðug við arbeiði sítt í

1963, og eftir at skúlastjórnin hevði kannað tað og gjørt sínar viðmerkingar, varð uppskotið sent landsstýrinum við viðmæli frá stjórnini.

12. februar 1964 legði so landsstýrið løgtingsmál nr. 46/1963: Kvøld- og ungdómsskúlaundirvísingin sum uppskot til samtyktar fram á ting. Uppskotið frá landsstýrinum mælti til at samtykkja, at uppskotið «om ungdomsskoler og alterskoler m.v. på Færøerne» varð sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan við teimum broytingum, sum skúlastjórnin hevði gjørt í brævi til landsstýrið dagfest 22. januar 1964.

Málið kom til 1. viðgerðar og varð beint í nevnd, men nevndin helt seg ikki kunna mæla til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum so beinan vegin, men mælti til at senda málið til ummælis hjá kommununum, og varð hetta samtykt.

Málið var so av landsstýrinum sent kommununum til ummælis, og av 32 kommununum, sum svaraðu, hevði ongin nakað at finnast at uppskotinum. 16 ella helvtin av kommununum góvu tí beinleiðis viðmæli, meðan hin helvtin hevði ongar viðmerkingar at gera. Tann 16. januar 1965 legði so landsstýrið uppskotið upp aftur fyri tingið sum løgtingsmál nr. 22/1964. Tað kom til 1. viðgerð og varð beint í nevnd, men hesa ferð kom tað ongantíð aftur til tingið.

Aftur 25. januar 1966 legði landsstýrið sama uppskot fram, og 31. januar var tað til 1. viðgerð og varð beint í nevnd.

Nevndarlimirnir eru teir flestu teir somu, sum hava viðgjørt málið allar hesar ferðirnar, so teir hava sjálvandi sett seg gjølla inn í málið og allir tykjast at halda, at tað hevði havt stóran týdning, um tað kundi verið framt. Men summir bera ótta fyri stórum útreiðslum, og aðrir fyri læraratrotið, um hetta verður sett í gildi.

Til hetta kortini at siga, at um nakar skuldi borið ótta fyri slíkum, so kundi tað verið kommununurnar, tí um allar lær uppgávur, sum eru innihildnar í uppskotinum, vóru settar í verk í einari kommunu, so kundi tað farið at kenst eitt sindur tungt; men hesum er helst ikki at óttast fyri.

Tey tiltøk, sum kunnu setast í verk eftir uppskotinum, eru kvøldskúlar, ungdómsklubbar og sovorðið. Kvøldskúlarnir hava vil frammanundan og tað nógva av hinnum verður helst ikki framt uttan í teimum størri bygdunum, og tær geva allar uppskotinum viðmæli.

Ikki er hetta eitt lógaruppskot, sum alt verður framt í senn. Heldur gevur tað møguleikar til at gera okkurt fyri ungdómin, har sum størsti førvur er til tað og har, sum vilji og umstøður annars eru fyri at fara undir sllkt arbeiði. Men úti á smábygdunum verða neyvan møguleikar fyri at fara undir stórt annað ungdómsarbeiði enn kvøldskúlar sum higartil, og tí kundi tað kanska verið ein hjálp til hesar bygdir, um

uppskotið eisini gav møguleikar fyri útvarpshásskúla, sum helst ikki hevði verið so ringur at fingið í lag.

Viðvikjandi rakstrinum av kvøldskúlum, kvøldháskúlum, ungdómsklubbum og slíkum er ætlanin, at kommunan skal lata høli við ljósi og varma og 30 % av læraralønunum, meðan statur og landskassi lata 70 %, sum verða býtt millum stat og landskassa við ávikavist ⅔ og ⅓.

Annars er eisini uppskot um at gera tað lagaligt hjá ungmannafeløgum at fáa sær sini egnu samkomuhús.

Eftir uppskotinum lata landsstýrið og statur 50 % í avdragsfríum láni við øðrum veðhaldi í húsunum og til 4 % í rentu, meðan ungmannafelagið ella annar slíkur stovnur letur 16 ⅔ % sum eginpening, og so er møguleiki fyri at fáa vanligt sparikassa- ella bankalán til 33⅓ % av kostnaðinum móti 1. veðhaldi í húsunum. Hetta eru so lagalig kor, at ungmannafeløg, sum ætla at fáa sær egin hús, munna fegin fara at taka móti slíkum tilboð. Og ongar aðrar treytir eru settar enn tær, at húsið skal vera sjálveigandi stovnur, og yvirslag og teknningar góðkendar av landsstýri og undirvísingarmálaráði.

Eisini er møguleiki fyri at keypa gomul hús eitt nú úti á bygd og seta tey í góðan stand. Tá verða 75 % av útreiðslunum latin í láni við somu treytum.

Til at standa fyri hesum ungdómsarbeiðinum, leggja tað til rættis og styðja tað upp á besta máta verður skotið upp, at ein nevnd verður sett við 14 limum. Ein so stór nevnd má haldast at vera all ov tung og dýrgoldin at arbeiða við, og so leingi hvørki kommunur, ungmannafeløg ella kvinnufeløg hava tikið sog saman í landsfeløg, verður tað torført at fáa limir valdar frá hesum stovnunum.

Skotið verður tí upp, at ungdómsnevndin hevur hert 5 limir: landsstýrismaðurin, sum hevur skúla- og mentamál í hondum, ríkisumboðsmaðurin, 2 limir valdir av løgtinginum og landsskúlaráðgevarin.

Tá ið vit vita, hvussu nógv arbeiði verður gjørt millum ungdómin og fyri hann í okkara grannalondum, fer tað at bera illa til at lálast sum onki hjá okkum. Higartil hevur ongin lóggáva verið her, sum hevur gjørt tað møguligt at tikið eitt sovorðið ungdómsarbeiði upp fyri álvara, tó at royndir eru gjørdar eitt nú á Tvøroyri og í Havn. Men verður hetta uppskotið sett í gildi, so eru møguleikarnir har, og so við og við munnu fólk fara at gera nýtslu av teimum.

Í brævi dagfest 14. apríl 1964 hevur ríkisstýrið eftir áheitan frá nevndini, sum hevði málið til viðgerðar í seinastu sefu, sett upp eina ætlan um, hvørjar meirútreiðslur munnu fara at standast av hesum uppskotinum, um tað verður samtykt. Meirútreiðslurnar eru hesar, sum tær vóru ætlaðar fyri 1964/65:

A. Ungdómsnevndin:		
1. Ungdómsráðgevari (6. lkt.)	30.000,—	
2. Skrivstovu-, ferðaútreiðslur o.a.	12.000,	42.000,—
B. Frítíðarfyriskipanir:		
1. Ungdómsklubbar	27.000,	
2. Útferðarskúli (leirskoleopph.) o.a.	13.000,—	40.000,—
	tilsamans	82.000,—

Útreiðslurnar undir A verða býttar helvt um helvt millum landskassa og ríkiskassa, meðan útreiðslurnar undir B verða bornar við 46 ⅔ % av ríkiskassa, 23 ⅓ % av landskassanum og 30 % av kommununi ella øðrum privatum stovni. Fyri klubbar við friari atgongd er býtið kostini 40 % til ríkiskassan, 20 % til landskassan og 40 % til kommunu ella privat.

Eftir hesum skuldi býtið verið hetta:

Landskassin	ca.	20.000,—
Ríkiskassin	ca.	40.000,—
Kommunur ella privat	ca.	22.000,—
Tilsamans	ca.	82.000,—

Hetta er meting fyri fyrsta árið. Tá verður ikki roknað við, at lánspurningur sambært greinirnar 12 og 13 kemur fyri, og ætlanin sum heild má sjálvsagt takast eitt sindur við fyrivarni, við tað, at vit ongar royndir hava serliga viðvikjandi frítíðarskipanum í Føroynum.

Men verður nakað munandi gjørt fyri at økja nu arbeiðið millum ungdómin við t.d. kvøldskúlahaldi og øðrum, so magu vit eisini rokna við fleiri útreiðslum, og ríkisumboðið heldur í bravi sínum, at málið í fyrstu syftu má vera at tvífalda tímatalið á kvøldskúlanum, og tað ger, at útreiðslurnar hækka til 150.000 kr., sum verða at býta soleiðis:

Landskassi	ca.	35.000,—
Ríkiskassi	ca.	70.000,
Kommunur ella privat	ca.	45.000,
Tilsamans	ca.	150.000,—

Verður settur ein ungdómsráðgevari, og hann og ungdómsnevndin fara at gera eitt arbeiði fyri at nøra um arbeiðið millum ungdómin á ymsan hátt, so má ein rokna við, at útreiðsluartar vaksa hareftir, men tað verður so ikki í fyrstu syftu, og annars er onki annað at ynskja eftir, uttan at so nógv verður gjørt fyri ungdóm okkara sum gjørligt, og eitt, sum er ógvuliga ábrokandi er, at ungdómshús verða bygd, og tá kemur sjálvandi spurningurin fyri um lán frá ríki og landskassa.

Við í málinum er bræv dagfest 31. januar 1966 frá Ditlev Olsen, fyristøðumanni á Statens skole for høre- og talelidende í Føroyum, har hann mælir frá at seta gr. 6, 2. stk., seinasta petti og gr. 9, 1. stk. 1. petti í uppskotinum í gildi.

Sonnuleiðis er bræv frá Føroya skúlastjóra dagfest 7. februar 1966, sum ívørtur imóti mælir til at seta nevndu stykkir í gildi, og aftur bræv frá Ditlev Olsen dagfest 10. februar 1966, har hann mælir frá at seta 2. stk. seinasta petti í gr. 6 í uppskotinum í gildi.

Nevndin heldur onga grund vera til at broyta nakað hesum viðvíkjandi í uppskotinum um kvøld- og ungdómsskúlar í Føroynum.

Nevndin hevur býtt sig í ein meirihluta, Marius Johannesen, Johan Poulsen og J. H. Danbjørg, og ein minnihluta, Hans Lützen og Johan Simonsen.

Meirihlutin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við fylgjandi broytingum:

Grein 2: Í 8. punkti, 4. reglu verður «Skoledirektionens» broytt til «den godkendende myndigheds».

Grein 3: Sum nýtt punktum verður sett: «Der ålmes også muligheder for at etablere en aftenhøjskole på foredrags basis i forbindelse med Ólivarp Føroya. Ansøgning om godkendelse sker som anført i paragraf 7 om aftenhøjskoler og udgifterne afholdes på samme måde, som gælder for aftenskoler».

Grein 4: Í punkt 3) verður «16 timer skal» broytt til «ca. ⅔ bør».

Grein 9: Í 1. stk. verður «lovens paragraf 14» broytt til «paragraf 14 i lovbekendtgørelse nr. 257 af 14. juni 1960. Der ydes ikke feriegodtgørelse til de omhandlede lønninger.»

Grein 10: Í 1. stk., 3. reglu, aftaná «lokale» verður broytt til «2 aftener».

Grein 11: Í 3. stk. verður «træffer afgørelse» broytt til «afgør».

Grein 12: Í 2.stk. verður aftaná «landskassen» sett «sideordnet».

Grein 13: Í 1. stk., næstseinastu reglu verður «skolens eller» strikað.

Grein 14: 1. stk. í hesari grein verður strikað, og í staðin verður sett sum nýtt stk. 1 til grein 14:
«Der nedsættes et ungdomsnævn for Føroyar på 5 medlemmer. Nævnet består af vedkommende medlem af Færøernes landsstyre, som varetager undervisning, og kulturelle forhold i øvrigt,
rigsombudsmanden,
landsskolekonsulenten,
2 medlemmer valgt af lagtinget.»

Minnilutin heldur tað vera rættari at steðga við hesum málinum til uppskot til nýggja skúlaskipan kemur á ting og mælir tí til, at hetta málið verður beint í ta nevndina sum hevur m.a. nýggja skúlaskipan til viðgerðan og at hon samstundis setur fram uppskot í her nevnda máli.

U p p s k o t

Út frá hesum setur minnilutin fram soljóðandi

Fyriliggjandi mál verður beint til viðgerðar í landsstýrisnevnd viðvíkjandi føroyskari skúlaskipan.

2. viðgerð 22. apríl (atkvgr. 13. mai).
§ 1 í landsstýrisins uppskoti var sett undir atkvøðu við navnakall:

J a a t k v ø d d u: K. Wang, J. Lindenskov, J. H. Dahbjørg, Petur Christiansen, Marius Johannesen, Trygve Samuelsen, Leon Joensen, Andreas Djurhuus, Johan Poulsen, Reinhold Thomsen, Samuel Petersen.

N e i a t k v ø d d u: Niels Holm Jacobsen og Gunnar Poulsen.

A t k v ø d d u i k k i: P. Petersen, J. P. Davidsen, O. Schrøter, V. Nielsen, Fr. Hansen, Kj. Mohr, Hans Lützen, Poul J. Olsen, Hans J. Ellingsgaard, Sigurd Joensen, Johan Simonsen, Hanus við Høgadalsá og Haldor Hansen.

B u r t u r: J. Fr. Øregaard, Hans Iversen og Erlendur Paturssen.

Uppskotið fall 11—2.

14. Sjómannslögtingslóg

Ár 1966, 25. januar legði Erlendur Paturssoon landsstýrismaður fram soljóðandi:

I løgtingssetuni 1964 legði landsstýrið inn aftur á løgting uppskotið til sjómansløgtingslóg, jbr. løgtingsmál nr. 23/1964.

Málið fekk 1. viðgerð og varð heint í nevnd, men kom ikki tilmæli frá nevndini.

Vísandi hertil loyvir landsstýrið sær at endurnýggja framløguna.

1. viðgerð 31. januar og 12. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ALIT

Málið hevur verið framlagt bæði av hinum landsstýrinum og hesum í ymsum líki, seinast undir hesi tingsetuni hin 25. januar í ár.

Lógarnevndin hevur havt málið til viðgerðar og skal um tað fyriliggjandi prentaða uppskotið viðmerkja:

Uppskotið má fáa gjølligan rettlestur, tí tað eru prentvillur í báðum textum og málvillur í teirri føroysku tekstini. Tær frekastu av málvillunum eru rættaðar í einum av teimum prentaðu eintøkunum, men ammars heldur nevndin tað ikki vera sína uppgávu at gera gjøllari grein fyri hesum villum, uttan, táið so er, at stílurin og orðingin gevur skeiva ella misjavna meining. Lógin er umseting av donsku sjómannalógini, sum í sínum lagi er tann sama sum í hinum norðurlondunum. Tessvegna má verða gingið út frá hesi felags norrønu lóg, sum hon er í dag.

Broytingaruppskot nevndarinnar hava nú trý slog av orsøk:

1) Sjómannalógin norðurlendska er broytt síðan fyriliggjandi lógaruppskot frá landsstýrinum varð prentað.
2) Tann føroyska tekstin hevur givið skeiva meining, við tað at orð og setningar er burturdottin og/ella skeivt umsett.
3) Tá ið lógin skal vera føroysk sjómannalóg, ætlað til føroysk skip mest við føroyskari manning, ber ikki til uttan at rokna við skipsins og mansins heimstaði, Føroyum, sum avfaringarstaði. Nevndin hevur tí í summum greinum, har orðið «ríkið», «havn í ríkinum» stóð, broytt hetta til «Føroyar», «føroysk havn».

ad 1): Vísl verður til niðanfyri standandi broytingaruppskot viðvikjandi §§ 15, 26, 41, 42, 56 og 79.

ad 2): Í § 15 eru orðini «eller fremmed havn, som det anløber» ikki umsett. Somuleiðis § 26 «ordner konsulen hjemrejsen» og § 46, 3. stk. «at foretage fordelingen af arbejdet mellem dem.»

Í § 33 (1) er «skjule nogen» umsett við «dylur okkurt».

Í § 35 er «anden stilling» ikki komið við í umsetingina, og gevur tað skeiva meiuing, somuleiðis táið orðið «rýmir» er nýtt í § 52.

Orðini «i Færøerne» í § 79 1. stk., sum bert eru í teirri føroysku tekstini, tykjast vera komin av misgáum.

Av tí at § 81 var niðurfeld sum óneyðug í føroyskari sjómannalóg vóru tey fylgjandi § nr. blandað.

Eftir at nevndin í niðanfyristandandi broytingaruppskoti hevur sett inn nýggja § 81 viðvíkjandi javnrættindi føroyinga, dana og grønlendinga við føroyskum skipum, eru sonn §-nr. aftur rættað soleiðis, at tey samsvara §-raðnum í hinum sjómannalógnum.

ad 3): Vísl verður til niðanfyristandandi uppskot til broytingar viðvíkjandi §§ 2, 12, 13, 14, 15, 19, 20; 26; 31; 41 3. stk.

Harafturímóti eru samsvarandi heiti veðin standandi, har ríkismyndugleikarnir eru uppi í, eitt nú §§ 43, 61, 67.

Annars skal nevndin viðmerkja, at sjómannalógin eftir sínum innihaldi og meining viðgev la rettarligu og socialu støðuna hjá skipara og manning á farmaskipum. Hetta er so í øllum norðurlondum. Munur er á mangan hátt millum fiskiskip øðrumegin, farma- og ferðamannaskip hinumegin. Tað ber minni enn so til í øllum førum at nýta reglurnar í sjómannalógini um viðurskifti fiskimanna. Av hesi orsøk hevur eisini gjørst neyðugt í øðrum londum at geva rettarskipanir um hetta, í hvønn mun sjómannalógin er nýtilig viðvíkjandi fiskimonnum, sbr. § 87 í hesum lógaruppskoti.

Tað er avgjørt neyðugt, at landsstýrið so skjótt sum til ber fyrireikar kunngerð ella møguliga aðra løgtingslóg á sama hátt sum gjort er eitt nú í Danmark við kgl. anordning nr. 161 av 1. juni 1957.

Eisini er neyðugt so skjótt sum til ber at fáa fyriskipanir og reglugerðir viðvíkjandi læknakanning, siglingarbókum, vernd móti vanlukku og sjúku, kosti um borð í skipum, sjúkrarøkt v.m. og kanska eisini viðvíkjandi disiplinsekt — sbr. § 10, 3. stk., § 11, næstsíðsta stk., § 55, 2. stk., § 57, 1. stk., § 85 og § 61 og 69.

Vísandi til frammanfyristandandi mælir lógarnevndin til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við hesum broytingum:

Viðv. § 2:

1. stk. fær hetta orðaljóð:

«Er onki annað avtalað, kann hvør av pørtunum siga upp starvsviðurskiftini við triggja mánaða frest til uppathald í føroyskari havn, sum skipið kemur í til uppskipingar, fermingar ella leggingar, sbr. tó § 89».

Stk. 1 affattes således:

«Er ikke andet aftalt, kan hver af parterne opsige tjenesteforholdet med tre måneders varsel til ophør i færøsk havn, som skibet anløber for losning, lastning eller oplægning, jfr. dog § 89».

viðv. § 12:

1. stk. fær hetta orðaljóð:

«Er sjómaður hýraður fyri ávist tíðarskeið, og skeiðið er úti á einari ferð, heldur hann fram í starvinum, til skipið kemur í føroyska havn, men kemur skipið, áðrenn so er, í fremmanda havn til at skipa upp, ferma ella til leggingar, tá, til skipið kemur í hesa havnina».

Stk. 1 affattes således:

«Er en sømand forhyret for en bestemt tid, og tiden udløber under en rejse, fortsætter tjenesteforholdet, til skibet anløber færøsk havn, eller, om det forinden anløber fremmed havn for losning, lastning eller oplægning, til denne havn».

viðv. § 13:

í stk. 1 og stk. 2 verða orðini «í ríkinum» broytt til «í Føroyum».

I stk. 1 og stk. 2 ændres ordene «indenfor riget» og «i riget» til «på Færøerne».

viðv. § 14:

í stk. 1 og stk. 2 verða orðini «í ríkinum» broytt til «í Føroyum».

I stk. 1 og stk. 2 ændres ordene «i riget» til «på Færøerne».

viðv. § 15:

§ fær hetta orðaljóð:

«Sama hvat ásett er í avtalunni ella fyrisett í § 13 um føroyska avfaringarhavn, kann sjómaður, sum verið hevur í tænastuni í eitt ár og hevur sagt upp starvið við

§ affattes således:

«Uden hensyn til, hvad der er bestemt i aftalen eller bestemt i § 13 om færøsk fratrædelseshavn, kan en sømand, som har været i tjeneste i et år, og som har op-

frest sum ímunveldari í § 13 3. stk., fara av í føroyskari havn, skipið kemur í, ella í fremmandari havn, tað kemur í til at skipa upp, ferma ella til leggingar. Við nýggja mynstring kann tó nýggj frest upp í eitt ár fara í gongd, um sjómaður samtykkir við orði».

sagt tjenesteforholdet med varsel som nævnt i § 13 stk. 3, fratræde i færøsk havn, som skibet anløber eller i fremmed havn, som skibet anløber til løsning, lastning eller oplægning. Ved ny mønstring kan dog en ny frist på indtil et år begynde at løbe, hvis sømanden udtrykkeligt samtykker deri».

viðv. § 19:

Í 3. stk. verða orðini «stað í ríkinum» broytt til «Føroyar».

I stk. 3 ændres ordene «stad i riget» til «Færøerne».

viðv. § 20:

Orðini «í ríkinum» verða broytt til «í Føroyum».

Ordene «i riget» ændres til «på Færøerne».

viðv. § 26 1. stk.

Í fyrsta pkt. verða orðini «tvey ár» broytt til «eitt ár» og «seinasta árið» til «seinastu seks mánaðir».

I 1. pkt. ændres ordene «to år» til «et år» og «det sidste år» til «de sidste seks måneder».

Í øðrum pkt. verður «6 mánaðir» broytt til «3 mánaðir».

I 2. pkt. ændres ordene «6 måneder» til «3 måneder».

Í fyrsta pkt. verða orðini «í ríkinum» broytt til «í Føroyum».

I 1. pkt. ændres ordene «i riget» til «på Færøerne».

viðv. § 26 2. stk.

Í fjórðu reglu skal í føroysku tekstini punktum koma staðinfyri komma og beint eftir punktummið: «Skipar konsulin fyri heimferðini,»

Í øðrum pkt. verða orðini «i ríkinum» broytt til «í Føroyum».

I 2. pkt. ændres ordene «i riget» til «på Færøerne».

viðv. § 28 4 stk. og 5. stk.

Orðini «ríkiskassin» verður broytt til «tað almenna».

Ordene «staten» ændres til «det offentlige».

viðv. § 30.

Í 2. stk. verða orðini «statsins rokning, rindar staturin» broytt til «almenna rokning, rindar tað almenna».

I stk. 2 ændres ordene «statens regning, betaler staten» til «det offentliges regning, betaler det offentlige».

viðv. § 31:

Í 2. stk. verða orðini «kann landskassin krevjast eftir endurgjaldi» broytt til «er heimilt at krevja endurgjald frá tí almenna».

I stk. 2 ændres ordene «kan erstatning kræves af landskassen» broytt til «kan erstatning kræves af det offentlige».

viðv. § 34 2. stk.

Orðini «í ríkinum» verða broytt til «í Føroyum».

Ordene «indenfor riget» og «i riget» ændres til «på Færøerne».

viðv. § 35:

Føroyska tekstin fær hetta orðaljóð:

«Prógvar sjómaður, at hann hevur starv á skipi í boði og á hægri stigi enn tað, hann hevur, ella annað starv, sum tað er umráðandi hjá honum at fáa, kann hann krevja avskeiðing, um hann uttan meiri útreiðslur hjá reiðaranum setur dugnaligan mann í sín stað.

Sama er, um einhvør hending eftir hýringina ger tað til vælferðarmál hjá honum at sleppa av.»

viðv. § 41:

Í stk. 2, 1. pkt. verða orðini «í rikinum» broytt til «í Føroyum».

I stk. 2, 1. pkt. ændres ordene «i riget» til «på Færøerne».

viðv. § 46:

3. stk. fær hetta orðaljóð:

«Ert fleiri maskinmeistarar umfram maskinchefurin við, verður tann hægsti av teimum roknaður fyri tann, ið skipar starvið í samráð við maskinchefin, um hesin onga fyriskipan hevur givið um hetta.»

Danski teksturin óbroyttur.

viðv. § 52.

Í 1. stk. verða fyrstu trý orðini: «Ber sjómaður seg» rettað til «Dregst sjómaður» og orðið «rýmir» í triðju reglu verður rettað «fer».

viðv. § 56:

2. stk., 2. pkt., fær hetta uppiskoyti:

«Er sjómaður omanfyri 16 ára aldur, skal hann hvørt sanndøgur hava minst 8 tíma hvíld, ið ikki má vera meira enn tvíbýtt.»

Orðini: «hesi reglu» verða «hesum reglum».

Stk. 2., pkt. 2. tilføjes:

«Er en sømand over 16 år, skal han indenfor hvert døgn have en hviletid på mindst 8 timer, der kan deles i højst to perioder.»

Ordene «denne bestemmelse» ændres til «disse bestemmelser».

6. deild í 3. bólki

(yvirskriftin til §§ 60 og 61) verður «Maktráð» staðin fyri «Maktboð».

4. bólkur

fær til yvirskrift «disciplinsekt» staðin fyri «Disciplinbót».

viðv. § 79 1. stk.

Orðini «í Føroyum» í føroysku tekstini falla niður.

Sum nýtt 2. pkt. kemur:

«Hetta viðvíkur tó ikki ákæru eftir § 77 fyri brot á § 55 2. stk.»

Som nyt pkt. 2 tilføjes:

«Dette gælder dog ikke tiltale efter § 77 for overtrædelse af § 55 stk. 2.»

viðv. § 79 2. stk., 1. pkt.

«I søkum um brot nevnd í §§ 71, 73, stk. 2 ella 76 verður ákæra ikki tikin upp, fyrr enn ummæli er fingið frá landsstýrinum og handilsmálaráðharranum.»

«I sager angående forseelser som nævnt i §§ 71, 73, stk. 2 eller 76 kan påtale ikke rejses forinden erklæringer indhentes fra landsstyret og handelsministeren.»

Nýggj § 81.

«Har sum í hesi løgtingslóg heiti føroyskur sjómaður er nýtt njóta danskir og grønlendskir sjómenn við føroyskum skipi javnrættindi, eitt nú viðvíkjandi ókeypis heimferð, vist og klædnað (§§ 26, 28, 31 2. stk. og § 41 2. stk.), sjúkrarøkt (§ 28), jarðarferð (§ 30 2. stk.), hýru (§ 41 2. stk.) og endurgjaldi fyri mistar ognarlutir (§42).»

Hvor i denne lagtingslov benævnelsen færøsk sømand er brugt nyder danske og grønlandske sømænd samme ret såsom vedrørende gratis hjemrejse, underhold og beklædning (§§ 26, 28, 31 2. stk. og § 41 2. stk.), sygepleje (§ 28), begravelse (§ 30 2. stk.), hyre (§ 41 2. stk.) og erstatning for tabte ejendele (§ 42).»

§§ 81 — 89 verða §§ 82 — 90.

Viðv. § 81, nú § 82:

I 1. stk. verður sett «2. — 5.» staðin fyri «2.,5».

2. stk. fellur niður.

I stk. 1 ændres «2.,5.» til «2. — 5.»

Stk. 2 udgår.

Viðv. § 88, nú § 89:

1. stk. fær hetta orðaljóð:

«Tá ið føroyingur sum er við føroyskum skipi hevur heimstað í Danmark ella í Grønlandi er donsk havn ella grønlendsk at javnmeta við føroyska viðvíkjandi uppsøgn og faring av skipinum. Sama er um dani, búsettur í Danmørk ella grønlendingur búsettur í Grønlandi er við føroyskum skipi».

Stk. 1. affattes således:

«Når en færing, påmønstret færøsk skib har hjemsted i Danmark eller i Grønland, bliver dansk henholdsvis grønlandsk havn at ligestille med færøsk havn med hensyn til opsigelse og fratræden. Det samme gælder, såfremt en i Danmark bosiddende dansker eller en i Grønland bosiddende grønlænding gør tjeneste i færøsk skib.»

Viðv. § 89 nú § 90:

1. stk. verður orðað soleiðis:	Stk. 1 affattes således:
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.»	«Denne lov træder straks i kraft.»

2. og 3. viðgerð 12. mai 1966.

Lógaruppskotið við broytingunum frá nevndini samtykt 23—0.

---

15. Um skráseting av motorakförum

Ár 1966, 25. januar legði Erlendur Patursson landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løglingslóg um avtøku av løglingslóg nr. 21 frá 16. mars 1951 um avgjald uppá motorakfør.	lagtingslov om ophævelse af lagtingslov nr. 21 af 16. marts 1951 om afgift på motorkøretøjer.
§ 1.	§ 1.
Løgtingslóg nr. 21 frá 16. mars 1951 um avgjald uppá motorakfør fer úr gildi.	Lagtingslov nr. 21 af 16. marts 1951 om afgift på motorkøretøjer ophæves.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað hevur so mangan verið uppi at fáa tikið hesa regluna av, m.a. tí hon dugir ikki til viðurskiftini, sum tey eru nú, og haraftirat er hon ikki so løtt at sita fyri.

Í skrivi frá 19. december 1964 sigur gjaldstovan soleiðis m.a.:

Tá ið lógin var sett í gildi, var tað helst ikki fyrsta grundin at útvega landskassanum inntøku. Heldur var tað soleiðis, at júst um tað mundið var torført at fáa innflutningsloyvi til bilar, og av teirri grund var stórur innanlands umsetningur av brúktum bilum til høgar prísir. Til tess at forða fyri hesum ovurprísum var gjaldið til landskassan so sett.

Tað hevur havt trupulleikar við sær av ymsum slag at umsitið hesa lógina, og stóran peningaligan týðning fyri landskassan hevur hon heldur ikki havt. Gjaldið hevur ligið frá umleið kr. 30.000 til gott kr. 165.000,— árliga.

Tá ið toll-nevndin í síni tíð legði fram uppskot sítt fyri landsstýrið um tollbroytingar, varð samstundis mælt til at taka hesa regluna av, men higartil hevur so onki hent í málinum.

Gjaldstovan hevur so statt heitt á landsstýrið at fáa broytt regluna annaðhvørt soleiðis, at gjaldið fer heilt burtur ella í staðin at seta fast gjald fyri hvørja umskráseting.

Eftir eini gjøllari meting av regluni og út frá tí, sum her er tilskilað, loyvir landsstýrið sær at leggja inn lógaruppskot um avtøku av løglingslógini nr. 21 frá 16. mars 1951 um avgjald uppá motorakfør.

1. viðgerð 28. januar og 7. februar legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

Ein meiriluti (Hanus við Høgadalsá, Kjartan Mohr, Sámal Petersen og Knút Wang) heldur, at tað er rætt samstundis at taka upp spurningin um, at øll motorakfør, ið brúkt verða her á landi, verða skrásett og lata avgjald her, og setur fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samlyktar

Álagt verður landsstýrinum at syrgja fyri, at øll motorakfør, sum koyra í Føroyum, verða skrásett her, uttan so at galdandi lóg ella altjóða reglur forða ti.

2. viðgerð 7. og 3. viðgerð 11. februar 1966.

Landsstýrisins uppskot samtykt 25—0.
Uppskot frá nevndini samtykt 16—0.

---

16. Skúlalæknaskipan

Ár 1966, 26 januar legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR

Løgtingið mælir til, at lóg fyri Føroyar nr. 140 frá 31. marts 1960 «om skolelæger» verður broytt soleiðis:

§ 1.

1. Í § 10, 1. stk. gongur út «for Færøernes mellem- og realskoles vedkommende Færøernes skolefond».
2. § 10, 2. stk. verður orðað soleiðis:
«Til udgifterne ved skolelægeordningen yder staten et tilskud, hvis størrelse fastsættes af undervisningsministeren efter indhentet ud-

talelse fra landsstyret og efter godkendelse af folkelingets finansudvalg. Tilskudet kan dog ikke overstige 50 pct. af udgiften».

3. I § 10, 4. stk. gongur út « for Færøernes mellem- og realskole af Færøernes skolefond».

§ 2.

Fyriskipanin í § 1 nr. 2 fær gildi frá 1. april 1965.

Viðmerkingar:

Eftir lóg fyri Føroyar nr. 140 frá 31. marts 1960 «om skolelæger» er skyldug skúlalæknaskipan framd í skúlunum í Føroyum eins og í Danmark, jbr. lóg nr. 413 frá 12. juli 1946 broytt við lóg nr. 117 frá 12. april 1957. Reglurnar eftir hesum lógum vóru tær sonnu, men við lóg nr. 196 frá 14. juni 1962 verður danska skipanin broytt.

Føroya skúlastjórn hevur havt skipanina til viðgerðar og mælt kenslumálaráðnum til, at lógin verður broytt soleiðis, at ríkisstuðningurin verður goldin eftir sonnu reglum sum í Danmark.

Kenslumálaráðið hevur so tilevnað viðlagda uppskot.

Eftir uppskotinum verða studningsreglurnar tær sum galdandi hava verið í Danmark síðani 1962, t.e., at kenslumálaráðharrin ásetur ríkisstudningin, treytað av góðkenning fíggjarnevnd fólkalingsins og ikki sum higartil, har lógarbroyting var neyðug. Studningurin kann tó ikki koma uppum 50 % av útreiðslunum. Landsstýrið hevur sett ta broytingina inn, at studningurin verður ikki broyttur uttan so, at landsstýrið er spurt frammanundan.

Aftaná samráðst er við læknafelagið er studningurin í Danmark frá 1. april 1965 settur til 50 % av eini árligari skúlalæknaserløn uppá hægst 5 kr. + serlønarviðbót fyri hvønn, sum kannaður er, ímóti nú 3 kr. + serlønarviðbót.

Fyri at hakta fram við núgaldandi skúlalæknaskipan og herafturat viðka hana til at umfata øll skúlabørn í landinum, er tað helst neyðugt at sama serlønin verður veitt her sum í hinum partinum av ríkinum.

Samlaða meirútreiðslan er fyri fíggjarárið 1965/66 metti til 8.500 kr. og í fíggjarárinum 1966/67 til 7.200 kr. Landskassin leggur bruttoút reiðslurnar av skúlalæknaskipanini út og fær aðra helvtina aftur frá ríkisstýrinum og hina frá kommununum; eftir § 10 í skúlalæknalógini heldur landskassin tó helvtina av útreiðslunni á Føroya Studentaskúla.

Rikisstýrið ger vart, at 15. februar 1966 er settur sum seinasta freist at leggja lógaruppskotið fram í hesi fólkatingssetu.

Håkun Djurhuus
løgmaður

/ J. Djurhuus.

Udkast.

Forslag
til
Lov om ændringer i lov for Færøerne om skolelæger.

§ 1.

I lov for Færøerne nr. 140 af 31. marts 1960 om skolelæger foretages følgende ændringer:

1. I § 10, stk. 1, udgår ordene «for Færøernes mellem- og realskoles vedkommende Færøernes skolefond».
2. § 10, stk. 2, affattes således:
   «Til udgifterne ved skolelægeordningen yder staten et tilskud, hvis størrelse fastsættes af undervisningsministeren efter godkendelse af folketingets finansudvalg. Tilskuddet kan dog ikke overstige 50 pct. af udgiften».
3. I § 10, stk. 4, udgår ordene «— for Færøernes mellem- og realskole af Færøernes skolefond —».

§ 2.

Bestemmelsen i § 1, nr. 2, har virkning fra den 1. april 1965.

Bemærkninger til lovforslaget.

Ved lov for Færøerne nr. 140 af 31. marts 1960 om skolelæger blev der indført obligatorisk skolelægeordning ved skolerne på Færøerne i lighed med den ved skolerne i Danmark i henhold til skolelægeloven af 12. juli 1946, som ændret ved lov nr. 117 af 12. april 1957, gældende ordning. Den færøske skolelægelov skulle være gennemført i alle kommuner inden den 1. april 1962, og den har således endnu kun virket i nogle få år. Nærværende lovforslag tager derfor ikke sigte på en almindelig revision af loven, men tilsigter kun en nødvendig á jourføring af tilskudsbestemmelserne i lovens § 10.

I øvrigt henvises til nedenstående bemærkninger til de fremsatte ændringsforslag.

Til § 1, nr. 2.

Ifølge den færøske skolelægelovs § 10, stk. 2, yder staten som tilskud til udgifterne ved skolelægeordningen på Færøerne 50 % af udgiften, men således at tilskuddet beregnes i forhold til visse i loven nærmere angivne maksimumssatser, der varierer, eftersom der som medhjælp for skolelægen er ansat en af sundhedsstyrelsen godkendt autoriseret sygeplejerske, anden medhjælp eller ingen medhjælp. Når der som skolelægemedhjælp er ansat en skolesundhedsplejerske med kursus for sundhedsplejersker ved Århus universitet eller en sundhedsplejerske, der virker i en kombineret spædbørnssundhedsplejerske- og skolesundhedsplejerskeordning, kan der ydes statstilskud med halvdelen af udgiften til sundhedsplejerskens lønning m.v. uden hensyn til de fastsatte maksimumssatser. Den nævnte bestemmelse i den færøske skolelægelov svarer til bestemmelsen i skolelægeloven af 12. juli 1916 § 11, stk. 2, således som denne bestemmelse var affattet ved lov nr. 117 af 12. april 1957, jfr. lovbekendtgørelse nr. 248 af 3. oktober 1957.

Ved den ved lov nr. 196 af 14. juni 1962 gennemførte revision af skolelægeloven ændredes § 11, stk. 2, således, at staten til kommunernes og de private skolers udgifter til skolelægeordningen yder et tilskud, hvis størrelse fastsættes af undervisningsministeren efter godkendelse af folketingets finansudvalg. Tilskuddet kan dog ikke overstige 50 pct. af udgiften. I bemærkningerne til lovforslaget begrundedes den nævnte bemyndigelsesbestemmelse med, at man ikke fandt det hensigtsmæssigt, at fremtidige forhøjelser af skolelægernes og skolelægemedhjælpernes lønninger — såfremt de skulle give sig udslag i en samtidig forhøjelse af maksimumsrefusionssatserne — kun ville kunne ske ved en lovændring i hvert enkelt tilfælde, jfr. Folketingstidende 1961-62, Tillæg A spalte 1033-34.

I henhold til skolelægelovens § 11, stk. 2, i den nuværende affattelse, jfr. lovbekendtgørelse nr. 278 af 30. juli 1962, har undervisningsministeriet — efter forhandling med de kommunale organisationer og Almindelig Dansk Lægeforening — med finansudvalgets tilslutning fastsat nye regler for beregning af statens tilskud til skolelægeordningen, jfr. undervisningsministeriets cirkulære af 27. juli 1965. De nye tilskudsregler, der har virkning fra den 1. april 1965, indebærer en væsentlig forhøjelse af de honorarer, der ydes skolelægerne.

Fra Færøernes skoledirektion har undervisningsministeriet modtaget indstilling om, at der tilvejebringes hjemmel for at udbetale statstil-

skud til skolelægeordningen på Færøerne i overensstemmelse med de i undervisningsministeriets cirkulære af 27. juli 1965 fastsatte regler. Skoledirektionen har i denne forbindelse henvist til, at det på baggrund af de stedfundne forhandlinger om den nu gennemførte tilskudsforhøjelse må antages, at alle lægeforeningens medlemmer, herunder også lægerne på Færøerne, har en berettiget forventning om, at skolelægehonoraret forhøjes fra den 1. april 1965, og at de pågældende læger ikke ønsker at forblive i skolelægestillinger eller lade sig ansætte som skolelæger på Færøerne, medmindre honorarforhøjelsen gennemføres på Færøerne med virkning fra den 1. april 1965. Skoledirektionen har endvidere oplyst, at statens merudgift ved gennemførelsen af de nye tilskudsregler på Færøerne kan beregnes til henholdsvis ca. 4.250 kr. i finansåret 1965/66 og ca. 3.600 kr. i finansåret 1966/67. Det bemærkes i denne forbindelse, at der på finansloven for finansåret 1965/66 er bevilget 47.900 kr. som tilskud til skolelægeordningen på Færøerne, og at der på forslaget til finanslov for finansåret 1966/67 er optaget et beløb på 57.000 kr. til det nævnte formål; begge de nævnte beløb er beregnet på grundlag af det den gældende færøske skolelægelov fastsatte maksimumssatser for tilskuddets beregning.

Undervisningsministeriet kan for sit vedkommende tilslutte sig skoledirektionens indstilling, idet man anser det for nødvendigt, at der tilvejebringes lovhjemmel for pårny at gennemføre samme tilskudsordning — og dermed samme honorarordning for skolelægerne på Færøerne som i Danmark, hvorved bemærkes, at de færøske skolelægers stilling og arbejdsforpligtelser efter den gældende lov helt svarer til deres danske kollegers. Det foreslås derfor, at § 10, stk. 2, i den færøske skolelægelov affattes i overensstemmelse med den danske skolelægelovs § 11, stk. 2, i den nuværende affattelse. Fremtidige ændringer af tilskudsordningen vil herefter kunne gennemføres samtidig i Danmark og på Færøerne.

Til § 1, nr. 1 og 3.

Ved gennemførelsen af lov nr. 117 af 30. marts 1962 om folkeskolen på Færøerne nedlagtes Færøernes mellem- og realskole i Thorshavn som selvstændig skole, idet skolen omdannedes til en realafdeling ved Thorshavn kommuneskole, og samtidig bestemtes det, at de i den eksisterende skolefond for mellem- og realskolen beroende midler skulle anvendes til anskaffelse af undervisningsmidler ved Thorshavn kommuneskole efter nærmere af skoledirektionen fastsatte retningslinier, jfr. den færøske folkeskolelovs § 71, stk. 1 og 5. Som følge heraf foreslås det at op-

hæve de i den færøske skolelægelovs § 10, stk. 1 og 4, indeholdte særregler om Færøernes mellem- og realskole og Færøernes skolefond.

Til § 2.

Det foreslås, at den ændrede affattelse af lovens § 10, stk. 2, får virkning fra den 1. april 1965, således at det bliver muligt efter godkendelse af folketingets finansudvalg at bringe de i undervisningsministeriets cirkulære af 27. juli 1965 fastsatte regler om statens tilskud til skolelægeordningen i anvendelse på Færøerne fra den nævnte dato at regne, jfr. herved bemærkningerne til § 1, nr. 2.

1. viðgerð 31. januar og 2. viðgerð 2. februar.

Landsstýrisins uppskot samtykt 24—0.

---

17. Broyting í telefongjöldum

Ár 1966, 27. januar legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg um broyting í løglingslóg um hækking av telefongjøldum v.m.

§ 1.

§ 1 í løglingslóg nr. 14 frá 25. april 1960, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 10. november 1961 verður orðað soleiðis:

Fylgjandi telefongjøld verða fyriselt soleiðis:

	Gjald eina ferð med alla kr.	Árligt gjald kr.
Nýtt nr. í samband við veggapparat ella vekslara	450,	
Telefonfelagagjald fyri automatstøðir uttan frian samtalurætt		240, –

Gjald fyri hvørja samtalucind fyri felagar á automatstøðum 1)		
Telefonfelagagjald á støðum við 1—20 felagum		130,—
Telefonfelagagjald á støðum við 21—50 felagum		160,—
Telefonfelagagjald á støðum við 51—150 felagum		240,—
Telefonfelagagjald á støðum við 151 -og fleiri		320,—
Kallinummar í samband við fleiri telefonnummnør	180,—	150,—
Borðapparat í samband við nýtt felag	15,—	
Myntapparat við tilringing	185,—	130,—
Neistatryggjað apparat	70,—	180,—
Ericofon ella lítað borðapparat	20,—	20,—
Borðapparat útskift frá veggapparat ella øvugt	35,—	
Borðapparat útskift frá Ericofon ella lítað borðapparat	35,—	
Útskiftan til Ericofon ella lítað borðapparat	45,—	
Eykaapparat við einkultari umskiftan í sama húsi	45,—	66,—
Eykaapparat við relèumskiftara í sama húsi	50,—	80,—
Eykaapparat til dupulta umskiftan ella størri vekslara í sama húsi	68,—	108,—
Eykaapparatleiðningar uttanhýsis:		
Fyri hvønn byrjaðan km	120,—	
Fyri hvørjar byrjaðar 100 m		12,—
Hvørja stikkontakt útyvir ta fyrstu	30,—	20,—
Eykaklokka innanhýsis	30,—	20,—
Eykaklokku uttanhýsis	60,—	40,—
Niðurfallsklapp	30,—	20,—
Eyka høvuðsmikrotelefon	40,—	26,—
Eykatelefon	30,—	7,—
Signalhorn	60,—	40,—
25 oyra automat (á magnetstøðum)	30,—	20,—
Umstiftara fyri eykaklokku	30,—	
Langan rosettsnór (3 m)	23,—	
Langan mikrotelefonsnór (3 m)	23,—	
Spiralsnór	23,—	
Mikrotelefon við fjøðir	38,—	
Signaldoyvari	15,—	
Nummarbroyting	15,—	

1) Gerandisdagar kl. 8-18, 10 oyru fyri hvørji 180 sekundir. Gerandisdagar kl. 18-8 og sunnu- og halgidagar alt samdagrið, 10 oyru fyri 360 sekundir.

Gjald fyri flyting av:	Í sama húsi kr.	Í annað lús kr.
høvuðsapparati	50,-	100,-
cykaapparati, stikkontakt	50,-	100,-
cykaapparat, stikkontakt saman við høvuðsapparati	25,-	50,-
cykaklokku, niðurfallsklappi	30,-	30,-
dupultum apparati	65,-	130,-
dupultum umskiftara	40,-	40,-
einkultum umskiftara	30,-	30,-

Øll onnur flytiug eftir rokning.

§ 2.

Tey í § 1 nevndu gjøld verða at krevja frá 1. apríl 1966, tó verður samtalugjaldið fyri automatiskar støðir at krevja frá 1. mars 1966.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om forhøjelse af telefontakster v.m.

§ 1.

§ 1 i lagtingslov nr. 11 af 25. april 1960, som denne er ændret ved lagtingslov nr. 67 af 10. november 1961 affattes således:

Følgende telefontakster fastsættes således:

	Afgift en gang for alle kr.	Abonnement pr. år. kr.
Nyt telefonnummer tilsluttet vægapparat eller omstillingsbord	150,-	
Telefonabonnement for automatcentraler uden ret til samtaler		240,-
Takster for hver samtale for abonnenter på automatcentraler 1)		
Abonnement på centraler med 1—20 abonnenter		130,-
Abonnement på centraler med 21—50 abonnenter		160,-
Abonnement på centraler med 51—150 abonnenter		240,-
Abonnent på centraler med 151— og flere abonnenter		320,-
Kaldenummer i forbindelse med flere telefonnumre	180,-	150,-
Bordapparat i forbindelse med ny telefonabonnent	15,-	
Møntapparat med møntilringning	185,-	130,-
Gnistsikret apparat	70,-	180,-

Ericofon eller farvet bordapparat	20,-	20,
Bordapparat udskiftet fra vægapparat eller omvendt	35,-	
Bordapparat udskiftet fra Ericofon eller farvet bordapparat	35,-	
Udskifting til Ericofon eller farvet bordapparat	45,-	
Ekstraapparat med enkelt omstilling i samme hus	15,	66,
Ekstraapparat med relæomskifter i samme hus	50,-	80,-
Ekstraapparat til dobbelt omstilling eller større omstillingsbord i samme hus	68,-	108,-
Ekstraapparatledning udendørs:		
pr. påbegyndt km	120,	
pr. påbegyndt 100 m		12,
For hver stikkontakt udover den første	30,	20,
Ekstraklokke indendørs	30,	20,-
Ekstraklokke udendørs	60,-	40,
Nedfaldsklap	30,	20,-
Ekstra hovedmikrotelefon	40,-	26,-
Ekstratelefon	30,	7,
Signalhorn	60,-	40,-
25 øre automat (på magnetocentraler)	30,-	20,
Omstiller til ekstraklokke	30,-	
Lang rosetsnor (3 m)	23,	
Lang mikrotelefonsnor (3 m)	23,-	
Spiralsnor	23,	
Mikrotelefon med fjeder	38,-	
Signaldæmper	15,-	
Ændring af nummer	15,-	

1) Hverdage kl. 8- 18, 10 øre for 180 sekunder. Hverdage kl. 18 8 og søn- og helligdage alt døgnet, 10 øre for 360 sekunder.

Afgift for flytning af:	I samme hus kr.	Til andet hus kr.
Hovedapparat	50,	100,-
Ekstraapparat, stikkontakt	50,	100,
Ekstraapparat, stikkontakt sammen med hovedapparat	25,	50,
Ekstraklokke, nedfaldsklap	30,-	30,
Dobbelt apparat	65,	130,

Dobbelt omskifter	40,—	40,—
Enkelt omskifter	30,—	30,—

Al anden flytning efter regning.

§ 2.

De i § 1 omhandlede afgifter indkræves fra 1. april 1966, dog skal taksten for samtaler fra automatiske centraler indkræves fra 1. marts 1966.

Viðmerkingar:

Telefonverk Føroya løgtings hevur í skrivi dagfest 11. januar í ár vent sær til landsstýrið um at skipa so fyri, at tey ymsu telefongjøldini verða hækkað.

Landsstýrið ger vart við, at tað er avgerandi neyðugt, um tann útbygging av telefonstøðunum á bygd og á annan hátt, sum er so tiltrongd, skal halda fram, at telefonverkið fær størri inntøku.

Eisini heldur landsstýrið, at tann hækking, ið skolin er upp, ikki er órímulig í mun til tað hækkaða prislagið — bæði lønir og prisir á tilfari er farið munandi upp seinastu árini.

Í viðlagda skrivi frá telefonverkinum verður gjøllað lýst, hvussu hækking er farin fram — bæði í løn og prisum — og skal landsstýrið loyva sær at vísa til hetta skriv.

TELEFONVERK
FØROYA LØGTINGS

Tórshavn, 11. januar 1966.

Føroya landsstýrið, her.

Eini: Hækking av telefongjøldunum.

Við hesum vendir telefonverkið sær til landsstýrið um at fáa loyvi til at hækka tey føstu telefongjøldini við 33⅓% og stovnaðargjøldini við 50% frá 1. apríl 1966, samb. hjálagda skjal 1, Karlsondebiteringina tó frá 1. marts 1966.

Um telefonverkið skal halda áfram við út- og umbyggingini fyri at lúka tey krøv samfelagið stillar tí, er neyðugt at fáa størri innløkur bæði til partvísa sjálvfiggjan og til avdráttt og rentur av nýggjum lánum.

Stovningargjaldið fyri nýtt telefonfelag varð í 1960 hækkað við 20%

frá kr. 250,00 til kr. 300,00, meðan stovnaðurgjøldini fyri eykalutir vóru óbroytt sum tey vóru sett til í 1953.

Samstundis vóru tey fostu árligu felagsgjøldini hækkaði við 20%. Hetta gav tó ikki telefonverkinum stórvegis meirinutøku, men var til fyrimun fyri felagarnar og støðirnar.

Inntil 1960 var tað árliga fasta gjaldið fyri felagar á støðum, við 1–20 felagum kr. 80,--, við 21–50 felagum kr. 100,--, við 51–150 felagum kr. 150,--- og við yvir 150 felagum kr. 200,--. Av hesum fingu støðirnar kr. 20,-- fyri innanhýggja tænastu í telefontíð og telefonverkið hevði eftir ávikavist kr. 60,--, kr. 80,--, kr. 130,-- og kr. 180,---. Telefontíðin var gerandisdagar frá kl. 8 til kl. 20. Fyri hvørja uppringing innanhýggja ímillum kl. 20 og kl. 23 skuldu felagarnir rinda 50 oyru eyka og aftaná kl. 23 1 kr. Hetta eykagjald fingu støðirnar. Fyri hvørja uttanhýggja samtalu felagarnir rinda ávikavist 50 oyru og 1 kr. til hvørja stød, ið varð órógvað, t.v.s. ímillum kl. 20 og kl. 23 í minsta lagi 1 kr. og aftaná kl. 23 í minsta lagi 2 kr.

Í 1960 vóru gjøldini hækkaði við 20% soleiðis at tey vóru ávikavist kr. 100,--, kr. 120,—, kr. 180,--- og kr. 240,--, men samstundis varð telefontíðin broytt til kl. 8–kl. 24, soleiðis at felagarnir kundu ringja innan- og uttanhýggja til kl. 24 utan at rinda eykagjald. Sum endurgjald fyri tað mista eykagjaldið varð samsýningin til støðirnar hækkað frá kr. 20,--- til kr. 50,--- um árið fyri hvønn felaga.

Telefonverkið fekk nú í sín part av felagsgjaldinum ávikavist kr. 50,—, kr. 70,—, kr. 130,— og kr. 190,--, t.v.s. kr. 10,--- minni um árið fyri hvønn felaga á støðum upp til 50 felagar, tað sama sum fyrr frá felagum á støðum við 50–150 felagum og kr. 10,--- meira frá felagum við yvir 150 felagum, sum tó langt frá uppvegaði minni-inntøkuni frá hinum felagunum.

Á automatstøðunum var tað fasta árliga gjaldið kr. 150,--, í kr. 50,--- fyri hvørjar ásettar 1000 samtalur innanhýggja. Eykagjald var einki innanhýggja men uttanhýggja eins og fyri hinar felagarnar. Eins og fyri tær magnetisku støðirnar varð felagsgjaldið fyri automatstøðir hækkað við 20%, t.v.s. tað fasta árliga gjaldið sett til kr. 180,--, men ístaðin fyri at seta gjaldið fyri hvørjar ásettar 1000 samtalur til kr. 60, varð gjaldið fyri hvørja samtalu sett til 7 oyru við óavmarkaða samtalutíð, so at felagarnir bert goldið fyri tað verunligu nýtsluna.

Á henda hátt kom ein meðalfelagi við 1200 samtalum árliga at gjalda kr. 264,-- í føstum- og samtalugjaldi, meðan hann eftir lí gomlu skipanini vildi komið at gjalda kr. 300,--- við sama samtalutal, ja, eisini um hann bert hevði 1005 samtalur. Samstundis fingu felagarnir á automatstøðunum sama fyrimun sum teir á magnetstøðunum, at teir sluppu und-

an at eindu eykagjald fyri uttanbýggjasamtalur til magnetstøðirnar imillum kl. 20 - kl. 24 gerandisdagar. Uttanbýggjasamtalur imillum automatstøðirnar fingu teir fyri vanligan tekst alt sumdøgrið.

Av teimum 20% gjøldini vóru hækkað 1960 fingu felagarnir tey 10% aftur við at sleppa undan eykagjald og telefonverkið tey 10%, um kr. 50.000,00, ið var partur av gjaldinum frá felagum á automatstøðunum. Henda meira-inntøka svaraði til 2,5% av samtalu inntøkuni og 7% av felagagjøldunum.

Í 1962 varð innanbýggjagjaldið á automatstøðunum sett upp úr 7 oyru til 8 oyru og gav hetta telefonverkinum eina meirainntøku uppá kr. 40.000, - sum svaraði til 1,6% av samlaðu inntøkuni og 4% av felagagjaldinum. Sostatt hevur telefonverkið í tíðarskeiðinum 1953-1965 fingið lítla meirainntøku frá takshækkingum í mun til meiraútreiðslur í sama tíðarskeiði, orsakaðar av lønarhækking o.ø.

Í tíðarskeiðinum 1953-1965 er prístalið farið upp úr 300 til 159 = 53%, meðal-mánaðarlønin er farin upp við 140%, tíma-lonin fyri arbeiðsmenn við 113%, meturprísurin fyri kaðalgravir gjørdar av arbeiðstakarum við 200%, tilfar m.a. kaðalar við 60% o.s.fr. Samstundis er rentan farin upp úr 6% til 8½% ein hækking uppá 41%. Tað er ikki bíligari at gera nýggjar felagar millum-bygda linjur o.a. og reka telefonverk í Føroyum enn t.d. í Danmark, heldur tvørturimóti. Í Føroyum er tó stovningargjaldið fyri eitt telefonfelag kr. 300,00, í Danmark kr. 1000,--, t.e. 233,3% hægri, tað fasta árliga gjaldið í Føroyum kr. 180,--, í Danmark kr. 352,— t.e 95,6% hægri. Í Føroyum kostar ein innanbýggjasamtala 8 oyru fyri óavmarkaða samtalutíð, í Danmark 10 oyru fyri 110 sekund (1 minut 50 sekund). Um meðalsamtalutíðin verður sett til 180 sekund, er meðalsamtalan í Danmark 104,5% dýrari enn í Føroyum. Sjálvt um stovnaðargjaldið verður hækkað við 50%, felagagjaldið við 33⅓% og innanbýggja samtalugjaldið á automatstøðum við 25%, verða gjøldini í Føroyum tó væl bíligari enn í Danmark, stovnaðargjaldið 122,2%, felagagjaldið 46,7% og samtalugjaldið 63,6%.

Karlson-debiteringin, sum ger at ein felagi fær 3 minuttir samtalu fyri 10 oyru ímillum kl. 8 og kl. 18 gerandisdagar og 6 minuttir fyri 10 oyru til allar aðrar tíðir mótvegis óavmarkaða tíð fyri 8 oyru nú, fer uttan iva at hjálpa ímóti blokeringum, sum standast av alt ov longum samtalum. Eisini verður trafikkurin betri útjavnaður við at fólk bíða við ikki týðandi samtalum til aftaná kl. 18, tá tey fáa meira fyri gjaldið. So statt skuldi verði lættari at komið framat hjá teimum, ið mugu nýta telefonina um dagin.

At biðið verður um at fáa Karlson-debiteringina setta í gildi frá 1.

marts 1966 kemst av, at teljararnir verða avlismir 1. marts, fyri at rokningin kann koma út saman við felagsgjaldinum fyri april ársfjórðing.

Telefonverkið vónar at uppskotið um hækking av telefongjøldunum verður framt, tí tað verður neyðugt um tann útlegging ið krevst skal halda á fram.

1. viðgerð 1. februar og 18. april legði telefonnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur saman við stjórarnum fyri telefonverkið havt fund og gav stjórin nevndini eina frágreiðing um, hví tað var neyðugt at fáa meira inntøkur til telefonverkið. Segði at umrødda uppskot kemur at geva verkinum einar 300.000 kr. meira um árið. Hesin peningur er neyðugur fyri at fáa lagt støði undir komandi útbyggingar.

Eftir tí útbyggingarætlan, ið er, skuldi øll telefonin verði automatisk um sjey ár.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meiriluti (Frederik Hansen, Marius Johannesen og Vilhelm Nielsen) mælir tinginum til at viðtaka uppskot landsstýrisins við hesum

BROYTINGARUPPSKOTI

I § 2 verður «1. april 1966» og 1. mars 1966» broytt til ávikavist «1. juli 1966» og «1. juni 1966».	I § 2 ændres «1. april 1966» og «1. marts 1966» til henholdsvis «1. juli 1966» og «1. juni 1966».

og setur fram fylgjandi

UPPSKOT

til samtyktar

Tingið áleggur landsstýrinum:

1) at seta teknisk kønnum mann við telefonverkið,
2) at telefonfelagi fær lepar yvir utlanbiggjasamtalur og telefontelegrammir saman við rokningini og
3) at lønarlagið á bygdaløðunum verður gjølla kannað.

Minnilutin (Jacob Lindenskov) er av teirri áskaðan, at automatiseringin av telefoniní um all landið ikki má tarnast, men heldur fremjast skjótast. Partar av landinum liggja enn við so út av lagi vánaligum telefonsambandi, at hetta er uttanfyri allan kritik, sum t.d. bygdirnir í norðara parti av Eysturoynni, ið hava so vánaligt telefonsamband, at tað ofta als ikki kann nýtast.

Endamálið við automatiseringini er, at telefonin skal verða hvønns manns ogn. Skal hetta mál verða rokkið, er eyðvitað neyðugt at skunda undir automatiseringina, men samstundis at gera lað atkomuligt hjá fólki at fáa sær telefon. Tí skjýtur minnilutin upp, at innleggsgjaldið, sum nú verður skolið upp at hækka til kr. 450,00 verður óbroytt.

Ein so umfalandi stovnur, sum telefonverkið, krevur at hava beslu leiðandi kreftir á øllum økjum. Mælt verður til, at knýttur verður ein fastur tekniskur leiðari (verkfrøðingur) at telefonverkinum.

Minnilutin mælir annars til, at tann gamla skipanin, hareftir telefonfelagarnir fáa lepar fyri uttanbiggja samtalur og telegrammir, soleiðis at abonnentar sjálvir kunnu kontrollera rokningina, aftur verður sett í verk og verður at standa við til automatiseringin er fullført.

Ynski frá teimum, ið røkja telefonstøðir uttanfyri automatøkið, um at fáa lønarsømdir, sum fólkið á automatstøðunum, er sjálvsagt, og verður mælt til at veita teimum betri lønarsømdir.

Í ásannanini av, at avgjørt neyðugt er at fremja fyriliggjandi uppskot fyri ikki at tarna automatiseringini, mælir minnilutin til at fremja uppskotið, men setur fram fylgjandi

BROYTINGARUPPSKOT

I. Í § 1 fellur hetta petti burtur: «Nýtt nummar í samband við veggapparat ella vekslara 450» -- og í danska tekstini: «Nyt telefonnummer tilsluttet vægapparat eller omstillingsbord 450».
og

U p p s k o t
til samtyktar

II. Landsstýrið skipar fyri, at settur verður tekniskur leiðari (verkfrøðingur) við Telefonverk Føroya Løgtings.

III. Starvsfólk við telefonstøðir uttanfyri automatstøðirnar fáa somu lønarsømdir sum á automatstøðunum.

Minnilutin (Hans Iversen) skal loyva sær at gera hesar viðmerkingar:

Telefonverk Føroya løgtings er nú vorðin ein so týðandi stovnur í okkara samfelagi, bæði trafikalt og figgjarliga, at lað má ætlast at verða neyðugt at fremja eina broyting av leiðsluni í hesum stovni. Higartil hevur stovnurin sum kunnugt verið stjórnaður av einum stjórn, sum

hevur *alla* ábyrgd, bæði av tí tekniska útbyggingini og av umsitingini av verkinum. Henda skipan hevur verið brúklig áður, soleingi útbyggingin av telefonini var meira einfald og nýtslan so nógv, nógv minni enn nú; tá vóru viðurskiftini ikki kravmiklari enn so, at starvið sum ábyrgdarmaður av hesum økjum kundi røkjast forsvarliga av skilamanni við vanliga góðum kunnleika, uttan tann serkunnleika, ið nú má halda at vera neyðugur. Við tí ómetaliga framburði, ið hevur verið á tí tekniska økinum í seinru árum, krevst, at tann tekniska leiðslan av verkinum og ábyrgdin av hesum øki verður løgd í hendurnar á serkønnum manni eins og umsitingin av verkinum nú er varðin so kravmikil, at eisini hon krevur sín serliga ábyrgdarmann. Í samsvar hervið vil minnilutin skjóta upp, at leiðslan av telefonverkinum fær 2 ábyrgdarmenn í staðin fyri sum nú bert ein, nevniliga soleiðis, at tann sitandi stjórin verður administrerandi stjóri við serligari ábyrgd fyri umsitingini, meðan starvið sum tekniskur stjóri verður at lýsa leyst, og kemur hesin maður at hava ábyrgdina fyri tí tekniska deildini.

Tá ið henda broyting er farin fram, verður ábagt tí tekniska leiðaranum at seta fram uppskot um eina framtíðar ætlan fyri útbyggingini av telefonverkinum við kostnaðarætlan. Fyrst tá heldur minnilutin verða grundarlag fyri eini støðutaksan til møguliga hækkan av teimum ymisku gjøldunum. Leparnir, ið vísa, hvat goldið verður fyri, eiga, sum fyrr, at sendast telefonfelagunum saman við kravinum um gjalding til telefonverkið.

Minnilutin setur fram soljóðandi

UPPSKOT

1) Landsstýrið verður heimlað at seta elektro ingenior sum tekniskan leiðara av Telefonverki Føroya løgtings.
2) Hækkan av telefongjøldunum verður at steðga fyribils, til planir og kostnaðarætlan fyri tí ilætlaðu útbygging fyriliggja frá tí undir pkt. 1) setta manni.
3) Lepar, ið vísa, hvat kravt verður fyri, eiga at fylgja við til felagarnar frá telefonverkinum.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Hans Iversen:

Afturat uppskotinum frá minnilutanum Hans Iversen í álitinum verður sett sum nýtt punkt

4) Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at Telefonverk Føroya Løgtings yvirtekur raksturin av øllum telefonstøðum í Føroyum, so

kommunurnar sleppa undan teimum skyldum, ið tær higartil hava havt.

og frá telefonnevndini:

I staðin fyri meirilutans (Frederik Hansen, Marius Johannesen og Vilhelm Nielsen) uppskot til samtyktar 1), 2) og 3), minnilutans (Jacob Lindenskov) uppskot til samtyktar II og III og minnilutans (Hans Iversen) uppskot 1) og 3) og uppískoytisuppskot 4) setur nevndin fram sóljóðandi

Uppskot
til samtyktar

1) Settur verður verkfrøðingur at standa fyri tí tekniska arbeiðinum við Telefonverk Føroya løgtings.
2) Telefonfelagi fær yvirlit yvir uttanbiggjasamtalur og telefontelegrammir saman við rokningini.
3) Telefonverk Føroya løgtings yvirtekur raksturin av bygdastøðunum og boðstøðunum, ið fáa lønarsømdir, ið svara til tær, sum galda fyri automatstøðir.

Minnilutin (J. Lindenskov) setur fram

Uppskot
til samtyktar

II. Tey í uppskotinum nevndu gjøld — uttan innleggsgjaldið — verða at seta í gildi, um tekniski leiðarin tilmælir at gera tað.

2. og 3. viðgerð 22. apríl 1966.

Uppskotið frá minnilutanum (H. Iversen) punkt 2 fall 11—0.
Punktini 1 og 3 og broytingaruppskotið frá minnilutanum (H. Iversen) afturtikin.
ad broytingaruppskotið frá nevndini:
Uppskot til samtyktar frá minnilutanum (J. Lindenskov) II fall 12—0.
Uppskot frá nevndini:
punkt 1) samtykt 24—0.
punkt 2) samtykt 27—0.
punkt 3) samtykt 24—0.
Broytingaruppskot I (frá J. Lindenskov) til § 1 í landsstýrisins uppskoti fall 7—0.

Punktini II og III afturtikin.
Broytingaruppskol frá meiralutanum í nevndini til § 2 samtykt 17 0.
Lógin so broytt samtykt 17 0.

---

18. Útróður í Grönlandi

Ár 1966, 31. januar legði Erlendur Patursson landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um ábyrgd fyri útgerðarlánum til útróðurs til lands í Vestur- og Eystur-Grønlandi.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt lands kassans vegna at taka ábyrgd fyri útgerðarlánum til bátsskipanir, sum reka útróður til lands í Vestur- og Eystur-Grønlandi árið 1966 taka, og sum hvør bátsskipan sínámillum og hvør einstakur av bátsskipanini heftir fyri in solidum.

§ 2.

Henda lóg kemur beinanvegin í gildi.

lagtingslov om garanti for udrustningslån til bådefiskeri til lands i Vest- og Øst-Grønland.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for udrustningslån, som bådelag, der driver bådfiskeri til lands i Vest- og Øst-Grønland i året 1966 optager, og som hvert bådelag indbyrdes og hver enkel af bådelaget hæfter for in solidum.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Henda lóggávan hevur verið endurnýggjað ár undan ári, men fyri eitt ár í senn (smbr. løgtingsmál nr. 54/1964).

Landsstýrið loyvir sær so statt at leggja inn uppskot at endurnýggja lógina fyri 1966 í sama líki sum áður.

1. viðgerð 3., 2. 7. og 3. viðgerð 11. februar.

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 24—0.

---

19. Broyting í lóg um kynsjúku

Ár 1966, 1. februar legði løgmaður fram soljóðandi

Uppskot
til samtyktar

Løgtingið mælir til, at viðlagda uppskot til lóg fyri Føroyar «om ændringer i lov for Færøerne om bekæmpelse af kønssygdomme», tilevnað av innanríkisráðharradeildini 17. september 1965, verður lagt fyri fólkatingið.

Viðmerkingar:

Í skrivi frá 2. oktober 1965 hevur ríkisumboðsmaðurin biðið um ummæli til uppskot til lóg um broytingar í lóg fyri Føroyar um fyribyrging av kynssjúkum.

Galdandi lóg er nr. 74 frá 24. februar 1960 og lýst at galda í Føroyum eftir kunngerð frá 27. oktober sama.

Skilað verður til, at sorinskrivarin hevur havt fyriliggjandi uppskot

til broytingar til ummælis og hevur ongar viðmerkingar at gera frá tí, at reglurnar í §§ 200 og 256 - 259 í galdandi straffilóg fara úr gildi, sbr. lógarkunngerð nr. 215 frá 24. juni 1939, og at § 731 í lóg fyri Føroyar nr. 95 frá 16 .mars 1960 verður broytt samsvarandi uppskotinum, sum eftir at ummæli fyriliggur frá løgtingi og landsstýri, væntast lagt inn á fólkatingið.

Tað verður lagt aftrat í skrívinum frá ríkisumboðnum, at ríkisstýrið leggur dent á at fáa málið avgreitt hiðani allarskjótast fyri at fáa tað fyri á fólkatingi í hesi setuni. Vist verður annars til viðmerkingarnar til fyriliggjandi uppskot.

Lógin og uppskotið fylgja við í serprentum.

1. viðgerð 1. og 2. 3. februar.

Uppskotið samtykt 22--0.

---

20. Föroyskt umboð í Norröna ráðnum

Ár 1966, 2. februar legði løgmaður fram soljóðandi

Uppskot
til samtyktar

Løgtingið heitir á ríkisstýrið um at skipa so fyri, at Føroya løgting og Føroya landsstýri fáa umboðan í Norröna ráðnum, og soleiðis at umboðini verða vald ávikavist av Føroya løgtingi og Føroya landsstýri millum limir tess.

Viðmerkingar:

Eftir viðtøkunum er Norröna ráðið stovnur fyri samráðingar millum fólkating Danmarkar, ríkisdag Finlands, alting Íslands, stórting Noregs,

rikisdag Svørikis og rikisstýrini í hesum londum í spurningum um samvirki millum hesi lond.

Ráðið hevur 69 valdar limir og haraftural umboð fyri rikisstýrini.

Lóggávutingini í Danmark, Finlandi, Noregi og Svøriki velja hvør sínar 16, meðan ísland velur 5, allir millum limirnar í tingunum. Rikisstýrini velja millum limir sínl so nógvar umboðsmenn, sum tey yuskja. Hesir seinnu hava ikki atkvoðuretl í ráðnum.

Hesar viðtøkur eru fyri Danmark lógfestar við lóg nr. 292 frá 21. december 197. Eftir hesi lóg verða limirnir valdir við byrjunini av hvørjari fólkatingssetu og aftaná val hevur verið. Valið er hlutfallsval. Limirnir skulu hava sæti í fólkatinginum.

Longu í januar 1955 vendi landsstýrið sær til forsætismálaráðherran í spurningum um føroyskt umboð í Norrøna ráðnum. Forsætismálaráðharrin svaraði aftur í juni 1955, at eftir viðtøkunum hjá ráðnum vóru ongir møguleikar fyri føroyskari umboðan, og at tað helst ikki tá var gjørligt at broyta viðtøkurnar. Ráðharrin helt tó, at ynskjandi var, at nærri kontakt varð millum Føroyar og ráðið. Í hesum sambandi var vist á, at saman við umboðsmonnum fyri rikisstýrini vanliga eru sakkønir, og at hugsað átti at verið um, at hesir sakkonn, tá ið talan var um føroysk áhugamál, vóru tilnevndir av landsstýrinum.

Viðvíkjandi hesum spurningi hevur landsstýrið 11. december 1961 sent rikisumboðsmanninum soljóðandi skriv:

«Med skrivelse af 16. juni — j.nr. 63-06/61 — oversendte hr. rigsombudsmanden en skrivelse af 25. marts i år fra fiskeriministeriet vedrørende færøsk repræsentation i det nordiske kontaktorgan for fiskerispørgsmål. I skrivelsen meddeler fiskeriministeriet, at det ikke i øjeblikket ser nogen mulighed for en ændring i repræsentationsspørgsmålet, idet de fire danske repræsentanter forlængst er udpeget; ministeriet vil dog være indforstået med, at en færøsk repræsentant, som suppleant for et af de faste medlemmer i alle tilfælde, hvor der drøftes spørgsmål af særlig interesse for Færøerne, indtræder for et af de øvrige medlemmer, der i disse tilfælde så fungerer som suppleant for det færøske ad hoc medlem. Ministeriet siger endvidere, at det er villigt til på ny at drøfte spørgsmålet om et eller to år i lyset af de erfaringer, man da ligger inde med.

Under henvisning hertil skal man meddele; at landsstyret må beklage, at der på et område som fiskeriet, der er af alt afgørende og livsvigtig betydning for Færøernes eksistens, ikke tilstås en direkte og ligelig repræsentation; når bortses fra Island er inten af de nordiske landes økonomi i den grad som den færøske knyttet til fiskeriet, man kan endvidere fremføre, at i kvantum og værdi er det færøske fiskeri betydelig større end det finske. For dog at opnå visse fordele i en periode, der forhå-

henflig kan er en korlvarig overgangsperiode, vil landsstyret udpege en suppleant, der fungerer efter de foran skitserede retningslinier, idet man dog forbeholder sig ret til, at denne udpeges for hver enkelt sag, jfr. skrivelse herfra af 25. september 1963.

Man skal herefter anmode om at få oplyst, hvilke sager er eller i nærmeste fremtid vil blive behandlet i kontaktorganet.»

Fyrstu ferð føroyskur fólkatingsmaður er valdur í Norrøna ráðið er 9. oktober 1958, tá fólkatingið vetur Johan Poulsen, fólkatingsmann.

Landsstýrið hevur ta áskoðan, at Føroyar eiga at vera umboðaðar í Norrøna ráðnum, har so mong felags norrøn áhugamál koma fyri, f.d. í lóggávu har tendensurin í nógv ár hevur verið at skapa eins rætfarreglur á týðandi økjum, og gongur hesin tendensur aftur í okkara lóggávu, har fleiri av hesum lógum eru galdandi.

Fyri at vera rætluligt umboð fyri Føroyar má krevjast, at umboðið er valt av hæggstu stovnum landsins — løgting og landsstýri, eina virðing søgutiga ting Føroya hevur uppibornað.

Til orientering hjá løgtingiunm verður viðlagt brævaskifti millum landsstýrið og ríkisumboðsmannin í spurninginum um at flagga við føroyskum flaggi í sambandi við 11. sessiónina hjá Norrøna ráðnum í København.

FØROYA LANDSSTYRI F.L.j. nr. 11-5.

Tórshavn, 27. januar 1966.

I anledning af at hr. rigsombudsmanden har meddelt, at folketingsmand P. M. Dam har fremsat ønske om, at der ved Nordisk Råds møder, der nu afholdes i København, flages med det færøske flag, skal landsstyret udtale:

Landsstyret støtter fuldt ud folketingsmand P. M. Dam i det af ham fremsatte ønske, men gør samtidig udtrykkelig opmærksom på, at dette ikke på nogen måde indebærer en godkendelse af den nuværende form for at vælge færøsk repræsentation, idet denne bør vælges af Færøernes lagting.

Rigsombudsmanden på Færøerne,
h e r.

RIGSOMBUDSMANDEN
PÅ FÆRØERNE

Tórshavn, den 28. januar 1966.

Under henvisning til landsstyrets skrivelse af 27. januar 1966 vedrørende flagning ved Nordisk råds møde i København skal man meddele, at man pr. telex har modtaget underretning om, at statsministeren den 27. januar 1966 har tilskrevet folketingets præsidium således:

«Under henvisning til præsidiets skrivelse af 26. januar 1966 vedrørende flagning i folketinget med det færøske flag ved Nordisk råds 14. session skal jeg hermed meddele, at spørgsmålet har været forelagt for Nordisk råds præsidium, der overfor mig har givet udtryk for den opfattelse, at flagning ved rådets sessioner er et anliggende, der henhører værtslandets regering.

Efter at jeg i dag fra Færøernes landsstyre har indhentet en udtalelse om, at landsstyret fuldt ud støtter folketingsmand Peter Mohr Dam i det af ham fremsatte ønske om flagning med færøsk flag ved den forestående session, har jeg intet principielt at indvende imod, at der ved denne lejlighed kunne flages med færøsk flag, men må dog mene, at der burde have været tid til at behandle sagen med partierne i folketinget, idet jeg gør opmærksom på, at det færøske landsstyre klart giver udtryk for, at man ikke derved godkender «den nuværende form for at vælge færøsk repræsentation, idet denne bør vælges af Færøernes lagting.»

Folketingets formand har derefter sendt folketingsmand Dam et svar, hvori formanden efter at have redegjort for statsministerens opfattelse, udtaler følgende:

«Da det forbehold, som landsstyret har taget, ikke har kunnet behandles af hverken præsidiet eller folketingets partier, og da det på dette sene tidspunkt ikke er muligt at indkalde partierne til en afklarende drøftelse, ser jeg mig nødsaget til at meddele, at jeg ikke kan imødekomme det ønske, du rejser i dit brev af 22. januar.»»

Færøernes landsstyre.

RIGSOMBUDSMANDEN
PÅ FÆRØERNE

Tórshavn, den 31. januar 1966.

Under henvisning til tidligere brevveksling, senest min skrivelse af 28. januar d.å., vedrørende flagning ved Nordisk Råds møde i København skal jeg meddele, at statsministeren i dag kl. 12.00 færøsk tid vil afgive følgende udtalelse til Ritzans Bureau:

«I anledning af diskussionen om flagning med det færøske flag ved Nordisk Råds session vil jeg gerne udtale, at jeg - som udtryk i min skrivelse til folketingets formand den 27. ds. - intet principielt havde at indvende imod, at man ved denne lejlighed i København også hejste det færøske flag. Spørgsmålet blev imidlertid rejst så sent, at det ikke kunne finde sin afklaring inden sessionens åbning.

Henvendelsen har igen henledt opmærksomheden på spørgsmålet om den fremtidige form for Færøernes repræsentation i Nordisk Råd. Jeg vil finde det rigtigt, at dette spørgsmål, der er det centrale i sagen, tages op til forhandling med folketingets partier, således at en afklaring inden rådets næste session.»

1. viðgerð 4. februar og 25. mars legði nevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Meirahlutin í nevndini (Hannis við Høgadalsá, Marius Johannesen, Kjartan Mohr, Poul Petersen, P. M. Dam og J. Fr. Øregaard) mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot óbroytt.

Minnihlutin (Trygve Samuelsen) ger hesar viðmerkingar:

Eftir lóg Om Nordisk Råd frá 21. december 1957 er hetta ráð ein samráðingarstovnur millum löggávutingini hjá Danmark, Finlandi, Islandi, Noreg og Svøriki. Löggávutingini velja millum sínar limir teir, ið verða skulu limir ráðsins, meðan ríkisstýrini velja umboð úr ríkisstýrinum, ið ikki hava atkvøðurætt, og hvørt land tekur sær skrivarar og serkona hjálp. Hvørt limaland heldur fær útreiðslur, ið standast av luttøkuni.

Umboðanin í Nordisk Råd er eftir sínari náttúru ein uttanríkisumboðan og eftir Heimastýrislógini frá 23. marts 1948 er uttanríkisumboðanin ríkismál, meðan føroyingar eftir § 1 í sama lóg innanfyri ríkismarkið við fólkavalda løgmanni sínum og tí av tinginum stovnaða landsstýri taka ræði yvir føroyskum sermálum sambæt lógina.

Eftir lóg um Nordisk Råd eru limalondini øll suveræn statar, hvørt lóggávuting hava fult og óskert lóggávuvald í øllum lutum. Teir av fólkatingi Danmarks valdu limir og dey av ríkisstýri Danmarks valdu umboð hava í Nordisk Råd umboðað danska ríkið; harundir Føroyar. Í hesum lóggávutingi eiga Føroyar sín part, og er tað samsvarandi okkara ríkisrættarligu støðu, at fólkatingið velur teir limir í Nordisk Råd, ið umboða danska ríkið. Av tí, at Føroyar kunnu hava síni serligu áhugamál í Nordisk Råd, so er tað eisini náttúrligt, at fólkatingið velur millum sínar limir í ráðnum føroyskar fólkatingsmenn eins og sakkønar umboðsmenn, tilnevndir av Føroya landsstýri, verða at luttaka, tá talan er um føroysk áhugamál.

Tá Føroyar verða umboðaðar sum nevnt, so eigur føroyska flaggið at verða vundið á stong eins og hini fløggini. Hesum viðvikjandi eiga ikki formellar reglur um, hvussu føroyska umboðið er valt, at forða fyri at flaggað verður við føroyska flagginum.

Annars kann verða lagt afturat, at tá limalondini sjálv ikki higartil hava hildið, at Føroyar eiga rætt til at vera uppií ráðnum sum sjálvstøðugur limur, so eiga vit ikki at troðka okkum fram til rættindi, sum limalondini ikki hava hildið Føroyar at hava.

Vísandi til framanfyri standandi viðmerkingar setur minnilutin fram soljóðandi

Uppskot

I Løgtingið heitir á fólkatingið um at velja føroyskar fólkatingsmenn til limir í Nordisk Råd, og á ríkisstýrið um at lata serkønar umboðsmenn, tilnevndar av landsstýrinum luttaka.

II. Løgtingið heitir á ríkismyndugleikarnar um at skipa fyri, at flaggað verður við føroyska flagginum, tá føroyingar luttaka í Nordisk Råd.

2. viðgerð 28. mars. (22/4).
Uppskot frá minnilutanum (Fr. Samuelsen)
I fall 6 -0.
II fall 9 0.
Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 20 0.

21. Broyting í lógini um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1966, 9. februar legði Erlendur Patursson landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3, 2. stk. gongur út og í staðin kemur:
«2. stk. Selur ella avhendir hin skattskyldugi her í landinum fastogn, skip, maskinur, innbúning og tílík rekstraramboð — sum hann hevur nýtt í virki ella vinnu sínu, og sum hava fingið avskriving — fyri meira, enn tey eru niðurskrivað til, skal helvtin av vinninginum verða tald upp í skattskyldugu inntøkuna undir einum, tó ikki meira enn helvtin av avskrivingini.
3. stk. Selur ella avhendir hin skattskyldugi skip, maskinur, innbúning og tílík rekstraramboð úl av landinum (Føroyum) fyri meira enn tey eru niðurskrivað til, er vinningurin skattskyldugur. Vinningurin er munurin millum søluvirðið og upprunavirðið eftir frádrátti av teim avskrivingum,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat foretages følgende ændringer:

1) § 3, 2. stk. udgår og indsættes i stedet:
«Stk. 2. Sælger eller afhænder den skattepligtige her i landet fast ejendom, skibe, maskiner, inventar og lignende driftsmidler — som han har benyttet i sin erhvervsvirksomhed eller bedrift, og som har været undergivet afskrivning — for mere end de er nedskrevet til, skal halvdelen af avancen medregnes i den skattepligtiges indkomst under et, men dog ikke med mere end halvdelen af afskrivningen.
Stk. 3. Sælger eller afhænder den skattepligtige skibe, maskiner, inventar og lignende driftsmidler til udlandet (udenfor Færøerne) for mere end de er nedskrevet til, er avancen skattepligtig. Avancen opgøres som forskellen mellem salgssummen og

sum farnar eru um rakstur og við aftratlegging av møguligum rakstrartapi, sum er ikki javnað út aftur í rakstrinum.
4. stk. Verður vinningurin eftir 2. og 3. stk. heilt ella lutvís nýttur til nýggjar íleggingar, er landsstýrinum heimilt, tá søkt verður um tað, at sleppa viðkomandi heilt ella lutvís frá at svara skatt av ágóðanum.»

anskaffelsesværdien efter fradrag af afskrivninger, der er taget over driften og med tillæg af eventuelle driftstab, som ikke senere måtte være udlignet over driften.
Stk. 4. Anvendes avancen efter stk. 2 og stk. 3 helt eller delvis til ny investering, skal landsstyret være bemyndiget til efter ansøgning at indrømme hel eller delvis fritagelse for skattetilsvar af avancen.»

2) Sum uppiskoyti til § 4, nýtt nr. «12) Studningur, sum tað almenna ella góðkend legatir og grunnar lata lesandi og lærlingum».

2) I § 4 indsættes som nyt nr. «12) Tilskud, som det offentlige eller godkendte legater og fonds yder studerende og lærlinge».

3) § 9, nr. 7) verður orðað soleiðis:
«7) hjá mynstraðum fiskimonnum við føroyskum fiskiskipum, sum fáa inntøku sum løn og/ella part í veiði, herundir minstuløn og prísviðbót, har skattleggjandi inntøka teirra uttan hendan frádrátt er minni enn 15.000 kr., 150 kr., har hon er 15.000 kr., men minni enn 20.000 kr. 125 kr., har hon er 20.000 kr., men minni enn 25.000 kr. 100 kr. og har hon er meira enn 25.000 kr. 75 kr. fyri hvønn siglingamánað í inntøkuárinum.»

3) § 9, nr. 7) affattes således:

«7) hos mønstrede fiskere med færøske fiskefartøjer, som har deres indkomst som løn eller andel i fangst, herunder mindsteløn og pristilskud, når den skattepligtige indtægt uden det her omhandlede fradrag er under 15.000 kr. 150 kr., er 15.000 kr., men under 20.000 kr. 125 kr., er 20.000 kr., men under 25.000 kr. 100 kr., og hvor der er over 25.000 kr. 75 kr. for hver måned vedkommende er påmønstret i indkomståret.»

4) Í § 15, c) verður í staðin fyri «bústað uttan fyri Føroyar» sett: «bústað uttan fyri ríkið».

4) I § 15, c) ændres bopæl uden for Færøerne» til: «bopæl uden for riget».

5) § 19 verður orðað soleiðis:
«Flytir maður higar til lands, verður hann skattskyldugur frá fyrsta degi í tí fjórðingsári, sum kemur beint aftaná tilflyting.

5) § 19 affattes således:
«Ved tilflytning til Færøerne indtræder skattepligten fra begyndelsen af det kvartal, som følger lige efter tilflytningen.

2. stk. Persónar, sum ikki hava fastan bústað her á landi, men sum eru her ein 1. apríl, 1. juli, 1. oktober ella 1. januar, og sum í teimum 12 mánaðum næst frammanundan hava verið her minst 3 mánaðar samfeldar ella í skiftum, koma undir skattskyldu eins og persónar sum fáa sær fastan bústað her.

3. stk. Tá ið persónur fyrstu ferð verður settur í skatt aftaná tilflyting ella aftaná at skattskyldan eftir 2. stk. er komin, verður hann fyribils settur í skatt av ætlaðari inntøku svarandi til ta inntøku, hann ætlandi kemur at hava í skattaárinum. Verður skattskyldan fyri stytri tíð enn 1 ár, verður inntøkan líknað eftir inntøkuni í einum heilum ári mett eftir inntøkuni í tí parti av skattaárinum, hann er skattskyldugur her á landi.

4. stk. Líkningin árið eftir verður gjørd eins og eftir 3. stk., uttan so hann álmanakkaárið fyri hevur havt skattskyldugt tilhald her á landi í minsta lagi 6 mánaðar, tí tá so er, verður inntøkan í hesum tíðarskeiðinum grundarlag undir líkningini umroknað til eitt ár inntøku.

5. stk. Til álíkningina eftir 3. og 4. stk. verður veittur vanligur frádráttur, men í staðin fyri frádrátt fyri goldnar skattir verður veittur skattafrádráttur, ið verður roknaður soleiðis: av ætlaðu inntøkuni, aftaná vanligar frádráttir verða inntøkuskattirnir roknaðir til kommunu og landskassa eftir

Stk. 2. Personer, der ikke er fast bosatte her i landet, men som opholder sig her en 1. april, 1. juli, 1. oktober eller 1. januar og som indenfor de nærmest forudgående 12 måneder med eller uden afbrydelse har opholdt sig her i mindst 3 måneder, kommer under skattepligt på samme måde som personer, der fager fast bopæl her i landet.

Stk. 3. Ved første skatteansættelse efter tilflytning eller skattepligtigt ophold efter stk. 2, ansættes tilflytteren foreløbig af en anslået indkomst på grundlag af sin forventede indtægt i den pågældende skattepligtsperiode. Hvis skattepligten indtræder for et kortere tidsrum end et år, afpasses indkomsten således, at den kommer til at svare til et fuldt års indkomst i forhold til indtægten i den del af skatteåret, han er skattepligtig her i landet.

Stk. 4. Ved ansættelsen for det efterfølgende skatteår ansættes den pågældende efter samme regler som i stk. 3, medmindre han i det foregående kalenderår har havt skattepligtigt ophold her i landet i mindst 6 måneder, i hvilket tilfælde indkomsten i dette tidsrum vil være at lægge til grund for ansættelsen omregnet til et års indkomst.

Stk. 5. Ved påligningen efter stk. 3 og 4 ydes der almindelige fradrag, men i stedet for fradrag for betalte skatter ydes skattefradrag efter følgende beregning: Af den ansatte indkomst efter lovmæssige fradrag beregnes indkomstskatterne til kommune og landskasse efter gældende regler;

galdandi reglum; hesir skattir sammanlagdir verða síðani minkaðir í hlutfallinum millum øðrumegin tí inntøku, sum skattirnir eru roknaðir eftir, og hinumegin hesari inntøku við teimum útroknaðu skattunum løgdum aftrat. Tann eftir hesum minkaða peningahædd, er tann skattur, sum tilsammans kann verða drigin frá,

6. s t k. Er í teim her nevndu førum ein ætlað komandi inntøka fyribils nýtt sum grundarlag undir álíkningini, verður við árs enda álíkningin javnað eftir teim upplýsingum, sum tá eru til taks um verulíga inntøkuna, eftir frammanfyri ávístu reglum roknað eftir einari ársinntøku.

7. s t k. Landsstýrið fær heimild til, har serlig viðurskifti eru, at gera av, at persónur, sum flytur higar til lands, ikki verður líknaður eftir frammanfyri standandi reglum, men eftir teimum reglum, sum galdandi eru fyri persónar, ið búgva her.

8. s t k. Flytir maður úr Føroyum, heldur skattskyldan uppat frá fyrsta degi í tí fjórðingsári, sum er beint aftaná fráflytingardagin, tó ikki fyrr enn hann er vorðin skattskyldugur uttanlands sum fastbúgvandi har ella fyrr enn tey 4 árini eru umliðin, sum nevnd eru í § 14, nr. 3. Allur skattur fyri tíðina fram til endan á tí fjórðingsári, maður flytir út, kann krevjast goldin, áður enn skattgjaldari flytir út, annaðhvørt hesin skattur eftir vanligum reglum er fallin til gjaldingar ella ikki».

de samlede skatter reduceres i forholdet mellem på den ene side den indkomst, hvoraf skatten er beregnet og på den anden side denne indkomst med tillæg af de udregnede skatter. Det således reducerede beløb udgør det fradragsberettigede indkomstskattebeløb.

S t k. 6. Såfremt i de forannævnte tilfælde en ansæt fremtidig indtægt foreløbig skal lægges til grund ved ansættelsen, foretages efter skatteårets udløb regulering af ansættelsen på grundlag af de da foreliggende oplysninger om den virkelige indkomst beregnet til et års indkomst efter foran givne regler.

S t k. 7. Landsstyret bemyndiges til, når særlige forhold foreligger, at bestemme, at personer, som flytter her til landet, ikke påliges efter forannævnte regler, men efter de regler, som er gældende for her bosatte personer.

S t k. 8. Ved fraflytning fra Færøerne ophører skattepligten fra begyndelsen af det kvartal, som følger lige efter fraflytningstidspunktet, dog ikke før end indkomstskattepligt er indtrådt i udlandet som for fasthoende der eller den i § 14, nr. 3 nævnte 4 års periode er udløbet. Al skat for tiden indtil udløbet af det kvartal, i hvilket udrejsen finder sted, kan fordres betalt inden den skattepligtiges udrejse, hvad enten disse skatter efter de almindelige regler er faldet til betaling eller ej.»

6) § 27, 2. stk. verður orðað soleiðir:

«Fey í § 14, nr. 5 umreddu felag v.m. við óskerdari skattskyldu svara skatt til landskassan eftir stiganum í stk. 1, men innan skattarin verður liknaður, verða drigin frá 6 % av tí inngoldna partapeninginum, tó ikki meira enn tað útgoldna vinningsbýti.»

7) § 30, 1. og 2. stk. verða orðað soleiðis:

«Hann, ið flytir til eina kommunu, skal svara skatt til hana frá fyrsta degi í tí fjórðingsári, sum er beint aftaná tilflytingina, tó í ongum føri fyrr enn frá byrjanini av tí skattahálvári, sum hann hevur fingið boð um álikningina.

2. s t k. Flytir skattgjaldari í skattaárinum burtur frá einari kommunu, skal hann gjalda skatt til hana til tann dag, ið hann verður settur í skatt til tilflytingarkommununa, smbr. 1. stk., tó ikki longur enn til skattaárið er at enda. Flytir hann til kommununa í seinasta lagi hin 1. í einum fjórðingsári, hevur tilflytingarkommunan rætt til at fáa skattin fyri tað fjórðingsárið, men um hann flytir frá einari kommunu fyri tann 1. í einum fjórðingsári og ikki flytir til nýggja fillaldskommunu fyrr enn seinni í fjórðingsárinum, lá heldur skattskyldan til fráflytingarkommununa ikki uppat, fyrr enn hetta fjórðingasárið er at enda.»

8) § 78, 3. stk. verður broytt soleiðis:

«Skattgjaldið eftir hesari grein fellur til gjaldingar tann 1. í mán-

6) § 27, stk. 2 affattes således:

«De i § 14 nr. 5 omhandlede ubegrænset skattepligtige selskaber m.v. svarer skat til landskassen efter den i stk. 1 anførte skala, men inden skatten beregnes fradrages 6 % af den indbetalte aktiekapital, dog ikke mere end det udbetalte aktieudbytte.»

7) § 30, stk. 1 og 2 formuleres således:

«Den, som tilflytter en kommune, bliver skattepligtig til kommunen fra begyndelsen af det kvartal, som følger lige efter tilflytningen, dog i intet tilfælde før en tidligere tid end det skattehalvår, i hvilket der er meddelt pågældende underretning om den skete skatteansættelse.

S t k. 2. Fraflytter en skatteyder i skatteårets løb i en kommune, svarer han skatten til denne indtil det tidspunkt, fra hvilket han bliver sat i skat til tilflytningskommunen, jfr. stk. 1, dog længst til skatteårets udgang. Sker tilflytningen senest den 1. i et kvartal, er tilflytningskommunen berettiget til at oppebære skatten for det pågældende kvartal, men sker fraflytningen inden den første i et kvartal, og tilflytningen til den nye opholdskommune først finder sted i kvartalet, ophører skattepligten til fraflytningskommunen først fra udgangen af dette kvartal.»

8) § 78, stk. 3, affattes således:

«Skattebeløbet efter nærværende paragraf forfalder til betaling den 1. i måneden efter, at reg-

aðanum aftaná, at rokning er send frá gjaldstovuni, og hevur skattgjaldarin gjaldfrest til 20. í mánaðanum, jmt. § 81, 3. stk.

Skattgjaldið og eykagjaldið ber til at innheinta við panting, og fyri henda skatt gildir sami forgongurættur sum fyri annan skatt.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi soleiðis, at nr. 2, 3, 4, 5, 7 og 8 fyrstu ferð koma í nýtslu fyri skattaárið 1966/67, meðan nr. 1 og 6 fáa gildi frá og við álíkningini fyri skattaárið 1967/68.

ning er udsendt fra Føroya gjaldstovu, og har skatteyderen betalingsfrist til den 20. i måneden, jfr. § 81, stk. 3.

Skattebeløbet samt efterbetalingsbeløbet kan inddrives ved udpantning, og der haves samme fortrinsret for beløbet som for skatter.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft således, at nr. 2, 3, 4, 5, 7 og 8 første gang finder anvendelse for skatteåret 1966/67, medens nr. 1 og 6 får gyldighed fra og med skatteligningen for skatteåret 1967/68.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur í september 1965 havt samráðingar við umboð fyri ríkisstýrið um sáttmála til fyribyrging av tvinnanda skatting av sonu innløku í Danmark og Føroyum.

Komið er ásaint um orðaljóðið í slíkum sáttmála og hevur landsstýrið í § 92 í skattalógini frá 2. juli 1963 heimild at gera hesa avtalu, men fyri at sáttmálin kann koma at virka soleiðis sum ætlanin er, er neyðugt at nakrar broytingar verða gjørdar í skattalógini.

Undir samráðingunum varð dentur lagdur á at gera sáttmálan so einfaldan og lættan at handfara sum gjørligt; t.d. verður skyldan at svara skatt, tá maður flytir, broytt frá nú at taka við og halda uppat við mánaðarskifti til at vera fjórðingsárið. Hetta fer at gera umsitingina bæði hjá gjaldstovuni og teimum kommunalu tikningarvaldunum einfaldari og skuldi ikki borið í sær nakran miss í skattinum. Fyriskipað er regla, sum ger, at inntøkan hjá tilflytara verður skattað, har hon er vunnin soleiðis, at undan slepst tí skattabýti, sum hígartil hevur verið millum føroyskar og danskar kommunur. Reglur eru eisini settar um atvinnuskatt soleiðis, at hesar verða lættari at praktisera. Hetta skuldi alt lætt um fyrisitingina og tryggja, at vit fingu skatt av tí vinningi, sum fellur av arbeiði her. Lønir til persónar í Danmark fyri nevndarstarv í Føroyum fer at verða skattað har nevndarlimur býr, so har missa vit nakað, men við sáttmála má verða roknað við, at okkurt verður latið móti tí sum fæst. Lærlingum og lesandi føroyingum í Danmark verður tryggjað skat-

talfrælsi av studningum og í stóran mun av arbeiðsimlekum í sambond við lesturin ella læruna ella sum neyðugar eru til uppihald.

Landsstýrið hevur fyri sín part góðkent uppskotið til sáttmálan og hevur ríkisstýrið eisini góðkent hann treytað av, at fær neyðugu broytingar verða gjørdar í skattalógini.

Broytingarnar nr. 2, 4, 5 og 7 í lógaruppskotinum standast av hesum sáttmála og skal landsstýrið mæla til, at tær verða samtyktar so skjótt, at sáttmálin kann verða settur í gildi frá 1. apríl 1966.

Viðvíkjandi hinum broytingunum skal landsstýrið viðmerkja:

ad 1: Reglur eru nú um skatting, tá rekstraramboð verða seld soleiðis, at ein partur av vinninginum kemur undir skattskyldu. Hesar reglur eru rímiligar, tá amboðini, serliga skip, verða seld innlendis, men tykjast reglurnar helst ov linar, tá selt verður út av landinum. Eftir uppskotinum verður við sølu uttanlands allur vinningurin, harumpii eisini konjunkturvinningurin skattaður, meðan við sølu innanlands er bert helvtin av avskrivingini skattskyldug.

ad 3: Í nýggju skattalógini frá 1963 varð veittur mynstraðum fiskimonnum við føroyskum fiskiskipum ein eykafrádráttur í mun til inntøkuna og veiðutíðina. Síðan tá er prislagið broytt og heldur landsstýrið tí rímiligt vera at broyta hesi tøl nakað.

ad 6: Í løgtingslóg nr. 38 frá 28. mai 1965 varð broyting gjørd í § 27 í skattalógini soleiðis, at ávis felløg og stovnar fingu rætt til skattafrían frádrátt við 6% av inngoldnum partapeningi ella garantipeningi. Við nærri kanning heldur landsstýrið hetta kunna fáa óretttvisar avleiðingar, tí vanliga verður latin renta av garantipeningi, og skal so aftrat verða loyvdur frádráttur við 6%, so verða tveir frádráttir, og tá rentan í øllum førum er skattafrí, skuldi reglan verið óneyðug. Eftir galdandi reglum er vinningsbýti ikki skattafrítt fyri partafelag, sum býtir út, og tá tað er skattskyldugt fyri hann, ið fær, kemur tað veruliga undir tvinnanda skatting. Rímiligt er tí at loyva tað frádragið, alt ella partvís, og miðjar reglan móti, at vinningsbýti upp í 6% er skattafrítt tó ikki meira enn felagið veruliga býtir út, soleiðis at býtir tað meira út enn 6%, so eru bert tey 6% skattafri.

ad 8: Tá skattalógin ikki beinteiðis fyrisetur, mer skattur, sum verður eftirlíknaður, t.d. tá skeivt er uppgivið, nýggir upplýsingar koma fram o.a., fellur til gjaldingar, verður hildið beinast at seta fastar reglur um hetta.

1. viðgerð 22. februar og 22. apríl legði skattanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla til, at landsstýrisins uppskot verður samtykt við niðanfyri nevndu broytingum.

Nevndin heldur, at broytingin í nr. 4 er óneyðug, tá landsstýrið hevur heimild í § 92 til neyðug undantøk í skattskyldu.

Nevndin er samd um, at 6% frádráttur in ikki bert skal vera í landsskattinum, men eisini í kommunuskattinum og setur tí fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Nú so nógv er útliðið fer ikki at bera til at broyta fiskimannafrádráttin, soleiðis at hann verður galdandi fyri álíkningina 1966/67 og verður tí í § 2, 2. regla, nr. 3, flutt niður í 4. regla aftanfyri 1, og verður henda regla so galdandi frá og við skattaárinum 1967/68.

Uppskot

1. Viðvíkjandi § 1, nr. 1, 3. stk. seinasta regla: «rakstrinum» verður broytt til «rakstri» í føroyska tekstinum og «driften» broytt til «drift» í danska tekstinum.

2. Viðvíkjandi nr. 3 aftanfyri 20.000 kr. 125 kr. verður í føroyska tekstinum sett: «og har hon er20.000 kr., men minni enn 30.000 kr. 75 kr. fyri hvønn siglingamánaða í inntøkuárinum» og í danska tekstinum: «og hvor den er 20.000 kr., men under 30.000 kr. 75 kr. for hver måned i indkomståret.»

3. Nr. 4 gongur út í báðum tekstum.

4. Sum nr. 4 verður í føroyska tekstinum sett: «í § 9 verður sett sum nýtt nr. 10) hjá teimum í § 14 nr. 5 umrøddu felagum v.m. 6% av tí innguldna partapeninginum» og í danska tekstinum «§ 9 indsættes som nyt nr. 10) for de i § 14 nr. 5 anførte selskaber m.v. 6% af den indbetalte aktiekapital».

5. Sum nýtt nr. 5 verður í føroyska tekstinum sett: «§ 10, 1. stk. nr. 2 gongur út» og í danska tekstinum «§ 10, stk. 1, nr. 2, udgår.»

6. Nr. 5 í landsstýrisuppskotinum verður í báðum tekstum nr. 6 og nr. 6 gongur út.

7. Sum nýtt nr. 7 verður í føroyska tekstinum sett: «§ 27, 3. stk. verður 2. stk.» og í danska tekstinum: «§ 27, stk. 3 bliver stk. 2.»

8. Nr. 7 verður nr. 8 og nr. 8 verður nr. 9 í báðum tekstum.

9. Í § 2 gongur í 2. reglu nr. 3 út og verður í 4. reglu aftaná nr. 1 sett «3» í báðum tekstum.

2. viðgerð 27. apríl og 3. viðgerð 12. mai.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá nevndini:

Stykkið 2 í nevndarinnar uppskoti viðv. nr. 3) í landsstýrisins uppskoti verður broytt soleiðis, at tað, ið stendur aftanfyri «og í danska tekstinum:», verður rettað til: «og hvor den er 20.000 kr., men under 30.000 kr., 75 kr. for hver måned vedkommende er påmønstret i indkomståret.»

Broytingaruppskotið samtykt 20– 0.

Landsstýrisins uppskot so broytt samtykt 19– 0.

22. Útvarp av lögtingsfundum

Ár 1966, 7. februar legði Kjartan Mohr, løgtingsmaður, fram soljóðandi

Uppskot
til samtyktar

Føroya løgting undirstrikar, at løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp, § 8 b) er at skilja sum, at útvarpið hevur heimild til at útvarpa allar almennar fundir, heilar ella í kutum, herundir eisini løgtingsfundir, uttan at biðja um loyvi.

Viðmerkingar:

Formannsskapur Føroya løgtings hevur forðað útvarpinum at koma inn í løgtingssalin við mikrofonini, tá ið tað vil. Formannsskapurin og flokkarnir hava bert viljað givið loyvi til útvarpingar í ávísum førum, sum t.d. viðgerðin av fíggjarlógini, løgmannsrøðuni og landsstýrismálunum, og so tá ið okkurt stórt mál er fyri. Hetta má haldast at vera brot uppá lógina um útvarp frá 28. mars 1956, § 8, b), har stendur: «Heimilt er útvarpinum at sleppa at útvarpa uttan endurgjald almennar fundir».

Tað ber ikki til, at formannsskapurin og flokkarnir skerja hesa lóg. Tvørturímóti má tað haldast vera náttúrligt, at útvarpið á so gjølligan hátt sum gjørligt ber boð úl til Føroya fólk um hvat, ið hendir á tingi.

1. viðgerð 11. februar og málið heint í lógarnevndina, sum 1-t. mai legði fram hetta álit:

Málið, framlagt av Kjartan Mohr, løgtingsmanni, hevur verið til viðgerðar í lógarnevndini. Nevndin heldur ikki, at løgtingsfundir eru almennir í teirri merking, sum løgtingslóg frá 28. mars 1956 meinar við, og at løgtingið má ráða hvørt og hvussu fundir fess verða útvarpaðir.

Nevndin mælir so stætt frá at samtykkja hetta uppskot.

2. viðgerð 15. mai og málið afturtikið av Kjartan Mohr.

23. Stuðul til keyp av hekkutrolara

Ár 1966, 7. februar legði Erlendur Patursson landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um stuðul til keyp av hekkutrolara.	lagtingslov om støtte til køb af hektrawler.
§ 1.	§ 1.
Í sambond við keyp av týska motor hekkutrolaranum «Kap Farvel» verður landsstýrið heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri prioritetslánum og at veita kurstapslán og studningslán.	I forbindelse med køb af den tyske motor hæktrawler «Kap Farvel» bemyndiges landsstyret til på landskassens vegne at garantere for prioritetslån og at yde kurstabslån og tilskudslån.
Kurstapslán og studningslán verða at prioritera eftir reglunum í løgtingslóg nr. 48 frá 30. mai 1964 um endurnýgging fiskiskipaflotans, eins og treytin til eginpening er hin sama sum eftir hesi lóg, og at hesin verður bundin sum partapeningur. Eisini er tað ein treyt fyri stuðulin, at landsstýrið setur kommiteraðan at hava eftirlit við eigarafelagnum.	Kurstabslån og tilskudslån skal prioriteres efter reglerne i lagtingslov nr. 48 af 30. maj 1964 om fornyelse af fiskerflåden, ligesom kravet til egenkapital er det samme som efter denne lov, og at denne bindes som aktiekapital. Endvidere er det en betingelse for støtten, at landsstyret indsætter en kommiteret til at have tilsyn med ejerselskabet.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

P/f Saturn í Vestmanna hevur vent sær til landsstýrið við umsókn um stuðul, nú felagið ætlar at keypa hekkutrolara.

Felagið átti t/tr. «Gullberg», sum varð seldur til Onglands seinasta summar. Við søluna vórðu 500.000 kr. tøkar, sum ætlanin er at seta í nýtt fiskiskip.

Aftaná gjølla at hava kannað málið er felagið komið fit að úrslit at keypa hekkutrolara og er hesin m/tr. «Kap. Farvel», eigari Cranzer Fischdampfer AG í Hamburg.

Trolarin er latin eigarunum í mai 1963 frá skipasmiðjuni H. C. Stülcken & Solm í Hamburg. Hann er til støddar 66,59 m longsta longd, 10,20 m.br. og 4,65 m djúpur, registaratonsatalið er 724,15 t.br. og 273,40 t. netto, høvuðsmaskinan er 1830 HK Deutz Diesel, sum gevur ferðina um 15 míl. Hann er klassaður í Germanischer Lloyd + 100 A4 (E) «Fischereifahrzeug».

Skipið hevur, sum er, eina frystilast, eina køtilast og eina last til fiskamjøl. Hesar tvær seinastu lastirnar ætlar felagið at broyta, soleiðis at køtilastin eisini verður frystilast og mjøllastin saltfiskalast. Tá hetta er gjørt, heldur felagið, at trolarin tekur 340 tons av flaki og 150 tons av saltfiski.

Sum er, er trolarin útgjørdur við vertikalum frystiamleggi til frysting av rundum fiski og frystiskápi til flak. Hetta vil felagið broyta til bert horisontala frysting (frystiskáp), soleiðis at øll frystiorkan verður 21/25 tons av flaki pr. 21 timar.

Summi av manningarrúmunum skulu broytast eins og bjargingarútgerðin at lúka krøvini hjá skipasýninum.

Keypspeningin og kostnaðin av broytingunum metir felagið til um 6.200.000 kr.

Felagið hevur samráðst um tánveiting og heldur seg kunna greiða keypið við hesari finansiering:

Eginpeningur	500.000,
Færøernes Realkreditinstitut 50 %	2.666.000,
nom. 3.100.000 kr., kurs 86	
Studningslán 15 %	930.000,
Kurstapslán 14 % av 3.100.000 kr.	434.000,
Lán í Vestur Týsklandi	1.000.000,
Bankalán í Føroyum	670.000,
	6.200.000,

Munnligt lyfti er givið frá realkreditstovninum, men krevur hann landskassaveðhald. Tilsøgn er givin um týska lánið til 8 % p.a. at gjalda aftur í 6 ár móti løgtingsveðhaldi. Eisini hevur banki givið tilsøgn um 670.000 kr. í láni og heraftirat, at hetta lánið og lánið úr Týsklandi verða goldin aftur í 10 ár við eins stórum árligum avdráttum. Bankin krevur høskandi trygd fyri hetta lán.

Felagið sigur, at tað fyrst í hesi viku skal taka støðu til keyp og biður ti um, at málið fær skjóta viðgerð. Felagið vísir á hvussu stóran týdning málið hevur fyri Vestmanna bygd, har bert eitt skip nú er eftir.

Eftir teimum upplýsingum frá september 1965, sum landsstýrið liggur við, eru seinastu tvey árini bygdir um 30 hekkutrolarar í stødduni 200-250 fót og í stødduni 150-200 fót um 20. Byggiprísirnir eru hesi tvey árini hækkaðir við um 6—10 %.

Við fyrivarni um, at munur er, sum skipini eru útgjørd til, eru byggiprísirnir fyri hekkutrolarar eftir meting hesir:

250 fót.....	13	milj. kr.
200 fót.....	10	milj. kr.
175 fót.....	7½	milj. kr.
150 fót.....	6½	milj. kr.

Lógin um endurnýgging fiskiskipaflotans gevur bert heimild at veita studningslán og kurstapslán til nýbyggingar eins og ongin heimild er at veðhalda fyri prioritetsláni.

Fyrr hava menn borið uppá mál at fáa hekkutrolara til landið, men eru hesar royndir ikki eydnaðar.

Tað ber helst á tað borið, at tað verður hekkutrolarin sum fer at loysa síðutrolaran av. Fyrsta takið er í flestu førum tað tyngsta og ein royndsum aðrir og samfelagið kann fáa nyttuna av. Landið eigur tí her ta ábyrgdina at stuðla serliga undir, so menn og feløg hava møguleikan fyri at fara undir tað, sum enn er óroyut á okkara leiðum, og sum mett verður at hava stóran týðning fyri land okkara.

Út frá hesum er tað, at landsstýrið mælir til at stuðla fyriliggjandi keyp, tó treytað av, at eginpeningurin kemur uppá ta hædd, sum kravdur verður í allari skipabygging, har landið luftekur, ella 10 %, í hesum fyri um 620.000 kr., og at hesin peningur verður bundin sum partapeningur.

Viðlagt er rakstraryvirlit.

Rakstur av m/tr. Kap Farvel fyri eitt ár á 3 túrar.

Inntøkur:	p/f Saturn	alt I.	landsskrivstovan	alt. II.
1. saltfiskur	450 t. á 2.500 = 1.125.000	387 t. á 2.500 =	967.00	172 t. á 2.500 = 430.000
2. filet	1020 t. á 3.600 = 3.672.000	870 t. á 3.600 =	3.132.000	1.020 t. á 3.600 = 3.672.000
3. lýsi	75.000		75.000	75.000
	4.872.000		4.174.500	4.177.000
Útreiðslur:				
4. olja	345.000		345.000	
5. vistir	90.000		106.000	
6. salt	30.000		30.000	
7. trolgreiðir	270.000		270.000	
8. tryggingargjøld	105.000		150.000	
9. hýrur, manning	1.453.480		1.205.000	
10. hýrur, yvirmenn	630.000		500.000	
11. umvælingar, greiðir			181.000	
12. havnagjøld, søluútreiðslur, tollur, uppskipan, lønjavningargrunnurin o.t.	60.000		93.000	
13. renta og avdráttur 1. árið	894.000		894.000	
	3.877.200		3.751.000	

Viðmerkingar til rakstraryvirlitið frá landsskrivstovuni:

ad 1-3. Føroyskur trolari hevur í 1965 frá 20/1-1965 til 2/1-1966 í 3 túrum og í 340 døgum úr havn fingið tilsamans 3.812 tons í sløgdum fiski – 1639 tons í saltfiski umrokningsprocent 43.

Roknað er við, at «Kap Farvel» fær sunn nogl í ráfiski sum nevndi trolari ella 3.800 tons, meðan felagið roknar við 4.440. Skarðhamar upplýsir, at hekkutrolarin «Junella» bygdur 1962, 1435 br.t., 240 f., hevur fiskað:

1963	*túrar*	*dagar úr havn*
3095 t.	10	348
1964		
2713 t.	9	344
1965		
fyribilstøl:		
2480 t.	7	281

Av tí at Kap Farvel her skal gera 3 túrar um ársins, fer hann fleiri fiskidagar, um 60 dagar fleiri um ársins.

Eftir fyriliggjandi upplýsingum er veiðan hjá Junella pr. fiskidag:

1963	12,5 t.
1964	11,1 t.
1965	13 t.

Alternativ I. Her er gingið út frá, at hálfalli millum saltfisk og filet er tað sama sum í uppstillingini hjá p/f Saturn. Umrokningarprocentið frá ráfiski til filet er 30.

Tá felagið setur prísin á saltfiski so bogan sum 2,50 pr. kg, so beldur henda meting bert, um tað er tann stóri fiskurin yvir 26", sum verður sallaður. Fyri teir triggjar túrarnar hjá foroyska trolaranum vóru prísirnir hesir

	yvir 26"	mongd yvir 26"	meðalprísur
1. túr	2,43 kr.	195 t.	1,95 kr.
2. túr	2,46 kr.	331 t.	2,12 kr.
3. túr	2,83 kr.	206 t.	2,18 kr.
		732 t.	

Alternativ II.

Um nú felagið leggur mesta dentin á at fiska flak, t.e. roynir at fylla flakalustina hvørja ferð, verða hert 172 t. í saltfiski. Samlaða søluúrstitið verður lítið og onki broytt, helst tí at saltfiskaprísurin er settur ov høgt.

a d útreiðslupostunum.

Postarnir 1, 5,7,8,11 og 12 eru settir eftir miðaltølunum hjá 12 trolarum í 1961. Summir av hesum áttu at verið hækkaðir eftir prisvøkstrinum síðani 10-15 %, hetta vildi hækkað útreiðslurnar við um 100.000 kr.

1. viðgerð 7. februar og 8. legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at úttala, at tað hevur størsta týdning, at føroyingar fáa royna ein hekkutrolara, men í hesum føri er hetta frávik frá galdandi reglum um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum. At nevndin hóast tað viðmælir hetta frávik er tí, at tað er ein nýggj royna á sama hátt, sum áður hevur verið í øðrum førum, sum tá fyrsta stálskipið var bygt, fyrsta farmaskipið og so framvegis og er ikki avgerandi fyri, hvørja støðu nevndin í framtíðini kemur at taka til tílík mál.

Fíggjarnevndin sær, at í teim í framløgutilmælunum uppsettu meltingum er í hesum føri roknað við sama lønum til yvirmenn, sum á vanligum trolarum. Hetta heldur nevndin ikki vera beint, tá her er talan um stórt verksmiðjuskip, og áttu yvirmannalønirnar at verið lutfallsliga minni enn á vanligum trolarum, og roknar nevndin við, at samráðingar sum skjótast verða tiknar upp um hetta.

Í uppskotinum frá landsstýrinum verður kravt, at eginpeningurin skal verða bundin sum partapeningur, men av skattatekniskum orsøkum letur hetta seg ikki gera, og mælir nevndin tí til, at hetta verður broytt soleiðis, at eginpeningurin verður bundin eftir reglum sum landsstýrið í samráð við fíggjarnevndina setur.

Nevndin er tí samd um at mæla til at samtykkja landsstýrisins uppskot við hesi broyting:

Broytingaruppskoti
(frá allari nevndini)

Í føroysku tekstini í landsstýrisins uppskoti verður í § 1, stk. 2 ístaðin fyri orðini «sum partapeningur» sett «eftir treytum sum landsstýrið í samráð við fíggjarnevndina setur» og í danska tekstini ístaðin fyri orðini «som aktiekapital» sett «efter bestemmelser som landsstyret i samråd

med finansudvalget foreskriver».

2. og 3. viðgerð 8. februar.

Broytingaruppskotið frá nevndini samtykt 27 0.
Landsstýrisins uppskot so broytt samtykt 25 0.

---

24. Stuðul til bygging av farmaskipum

Ár 1966, 8. februar legði Karsten Høydal landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um stuðul til bygging av farmaskipum.	lagtingslov om støtte til bygning af fragtskibe.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum er heimilað í samráð við figgjarnevndina lands kassans vegna at veðhalda at føroyskar skipasmiðjur lúka treytirnar eftir sáttmálum um bygging av farmaskipum, fyri lánum til bygging og fyri prioritetslánum til nýggj farmaskip.	Landsstyret bemyndiges til i samråd med finansudvalget på landskassens vegne at garantere for, at færoske skibsværfter opfylder betingelserne for bygning af fragtskibe, for lån til bygning af og for prioritetslån til nye fragtskibe.
2. stk. Veðhaldini fyri prioritetslánum eru avmarknði til 4 milj. kr. hvørt av teimum 4 figgjarárunum 1966/67 til 1969/70.	Stk. 2. Garantierne for prioritetslån er begrænset til 4 mill. kr. hvert af de 4 finansår 1966/67 til 1969/70.

§ 2.

Veðhaldsveitingin er treytað av, at viðkomandi byggiharri/skipacigari eignr í minsta lagi 10% av byggipeningnum eftir sáttmála ella virði skipsins eftir meting.

§ 3.

Veðhald fyri prioritetslánum verður í mesta lagi veitt upptil 15 ár. Byrjunardagurin fyri minkan av veðhaldinum kann skjótast út í upptil 2 ár eftir, at veðhaldið er bindandi.

§ 4.

Prioritetslánini, landskassin veð heldur fyri, verða tryggjað við pant í skipinum innanfyri 90% av virði skipsins eftir meting.

§ 5.

Til fulla ella partvísa endurrinding av farmagjaldsútreiðslum fyri tilfar til bygging av farmaskipum á føroyskum skipasmiðjum, kann studningur veitast við upp til 4,50% av virði skipsins eftir meting.

§ 6.

Til fulla ella partvísa endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum í sini av tilfari til bygging av farmaskipum á føroyskum skipasmiðjum kann studningur veitast við upp til 3,75% av virði skipsins eftir meting.

§ 7.

Tann í §§ 1, 5 og 6 nevndi stuðul kann bert veitast, tá ið talan er um farmaskip upp til um 1.000 br.reg.tons til støddar.

§ 2.

Garantiydelsen er betinget af, at vedkommende byggeherre-/skibsejer har mindst 10 % af byggeudgiften efter kontrakt eller skibets værdi efter vurdering.

§ 3.

Garanti for prioritetslån ydes højst over 15 år. Begyndelsestidspunktet for garantiens nedbringelse kan udskydes i indtil 2 år, efter at garantien er bindende.

§ 4.

De prioritetslån, som landskassen garanterer for, skal sikres med pant i skibet indenfor 90% af skibets værdi i henhold til vurdering.

§ 5.

Til hel eller delvis dækning af fragtudgifterne for materiale til fragtskibe bygget på færøsk værft, kan der ydes tilskud på indtil 4,50% af skibets værdi i henhold til vurdering.

§ 6.

Til hel eller delvis refusion af den særlige indførelsesafgift, der også erlægges af materiale til fragtskibe bygget på færøsk værft, kan der ydes tilskud på indtil 3,75% af skibets værdi i henhold til vurdering.

§ 7.

De i §§ 1, 5 og 6 omhandlede støtteforanstaltninger kan kun ydes i de tilfælde, hvor der er tale om fragtskibe af en størrelse på indtil ca. 1.000 br.reg.tons.

§ 8.

Meting eftir §§ 2, 5 og 6 verður gjørd av metingarmonnum, landsstýrið uppnevnir, av hesum skal ein vera skipakønur og ein maskinkønur.

§ 9.

Studningarnir eftir §§ 5 og 6 verða goldnir úr grunnínum til endurnýggjing av fiskiskipaflotanum.

§ 10.

Hetta lóg fær gild ifrá 1. apríl 1966.

2. stk. Lógin verður at endurskoða í løgtingssetuni 1969.

§ 8.

De i §§ 2, 5 og 6 omhandlede vurderinger udføres af 3 vurderingsmænd, som landsstyret udpeger. Af disse skal en være skibskyndig og en maskinkyndig.

§ 9.

Tilskudene i henhold til §§ 5 og 6 afholdes over fonden til fiskerflådens fornyelse.

§ 10.

Denne lov træder i kraft fra 1. april 1966.

2. stk. Loven skal optages til revision i lagtingssamlingen 1969.

Viðmerkingar:

Eftir løgtingslóg nr. 6 frá 7. februar 1964, sum hon er broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 14. august sama ár fekk landsstýrið heimild til í samráð við fíggjarnevndini at veðhalda fyri lánum til bygging av farmaskipum, fyri prioritetslánum og fyri at føroyskar skipasmiðjur lúka treytirnar eftir sáttmálum um bygging av farmaskipum alt fyri tilsamans 8 milj. kr. í fíggjarárinum 1964/65 og 4 milj. kr. í fíggjarárinum 1965/66.

Haraftarat er heimild at veita í studningi til føroyskar skipasmiðjur í farmagjaldsstudningi 4,50 % og til endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum 3,75 % av virði skipsins eftir meting.

Stuðul er eftir lógini veittur til bygging av 7 farmaskipum, 5 fyri føroyska og 2 fyri danska rokning. Av skipunum eru ella verða tey 1 bygd á føroyskari skipasmiðju, 2 á danskari og 1 á norskari.

Stuðulin býtir seg soleiðis:

Sáttmálaveðhald	8.186.350 kr.
Veðhald av byggilán	6.839.550 kr.
Veðhald av prioritetslán	4.109.000 kr.
Studningur	361.350 kr.

Í veruleikanum eru veðhald fyri sáttmála og byggilán veðhald fyri sonnu risiko, og tá veðhald verður givið fyri prioritetslán, skulu tey fyrru

fella burtur. Lógarheimildin er tí ikki enn all brúkt. Studningur verður goldin um grunnin til endurnýggjing fiskiskipaflotans, jbr. § 6.

Síðani lógin varð sett í gildi er lóg nr. 143 frá 17. mai 1961 «om et skibsfinansieringsinstitut» lýst at galda í Føroyum, jbr. løgtingsmál nr. 60/1961 og harafturat hevur løgtingið, jbr. løgtingsmál nr. 18/1961, samtykt at mæla til, at lóg nr. 331 frá 24. november 1961 «om garantier eller lån til bygning af mindre fragtskibe» verður galdandi í Føroyum. Málið er lagt inn á fólkating í hesi setu.

Skipsíleggingarstovnurin hevur givið tilsøgn um lán til 4 skip ið eru ella verða skrásett í Føroyum. Lánini eru uppí 80 % av virði skipsins, avdráttarfriðin 10 ár og verða goldin í kassaobligatiónum vanliga til 6 % renta, trygdin er 1. prioritet í skipinum og heraftarat bankaveðhald fyri tey seinastu 30 %. Orsakað av krøvunum eftir bankalógini um lutfalli millum egingpening og veðhald eru bankarnir ikki førir fyri at taka nevndu kaution uppá seg, og hevur tað tí verið neyðugt hjá landsstýrinum at veita bankunum veðhald fyri tey 30 %. Helst broytist hetta, um seinra lógin fær gildi her, soleiðis at bankar og landskassi sleppa undan at veðhalda fyri hendu lánipartin.

Viðmerkingar til §§:

ad § 1. Um 4 farmaskip verða bygd árliga fyri føroyska rokning og hesi í meðal verða sett til 3 milj. kr., rækkur ein veðhaldsheimild til prioritetslán uppá 3.6 milj. kr. árliga. Einki mark er sett fyri sáttmálaveðhald og veðhald av byggiláni, hesi eru jú stuttfreistaði og fella burtur, tá prioriterað verður.

Eftir uppskotinum er tað, sum higartil, fíggjarnevnd og landsstýrið sum eiga avgerðina. Spurningur er um hetta eigur at broytast, so landsstýrið fær heimildina einsamalt.

ad § 2. Svarar til § 1, 2. stk. í galdandi lóg.

ad § 3. Spurningurin er, um áramálið skal setast til 10 ella 15 ár. Tá ið skotið er upp at seta 15 ár, so er tað fyri at landsstýrið fær tann møguleika í serligum føri at geva skáða.

ad § 4. Svarar til § 1, 2. stk. í galdandi lóg.

ad §§ 5-9: Svara til §§ 2-6 í galdandi lóg.

ad § 10, 2. stk. Lógin verður eftir hesum at endurskoða í sama tingsetu sum lógin til endurnýggjing av fiskiskipaflotanum.

1. viðgerð 10. februar og 23. s.m. legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Galdandi lóg um veðhald fyri bygging av farmaskipum fer úr gildi 31. mars í ár og eftir fyriliggjandi uppskoti verður lógin endurnýggjað at galda í 4 ár frá og við figgjarárinum 1966/67 til og við figgjarárinum 1969/70.

Eftir nýggja uppskotinum er einki mark fyri sáttmálaveðhaldum og veðhaldum av byggilánum, tí hesi eru skattfreistað og fella burtur, tá ið prioriterað verður, meðan veðhaldini fyri prioritetslánum eru avmarkað til 4 milj. kr. hvørt av teim nevndu í figgjarárum.

Eginpeningurin er sum áður settur til 10 %, meðan møguleiki er eftir uppskotinum at veita veðhald fyri prioritetslánum upptil 15 ár.

Í hesi lóg eru eisini upptiknar reglur um fulla ella partvísa endurrinding av farmagjaldsútreiðslum til bygging av farmaskipum á føroyskum skipasmiðjum og til fulla ella partvísa endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum.

Tað er við hesi lóg bert hugsað um skip upp til 1000 br.reg. tons til støddar.

Lógin kemur at verða endurskoðað í sonn tingsetn sum lógin um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

Eftir § 1 í uppskotinum verður landsstýrið saman við figgjarnevndini heimilað at veita umtalaðu veðhald, men landsstýrið umtalar í viðmerkingum sínum tann møguleika, um ikki hella eigur at verða broytt so, at landsstýrið fær heimildina einsamalt.

Hetta heldur figgjarnevndin seg ikki kunna styðja og ger tí onga broyting her.

Eftir § 8 í uppskotinum verða tær umtalaðu metingar gjørdar av metingarmonnum, sum landsstýrið uppnevnir, men meðan tað í danska tekstini eru nevndir 3 metingarmenn, er í føroyska tekstini einki tal nevnt av metingarmonnum. Tá hetta man verða ein skrivifeilur, verður hann rettaður her við broytingaruppskoti.

Figgjarnevndin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum

BROYTINGARUPPSKOTI

I § 8 í landsstýrisins uppskoti verður í føroyska tekstini millum orðini «av» og «metingarmonnum» sett «3».

2. viðgerð 28. februar og 3. viðgerð 7. mars.

Broytingaruppskotið frá nevndini samtykt 26-0.

Landsstýrisins uppskot so broytt samtykt 20-0.

---

25. Fyriskipan um luftferðslu

Ár 1966, 9. og 25. februar legði lógarnevndin fram soljóðandi

Landsstýrið hevur 26. mars 1965 lagt fyri løgtingið spurningin um at seta ríkislógina, lóg nr. 252 frá 10/6 1960 um «Luftfart» í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan og við vissum smábroytingum (jbr. løgtingsmál nr. 73/1961). Eftir landsstýrisins viðmerkingum kundi tað sæð út sum kap. 9 í teirri nevndu ríkislóg ikki var sett í gildi í Danmark, men tað er gjørt við lóg nr. 272 frá 18. juni 1963.

Málið hevur verið í lógarnevndini, og mælir lógarnevndin til at samtykkja uppskot landsstýrisins, sum er soljóðandi:

Uppskot
til samtyktar

Við heimild í § 158 í lóg nr. 252 frá 10. juni um «luftfart» verður henda lóg at seta í gildi í Føroynum við kgl. fyriskipan við hesum broytingum:

1) I § 61 ganga orðini «skal ekspropriation kunne ske efter reglerne i forordning af 5. marts 1845, jfr. lov nr. 6 af 10. januar 1928 om tillæg til samme, såfremt ministeren for offentlige arbejder måtte skønne, at det pågældende formål har almen interesse» út og í staðin verður sett «bemyndiges landsstyret til at erhverve, om fornødent ved ekspropriation efter reglerne i lov nr. 69 af 7. maj 1881 om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingspladser samt til offentlige skoler på Færøerne med senere ændringer, de nødvendige arealer m.v.»
2) § 75, stk. 1, verður orðað soleiðis: «til drift af regelmæssig luftfart i erhvervsøjemed over færøsk område kræves tilladelse af ministeren for offentlige arbejder efter indhentet udtalelse fra Færøernes hjemmestyre.»
3) § 85, stk. 1, verður orðað soleiðis: «Luftfartøjer må ikke medføre eksplosive stoffer, krigsmateriel eller krigsammunition.»
4) I § 150, stk. 8, verður aftaná «§ 70 i fødselsloven» skoytt uppí og «§ 59 i lagtingsloven om fødsel.»
5) I § 156, stk. 1, verður «dansk» broytt til «færøsk».
I § 156, stk. 2, verður aftaná «forsvarsministeren» sett «efter indhentet udtalelse fra Færøernes landsstyre og».
6) I § 157, stk. 1, verður skoytt uppí: «og midlertidig bestemmelse nr. 55 af 19. december 1912 om visse ekspropriationer.»
7) § 158 verður orðað soleiðis:
«Denne anordning træder i kraft .....».

Uppískoyti
til álit

Síðani hetta álit 9. februar 1966 varð framlagt í tinginum, hevur landsstýrið hin 15. februar utlan viðmerkingar send tinginum skriv dagfest 30. december 1965 frá Ministeriet for offentlige arbejder til Statsministeriet við átekning ríkismanboðsmannsins dagfest 12. februar 1966 til Føroya landsstýri. Skriv dagfest 13. oktober 1965 frá Forsvarsministeriet, Keypmannahavn, til Ministeriet for offentlige arbejder viðvíkjandi hesum sama máli er eisini sent tinginum.

§ 85, stk. 1, í lov om luftfart er soljóðandi:

«Luftfartøjer må ikke uden tilladelse af ministeriet for offentlige arbejder og justitsministeren eller af den, som disse dertil bemyndiger, medføre eksplosive stoffer, krigsmateriel eller krigsammunition. Ministeren for offentlige arbejder kan efter forhandling med forsvarsministeren og justitsministeren ved forskrift gøre undtagelse fra bestemmelsen i 1. punktum og fastsætter i ligeledes efter forhandling med

justitsministeren — hvad der skal forstås ved eksplosive stoffer, krigsmateriel eller krigsammunition.»

Uppskot landsstýrisins, sum lógarnevndin einmælt hevur viðmælt, er, at hetta stykki verður soleiðis orðað:

«Luftfartøjer må ikke medføre eksplosive stoffer, krigsmateriel eller krigsammunition».

Danska verjumálaráðið kann fyri sitt viðkomandi ikki fallast á hesa broyting í § 85, 1. stk., við tað at broytingin merkir, «et forbud mod, at civile luftfartøjer på Færøerne medfører eksplosive stoffer, krigsmateriel eller krigsammunition, hvorved forsvaret ville blive pålagt uønskede restriktioner i sin anvendelse af transportmidler til fremføring af materiel m.v. til militære installationer og enheder på og ved Færøerne, herunder også materiel til de under Færøernes Kommando hørende inspektionsskibe.»

Eiheldur vil verjumálaráðið, at reglan í stykki 1 um, at Ministeriet for offentlige arbejder og løgmálaráðið skulu gera av, hvat meint er við eksplosiv evni, krígsmateriel og krígsammunitión, skal falla niður.

So statt mælir verjumálaráðið til, at § 85, stk. 1, verður sett í gildi í Føroyum, sum hon er, møguliga tó soleiðis, at «en udtalelse frá Færøernes landsstyre skal indhentes», áðrenn viðkomandi ministerium gevur loyvi til flutning av tí nevnda tilfari og materiel á føroyskum øki.

Ministeriet for offentlige arbejder ger seg til talsmann fyri verjumálaráðsins principalu og subsidiæru støðu. Ríkisumboðsins skriv til landsstýrið má skiljast soleiðis, at ríkisumboðið (statsministeriið) mælir til la seinru versiónina. Veruliga biður ríkisumboðið tó bert um álit landsstýrisins. Tað er ikki greitt, um landsstýrið hevur svarað hesum skrivi ríkisumboðsmannsins frá 12. februar, men landsstýrið hevur sum sagt uttan viðmerkingar sent løgtinginum tað nevnda brævaskifti.

Lógarnevndin sær onga grund ella heimild til at víkja frá uppskoti landsstýrisins, sum nevndin longu hevur mælt løgtinginum til at samtykkja.

Lógarnevndin vísir til løgtingsmál nr. 14 í 1960: Mótmæli móti herstøðum í Føroyum (síðu 102 til 104 í Løgtingstíðindi 1960). Undir hesum máli hevur Føroya løgting einmælt mótmælt, «At hernæm verða knýtlir at Sodnfellis- ella Eiðisstøðini og noktað fyri, at krígsútgerð verður goymd ella nýtt á føroyskum land- ella sjóoki, tó undantikið tí, ið er neyðugt fyri at røkja sjóverjuna (fiskarítinspektiónina)».

Umfram áðurnevnda brævaskifti hevur landsstýri — sonnuleiðis uttan viðmerkingar — sent fram yvirlit yvir 17 kunngerðir og fyriskipanir viðvíkjandi loftferðslu, sum í Danmark er komið í tíðini frá 1930 til 1965. Hetta yvirlit er sent landsstýrinum frá Ministeriet for offentlige arbejder við statsministeriet og ríkisumboðið. Donsku myndugleikarnir

spyrja, um og við hvørjum broytingum hesar administrativu kunngerðir skulu gerast galdandi í Føroyum. Einasti kunngerðartekstur, sum fylgir málinum, er «Bekendtgørelse om transport af eksplosive stoffer, krigsmateriel og krigsammunition m.v. med civile luftfartøjer» frá 17. august 1964. Hendá kunngerð rímar so ikki við landsstýrisins uppskot ad § 85, stk. 1, í lógini. Tað er skilligt, at nógvar av kunngerðunum eru óneyðugar í Føroyum. Áðrenn lógarnevndin fær gjørt nakað við hesar kunngerðir, má hon biðja landsstýrið skilja tær, lýsa tær og annars komu við sínum tilmæli.

Lógarnevndin heldur ikki, at tað máttí verið neyðugt, at hesar kunngerðir verða viðgjørdar, áðrenn lógin verður viðgjørd í lagtinginum. Viðvíkjandi lógini um loftferðslu skal lógarnevndin annars viðmerkja, at loftferðsla er B-mál eftir lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 om Færøernes hjemmestyre, og at lógin annars í sínt § 58, 2. stk., hevur hesa reglu:

«Loven gælder ikke for Færøerne. Ved kgl. anordning kan det dog bestemmes, at loven tillige skal gælde for Færøerne i det omfang og med de ændringer, som indstilles af Færøernes lagting.»

So staðt mælir lógarnevndin framvegis til at samtykkja uppskot landsstýrisins, soleiðis sum hetta er fyrilagt tinginum frá lógarnevndini 9. f.h.m.

2. viðgerð 28. februar.

Uppskotið frá nevndini samtykt 21--0.

---

26. Landsstýrismálini

Ár 1966, 7. mars legði tingformaðurin fram landsstýrismálini og beindi tey til landsstýrismálanevndina.

---

27. Havnarverkið í Fuglafirði

Ár 1966, 15. februar legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um studning og ábyrgd fyri láni til øking um havnarverkið í Fuglafirði.

§ 1.

Úr landskassanum verður veittur studningur til øking um havnarverkið í Fuglafirði við tí endamáli at skapa grundøki v.m. fyri virki til framleiðslu av silda- og fiskamjøli, sildaolju o.t. Studningurin verður 50 % av byggipeningunum, tó hægst 50 % av 4.000.000 kr., og verður at rinda við eins stórum ársgjøldum í 10 fylgjandi figgjarár frá figgjarárinum 1966-67 at rokna.

§ 2.

Eingin studningur verður goldin ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett fyri eini góðkenning av byggiætlanini, eru loknar og vissa er fyri, at tað í § 1 nevnda virki verður sett á stovn.

§ 3.

Landsstýrinum verður heimlað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum upp til 2.800.000 kr. til Fuglafjarðar kommunu í sambandi við hesa øking um havnarverkið í Fuglafirði.

§ 4.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinan vegin, og samstundis fer

lagtingslov om tilskud og garanti for lån til udvidelse af havneanlægget i Fuglafirði.

§ 1.

Af landskassen ydes tilskud til udvidelse af havneanlægget i Fuglafirði med det formål at skabe grundareal m.v. for et fabriksanlæg for produktion af silde- og fiskemel, sildeolie o.l. Tilskudet andrager 50 % af anlægsudgifterne, dog højst 50 % af 4.000.000 kr., og udbetales i lige store årlige rater i 10 på hinanden følgende finansår fra finansåret 1966/67 at regne.

§ 2.

Ingen del af tilskudet udbetales eller stilles som sikkerhed, førend alle betingelser, landsstyret måtte stille for en godkendelse af projektet er opfyldt, og der er vished for, at det i § 1 nævnte fabriksanlæg etableres.

§ 3.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån på indtil 2.800.000 kr. til Fuglafjarðar kommune i forbindelse med denne udvidelse af havneanlægget i Fuglafirði.

§ 4.

Denne lagtingslov træder i kraft straks, og samtidig ophæves lag-

úr gildi løgtingslóg nr. 22 frá 6. mai 1965: løgtingslóg um studning og ábyrgd fyri láni til øking um havnarplássið í Fuglafirði.

tingslov nr. 22 af 6. maj 1965: lagtingslov om tilskud og garanti for lån til udvidelse af havnepladsen i Figlafirði.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 22 frá 6. mai 1965: løgtingslóg um studning og ábyrgd fyri láni til øking um havnarplássið í Fuglafirði, varð játtað Fuglafjarðar kommunu 50 % av 900.000 kr. í studningi til øking um havnarplássið har fyri at skapa møguleika at seta á stovn virki til framleiðslu av sildu- og fiskamjøli og sildaolju.

Ætlanin var, at virkið í fyrsta syltu skuldi hava eina framleiðsluorku upp á maksimall 250 t/sandøgur, og var tí roknað við, at pierurin, ið er, gav nóg mikið alløguplass, so ikki var neyðugt at gera bryggju beinanvegin.

Eina tíð aftaná at nevnda løgtingslóg var samtykt, varð nýtt felag P/F Havshrún sett á stovn við tí endamáli at taka á seg at lata byggja og reka nevndu verksmiðju, og var hetta felag so mikið betri fyri peningaliga, at tað kundi fara undir at byggja verksmiðju við framleiðsluorku 500 t/sandøgur.

Verksmiðja við hesi orku krevur meiri bryggjuplass enn tað, pierurin gevur, og er tí neyðugt at byggja einar 100 m av bryggju frammanfyri plássið, har verksmiðjan skal standa.

Aðrar byggingar krevjast eisini í sambandi við verksmiðjuna. Beint oman fyri, har verksmiðja verður sett, er oljugoymsla. Goymsluøkið har er, sum er, ov lítið til at taka tá neyðugu øking av goymslukapasitetinum, og tangarnir, sum eru, kunnu ikki verða standandi, tí har forða teir fyri havnarbyggingini. Tá so er, og tá harumfram kemur, at sera ódánligt er at hava oljugoymslu beint niðan av tílíkum virki, er komið ásamt um at flyta oljugoymsluna einar 400 m longur suður. Hetta ger tað neyðugt at byggja einar 2—300 m av vegi suður undir balokanum og helst byggja serstaka oljubryggju millum tu nýggju bryggjuna og oljugoymsluna.

1. viðgerð 23. februar og 7. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Sum yvirskt undir 1. viðgerð hevur figgjarnevndin viðgjørt málið saman við havna- og veganevndini.

Eftir § 1 í uppskotinum verður úr landskassanum veittur studningur til øking av havnaverkinum í Fuglafirði við upp til 4 milj. kr., harav løgtingsins partur upp til 50% av nevndu peningaheddi verður at rinda við eins stórum ársgjøldum í 10 fylgjandi figgjarár.

Løgtingsins árligu útreiðslur fara tó ikki upp við einum 10-unda parti av 2 milj. kr., av tí at sambært § 4 fer úr gildi løgtingslóg um studning og ábyrgd fyri láni til øking um havnaplássið í Puglafirði, við tað, at tann tá samtykti studningur er innroknaður í tað her fyriliggjandi uppskot. Veruliga hækkingin verður tí 200.000 kr. + 45.000 kr. = 155.000 kr.

Sambært § í uppskotinum verður studningurin ikki útgoldin ella bundin til gjaldingar fyrrenn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar og vissa er fingin fyri, at tað í § 1 nevnda virki er sett á stovn, t.v.s. virki til framleiðslu av silda- og fiskamjøli o.l.

Í § 1 er nevnt, at økingin av havnaverkinum er til at skapa grundøki v.m. til sildaverksmiðjuna. Hertil er at viðmerkja, at í uppískoytinum er mest talan um atleggingarpláss til uppskiping og ferming eins og til bryggjupláss.

Løgtingið hevur áður játtað uppískoytisstudning, har talan er um at hetta er ein treyt fyri virki, sum klárt er at sela á stovn, og fíggjarnevndin mælir tí einmælt til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 9. og 3. viðgerð 10. mars.

Landsstýrisins uppskot samtykt 26—0.

---

28. Eykastudningur til summar havnir

Ár 1966, 15. februar legði løgmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um eykastudning til ávisar havnaviðkamir.	lagtingslov om ekstra tilskud til visse havneudvidelser.
§ 1.	§ 1.
Sum uppískoti til tær játtanir, sum við løgtingslóg nr. 56 frá 3. november 1958: løgtingslóg um	Som tillæg til de bevillinger, der ved lagtingslov nr. 56 af 3. november 1958: lagtingslov om

havnabygging, vórðu veittar til víðkan av havnunum í niðanfyri nevndu kommunum, verður úr landskasanum veittur studningur svarandi til 50 % av tí upphædd, byggiútreiðslurnar til avvarðandi havnaviðkan verða hægri enn tann í omanfyri nevndu løgtingslóg tilskilaði støsti studningsborni byggipeningur, tó hægst 50 % av niðanfyri tilskilaða upphæddum. Studningurin verður goldin við eins stórum ársgjøldum í 5 fylgjandi figgjarár frá og við figgjarárinum 1966/67 at rokna:

Kommuna	kr.
Klakksvíkar	400.000
Nes	700.000
Skála	100.000
Kollafjarðar	150.000
Miðvágs og Sandavágs	900.000
Sørvágs	250.000
Froðbiar	800.000
Vágs	200.000
tilsamans kr.	3.500.000

§ 2.

Ásetingarnar í §§ 3-9 í løgtingslóg nr. 56 frá 3. november 1958 eru eisini galdandi fyri byggingar framdar við studningi sambært hesi løgtingslóg.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

havnebygning, blev ydet til udvidelse af havnene i nedennævnte kommuner, ydes der af landskassen tilskud svarende til 50 % af det beløb, anlægsudgifterne for pågældende havneudvidelse overstiger den i ovennævnte lagtingslov anførte maksimale tilskudsberettigede byggesum, dog højst 50 % af nedenfor angivne beløb. Tilskudet udbetales i lige store årlige rater gennem 5 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1966/67 at regne:

Kommune	kr.
Klakksvikar	400.000
Nes	700.000
Skála	100.000
Kollafjarðar	150.000
Miðvágs og Sandavágs	900.000
Sørvágs	250.000
Froðbiar	800.000
Vágs	200.000
ialt kr.	3.500.000

§ 2.

Bestemmelserne i §§ 3-9 i lagtingslov nr. 56 af 3. november 1958 er også gældende for anlæg udført med tilskud i henhold til denne lagtingslov.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 56 frá 3. november 1958 varð játtaður studningur til 18 ymiskar bygdakommunur. Í farnu 7 árum eru 9 av hesum byggingum framdar og í 6 av kommununum er bygt svarandi til stórri ella minni part av studninginum.

Síðan 1958 eru broytingar av ymiskum slag, sum hava ávirkan á hav-

nabyggingar, farnar fram. Serliga er lønar- og prislagið broytt so nógv hesi árini, at ein kostnaðarætlan frá 1958 í dag lítið hevur við veruleikan at gera. Fisini hevur fiskivinnan veiða, veiðiháttir og virkingin av veiðuni verið fyri broytingum, so hon í dag setir onnur krøv til havnirnar enn fyri 7 árum síðani.

Tessvegna hevur landsstýrið, sjálvt um ætlanin hevur verið ikki at játta meir til havnabyggingar í bygdakommununum í tíðarskeiðinum 1959-68 enn tað, ið veilt varð við áðurnevndu løgtingslóg, hildið, at tær broyttu umstøðurnar hava gjørt tað neyðugt at seta fram hetta uppskot um eykajáttanir.

Til tær ymisku játtanirnar er at viðmenkja:

Eykajáttanirnar til Klakksvíkar, Nes, Skála, Kollafjarðar, Sørvágs og Vágs kommunur eru mest orsakaðar av hækkingunum í pris- og lønarlagunum, meðan tað fyri játtanirnar til Miðvágs og Sandavágs og Froðbiar kommunur, sum eru serliga stórar í mun til tær upprinaligu studningsveitingarnar, er útvegan av byggiøki til flakavirki, sum í stóran mun hevur gjørt seg galdandi.

1. viðgerð 23. februar og 7. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Sum ynskt undir 1. viðgerð hevur figgjarnevndin viðgjørt málið saman við havna- og veganevndini.

Sambært § 1 í uppskotinum verður veiltur studningur, sum uppiskoyti til 10-ára havnaætlanina frá 1958, og verður hesin studningur veiltur við eins stórum ársgjøldum í 5 fylgjandi figgjarár.

Árliga studningsveitanin hesi 5 figgjarár verður 350.000 kr.

Eftir § 2 eru ásetingarnar eftir 10-ára ætlanini eisini galdandi fyri byggingar framdar eftir landsstýrisins uppskoti.

Í uppskotinum er talan um 8 havnaløg og hækkingin er deils orsakað av, at prislagið er nógv broytt, síðani ætlanin varð gjørd og ein kostnaðarætlan frá 1958 lítið hevur við veruleikan at gera, og deils fyri at ganga teim havnarløgum á móti, har ólbyggingin er ein freyt fyri bygging av neyðugum fiskavirkjum, sum klár eru at stovnsetu.

Figgjarnevndin ynskir at undirstrika, at her er ikki talan um eina

nýggja havnaætlan, men bert uppiskoyti, og verður talan um onnur havnaløg, fáa tey sonnu viðgerð, um fyritreytirnar eru tær somu.

Figgjarnevndin mælir, vísandi til frammanfyristandandi, einmælt til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 9. og 3. viðgerð 10. mars.

Landsstýrisins uppskot samtykt 26-0.

---

29. Broyting í reglunum um kommunal val

Ár 1966, 22. februar legði Niels Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í teimum kommunalu valreglunum.

§ 1.

Í lóg nr. 84 frá 30. april 1909, lóg nr. 28 frá 30. januar 1923, lóg nr. 59 frá 14. mars 1931, lóg nr. 88 frá 15. mars 1939 og løgtingslóg nr. 61 frá 2. desember 1949 (sml. lógarkunngerð nr. 200 frá 17. juli 1931) verða gjørdar hesar broytingar:

lagtingslov om ændring i de kommunale valgregler.

§ 1.

I lov nr. 84 af 30. april 1909, lov nr. 28 af 30. januar 1923, lov nr. 59 af 14. marts 1931, lov nr. 88 af 15. marts 1939 og lagtingslov nr. 61 af 2. december 1949 (jfr. lovbekendtgørelse nr. 200 af 17. juli 1931) foretages følgende ændringer:

1) § 2:

Verður orðað soleiðis:

«Valrætt og valbæri til kommunustýri hevur hann, sum lýkur treytirnar til valrætt og valbæri til løgtingið, er tilmeldaður fólkayvirlitið í kommununi í seinasta lagi 31. mars í ti áriunum, sum kommununval fer fram og er undir høvuðsskattaálikningini ella hjá giftum, um maðurin er tað.

2. stk. Ongin sleppur á val, sum stendur ikki uppi á vallistanum.»

2) § 5:

Verður orðað soleiðis:

«Val verður fyrireikað við listum yvir veljararnar. Vallistin verður gjørdur við løgtingsvallistanum við tilhoyrandi eykalista sum grundarlag. Listin við teim um skrivaðum afturat, sum komin og tilmeldað fólkayvirlitinum eru frá tí løgtingsvallistin var gjørdur og til 31. mars, skal eyðkennast sum «vallisti til kommununval» og verða gjørdur í 2 eintøkum, sum skulu varðveitast hvørt fyri seg. Afturat verður á sama hátt gjørdur serligur eykalisti, har teir persónar verða skriv aðir, sum valdagin ætlast at lúka aldurs- og aðrar treytir til valrætt.

2. stk. 1 vikur áðrenn valdagin skulu vallistarnir verða lagdir fram til alment eftirlit í 14 dagar á einum fyri ílúgvarnar í kommununi bóskandi stað ella eftir umstøðunum á fleiri støðum. Hetta verður kunngjort á vanligan hátt 8 dagar frammanundan.

1) § 2:

Affattes således:

«Valgret og valgbarhed til kommunalbestyrelsen har enhver, som opfylder betingelserne for valgret og valgbarhed til lagtinget, er anmeldt til folkeregistret i kommunen senest 31. marts i det år, valget afholdes i og er under hovedskatteligningen eller for gifte, om manden er det.

Stk. 2. Ingen kan udøve valgret uden at være optaget på valglisten.»

2) § 5:

Affattes således:

«Valgene forberedes ved lister over vælgerne. Valglisten udarbejdes med lagtingsvalglisten med tilhørende tillægsliste som grundlag. Valglisten med tilføjelse af dem, som er tilflyttet og anmeldt folkeregistret fra lagtingsvalglistens udfærdigelse og til 31. marts, forsynes med betegnelsen «vallisti til kommununval» og udarbejdes i 2 eksemplarer, der opbevares hvert for sig. Endvidere udfærdiges på samme måde en særlig tillægsliste, hvorpå optages de personer, som på valgdagen kan ventes at ville oppfylde alders- og øvrige betingelser for valgret.

Stk. 2. 4 uger inden valgdagen skal valglisterne fremlægges til offentligt eftersyn i 14 dage på et for kommunens beboere bekvemt sted eller efter omstændighederne på flere steder. Bekendtgørelse herom sker med 8 dages varsel på sædvanlig måde.

3. stk. Kæra yvir, at ein við ongum rætti er uppteikin á listan ella at ein við rætti hertil ikki er komin við, skal í minsta lagi 14 dagar áðrenn valdagin handast valnevndini, sum ger málið av. Um neyðugt ger nevndin nærri kanningar, so málið verður avgjørt áðrenn valið.»

3) § 8:

Sum nýtt 4. punktum til 1. stk. verður sett:

«Valnevndin kann gera av, at brævabjálvar skulu ikki nýtast, men skulu atkvøðuseðlarnir tá verða soleiðis gjørdir, at teir í hvussu er kunnu faldast so, at óviðkomandi ikki sær, hvussu atkvøtt er.»

4) § 8, 2. stk.:

Verður orðað soleiðis:

«Á atkvøðuseðilin skal týðuliga verða prentað ella stemplað merkini «Vallisti A», «Vallisti B», «Vallisti C» o.s.fr. við so nógvum reglum, sum tað eru valevnislistar; hvørt valmerki skal standa á reglu fyri seg og vera avmarkað hvørt frá øðrum við einari vatnrættari striku. Í hvørjum teigi undir listamerkinum á atkvøðuseðlunum skulu eisini verða prentað nøvnini á øllum valevnum listans í tí røðfylgju, sum tey eru fráboðað av stillarunum og við teinum nummrum, sum nøvnini á valevnunum eru merkt við á teim ymsu valevnislistunum; heldur valnevndin at nøvn kunnu misskiljast skal á atkvøðuseðlunum innframt nøvn verða prentað starv ella bústaður teirra. Nøvnini á valevnunum verða

S t k. 3. Klage over, at en uberettiget er optaget på listen, eller en berettiget er udeladt, må mindst 14 dage forinden valgdagen indgives til valgnævnet, som afgør spørgsmålet. I fornødent fald anstiller nævnet nærmere undersøgelse, så sagen afgøres forinden valget.»

3) § 8:

Som nyt 4. punktum til stk. 1 tilføjes:

«Valghestyrelsen kan afgøre, at konvolutter ikke anvendes, i så fald skal stemmesedlerne kunne sammenfoldes således, at nvedkommende ikke kan se, hvorledes der er stemt.»

4) § 8, 2. stk.:

Affattes således:

«Stemmesedlen skal i tydeligt tryk eller stempel indeholde betegnelserne «Valgliste A», «Valgliste B», «Valgliste C» o.s.v. i så mange linier, som der er kandidatlister; hver valgbetegnelse skal stå i en linie for sig, og hver to valgbetegnelser skal være indbyrdes adskilt med en vandret streg. På stemmesedlerne skal der endvidere i hvert felt under kandidatlistens betegnelse med almindelige typer trykkes navnene på samtlige listens kandidater i den rækkefølge, hvori de af stillerne er anmeldt, og med angivelse af de numre, hvormed kandidaternes navne er mærket på de forskellige kandidatlister; hvor forveksling af kandidaternes navne efter valgnævnets skøn kan finde sted, skal der på stemmesedlerne

prentað hvørt undir øðrum við tynri striku millum. Onki annað orð, bókstavur, tal ella merki má verða sett á atkvøðuseðilin, hvørki upp á prent ella við skrift ella á annan hátt.»

foruden navn trykkes en kortfattet betegnelse af stilling eller bopæl. Kandidaternes navne i felterne trykkes under hinanden, adskilt ved en tyndere trykt streg. Intet andet ord, bogstav, tal eller tegn må være påført nogen stemmesedel hverken ved tryk eller skrift eller på anden måde.»

5) § 10, 2. stk.

Skoytt verður uppí aftaná «tallet af stemmer for hver kandidatliste»: «talið av atkvøðum til hvørt valevni.»

5) § 10, stk. 2:

Efter «tallet af stemmer på hver kandidatliste» tilføjes: «tallet af stemmer på hver kandidat.»

6) Sum nýggj § 11 A verður sett:

«Atkvøtt kann eisini verða við brævi eftir reglunum í §§ 39-49 í lóg nr. 92 frá 28. mars 1956 um fólkatingsval í Føroyum, har tó «indenrigsministeriet» verður lisið sum «landsstýrið» og «folketingsvalg» som «kommunuval» eins og «lagtingspartier» í § 42 verður lisið sum «vallistar».»

6) Som ny § 11 A indføres:

«Afstemning kan også foretages pr. brev efter bestemmelserne i §§ 39-49 i lov nr. 92 af 28. marts 1956 om folketingsvalg på Færøerne, idet dog «indenrigsministeriet» læses som landsstyret» og «folketingsvalg» som «kommunevalg», ligesom «lagtingspartier» i § 42 læses som «valglister».»

7) § 14, 1. stk., 2. punktum:

Skoytt verður uppí aftaná «kandidatlisterne»: «ella valevnunum».

7) § 14, stk. 1, 2. punktum:

Efter «kandidatlisterne» tilføjes: «eller en kandidat».

8) § 14, 1. stk., 4. punktum nr. 1:

Skoytt verður uppí aftaná «listerne»: «ella valevnunum».

8) § 14, stk. 1, 4. punktum nr. 1:

Efter «listerne» tilføjes: «eller kandidaterne».

9) § 15, 1. stk.:

Verður orðað soleiðis:

Aftaná at valnevndin hevur vissað sær, at valið er farið løgliga fram, verða atkvøðurnar hjá hvørjum valevnislista taldar saman. Atkvøðutalið hjá hvørjum listanum verður býtt við 1, 2, 3 o.s.fr. til hvørt atkvøðutalið er býtt við tali, sum er so stórt sum talið av limum, sum listin kann

9) § 15, stk. 1:

Affattes således:

«Efter at valgnævnet har forvisset sig om, at valghandlingen er foregået på lovlig måde, sammenlægges alle de for hver kandidatliste afgivne stemmer. Hver listes stemmetal deles derefter med 1, 2, 3 o.s.v. indtil hvert stemmetal er delt med et tal så stort som det antal medlemmer, der i

fáa í mestu lagi. Tann størsti kvotienturin, sum soleiðis kemur út, gevur listanum, sum eigur hann, rætt til lim nr. 1, næststørsti kvotienturin gevur listanum, sum hevur fingið hann rætt til lim nr. 2 og framefjir, til allir limirnir eru valdir. Standa kvotientar á jøvnum, ger lutakast av. Av hvørj um einstakum lista verða teir limir, sum valdir eru, tiknir eftir talinum av sínum persónligu atkvøðum. Er ein valevnislisti útlømdur og honum tilkemur lim, verður hesin tikin av ti lista, sum síðan hevur størsta atkvøðutalið.»

det højeste kan blive listen til del. Den største af de således fremkomne kvotienter giver den liste, den er tilfaldet ret til medlem nr. 1, den næststørste kvotient giver den liste, den er tilfaldet ret til medlem nr. 2 og således fremdeles, indtil alle medlemmer er valgt. Er kvotienterne lige store, gør lodtrækning udslaget. Af hver enkelt liste udtages de valgte medlemmer efter deres antal personlige stemmer. Er en kandidatliste udtømt, når der er tilkommet den en repræsentant, tages denne af den liste, som derefter har det højeste stemmetal.»

10) § 17, 1. stk.:
Verður orðað soleiðis:

«Valevnir á lista til vanlig val, sum eru ikki vald, koma inn sum tiltaksmenn fyri teir, sum valdir eru á sama lista, eftir sínum persónligu atkvøðum, og taka við í sama rað í staðin fyri teir, sum valdir eru sum limir í viðkomandi kommunustýri, um so er, at onkur av teimum skuldi doyð í valskeiðinum ella farið frá, ella vegna sjúku er burtur ella av aðrari lógligari orsøk ikki kunnu taka lut í sóknarstýrisins samráðingum, tó bert so leingi hetta eftir umstøðunum verður hildið neyðugt.»

10) § 17, stk. 1.:
Affattes således:

«De på en liste ved almindelige valg opførte kandidater, der ikke erklæres for valgte, betragtes som suppleanter for de valgte af samme liste efter deres antal personlige stemmer og træder i den angivne orden i stedet for de valgte som medlemmer af vedkommende kommunalbestyrelse, hvis nogen af disse i valgperiodens løb måtte afgå ved døden eller udtræde, bortrejser på grund af sygdom eller af anden grund måtte være lovlig forhindret i at deltage i forstanderskabets forhandlinger, dog kun så længe dette efter omstændighederne skønnes nødvendigt.»

11) § 18, 3. stk.:
«Reinskabsáretsins» verður broytt til: «álmanakkaársins».

11) § 18, stk. 3.
«Regnskabsårets» ændres til: «kalenderårets».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin og verða vallistarnir til komandi kommunuval gjørdir eftir reglunum í hesari lóg.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks og affattes valglisterne til førstkommende kommunevalg efter bestemmelserne i denne lov.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 58 frá 14. apríl 1961 eru reglurnar um val til Tórshavnar býráð m.a. broyttar soleiðis, at tær persóntligu atkvøðurnar gera av, hvørji valevni eru vald. Uppskot liggur eisini á lingi um tilsvarandi broyting í løgtingslógini.

Broytingarnar eftir hesum uppskoti svara í høvuðsheitunum til tær broytingar, ið gjørdar eru í vallógini fyri Tórshavnar býráð. Hermunframt verður skotið upp, at atkvøðugreiðsla eisini kann fara fram við bræví eins og til løgtingsval.

Annars kann vera vist á, at vallistarnir skulu verða gjørdir uflaná 1. apríl og seinast 4 viknr áðrenn valdagin. Valnevndini verður latið upp í hendi at avgera, um brævabjálvar skulu nýtast. Higartil hevur valskeiðið fylgt rokskaparárinum, men er nú rokskaparárið í bygdakommununum broytt at vera fíggjarárið 1. apríl – 31. mars (sml. § 95 í skattalógini). Landsstýrið skjýtur upp, at valskeiðið framvegis verður eftir almanakkaárinum, soleiðis at nývalda kommunustýri tekur við á nýggjárinum. Tey í § 11 í kommunulógini frá 28. februar 1872 nevndu val vera sostatt eisini fyri almanakkaárið.

Viðvíkjandi øðrum broytingum verður vist til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 27/1963: Broyting í løgtingslógini og løgtingsmáli nr. 28/1963: Broyting í reglunum um val til Tórshavnar býráð.

1. viðgerð 25. februar og 22. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið hevur verið til viðgerðar í lógarnevndini, sum er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 24. og 3. viðgerð 30. mars.

Landsstýrisins uppskot samtykt 21 – 0.

30. Broyting í straffilógini

Ár 1966, 22. februar legði Erlendur Patursson landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

anordning om ikrafttræden på Færøerne af ændringer
i borgerlig straffelov.

§ 1.

I medfør af lovene nr. 138 af 31. marts 1960 § 2, nr. 163 af 31. maj 1961 § 5 og nr. 212 af 4. juni 1965 § 3 sættes de ved disse love gennemførte ændringer i borgerlig straffelov af 15. april 1930 i kraft på Færøerne.

Borgerlig straffelov er herefter gældende for Færøerne med det i lovbekendtgørelse nr. 276 af 30. juni 1965 gengivne indhold, dog at §§ 196 og 205 stadig er gældende med deres oprindelige indhold.

§ 2.

Der kan ikke i medfør af straffelovens § 59 ske skærpelse af vilkår, som er fastsat i en betingeet dom før denne anordnings ikrafttræden.

§ 3.

Den, der inden anordningens ikrafttræden i medfør af straffelovens § 195 eller § 207 er frakendt rettighed at udøve næringsvirksomhed, kan generhverve retten i overensstemmelse med reglerne i straffelovens § 78, stk. 3.

§ 4.

Denne anordning træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sorinskrivarin hevur havt málið til ummælis, og hann sigur í ummæli sínum m.a.

Straffilógin frá 15. apríl 1930 hevur verið broytt í nakað nógvum lógum.

Í Føroyum er straffilógin galdandi eftir lógarkunngerð nr. 215 frá 21. juni 1939 og hevur so statt bert tær broytingartur, sum kommar vórn fyri seinna heimsbardagan, men í Danmark er hon galdandi eftir lógarkunngerð nr. 276 frá 30. juni 1965, og hevur allar broytingar, sum kommar vórn til tann dagin.

Nakrar seinni kommar broytingar eru tó settar í gildi í Føroyum.

Her fyriliggjandi lóg nr. 212 frá 4. juni 1965 um broytingar í borgarligu straffilógini inniheldur broytingar í tí almenna partinum í straffilógini, serstakliga í kap. 6 (um straffiverk), kap. 8 (um arbeiðshúís og trygdarvarðhald) og kap. 9 (um aðrar rettarfylgjur av brotsgerð, serstakliga uppløka (konfiskatión)). Harafturat minni broytingar í m.a. kap. 7 (um treytaðar dómir). Vist verður annars til tær einstøku reglurnar í nevndu lóg.

Broytingarnar í tí serstaka partinum í straffilógini eru hert viðfáningur (smbr. § 225, stk. 4). Henda reglan var sett í gildi í Danmark í lógarbroytingini frá 31. mai 1961, men sett úr gildi aftur í lógini frá 4. juni 1965 (smbr. pkt. 51). Hon hevur ongantið verið í gildi í Føroyum.

Grundir kunnu vera at tilskila broytingarnar í §§ 158, 159 og 161 í straffilógini, eftirsum hesar reglurnar ið standa í sambund við lóg nr. 149 frá 21. apríl 1965 um broytingar í rettargangslógini m.a. um vitnisburð undir eið, sum í Danmark er avlikin eftir hesi lógini. Henda reglan er ikki tikin inn í tu føroysku rettargangslógina. So stødt bindur tað ikki tingið at taka støðu til hesa broytingina, um tað samtykkir her nevndu broytingar í straffilógini.

Við fylgdu eisini lóg nr. 213 frá 4. juni 1965 um broytingar í ymsum reglum um straff, konfiskatión o.a.

Hóast tær broyttu reglurnar um upploku í lóg nr. 212 frá 4. juni 1965 tykist ikki vera neyðugt at seta lógina í gildi í Føroyum ið hvussu er enn.

Sum tilskilað í skrivinum frá justitsmálaráðnum frá 23. juni 1965 skuldi lóg nr. 213 komið í gildi eftir sínari § 118 samstundis við lóg nr. 212, men hon skal lýsast her eftir reglunum í lóg nr. 51 frá 1. april 1896. Skilað verður til, at uppruddingin í henni bert sum viðfáningur nemur føroyska lóggávu.

Vísandi hertil loyvir landsstýrið sær at leggja inn uppskot til kgl. fyriskipan samsvarandi, og sum sagt í øðrum viðfangi hevur málið skund.

1. viðgerð 25. februar og 7. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Talan er her um við kunngerð at seta ríkislógirnar nr. 138 av 31. mars 1960, nr. 163 frá 31. mai 1961 og nr. 212 frá 4. juni 1965 í gildi í Føroyum. Alt eru hetta lógir um broytingar í teirri borgarligu revsilógini frá 15. apríl 1930. Hervið er revsilógin ført á jour upp til 30. juni 1965. §§ 196 og 205, sum eru burturtiknar úr donsku revsilógini, verða tó framvegis galdandi her. Tann fyrra er um djórapínslu, og tann seinna er um revsing fyri tann, sum ólógliga «gør sig en næringsvej af at udforske private

livsforhold». Vit hava ongar tilsvarandi serlógarrevsigreinir fyri hesi viðurskifti. Annars er í hesi kgl. fyriskipan, sum skal sela tær nevndu broytingarlógirnar í gildi, tilskilað, at treytir við dóminum, sum dømdir eru, ikki kunnu gerast harðari, hóast tann nýggja § 59 kann heimilað tað fyri framtíðina. Á hin bógvin kunnu tær limari reglurnar viðvíkjandi rætlindamissi koma teimum til góða, sum dømd eru eftir higartil galdandi reglum.

Vísandi annars til framløguskriv landsstýrisins mælir lógarnevndin til, at løgtingið viðmælir, at tað fyriliggjandi uppskotið til kgl. fyriskipan verður sett í gildi í Føroyum.

2. viðgerð 9. mars.

Landsstýrisins uppskot samtykt 22—0.

---

31. Bygging av Landsbóka- og Skjalasavni

Ár 1966, 25. februar legði Niels Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til samtyktar

Landsstýrinum verður heimilað at byggja landsbóka- og landsskjalasavn á matr. nr. 1025 a í Tórshavn.

Viðmerkingar:

Hetta mál var fyri á lingi á seinastu tingsetu sum løgtingsmál nr. 64/1964.

Ein serlig 5-mannanevnd varð tá vald at viðgera hetta málið, og tók hon væl undir við tí og sannaði, at ongantið var ov skjótt at fara undir bygging av nýggjum bóka- og skjalasavni.

Hendla nevnd helt tó, at tá detailprojekteringin ikki var byrjað, var

kanska rættast í fyrstu syltu bert at játta tann pening, ið neyðugur var til hesa projektering, og samsvarandi hesum mælti nevndin tinginum til at samtykkja soljóðandi uppskot til samlyktar:

Landsstýrinum verður heimilað at lata detailprojektera landsbókasavn og landsskjalasavn á matr. nr. 1625 a í Tórshavn og soleiðis, at hetta mál verður lagt fyri aftur tingið, tá ið detailprojekteringin er liðug».

og varð hetta samtykt 2. april 1965 við stórum meiriluta.

Landsstýrið hevur síðani tilnevnt byggineynd at taka sær av málinum.

Arkitekturin og ingeniørfelag saman við hownm fingu til uppgávu at fara undir detailprojekteringina. Allir partar roknaðu við, at henda projektering skuldi verða greið, áðrenn tingið kom saman aftur í januar; men tað hevur vist seg, at tær kanningar og tað forarbeiði, ið máttu gerast, áðrenn farið kundi verða undir sjálva detailprojekteringina, til dømis endalig fastlegging av innrættingini í samarbeiði við landsbókavørði og landsskjalavørði og serkønum í bókasavnsbygging, og hvørji sløg av tilfari, ið nýtast skuldu í byggingini, tóku so drúgva tíð, at eitt projekt, fört út í æsir, ikki kann verða lagt á tingborð saman við hesum uppskoti; men verður tað liðugt seinri í tingsetuni.

Tað tilfar, sum er hjálagt hesum uppskoti, er deils 8 tekningar í 1:100, sum vísa innrætting, skurðir og facadur, deils greinliga kostnaðarætlan og deils ein tíðarplanur fyri byggingini. Herafturat er model gjørt av bygningínum.

Málið skuldi soleiðis verið so væl lýst sum gjørligt, og er tað onkur, sum hevur áhuga fyri ávísum tekniskum detaljum, verður høvi til seinri í tingsetuni at fáa tekningar og frágreiðingar viðvíkjandi hesum.

Kostnaðarætlanin vísir, at byggiútreiðslurnar tilsamans eru metta at verða 4.275.000 kr.

Herafturat koma útreiðslurnar til búnyttur. Bibliotekcentralen, ein danskur stovnur, sum hevur til endamáls at ráðleggja donskum bókasøvnum viðvíkjandi m.øðr. hútyttum og skrivstovutólum, hevur sagt, at leysliga kunnu vit meta keypsprísin til 500.000 kr., leggja vit uppfyri fyri meirkostnað, toll, frakt o.a., faca vit ikki nógv skeivir, tá vit meta kostnaðin til 625.000 kr. Hesin stovnur er annars biðin um at gera fullfíggjað uppskot um, hvat keypast skal av búnyttum.

Byggingin skuldi soleiðis kravt hesa flegging:

í húsini og tað, sum uttan um tey verður gjørt	4.275.000,—
í búnyttum o.t.	625.000,—
	4.900.000,-

Arkitekturin metir hóskandi byggitíð at vera 2½ ár, og út frá tí, at úthjóðing av 1. byggistigi er greið í mai mánaða í ár, kunna byggiútreiðslurnar býtast soleiðis yvir fíggjarárini:

1966/67	.....	1.000.000,—
1967/68	.....	1.900.000, —
1968/69	.....	1.700.000,—
1969/70	.....	300.000,
		4.900.000,—

1. viðgerð 28. februar og 13. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Løgtingið samtykti 2. apríl 1965 at lata detailprojektera landsbókasavn og landsskjalasavn á matr. nr. 1025 a í Tórshavn.

Detailprojektið er eftir at hava verið til kanningar hjá landsverkfræðinginum sent í fíggjarnevndina 2. mai 1966.

Eftir landsstýrisins uppskoti til samtyktar, skal landsstýrið hava heimild til at lata byggja landsbóka- og landsskjalasavn á tí í uppskotinum nevnda matr. nr. í Havn og samlart teknningar sum liggja í málinum.

Eftir viðmerkingum landsstýrisins krevst ein fleggjing uppá 1,9 milj. kr. til hesa bygging og tá er eisini roknað við búnyttum.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt eg undur í 4 minnilutar.

Minnilutin (Knút Wang, Sámal Petersen og Hannus við Høgadalsá) ynskir at viðmerkja: Byggingin av landsbóka- og landsskjalasavni tænir tveimum endamálum:

Hitt fyrra er at goyma tær bøkur, sum eru og verða ogn hjá landsbókasavninum og sum ring líkindi eru at goyma nú, so ring, at savnið hevur ikki kunnað tikið innóti øllum bókum, sum áttu at finnist á landsbókasavninum, og somuleiðis at kunna goyma tey skjøl, sum eru og verða ogn hjá landsskjalasavninum, og sum óvanliga ring líkindi eru at goyma nú. Sum er má landsbókasavnið goyma bøkur ymsastaðni í býnum og fær heldur ikki rokt tær uppgávur, sum at útvega skipabókasøvn. Landsskjalasavnið fær heldur ikki goymt sínt skjøl og bøkur og nógv er ikki atkomandi.

Hitt seinna endamálið er at skapa betur møguleikar til at granska bøkur og skjøl.

Landsbókasavnið eigur at verða eitt av miðdeplunum í samfelag okkara, og skal tað verða ein týðandi táttur í útbúgvingini og útbyggingini

av samfelag okkara, so sleppst ikki undan at skapa eina meira hóskandi rammu um eitt føroyskt landsbóka- og landsskjalasavn.

Tað kann tí eingki verða at ivast í, at neyðugt er at byggja eitt landsbóka- og landsskjalasavn, og at so vælverður lagt uppfyri, at tað svarar til tað, sum neyðugt er vælfram í tíðina.

Men øllum er kunnugt, at tað, serliga í Havn fara fram stórar ileggingar og ivamál kann vera, hvat ið skal hava fyrsta rætt til at verða bygt, ella hvussu stórar ileggingar kunnu fara fram samstundis. Hesar ileggingar mugu samanlagdar fara fram. og so tær svara til figgjarorkuna og serstakliga í Havn, so at tær skapa ein javnan eftirspurning eftir arbeiðsmegini.

Landsstýrið heldur í viðmerkingunum, at tað krevst ein ilegging uppá 3,9 milj. kr., um farið verður undir at byggja í ár. Á galdandi figgjarlóg er heimild til at lána 1 milj. kr. til hesa bygging í ár.

Eftir pris- og lønarvokstri at dømi, kann hugsast, at byggingin kemur at kosta meira, um bygt skal verða eftir hjáløgdu ætlanum.

Men meðan tað eingin ivi kann vera um, at tað eigur at verða bygt eitt landsbóka- og landsskjalasavn, so er einasti spurningurin nær tað figgjarliga er forsvarligt at fara undir byggingina.

Við frammanfyri nevnda fyrivarni heldur minnilutin, at løgtingið nú eigur at samtykkja at byggjast skal, men at landsstýrið avger, nær ið tað er figgjarliga forsvarligt at fara undir byggingina og um ætlanirnar fyri byggingini eiga at verða broyttar.

Minnilutin mælir við lesum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Kjartan Mohr) setir eingki uppskot fram.

Minnilutin (Haldor Hansen og Jacob Lindenskov) mælir til at biðið verður við at fara í ferð við at byggja bóka- og skjalasavn, bæði av teim orsøkum, sum meirilutin fører fram og við teirri ásannan, at byggikostnaður og príslag í sínt heild broytast so nógv, at tað er ógjørligt í dag at samtykkja eitt uppskot við eini kostnaðarætlan, tá byggingin moguliga ikki verður sett í verk í ár. Tí er rættast at málið aftur verður lagt fyri tingið við nýggjari kostnaðarætlan, tá landsstýrið og figgjarnevnd eru samd um at seta byggingina í verk, og setur minnilutin tí fram uppskot samsvarandi.

UPPSKOT
til samtyktar
(frá minnilutanum Haldor Hansen og Jacob Lindenskov)

Tá ið landsstýrið og figgjarnevnd eru samd um at seta arbeiðið í gongd, verður málið við nýggjari kostnaðarætlan at leggja fyri løgtingið.

Minnilutin (Andrias Djurhuus) setur fram fylgjandi

Uppskot
til samtyktar

Málið verður útsett fyri fyrst. Løgtingið tekur avgerð, nær hyggingin skal fara fram.

2. viðgerð 13. mai.

Uppskotið frá landsstýrinum fall 11—0.
Uppskotið frá minnilutanum (Haldur Hansen og J. Lindenskov) fall 5—0.
Uppskotið frá minnilutanum (A. Djurhuus) fall 6—0.

---

32. Val av monnum og nevndum

Ár 1966, 16. mars stóð val av monnum og nevndum:

1. LØGTINGSVALNEVNDIR:
   A. Suðurstreymoyar prestagjald:
      a. fastir limir: Karl Jakobsen, keypmaður, Tórshavn. Poul Hansen, verkstjóri, Tórshavn. Poul Karbech Mouritsen, prentari, Tórshavn.

      b. tiltaksmenn: Louis Højgaard, bankamaður, Tórshavn. Jákup Wenningstedt, lærari, Tórshavn.

   B. Norðstreymoyar prestagjald:
      a. fastir limir: Alfred Hammeland, seglmakari, Vestmanna. Tórstein Græskarisson, fiskimaður, Kvívík. Arni á Rógvi, vrakari, Vestmanna.
      b. tiltaksmenn: Poul J. Djurhuus, arbeiðsmaður, Kollafirði. Andreas Andreassen, lærari, Vestmanna.

C. Eysturoyar sýsla:

a. fastir limir: Ismar Joensen, keypmaður, Fuglafirði. Herluf Bertelsen, lærari, Fuglafirði. Jákup Simonsen, lærari, Gøtu.

b. tiltaksmenn: Óli Ellingsgaard, postmaður, Eiði. Sámal P. Hansen, vrakari, Norðagøtu.

D. Norðoya sýsla:

a. fastir limir: Jógvan Niclasen, byggimeistari, Klakksvík. Johannes Vitalis Hansen, snikkari, Klakksvík. Meinhard Johannesen, lærari, Klakksvík.

b. tiltaksmenn: Johan Christiansen, fiskimaður, Norðdepli. Einar Waag, stjóri, Klakksvík.

E. Vága sýsla:

a. fastir limir: Carl Petersen, byggimeistari, Sandavágur. Jákup Joensen, skipari, Sandavágur. Sigmund Frederiksen, vrakari, Miðvági.

b. tiltaksmenn: Thomas J. Thomasen, fiskimaður, Sørvágur. Napoleon Nolsøe Petersen, lærari, Sørvágur.

F. Sandoyar sýsla:

a. fastir limir: Hanus Johannesen, bóndi, Sandur. Zacharias Stórá, fiskimaður, Skopun. Petur Joensen, fiskimaður, Skopun.

b. tiltaksmenn: Ewald Hentze, fiskimaður, Sandur. Óli Danielsen, jarðabrúkari, Húsavík.

G. Suðuroyar sýsla:

a. fastir limir: Hans P. Thomasen, keypmaður, Tvøroyri. Johannes Enni, lærari, Tvøroyri. Dion Nolsøe, løgtingsmaður, Vági.

b. tiltaksmenn: Ísak Ziskasen, fiskimaður, Hvalba. Jaspur Holm, skrivstovumaður, Tvøroyri.

II. KIRKJUSTJÓRNIN:

Kjartan Mohr, Hans J. Ellingsgaard, J. Fr. Øregaard.

III. GRANNSKOÐARI Í FØROYA SPARIKASSA:

Karl Jakobsen, keypmaður, Tórshavn.

IV. NEVND Í P/F SKIPAFELAGNUM:

Johan Simonsen, J. P. Davidsen.

V. UMBOÐSMAÐUR Á AÐALFUNDI HJÁ P/F SKIPAFELAGNUM

fastur limur: Kjartan Mohr.

tiltaksmaður: Sigfried Skaale.

VI. UMBOÐSMAÐUR Á AÐALFUNDI P/F SJØVINNUBANKANS:
fastur limur: Kjartan Mohr,
tiltaksmaður: Johan Simonsen.

VII. STÝRIÐ FYRI MENTUNNARGRUNNIN:
fastur limur: Edmund í Garði,
tiltaksmaður: Marius Johannesen.

VIII. NEVND Í L/F GRØNLANDSFELAGNUM:
fastir limir: Frederik Hansen, Sigfried Skaale, J. Fr. Øregaard.
tiltaksmenn: Johan Simonsen, Oddfríur Gregersen, Poul J. Olsen.

IX. STÝRIÐ Í FØROYA LISTASAVNI
Janus Kamban, Jens P. Heinesen, Jákup Lindenskov.

X. STÝRIÐ FYRI SJÚKRAHÚSINI:
a. Tvøroyrar sjúkrahús: Reinhold Sylá, Tvøroyri, Hemming Jespersen, Tvøroyri, Hans P. Thomasen, Tvøroyri.
b. Klaksvíkar sjúkrahús: Jógvan Joensen, lærari, Johan Simonsen, løgtingsmaður og Robert Joensen, skrivari, allir Klaksvík.
c. Landssjúkrahúsið: J. P. Henriksen, Jákup í Jákupsstovu og Knút Wang, allir Tórshavn.

XI. STÝRIÐ FYRI FØROYA VANLUKKUTRYGGING:
a. Fastir limir: Hans Lützen, Klaksvík, Hemming Jespersen, Tvøroyri, Haldor Hansen, Tórshavn.
b. tiltaksmenn: Sigfried Skaale, Sigurð Joensen og Magnus Tórsheim, allir Tórshavn.

LØGTINGSNEVNDIR o. a.

FIGGJARNEVND: Knút Wang, Kjartan Mohr, Hanus við Høgadalsá, Sámal Petersen, P. M. Dam, J. Fr. Øregaard, Andreas Djurhuus.
Tiltaksmenn: Poul Petersen, Vilhelm Nielsen, Sigurð Joensen, Marius Johannesen, Haldor Hansen, Jákup Lindenskov, Johan Poulsen.

UMSÓKNARNEVND: Vilhelm Nielsen, Hans J. Ellingsgaard, J. Lindenskov.

LANDSSTYRISMÁLANEVND: Sigfried Skaale, Frederik Hansen, J. F. Øregaard.

HAVNA- OG VEGANEVND: Kjartan Mohr, Vilhelm Nielsen, Sámal Petersen, Haldor Hansen, Poul J. Olsen, Hans Iversen, Frederik Hansen.

FISKIVINNUNEVND: Niels Holm Jacobsen, Johan Simonsen, Frederik Hansen, Leon Joensen, Poul J. Olsen.

LOGARNEVND: Sigurð Joensen, Poul Petersen, Marius Johannesen, Trygve Samuelsen, J. H. Danbjørg.

KIRKJUNEVND: Marius Johannesen, Hans J. Ellingsgaard, Vilhelm Nielsen, Jákup Lindenskov, Reinhold Thomsen.

SKÚLANEVND: Johan Simonsen, Marius Johannesen, Hans Lützen, Johan Poulsen, J. H. Danbjørg.

TELEFONNEVND: Frederik Hansen, Vilhelm Nielsen, Marius Johannesen, Hans Iversen, Jákup Lindenskov.

SOCIALA NEVND: Marius Johannesen, Frederik Hansen, Hans Lützen, Jákup Lindenskov, Johan Poulsen.

HELIKOPTARANEVND: Hans J. Ellingsgaard, Kjartan Mohr, Hans Lützen, J. P. Davidsen, Leon Joensen.

SKATTANEVND: Sigfried Skaale, Hannus við Høgadalsá, Marius Johannesen, Poul J. Olsen, Trygve Samuelsen.

LANDSBÓKA- OG LANDSSKJALASAVNSNEVND: Sigurð Joensen, Marius Johannesen, Poul Petersen, J. H. Danbjørg, Johan Poulsen.

EFTA NEVND: Hannus við Høgadalsá, Marius Johannesen, Kjartan Mohr, Poul Petersen, J. Fr. Øregaard, Haldor Hansen, Andr. Djurhuus.

NEVND VIÐV. STÝRISSKIPANINI: Poul Petersen, Kjartan Mohr, Hannus við Høgadalsá, Marius Johannesen, Trygve Samuelsen, J. Fr. Øregaard, P. M. Dam.

KOMMUNAL NEVND: Hans Lützen, Marius Johannesen, Hannus við Høgadalsá, Poul J. Olsen, Hans Iversen.

33. Stuttleikagjald

Ár 1966, 3. mars legði Eilendur Paturssón landsstýrismaður fram sólj óðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um stuttleikaskatt	lagtingslov om forlystelsesafgifter
§ 1.	§ 1.
Tann, sum sambærd lóg, loyvisbrævi ella eftir loyvi frá løgreglumi, almennt vísir kvikmyndir ella hevur almennan dans, skal rinda gjald, sum fer í landskassan. Sam komur einans við føroyskum dansi sleppa undan gjaldi.	Enhver, der i henhold til lov, bevilling eller en af politiet meddelt tilladelse foranstalter offentlig forevisning af film eller afholder offentlig dans, skal erlægge en landskassen tilfaldende afgift. Undtagne fra afgift er sammenkomster, hvor der udelukkende afholdes færøsk dans.
§ 2.	§ 2.
Gjaldið er 33⅓% av samlaða atgongupeninginum fyri avvarandi stuttleikasamkomur.	Afgift svares med 33⅓% af det samlede beløb, der er indgået som entreindtægt for den pågældende forlystelse.
stk. 2. Verður goldin ein serstøk peningahædd til rindan av gjaldinum, verður henda peningahædd at rokna sum ein partur av atgongupeninginum.	stk. 2. Erlægges der af publikum et særligt beløb til dækning af afgiften, betragtes dette beløb som en del af entreindtægten.
stk. 3. Verður umframt vanliga atgongupeningin goldin serstøk samsýning fyri ávís pláss, verður henda serstaka samsýning at rokna sum atgongupeningur.	stk. 3. Såfremt der ud over den egentlige entreindtægt erlægges særligt vederlag for adgang til visse pladser, betragtes dette særlige vederlag som entreindtægt.
stk. 4. Tvungin garderobusamsýning verður roknað sum atgongupeningur. Er nóg mikið av garderobuplássi og -lærnastu, kann landsstýrið geva loyvi til, at garderobusamsýningin heilt ella lutvís ikki verður roknað uppí atgongupeningin.	stk. 4. Tvungent garderobevederlag betragtes som entreindtægt. Så fremt der må anses at være effektiv garderobeplads og -betjening, kan landsstyret dog tillade, at garderobevederlaget helt eller delvis ikke henregnes til entreindtægten.
stk. 5. Tvungin samsýning fyri skrá og aðrar veitingar verður	stk. 5. Tvungent vederlag for program og for andre særlige

eisini roknað sum atgongupeningur.

§ 3.

Sleppa fólk inn heilt ella lutvíst ullan at rinda nakað t.d. til restauratiónir við loyvisbrevi ella loyvi til almennan dans, kann landsstýrið áseta, at gjald skal rindast fyri hvønn persón, sum sleppur inn, og kann annars áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi, heimmdir eisini støddina av tilfkum gjaldi.

§ 4.

Gjaldið skyldar hann, sum vísir ella letur vísa kvikmyndirnar ella hevur dansin.

stk. 2. Gjaldið verður uppgjørt á fráboðanum, sum beinanvegin tá ið vikan er úti av teimum gjald skyldugu skulu handast — í Tórshavn til landfútan, uttanfyri Tórshavn til sýslumannin — og til tess verða nýtt oyðubløð við teksti, ásettum av landsstýrinum. Gjaldið skal rindast, samstundis sum fráboðanin verður send.

stk. 3. Gjaldið verður kravt inn av Føroya gjaldstovu.

§ 5.

Kvikmyndafyrivísanir, sum hava eitt vísindaligt endamál, eru til frama fyri upplýsingina ella við undirvísing fyri eyga verða settar í verk av skúlum ella eftir avtalu við skúlar, kunnu við landsstýrisins játtan heilt ella lutvíst sleppa frá gjaldi.

stk. 2. Landsstýrið kann heilt ella lutvíst eftirgeva gjaldið, um vinningur av eini kvikmyndafyri-

ydelser betragtes ligeledes som enkeindtægt.

§ 3.

Tilstedes der publikum adgang helt eller delvis uden betaling f. eks. til restaurationer med bevilling eller tilladelse til offentlig dans, kan landsstyret bestemme, at der skal erlægges afgift for hver person, der får adgang, og kan iøvrigt fastsætte de nærmere regler herfor, således også med hensyn til størrelsen af en sådan afgift.

§ 4.

Afgiften påhviler den, der afholder eller lader afholde filmforevisningen eller dansen.

stk. 2. Afgiften berigtiges på grundlag af anmeldelser, der straks ved hver uges afslutning af de afgiftspligtige skal indgives — i Tórshavn til politimesteren, udenfor Tórshavn til sysselmandene —, og hvertil formularen skemaet, hvis tekst fastsættes af landsstyret. Afgiften forfalder til betaling, samtidig med indgivelsen af afgiftsanmeldelsen.

stk. 3. Afgiften opkræves ved Gjaldstovens foranstaltning.

§ 5.

Forevisning af film, som har et videnskabligt formål, som tjener til oplysningens fremme eller som iværksættes i undervisningsøjemed af eller efter aftale med skoler, kan af landsstyret helt eller delvis fritages for afgift.

st. 2. Hvor overskuddet af en filmforevisning eller dans skal anvendes i almenvelgørende eller andet almennyttigt øjemed, kan

vísan ella dansi skal nýtast til eitt almannagagnligt ella gott endamál.

landsstyret fritage helt eller delvis overskuddet for afgift.

§ 6.

Verður fallið gjald ikki rindað rætlstundis, kemur renta ½% um mánaðin aftrat fyri hvønn ásettan mánaða frá gjaldkomudegnum at rokna, tó ikki minni enn 10 kr.

stk. 2. Fallið gjald og renta kann verða heimlað við panting.

§ 6.

Såfremt skyldig afgift ikke betales rettidig, svares rente med ½% pr. påbegyndt måned af det skyldige beløb regnet fra forfaldsdag, dog mindst med 10 kr.

stk. 2. Skyldig afgift med påløbne renter kan inddrives ved udpantning.

§ 7.

Løgreglan, herundir sýslumenn inir, hevur umsjón og eftirlit við stattleikasamkomum. Loyvishavarin hevur skyldu at nýta afgongumerkir, góðkend av landsstýrinum í samráð við gjaldstovuna.

stk. 2. Tey gjaldskyldugu hava skyldu at geva seg undir tær fyriskipaðu reglurnar um umsjón og eftirlit, tey hava skyldu at geva eftirlitinum og gjaldstovuni høvi at kanna bøkur teirra v.m.

§ 7.

Politiet, herunder sysselmændene, fører tilsyn og kontrol med de pågældende sammenkomster. Bevillingshaveren har pligt til at benytte billetter, godkendt af landsstyret i samråd med gjaldstovan.

stk. 2. De afgiftspligtige er forpligtede til at underkaste sig de givne tilsyns- og kontrolbestemmelser, der er forpligtede til at give kontrollen og gjaldstovan adgang til eftersyn af deres bøger m.v.

§ 8.

Persónar ella feløg ella umboðsmenn teirra, sum útleiga kvikmyndir til almenna fyrivisan, hava skyldu til uttan samsýning at geva eftirlitsmyndugleikunum tilíkar upplýsingar um rokonskapin v.m., sum kunnu vera myndugleikunum til leiðbeining í starvi teirra við umsjón og eftirliti við almennum kvikmyndafyrivísanum.

§ 8.

Personer eller selskaber, eller disse agenter, der udlejer film til offentlig forevisning, er pligtige til uden betaling at meddele de kontrollerende myndigheder sådanne regnskabsmæssige oplysninger m.v., der kan tjene disse myndigheder til vejledning ved udførelse af tilsynet og kontrollen med offentlige filmsforevisninger.

§ 9.

Um fráboðanir viðvíkjandi

§ 9.

Undladelse af at indgive de i

gjaldi sambært § 4 ikki verða sendar inn ella verður rong fráboðan innlatin, er revsingin sekt ella hefti.

stk. 2. Brot á umsjónar- og eftirlitsreglurnar verður revsað við sekt.

§ 10.

Landsstýrið setir nærri reglur fyri, hvussu henda lóg skal verða framd.

§ 11.

Henda lóg kemur í gildi 1. august 1966.

stk. 2. Samstundis fer úr gildi fyribilskunngerð nr. 44 frá 28. november 1940 «om afgift for fremvisning af levende billeder og afholdelse af offentlig dans», sum broytt við løgtingslóg nr. 3 frá 18. februar 1955.

§ 4 omhandlede afgiftsanmeldelser eller afgivelse af urigtige afgiftsanmeldelser straffes med bøde eller hæfte.

stk. 2. Overtrædelse af givne tilsyns- og kontrolbestemmelser straffes med bøde.

§ 10.

De til lovens gennemførelse iøvrigt fornødne regler fastsættes af landsstyret.

§ 11.

Denne lov træder i kraft den 1. august 1966.

stk. 2. Samtidig ophæves Bestemmelser nr. 44 af 28. november 1940 om afgift for fremvisning af levende billeder og afholdelse af offentlig dans som ændret ved lov af 18. februar 1955.

Viðmerkingar:

Fyrliggjandi uppskot til løgtingslóg um stuttleikagjøld avloysir fyribilskunngerð nr. 44 frá 28. november 1940 um stuttleikagjøld við seinni broyting.

Uppskotið er gjørt av nevnd, ið landsstýrið á fundi 20. juni 1963 samtykti at seta niður at koma við uppskoti til eina betri eftirlitsskipan við stuttleikagjøldunum. Grannskoðaradeildin hevði í viðmerkingum til landskassarokskapin gjørt vart við, at hon ikki fekk havt eftirlit við stuttleikagjøldunum, sum hon átti. Sýslumenninir høvdu eisini upplýst, at tørvur var á at fáa bølt uppá viðtaskiftini. Í nevndini hava sitið landfútin, Chr. Larsen, sýslumaður, N. Rasmussen, gjaldstovustjóri og J. Hilduberg, fulltrúi. Grannskoðarin hevur kannað uppskotið og hevur ongar viðmerkingar at gera, um eftirlitið verður skipað, sum skotið er upp.

Týdningarmestu broytingarnar eru hesar:

1) Undir stuttleikaskatt koma eftir uppskotinum bert kvikmyndafyrivísanir og ótlendskur dansur. Eftir núgaldandi skipan koma eisini umsettir sjónleikir og aðrar skemtisamkomur undir stuttleikaskatt. Gjaldið av seinast nevndu samkomum hevur ongan peningaligan týdning havt fyri landskassan.

2) Til tess at gera eftirlitið einfaldari verður skotið upp at nýta prosent-sats í staðin fyri ávist gjald av hvørjum atgongumerki. Tann í uppskotinum nevndi prosent-satsur skuldi givið landskassanum nøkurlunda somu inntøku sum higartil.
3) Álagt verður loyvishavaranum at nýta góðkend atgongumerki. T.d. kann eftirlitið krevja, at navn (á bio- ella dansihøll), rað nr. og prísur verður prentaður á atgongumerkini, og at eftirlitið fær váttan frá avvarandi prentsmiðju um tal, nummar og pris á prentaðum atgongumerkjum. Eisini kann verða álagt ferðandi, sum vísa filmir, ella dansistovum, sum ikki hava fast loyvi, at nýta atgongumerkir, sum viðkomandi sýslumaður ella landfóti útflýggjar, samstundis við at loyvi verður givið.

1. viðgerð 7. mars og 18. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Eftir uppskotinum hjá landsstýrinum verða sluttleikagjøldini ikki hækkað, men størri heimild verður at hava eftirlit við innkrevjingini av hesum gjøldum. Vist verður til í viðmerkingunum frá landsstýrinum, at higartil hevur tílík heimild ikki verið. Grannskoðari landsins hevur kravt betur eftirlit. Sonnleiðis knæðsetir lógin tað princip, at sjónleikur og føroyskur dansur eru undantikin sluttleikagjaldið.

Lógaruppskotið skapar sostatt ikki stórvegis broyting í sjálvum gjøldunum, men í innkrevjingini og eftirlitinum, og útfrá hesum kann nevndin mæla til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Eftir at málið var vist í fíggjarnevndina, er umsókn frá føroysku bygdabiografunum vist í fíggjarnevndina.

Umsóknin er henda:

«Tað hevur leingi verið umhugsað at fáa bøt um tær stóru útreiðslur, sum standast av at reka bio-virki, serstakliga fyri bygdabiografarnar í Føroyum.

Tann størsti meinbogi bygdabiografunum viðvíkjandi man helst vera sluttleikaskatturin, sum fyri allar biografar í Føroyum enn er 30% av bruttobilettini.

Eitt biovirki er og eigur at vera ein mentunarligur «faktor» í samfelaga okkara, og skuldi tað helst eisini verið tað soleiðis framvegis. Umráðandi er tí, at bygdabiografarnir standa saman um at fáa ein lætta viðvíkjandi sluttleikaskattinum.

Í Danmark er sluttleikaskatturin avtikin. Í Føroyum er sluttleikaskatturin enn ikki avtikin, men átti at verið tað. Tað er í hvussu er veruleiki, at bygdabiografarnir í Føroyum, um teir skulu lúka tíðarinnar

krøv og fyri at kunna bera seg, mega fáa ein munandi lætta hesum viðvíkjandi. Sum nú er, kann biovirki á bygd ikki halda fram uttan við hjálp av undirløntum personali.

Tí seuda vit undirritaðu bygdabiografeigarar í Føroyum hetta skriv inn og vóna, at okkum verður givið viðhald, tá vit krevja, at stuttleikaskatturin verður avtikin, ella í minsta lagi lækkaður til 15—10%.

Ætlanin er at leggja hetta fyri bygdabiografunum neyðturvuliga krav fram á ting beinan vegin.»

Viðvíkjandi inkomnum gjøldum hevur nevndin fyri eitt fíggjarár (1964/65) fingið hesar upplýsingar:

Tað komu inn hesi stuttleikagjøld:

Fuglafjørður	1.540,90
Vestmanna	8.408,70
Sørvágur	10.125,10
Tvøroyri	16.111,70
Vágur	13.384,60
Klaksvík	34.155,50
Skáli	3.360,40
Glyvrar	10.664,80
Tilsamans	97.752,00

Sama fíggjarár var samlaða inntøka av stuttleikagjøldum kr. 372.284,90. Umframt frammanfyri nevndu bygdir er alt hitt gjaldið innkomið í Tórshavn.

Nevndin vísir á, at endamálið við uppskotinum hjá landsstýrinum ikki í fyrsta umfari er, um stuttleikagjøld skulu uppihaldast ella ikki, ella verða so ella so, men út frá galdandi reglum um stuttleikagjøld at skapa eitt meira effektivt eftirlit. Á inntøkusiðnum á nú samtyktu fíggjarlóg eru stuttleikagjøldini so munandi lúttur, at her gerst eingin broyting uttan at útvegir verða gjørdir fyri øðrum inntøkum. Skoytt kann verða uppí, at formelt er stuttleikagjaldið goldið av áskoðarum og ikki av loyvishavarum, meðan hesir seinnu krevja tað inn. Eitt høgt stuttleikagjald kann tó forða fyri einum hægri atgongupeningi, sum kemur loyvishavarum til góðar.

Fíggjarnevndin er samd um at úttala, at tað er av størsta týdningi at skapa betri og hugnaligari høli til biografir og aðrar samkomur úti á bygd, eins og í Havn, og at tað eigur at verða gjørt, sum gerast kann, hesum viðvíkjandi. Nevndin vil tó við uppskoti veita landsstýrinum

heimild til at arbeiða við hesum máli, har tað ikki er heimill á annan hátt.

Umfram at nevndin einmælt mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot, setir nevndin fram fylgjandi:

U p p s k o t
til samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at kanna og síðan seta uppskot um reglur, hareftir tað eru betur møguleikar til at gera høli, sum betur eru higartil uppfylla krøvini til biograf, dans ella aðrar samkomur.

2. viðgerð 19. april.

Uppskot frá nevndini samtykt 22 0.

3. viðgerð 20. april.

Landsstýrisins uppskot samtykt 23 0.

---

34. Broyting í lóg um vanlukktrygging

Ár 1966, 9. februar legði Haldor Hansen løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT

til broyting í kgl. fyriskipan fyri Føroyar nr. 161 av 29/3 1939 við seinni broytingum um trygging móti vanlukkutilburðum.

Sum uppiskoyti til § 1 verður sett:

Er det usikkert, om en påvist forringelse af erhvervsevnen hos en

person eller en persons død skyldes et ulykkestilfælde eller en skadelig påvirkning som foran omhandlet eller erhvervssygdom som foran omhandlet, skal forringelsen af erhvervsevnen eller døden anses som hidført ved ulykkestilfældet eller den omhandlede skadelige påvirkning eller erhvervssygdommen, medmindre der er overvejende sandsynlighed for, at dette ikke er tilfældet.

I § 3. pétti 1. verður aftan á orðið «mønstrede» sett orðið «søfolk».

I § 3. pétti 2. verður frammar fyri orðinum «erstatningen» sett orðið «invaliditets».

§ 7 verður orðað soleiðis:
Bestemmelserne i nærværende anordning finder også anvendelse på arbejdere, der udsendes af en virksomhed, der har sæde eller styrelse på Færøerne til midlertidig beskæftigelse i andre lande.
Som midlertidig beskæftigelse skal anses arbejde af indtil 2 års varighed.

§ 22. Sum nýtt pétti 4 verður sett:
Såfremt tilskadekomne under arbejdet anvendte et af de ovenfornævnte hjælpemidler, og dette er blevet beskadiget som følge af ulykkestilfældet, påhviler det ligeledes Føroya Vanlukkutrygging at afholde udgifterne til reparation, eventuelt fornyelse af hjælpemidlet.

Pétti 5 i § 23 gongur heilt út.

I § 25. 1sta punktum, verður aftaná orðini «10.000. kr.» sett orðini «som pristalsreguleres, jfr. § 44.»

§ 39. pétti 1, 6) gongur heilt út.

§39. pétti 2, gongur heill út.

§ 40 gongur heill út.

I § 44, pétti 2, verður aftaná orðini «5.000. kr.» sett:
Årslønnen skal dog pristalsreguleres med pristallet pr. 1. januar 1963 som grundlag.

Sum nýtt pétti 4 í sama grein verður sett:
Ved beregning af invaliditets- og dødserstatning for en forsikret, der

er medlem af arbejdsgivernes familie og af den grund arbejdet for et vederlag, der er væsentlig mindre end sædvanlig, for en forsikret, der står i lærlingeforhold til arbejdsgiveren, samt for en person på under 21 år fastsættes årslønnen af Færøernes Ulykkesforsikringsråd efter skøn. Ved denne fastsættelse af årslønnen for unge vil derfor den del af invaliditeten, der må anses for at være af varighed udover det fyldte 21 år, kunne lægges den årsløn til grund, der sædvanlig oppebæres af personer på 21 år og derover med samme uddannelse i samme eller dermed beslægtede erhværv som det, hvormed pågældende var beskæftiget, da ulykken skete.

I § 56, petti 1, verður sett:

Bestyrelsen for Føroya Vanlukkutrygging skal endvidere på begæring være berettiget til at medinddrage under denne anordnings bestemmelser besætningen på midlertidig på Færøerne stationerede fiskefartøjer af fremmed nationalitet.

Umhugsan:

Til uppiskoytið til grein 1: Hetta uppiskoyti er sett í tilsvaramdi donsku fyriskipan hin 27. mai 1964, og tað verður hildið at vera beinast, at vit eisini fáa tað uppí fyriskipanina fyri Føroyar, soleiðis at ivamál ikki verða avvist.

til grein 3, petti 1: Umrædda petti kemur nú at ljóða soleiðis: «I alle tilfælde omfatter forsikringen mønstrede søfolk, fiskere og bådfiskere, såfrænge disse er mønstrede». Føroyski farmaflotin er støðugt vaksandi, og tað verður tí hildið at vera rætt, at manningarnar á hesum førum og á rutubátum, sandbátum o.l. eru eins væl tryggjaðar og manningarnar á fiskiførum.

til grein 3, petti 2: Hetta petti ljóðar: «Udelukket fra forsikringen er ulykkestilfælde, som den forsikrede selv har hidført med forsæt. Har den forsikrede ved grov uagtsomhed, ved tilsidesættelse af reglementariske bestemmelser, som er holdt tilbørlig i kraft, eller ved berusselse selv hidført eller dog væsentlig bidraget til ulykkestilfældet, kan erstatningen nedsættes eller bortfalde. I så fald skal rådet (jfr. kapitel II) udtrykkelig udtale det i sin kendelse». Mælt verður til at sela orðið «invaliditets» framman fyri orðið «erstatningen», tí tað verður hildið at vera skeivt at sekta konu og børn fyri nakað, sum maðurin møguliga hevur gjørt skeivt. Eftir hesari broyting verður tað bert maðurin sjálvur, sum kann verða sektaður.

til grein 7: Við hesum uppskoti verður serstakliga hugsað um arbeiðsfólkið í Grønlandi (Grønlandsfelagið, Sjómannasheimið o.a.) á sjómannasheiminum í Reykjavík, í Aberdeen og annað. Hesi hava sjálvandi verið tryggjað, men tað verður hildið at vera beinast, at hetta verður skrivað greinliga í fyriskipanini.

til grein 22: Tryggingin hevur áður goldið fyri brillur og forlornar lenn, sum eru brotnaðar ella burturmistar av vanlukku ávum, men hetta hevur ikki staðið beinleiðis í fyriskipanini. Hetta verður við hesum gjørt

til petti 5 í grein 23: Hetta petti ljóðar soleiðis: «Fiskere, som modtager sygeløn fra Løntjavningargrunni Skipsfiskimanna, har ikke krav på dagpenge i den tid, de modtager sygeløn».

Hetta petti var í sínari tíð gjørt av løgtinginum við teirri hugsun, at maður skuldi ikki fáa hjálp úr tveimum stovnum í senn. Í veruleikanum vinkar hetta petti tó soleiðis, at yvirmenn og menn á skipum, sum fiska so mikið, at teir ikki koma undir løntjavning, fáa dagpening frá vanlukkutryggingini, tá biðitiðin 11 dagar eru gingnir, meðan aðrir, sum koma undir løntjavningargrunnin, skulu bíða, til henda hjálp er uppbrúkt, møg uliga í tríggjar mánaðir. Og ofta gongur heilt long tið, áðrenn veiðan er avskipað og avrokning fæst. Mælt verður til, at hetta petti verður tikið burturúr fyriskipanini. Um hesir menn, sum fáa sjúkraviðbót frá løntjavningargrunninum eisini skulu fáa dagpening frá Vanlukkutryggingini hevur lítið at týða, tá hugsað verður um, at teir við tí stóru inntøkuni skulu fáa dagpening frá 15. degi.

til grein 25, 1sta punktum: Frá 1/1 1963 var lógarlønin sett til í mesta lagi 10.000 kr. og í minsta lagi 5.000 kr. Prístalið var tá 400. Pr. 1/1 1966 er tað komið upp í 159; av hesum minkar peningavirði, og tað verður tí rátt til at prístalsregulera lógarárslønina. Hetta kann verða gjørt, uttan at tryggingargjøldini fara upp, tí øll hesi seinasta árini hevur tryggingin havt góð ár.

til grein 29, petti 1, 6) og petti 2 í sama grein: Mark er, sum nú er, sett upp eftir fyri deyðsendurgjøldini. Hetta ber til, tá talan er um endurgjald til einkju; men er tað talan um endurgjald til børnini, fáa tey minni í part, jú fleiri tey eru. Mestagjaldið til børn er í løtuni 13.500 kr. til eitt barn, men tó í mesta lagi tilsamans 27.000 kr., og verður endurgjaldið til børn roknað út eftir áratalinum frá deyðsdegi pápans og til tey fylla 18 ár.

Broytingaruppskotið miðar ímóti, at har tað eru fleiri børn, at hesi so fáa tað, tey hava uppihorðið sambært fyriskipanina, uttan at tað sum

nít má verða skarvað burturav hjá teimum, fyri at tað samlaða endurgjaldið til tey kann vera innan fyri mestaanarkið.

til grein 40: Henda grein ljóðar soleiðis: «Ein efterladt har kun krav efter foranstående bestemmelser, når han enten har dansk indfødsret eller har fast bopæl i kongeriget eller i Grønland. Fra denne bestemmelse kan regeringen dog gøre undtagelse med hensyn til statsborgere i sådanne andre stater eller selvstændige dele af disse, som ligestiller danske statsborgere med deres egne statsborgere med hensyn til ydelser efter den tilsvarende lovgivning. Lige med indfødt anses med hensyn til krav på erstatning den efterladte enke, selvom hun ikke har dansk indfødsret, såfremt den forulykkede var dansk statsborger.»

Henda grein er strikað í dansku fyriskipanini 25/5 1961, og tað er heldur eingin grund til at hava hana í ti føroysku fyriskipanini.

til grein 44, petti 2: Viðmerkingarnar til hesa broytingina eru tær somu sum til grein 25, 1sta punktum, um pristalsregulering av meðal ársinnløkuni.

til nýtt petti 4 í somu grein: Her verður víst á ársfrágreiðingina 1961 frá Vanlukkutryggingini, har tað m.a. stendur: Snýr tað sig um ungan mann ella kvinnu, sum hevur minni enn 5.000 kr. í meðalársinnløku kemur hann ella hon restina av ævi sini bert at fáa helmingin av lí, tey kundu fingið, um tey vóru komin til skaða nøkur fá ár seinri, tá tey vórðu komin út í veruligari vinnu.

Fyri at rætta uppá hetta, verður nýggjn petti 4 sett í grein 44.

til grein 56, petti 1:

Hetta uppískoyti er tað sama sum fyribils kunngerð nr. 8 av 16. mars 1942. Tá mælt verður til at seta hana aftur í fyriskipanina, verður serliga hugsað um skip sum «Ingrid Pau», sum kom undir føroyska vanlukkutrygging við at verða koyrd undir kap. VI í fyriskipanini, sum fevnir um idnaða, handverk, handil, privat tænastuviðurskifti o.a., tí undir sjóvinnu kundi hon ikki koma, og um trolarin «Akurey», sum ikki slapp undir føroyska vanlukkutrygging.

1. viðgerð 11. februar og 11. mai legði sociala nevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur havt fundir um málið og er samd um, at ymist er, sum trongir til umvælingar í hesi lógini.

Av ársfrágreiðingini frá vanlukkutryggingini siggja vit eisini, at hetta

uppskotið frá javnaðarflokkinum er tikið við í frágreiðingina, og hetta man vera prógv um, at neyðugt er at gera broytingar.

Nevndin hevur eisini havt stjóran í vanlukkutryggingini, Niels Juul Nielsen, á fundi við sær og somuleiðis eisini rikisumboðsmannin M. Wahl, við skrivstovufulltrúa Klaus Herman og fyri formansskapin í vanlukkutryggingarráðnum, hæra dómarafulltrúa Mondrup.

Allir hesir vóru samdir um, at ymist var, sum átti at verið broytt og vælt um við vanlukkutryggingarlógini.

Nú er tað kortini soleiðis, at nevnd er sett, júst við leirri uppgávu at kanna alla sosiallóggávuna fyri Føroyar og serliga lóggávuna viðvíkjandi sjúkratrygging og vanlukkutrygging.

Í hesari nevnd sita Hákun Djurhuus, løgmaður, Mogens Wahl, rikisumboðsmaður, Johan Djurhuus, stjóri, Engberg, skrivstovustjóri frá sosialministeriinum, sum er formaður og Gammelgaard, eisini frá sosialministeriinum.

Henda nevnd hevði fund fyri stuttum í Kjøpinhavn, og seinnapartin í juni er ætlanin, at hon skal hava fund í Føroyum, júst um hesi viðurskiftini.

Við hesum í huga kann tað tykjast óneyðugt júst nú at taka hetta arbeiðið úr hondunum á hesari nevndini, serliga við tað, at hon ætlar at hava uppskot til reiðar í hesum málinum til ólavsøkutingið.

Henda nevndin hevur kortini býtt sig í ein meirihluta og ein minnihluta.

Meirihlutin (Marius Johannesen, Johan Poulsen, Hans Lützen og Hans J. Ellingsgaard) setir fram soljóðandi

Uppskot
til samtyktar

Málið verður sent til ta nevndina, sum er nevnd áður, og sum hevur til uppgávu at koma við uppskoti um broytingar, millum annað í vanlukkutryggingarlógini. Hetta verður landsstýrið biðið um at gera

Minnihlutin (Jacob Lindenskov) mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 12. mai.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 7—0.
Uppskotið frá meirahlutanum í nevndini samtykt 22—0.

35. Broyting í reglugerðini hjá Lönjavningargrunninum

Ár 1966, 10. mars legði Poul J. Olsen løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til samtyktar

Tingið heitir á nevnd Lønjavningargrunn skipsfiskimanna at broyta reglugerðina soleiðis:

1) at allir mynstraðir fiskimenn við føroyskum skipum, ið landa feskan fisk í Føroyum fáa í prisviðbót 15 oyru pr. kg. av øllum rundum og kruvdum fiski við høvdi, avreiddur til virkingar og útflutning.
2) at prísiskoytið eisiui verður latið til skiparar, stýrimenn og motorpassarar, tá ið hýra teirra liggur niðanfyri kr. 3.500.- um mánaðin.

Umhugsan:

Tað er ein dapur veruleiki, at meðan skip okkara annaðhvørt taka lut í eydnuspæli at selja fisk sín á útlendskum marknaðum, sum tíverri í flestu tilfellum gevur ov lítið til mannningina og tap til hann, sum skipið eigur, ella verða løgd fyri teym vegna manningartrot, leita okkara bestu menn burtur í onnur lond fyri at vinna sær og sínum.

Hetta óskil verður at mergsúgva okkara samfelag, og megu ti verða gjørdar fyriskipanir, sum fyribyrgja hesum.

Hetta uppskot skal tí miða ímóti at gera tað meira lønsamt hjá fiskimonnum at avreiða fisk teirra í Føroyum, heldur enn at flyta hann út av landinum, og lá til ein pris, sum ikki gevur fiskimonnum meira úrtøku enn einar 600 til 700 kr. fyri túrin, samstundis sum hetta vil vaksa munandi um arbeiðið heima og gera tað møguligt hjá flakavirkjunum at forrenda og avdraga teirra dýru anlegg.

1. viðgerð 14. mars og 28. apríl legði fiskivinnumevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Meirilutin (N. Holm Jacobsen, Fr. Hansen, J. Simonsen og L. Joensen) vísir til álitið í løgtingsmáli nr. 36/1965: Endurnýgging av skipan um

studning úr landskassanum til minstuløn og viðbót til fiskaprísin.

Minnilutin (Poul J. Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 29. apríl.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 7 0.

---

36. Endurnýgging av skipanini um minstulön v. m.

Ár 1966, 10. mars legði Poul J. Olsen løgtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um endurnýggjan av skipan um studning úr landskassanum til minstuløn og viðbót til fiskaprísin.

§ 1.

Við tí endamáli at gera lønjavningargrunn skipsfiskimanna førnu fyri frá 1. april 1966 at veita manning á føroyskum fiskiskipum og útróðrarmonnum í Grønlandi minstuløn og/ella viðbót til fiskaprísin, verður veitt grunninum árligur studningur úr landskassanum á figgjarlógini. Studningurin verður latin við hesum treytum:

lagtingslov om forlængelse af tilskudsordningen fra landskassen til mindsteløn og tilskud til fiskepriser.

§ 1.

Med det formål at sætte skibsfiskernes lønreguleringsfond i stand til fra 1. april 1966 at yde mandskabet på færøske fiskerskibe og bådefiskere i grønlandske farvande mindsteløn og/eller tilskud til fiskepriser, ydes fonden et årligt tilskud af landskassen på finansloven. Tilskuddet ydes med disse betingelser:

1) Minstaløn til fiskimenn verður kr. 1800,- pr. mánað pr. veiðuferð, og at minstaløn verður prístalsviðgjørd frá 1. apríl 1966.
2) Grunnurin fyrisitur studningin til fiskimenn í heimaútróðri og á sildaveiðu við opnum bátum.

§ 2.

Studningur hjá fiskimonnum í heimaútróðri og á sildaveiðu verður 15 oyru pr. kg. (fyri veiðu veidda við opnum báti, sum brúkar bensinmotor verður viðbótin 18 oyru pr. kg.) av veiðami av øllum runduum, kruvdum ráfiski við høvdi avreiddur í Føroyum til virkingar og útflutnings og hjá øllum opnum bátum á sildaveiðu til agns, frystingar og saltingar.

§ 3.

Reglurnar hjá grunninum verða at leggja fyri landsstýrið til góðkenningar.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1966.

1) At mindstelønnen til fiskere bliver kr. 1800,- pr. måned pr. fangsttur, og at mindstelønnen bliver prístalsreguleret fra 1. april 1966.
2) Fonden administrerer tilskuddet til fiskere, der driver hjemmefiskeri samt sildefiskeri med åbne både.

§ 2.

Tilskudet til fiskere i hjemmefiskeri samt sildefiskeri bliver 15 øre pr. kg. (for fangst fiskel med åbne både med bensinmotor 18 øre pr. kg.) af al rund råfisk uden indvolde, men med hoved, der indhandles på Færøerne til tilvirkning og eksport, for alle åbne både på sildefangst til agn, frysning og saltning.

§ 3.

Fondens regulativ forelægges landsstyret til godkendelse.

§ 4.

Denne lov træder i kraft 1. april 1966.

Umhugsan:

Tað er øllum tingmonnum greitt, at fiskimenn okkara ikki stoðast á skipunum, og man ein av orsøkunum vera, at úrtøka leirra er ov lítil. Tað er í skylda tingsins at finna útveg til at bøta um hetta, ti at lata arbeiðsamboð okkara liggja ónýtt, er skilaloysið. Bæði í 1961 og 1965 lógu skip okkara fyri teymi á hásumri í bestu vinnutíð.

At fiskimenn, sum gera ein størri arbeiðsinnsats, enn flest øll onnur í føroyska samfelagnum fyri minni løn enn onnur, fer ikki at bera til.

Tað er fyri at bøta um honda skeivleika, at javnaðarflokkurin setur fram omanfyri standandi uppskot.

1. viðgerð 14. mars og 28. apríl legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Meirilutin (N. H. Jacobsen, Fr. Hansen, J. Simonsen og L. Joensen) ger hesar viðmerkingar.

Málið um minstuløn til fiskimenn er eitt mál, sum hevur verið ofta fyri á tingi.

I tingsetuni 1964 vóru tvey mál um minstuløn løgd fram av javnaðarflokkinum, eitt uppá 1200 kr. og eitt uppá 1500 kr., alt í sonnu tingsetu. Aftur í ár hevur javnaðarflokkurin lagt mál fram um 1800 kr. í minstuløn.

Meirilutin skal her vísa á, hvat hent er hesi seinastu árini, bæði hvat viðvíkur minstuløn og øðrum viðbótum til fruma fyri teir menn, sum starvast á tí føroyska skipaflotanum.

I reglugerðini fyri lønjavningargrunnin, sum var galdandi frá 1. apríl 1963 til 31. mars 1964 var tágaldandi minstaløn kr. 1.000, . Kostútreiðslur 5,50 kr.

Núgaldandi minstaløn er kr. 1.380,60, ein hækking uppá kr. 380,60 í tvey ár. Kostútreiðslur eru nú 10,00 kr., ein hækking uppá kr. 4,50, so at tann veruliga hækkingin í minstulønini ! hækkingin í kostútreiðslunum er 135 kr. + kr. 380,60, tilsamans 515 kr., ein hækking uppá meira enn 50 % í tvey ár.

Viðbót til fiskaprísin, sum var galdandi, var henda:

Fiskur, landaður av snørís-, línu ella garnaveiðu:

Toskur yvir 22" 55 oyru pr. kg., núgaldandi 65 oyru pr. kg.

Fiskur, landaður av trolveiðu:

Toskur yvir 22" 25 oyru kr. kg., núgaldandi 42 oyru pr. kg.

Fiskur, landaður av snørís-, línu-, garna- og trolveiðu:

Toskur 16—22", 20 oyru pr. kg., núgaldandi 42 oyru pr. kg.

Manning á trolarum fær nú prísískoti av 30 % pr.kg. av veiðuni í staðin fyri fyrr 20 %.

Ein stórbroyting er eisini tann, at lofti uppá 2.500 kr. er eisini burtur, soleiðis at um maður er heppin at gera ein góðan túr, so verður hann ikki straffaður við, at hann ikki fær prísískoyti.

Tað sum er ein stórbroyting er tann, at menn, myndstraðir fiskimenn, sum landaðu feskan fisk í Føroyum, eiuki prísískoyti fingu, fáa teir fyriútlan minstuløn 12 oyru av hvørjum kg., sum teir landa í Føroyum, meðan maður fyri tveimum árum síðani, bert fekk í útløku 660 kr. pr. mánað, fær hann nú 1200 kr., ein hækking uppá 540 kr.

Lógin um studning til minstuløn og fiskapris er ein lóg, sum hevur verið endurnýggjað á hvørjum ári.

Í tingsetuni í fjør varð lógin gjørd generell og var minstalønin hækkað úr 1.000 kr. uppí 1300 kr. um mánaðin og pristalsviðgjørd frá 1. apríl 1965.

Vísandi til tað sum her er fört fram, heldur meirilutin, at tær hækkingar, sum eru framdar soleiðis sum frammanfyri tilskilað, týðir meir fyri heildina enn ein hækking av minstulønini.

Meirilutin setur so stall einki uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Poul J. Olsen):

Sum av meirilutanum ávist kann sigast, at minstaløn og pristalsviðbótir fyri fiskimannin eru komin vel á leið ímóti teirri hædd, sum javnaðarmenn á tingi ferð eftir ferð hava havt uppskot um, men sum tessverri vanliga ikki í fyrstu atløgu vunnu sømdir. Tað gleðir minnilutan sum javnaðarmann at merkja, at menn innanfyri hinar flokkarnar so við og við í meiri og minni mun vera at ásanna rettvísi í krøvum javnaðarflokksins fyri fiskimenninar.

Men hóast hesi ásannaðu framstig er ikki komið nóg langt, serliga ikki viðvíkjandi minstuløn fiskimanna.

Bæði tímaløn og í langt størri mun fastløn fólk hava fingið langt betri lønarkor enn fiskimenn, og við samráðingar felaganna millum hevur tað ikki eydnast at vunnið fiskimonnum rettvís lønarkor.

Uppskot javnaðarflokksins um 1800 kr. um mánaðan er ikki ov høgt sett, tá ein hugsar um, at hettar er grundstuðulin í okkara vinnulívi, og hvussu nógvar arbeiðstímar ein fiskimaður hevur í mun til heimafólkið. Eisini eigur at verða havt í huga, at vetrarhálvárið, tá størsti parturin av skipaflotanum er á ísfiskaveiðu, at meðan hvør túur vanliga varar slukan mánað, so eru fiskimenn bert nýnstraðir í hálvan mánað og minstulønin so stall bert verður kr. 900 og einki verður vunnið la tið, skipið er niðri og sekur, og ger til til trýggjan túr.

Tað er ikki bara eitt rættvist krav frá teimum at fáa tryggjað eina forsvarliga minstuløn, men tað er eitt neyðugt krav frá vinnulívinum, at teir kenna seg lønarliga tryggjaðar, líka vel við okkara skipum, sum við at fara í tænastu hjá fremmandum monnum.

Tað er tessverri ikki veitt fiskimonnum fulla inntøkusøndir. Men ein

farsvarlig minstaløn er eitt lið í hesi trygging, og tað er átroðkandi neyðugt at skipa hetta liðið so fullfíggjað sum møguligt.

Minnilutin mælir til at samtykkja uppskot javnaðarflokksins.

2. viðgerð 29. apríl.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 7-0.

---

37. Frígoymsla

Ár 1966, 11. mars legði Kjartan Mohr løgtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at kanna spurningin um frígoymslu fyri vørur, ið flutar verða til Føroyar.

Viðmerkingar:

Tað hevur gjøgnum árini ikki so sjáldan komið fyri, at útlendsk skip hava fingið vørur (proviant ella aðra útgerð) senda til skipaavgreiðslu her, sum tey hava verið í uppisetri við. Hesar vørusendingar eru eftir galdandi reglum ikki útflýggjaðar uttan móti tollfrindan. Undantikin hesum eru tó marinuskip sum ikki hava fasta stað í Føroyum (sml. kunngerð nr. 44 frá 18. september 1958).

Henda skipan hevur volt ymsar trupulleikar, við tað at tað oftast er torført at fáa hesi útlendsku skip at skilja, at tey ikki kunnu fáa tílíkar vørur tollfrítt her eins og aðrastaðni.

Harnæst hevur tað hendinga ferð komið fyri, at vørur komar hingatil til viðari flutning til annað land. Eisini fyri tílíkar vørur hevur tollur

verið krevdur, og bert í heilt serstøkum førum hevur undantaksloyvi verið givið, eitt nú tá vøran er komin til Føroyar av misgávum.

Tað er einki at ivast í, at ein frigoymsla kann fáa stóran handilsligan týdning til hata fyri tað føroyska samfelagið. Her verður hugsað um t.d., at dugandi føroyskir handilsmenn finna góð handilsumboð í útlondum og haðani innflyta vørur higar við endurútflyting til onnur lond fyri eyga við góðum vinningi, um so var, at vøran bert kom inn á eina frigoymslu, uttan at verða tollað.

Hetta er eitt so stórt og vittfevnandi mál, sum ikki er gjørligt at greiða frá út í ørsir í nøkrum stuttum viðmerkingum.

Verður ein ella onnur frigoymsluskipan sett í verk sleppst ikki undan útreiðslum til umsiting og neyðugt goymslurúm, eins og eigur at vera havt í huga, at ein slík skipan sum frammanfyri nevnt av handilsligum og samfelagsligum gagni sjálvandi ikki má skerja inntøkur landskassans.

1. viðgerð 14. mars og 25. sam. legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ALIT

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um, at spurningurin um frigoymslur fyri vørur, ið verða flutar til Føroyar, eigur at verða loystur. Nevndin sær uppskotið frá Kjartan Mohr, sum eitt slíg tann vegin at fáa loyst henda spurning og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið, soleiðis at landsstýrið kannar henda spurning og leggur fyri tingið fullfiggjað uppskot um frigoymslu ella frigoymslur so skjótt ið til ber.

2. viðgerð 29. mars.
Uppskotið frá framburðsflokkinum samtykt 20-0.

38. Nýggj patentlóg

Ár 1966, 11. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Talan er um eitt uppskot til patentlóg, sum skal koma staðin fyri patentlógina frá 19. desember 1958 og eina lóg um sama evni frá 29. apríl 1955.

Tað nýggja er serliga, at tað nú fer at bera til at senda inn «nordisk patentansøgning» til patentbyndugleikan og soleiðis, at verður í einum av teimum skandinavisku londunum patent veitt við tilskilan, at tað er galdandi í einum ella fleiri av hinum londunum, tá er tað galdandi har.

Landsstýrið hevur hildið, at henda lóg átti at verið sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan við teimum broytingum sum tóktust neyðugar.

Við tað, at hetta er samnordrøn lóg, heldur danska handilsmálaráðið tað ikki bera til at fáa nakrar broytingar inn.

Lógarnevndin hevur havt málið til viðgerðar og mælir til fylgjandi

Samtykt

Løgtingið samtykkir, at nordisk patentlóg verður sett í gildi í Føroyum.

2. viðgerð 15. mars.

Uppskotið frá nevndini samtykt 22 –0.

39. Vegagerð millum Húsar og Mikladals

Ár 1966, 11. mars legði Poul J. Olsen løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin soljóðandi

«Tær bygdir, ið eru brimpláss, sakna mangar av teimum fyrimunum sum kyrruplássini hava, men um gott vegasamband var, vildi tað bøtt munandi um hetta sakn.

Bygdirnar á Kalsoynni eru illa fyri í so máta og lá serliga tær norðaru bygdirnar.

Fyri tveimum árum síðani setti Javnaðarflokkurin uppskot fram um veg millum Húsar og Mikladals, men hetta uppskot fekk ta syndarligu lagnu, sum so mangt annað mál hevur fingið undir tesi landsstýrissamgongu, at málið varð beint til kanningar, og teir, sum kanna skuldu málið hava ikki gjørt tað.

Javnaðarflokkurin loyvir sær ti at reisa málið aftur og setur fram soljóðandi

Uppskot

til samtyktar

Landsstýrinum verður heimilt landskassans vegna at seta í verk vegagerð millum Húsar og Mikladals — og taka neyðug lán.»

1. viðgerð 15. mars og beint til havna- og veganevndina.

40. Bygging av skúlum og lærarahúsum

Ár 1966, 11. mars legði J. H. Dambjørg løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT

til

løgtingslóg um bygging av skúlum og lærarahúsum.	lagtingslov om opførelse af um og lærarahúsum.
§ 1.	§ 1.
Kommununnar partur av útreiðslunum til bygging av skúlum og lærarahúsum verður 20% av koslnaðinum, meðan landskassin rindar 60%.	Kommunernes andel af udgifterne til opførelse af skoler og lærerboliger pardsættes til 20% af udgifterne, medens landskassen betaler 60%.
§ 2.	§ 2.
Viðvlíkahald av hesum bygningum verður at rinda av viðkomandi kommunu.	Udgifterne til vedligeholdelse af disse bygninger afholdes af vedkommende kommune.
§ 3.	§ 3.
Har fleiri kommunur eru um at byggja og at nýta sama skúla verða útreiðslurnar býttar eftir fólkatalinum í viðkomandi kommunum.	Hvor flere kommuner deltager i opførelsen og benytter samme skole fordeles udgifterne i forhold til folketallet i vedkommende kommuner.
§ 3.	§ 4.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Umhugsan:

I fleiri bygdum eru skúlarnir so gamlir og vánaligir, at her er neyðugt at farið verður undir at byggja skúlar.

Um onkur lærari kemur til slíkar bygdir, stoðast hann ikki vegna tess, at bæði skúlin og lærarahúsini eru so vánalig, at har er ikki verandi inni. Av hesi orsøk er tað vónleyst at fáa lærarar at søkja til slíkar bygdir.

Kommununnar eru ikki figgjarliga førar fyri at rætta hesi brek. So

skulu hesar bygdir ikki ganga til grundar hvat skúlaundirvising viðvíkir, má ein broyting koma í her.

Eftir galdandi skipan rindar viðkomandi kommuna 60% av kostnaðinum av skúlabyggingini, meðan landskassin rindar 20% og statskassin 20%.

Taka vit til dømis vegagerð, so rindar landskassin 90%, meðan viðkomandi kommuna rindar 10%. Viðvíkjandi havnagerð, so rindar landskassin 50%, statskassin 25% meðan viðkomandi kommuna rindar 25%.

At løgtingið hevur átikið sær so stóran part av vega- og havnagerðini er í ásannan av, at kommunurnar ikki maktaðu hesa uppgávu sjálvar. Tað er tí rímligt at tað almenna eisini lættir kommunum um byrðirnar viðkomandi skúlabygging, tí barnaundirvisingin er ikki minni týðandi táttur í okkara samfelag.

Javnaðarflokkurin loyvir sær tí at skjóta upp, at lógin viðvíkjandi studningi til skúlabygging verður broytt soleiðis, at kommunurnar partur, sum nú er 60% verður 20% av kostnaðinum, bæði til skúlar og læraralús og setur tí fram hetta uppskot.

1. viðgerð 15. mars og 25. s.m. legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1966/67 eru til skúlabygging avsettar 650.000 kr., meðan skúlastjórnin hevur mett landsstýrisins part eftir galdandi skipan um 20% at vera 900.000 kr. — tað sama sum ríkisins partur. Orsøkin til munin millum 650.000 og 900.000 kr. er, at hesin peningur er í grunninum til bygging av skúlum.

Skuldi uppskotið frá javnaðarflokkinum komið í gildi í komandi fíggjarári, skal landskassin svara til 60% av tí skúlabygging, sum skúlastjórnin metir til tilsamans 4,5 milj. kr., tað vil siga, at tað á komandi fíggjarlóg skulu setast av 1,8 milj. kr. aftrat til hetta endamál, og tað hevur eiki uppskot verið um.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at málið er vert at kanna, eitt nú hvat viðvíkir felagsskúlum fyri fleiri kommunur. Men tá ið málið av fyrrnevndum orsøkum ikki kann koma at galda í fíggjarárinum 1966/67 heldur meirilutin av nevndini (allir uttan javnaðarflokkurin) at góð tíð er til at lata landsstýrið og skúlastjórn kanna málið.

Sami meirilutin setir tí uppskot um, at hetta verður gjørt, meðan minnilutin (javnaðarflokkurin) í fyrsta syftu styðjar uppskotið frá javnaðarflokkinum og í aðru syftu tekur undir við uppskotinum frá meirilutanum.

Uppskot
frá

meirilutanum (Kjartan Mohr, Sámal Petersen, Hanus við Høgadalsá, Knút Wang og Andrias Djurhuus) og í aðru syftu frá minnilutanum (Poul J. Olsen og Haldor Hansen):

Málið verður sent landsstýrinum og skúlastjórnini til ummælis.

2. viðgerð 22. apríl.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 7—0.

Uppskotið frá meiralutanum í nevndini samtykt 24—0.

---

41. Broyting í lóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum

Ár 1966, 14. mars legði Poul J. Olsen fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 48 frá 30. mai 1964 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

§ 1.

Í § 6 verður skoytt uppí: «Til innbygging av kraftblokki kann

lagtingslov om ændring af lagtingslov nr. 48 af 30. maj 1964 om fornyelse af fiskeriflåden.

§ 1.

Til § 6 tilføjes: «Til installation af kraftblok kan ydes tilskudslån

veitast studningslán við upp til 25% av innleggingarkostnaðinum.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

med indtil 25% af installationsomkostningerne.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Umhugsan:

Aftaná kriggið vóru Føroyingar farleysir, og soleiðis var tað um allan heim, tí størsti parturin av flotanum var søktur undir kríggrum. Allar skipasmiðjur høvdu bundið seg til leveringar langt fram í tíðina, so nýggj skip vóru ikki til at fáa. Føroyingar royndu at bjarga sær sum frægast, við at keypa gomul skip. Men hesi gomlu skip, bæði trolarar og onnur skip vórðu ov dýr at halda við líka, so teir, sum áttu tey fóru allir á hútsagang.

Utlan skip verður ikki livað her á landi, so fyri nøkrum árum síðan vóru tað fiskimenn í hópatali, sum settu tær krónur, teir áttu í nýggjar stállínubátar. Men hesi skip vóru dýr, og linudriftin er dýrur driftsfonnur, so illa hevur gingist at fingið endarnar at røkka saman, og fleiri av hesum annars frálíku skipum eru eisini farin undir hamarin.

Prisurin á saltfiski hevur verið hækkandi nú í fleiri ár vegna tað, at flest øll lond eru hildin uppat at veiða saltfisk; men ísfiskasiglingin hevur verið Føroyingum eitt stórt vónbrot, so tey flestu skipini hava siglt tað útaftur, sum tey vunnu um summarið.

Línuveiða er ikki bara dýrur veiðiháttur, men krevur nógva manning, og førir hetta við sær, at úrtøkan til manningina verður ov lítil, so vandi er fyri, at skipini verða liggjandi fyri teymi vegna manningarfrot.

Sildafiskiskiskapurin hevur roynst vel. Hann hevur roynst vel hjá íslendingum, og hjá norðmonnum hevur hann roynst so vel tey seinastu árini, at nærum allur tann norski fiskiflotin hevur lagt um til kraftblokk.

Hjá Føroyingum er hesin veiðiháttur nýggjur, men tey skip sum nýtt hava henda veiðiátt hava klárað seg mannin betri enn línuskipini, og manningarparturin hevur verið nærum tvær ferðir so stórur. Men umleggingar til kraftblokk kosta nógvan pening. Blokkur, spæl ognðrar umleggingar kosta umleið kr. 500.000,00 umfram nót, ið kostar umleið kr. 200.000.

Eftir galdandi reglum kunnu felag fáa hesa financiering:

Realkreditstovnurin	50%
Fiskaribankin	20%
Studningur	15%
falt	85%

So veðheldur landskassin fyri 5% afturat og lænir avlandi kurslapslánið. Men sum støðan er hjá teimum flestu skipum, so klára tey ikki 10% av eini hálvari millión. Tað er tí neyðugt, um talan skal verða um nakra umlegging til muns, at finna aðrar vegir, tí fiskimenn kunnu ikki einsamallir verða teir, sum skulu leggja peningin á borðið, hvørja ferð ástendur.

Javnaðarflokkurin mælir tí til at broyta hesa skipan so, at studningurin til ísetan av kraftblokki verður 25% av kostnaðinum.

1. viðgerð 17. mars og 9. mai legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Niels Holm Jacobsen, Frederik Hansen og Johan Simonsen) heldur ikki, at tað er galdandi studningsskipan, sum ger tað trupult fyri línubátar at leggja um til kraftblokk. Í viðmerkingunum verður sagt, at eftir galdandi reglum kunnu feløg fáa hesa finansiering:

Realkreditstovnurin	50%
Fiskaríbankin	20%
Studningur	15%

Eftir hvat meirilutin hevur fingið at vita, er kursurin hjá Realkreditstovninum bert 86, og er nakað tað sama hjá Fiskaríbankanum. Tað má heldur kanna sigst, at tað eru lániviðurskiftini, sum gera tað so ómøguligt at byggja og modernisera skip. Skal hetta halda áfram, at kurstapið skal vera 14%, so verður tað ómøguligt at byggja fleiri nýggj skip.

Fyri at bøta um hesi viðurskifti setur meirilutin fram hetta

UPPSKOT

til samtyktar

Løgtingið biður landsstýrið kanna møguleikarnar fyri betur lániviðurskiftum til skipabygging og til umbygging av skipum til kraftblokk.

Minnilutin (Poul J. Olsen) heldur fram:

Tessverri er tað rætt, at lánikorðini eru ógvuliga trong og vánalig.

Lánini eru vanlig ov stuttfreistnð og nógv ov dýr, og tá ein oftast noyðist at taka obligatiónslán, verður maður at fáa minni, ofta 20% og kanska eru minni enn ein hevði roknað við.

Hesim veruleiki ger tað ikki neyðugt at senda málið til landsstýrið til nýggjar kanningar, tí allir ásanna, at tað er neyðugt at fáa kraftblokk í tey hóskandi skipini og allir menn og ikki minst landsstýrismenninir

vila, at lánini eru ov dýr og tung at taka. Heraftaeat kemur, at landsstýrið hevur fingið heimild til og sum uppgávu frá tinginum at veita pening til vega í stórari nøgd. Landsstýrið hevur soleiðis samtyktina um at læna 40 milj. kr. til ein lánigrunn við vinnulívsuppgávum.

Tað at peningurin er dýrur og ofta verður leeutur sum obligatiónslán, ið kann geva innfil 20% uinni í reinum peningi eru søkt varð um er tessverri satt og er, sum sagt júst høvuðsgrundin til hetta uppskot javnaðarflokksins um meiri studning til ísetingar av kraftblokki og keyp av aðrari útgerð til kraftblokkaveiðu eftir sild.

Minnilutin mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

Minnilutin (Leon Joensen) ger hesar viðmerkingar:

Fiskivinnan, høvuðsvinna okkara, er inni í eini broytingartíð, eini tíð, har so nógv nýmótans tól koma fram ímillum heimsins fiskivinnutjóðir, og um vit ikki skulu gerast eftirbátar, ræður um at fylgja við í øllum økjum, ikki minst har, tað ræður um at úttúgva seg at troyta møguleikarnar í havsins ríkidømi av sild, har kappingin er serliga stór.

Her verður helst hugsað um kraftblokkin, sum hevur roynst vel hjá leimum førum, sum hava fingið hann ísettan. At fáa kraftblokk ísettan er ógvuliga kostnaðarmikið, serliga tá hugsað verður um ley dýru skip, ið menn hava fingið sær, og er so statt øllum monnum kunnugt hin síðsti endin av finansieringini hin tyngsti og eigur hitt almenna tí at gera lání- og studningsveitanina so lagaliga sum møguligt, og setir tí minnilutin samsvarandi hesum

Uppskot
til

broyting í løgtingslóg nr. 48 frá 30. mai 1964 um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum.

§ 1.

Í § 6 í løgtingslóg nr. 48 frá 30. mai 1964 um endurnýggjing av skipaflotanum verður skoytt uppí in fíné «tó viðvikjandi kraftblokki 20%».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

ændring i lagtingslov nr. 48 af 30. maj 1964 om fornyelse af fiskerflåden.

§ 1.

I § 6 i lagtingslov nr. 48 af 30. maj 1964 om fornyelse af fiskerflåden føjes til in fine «dog forsåvidt angår kraftblokke 20%».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 10. mai.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 5—0.
Uppskotið frá minnilutanum í nevndini (Leon Joensen) fall 9—0.
Uppskotið til samtyktar fall 13—0.

---

42. Broyting í lærlingalógini

Ár 1966, 14. mars legði J. H. Dauhjørg fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot til

løgtingslóg um broyting í lærlingalógini.

§ 1

Í løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 við seinni broytingum verður í § 4, 1. stk. gjørt hetta uppiskoyti:

«Fyri lærlingar innan handverk og ídnað verður minstalønin fastsett til fylgjandi procentpartar av galdandi sveinaløn:

1. læruár 20%, 2. læruár 25%, 3. læruár 35%, 4. læruár 50%, 5. læruár 75%.

Frammanfyri standandi minsta løn er eisini galdandi fyri teir lærusáttmálar sum eru í gildi.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lærlingeloven.

§ 1

I lagtingslov nr. 29 af 12. oktober 1954 med senere ændringer om lærlingeforhold foretages i § 4, 1. stk. følgende tilføjelse:

«For lærlinge inden for håndværk og industri fastsættes mindstelønnen til følgende procenttal af gældende svendeløn:

1. læreår 25%, 2. læreår 25%, 3. læreår 35%, 4. læreår 50%, 5. læreår 75%.

Foranstående mindstelon er også gældende for de løbende kontrakter.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Umhugsan:

Tað hevur ofta vist seg, at lærlingar sum bæði hava havt hug og evnir at læra, hava verið noyddir at fara úr læruni og ikki hava kunnað fullført sína læru vegna tess, at teir ikki hava havt ráð at rinda kost, innivist o.a. — og foreldur teirra ikki hava kunnað hjálpt teimum peningaliga — má tað almennna gera útveg fyri at veita lærlingum munandi studning og samstundis má tað verða skipað soleiðis fyri, at lærlingalønin verður hækkað somikið, at eisini fátækir unglingar skulu kunna læra bæði handverk, handilsskap o.a.

Hvønn týdning tað hevur fyri eitt samfelag at hava dugnaligar handverkarar, handlandi o.s.fr. er øllum lagsandi so kunnugt, at óneyðugt er at greiða meira frá hesum.

1. viðgerð 17. mars og málið beint í lógarnevndina.

---

43. Broyting í skattalógini

Ár 1966, 14. mars legði J. H. Danbjørg løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í skattalógini.	lagtingslov om ændring i skatteloven.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar:	I lov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat foretages følgende ændringer:
1) § 27, stk. 1, fær hetta uppiskoyti: Lærlingar og skúlanæmingar, sum ikki hava meira skattainn tøku enn 6.000 kr. rinda ikki skatt til landskassan.	1) I § 27, stk. 1, tilføjes: Lærlinger og skoleelever, som ikke har en skatteindtægt over 6.000 kr. er frilaget for skat til landskassen.

2) § 34, stk. 2, nr. 2, fær hetta uppískoyti:
Viðvíkjandi skatting av lærlingum og skúlanæmingum galda sonn reglur sum fyri landsskatt.

2) I § 34, stk. 2, nr. 2, tilføjes:
Vedrørende lærlinger og skoleelevers skattepligt gælder dog samme regler som for landsskatt.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og verður á fyrsta sinni nýtt fyri skattaárið 1966/67.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks og anvendes første gang for skatteåret 1966/67.

Viðmerkingar:

Unglingar, sum læra, hava stórar útreiðslur, og tað er ikki allið, at foreldrini kunnu veita teim peningaligan stuðul. Hesir unglingar royna tí at arbeiða í frítíðini, annaðhvørt á landi ella til skips.

Tað er tí skeivt, at stórur partur av hesi inntøku verður tikin fyri skatt. Tann stuðul, sum hitt almenna letur er ofta so lítil, at hann røkkur alt ov stutt. Hvaðna verri er tað at krevja lærlingar eftir skatti av teimum krónum, sum teir royna at vinna sær fyri læruna.

1. viðgerð 17. mars og 9. mai legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Eftir uppskotinum skulu lærlingar og skúlanæmingar sleppa frá skatti, um inntøkan er minni enn 6000 kr. bæði til landsskatt og kommunuskatt.

Sum er, er markið fyri at sleppa undan landsskatti 4000 kr., meðan kommunalu líkningarvøldini hava møguleika til at álíkna lágum inntøkum heilt lítlan skatt.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Kjartan Mohr, Sámal Petersen, Hanus við Høgadalsá, Knút Wang og Andrias Djurhuus) heldur, at tað ber ikki til at gera serligar skattareglur fyri summi fólk, men tað er ein spurningur um ikki markið, sum er 4000 kr. viðvíkjandi landsskatti, eigur at verða hækkað samsvarandi tí, sum peningavirði er broytt, síðan hetta mark varð sett, og um tað verður hildið forsvarligt at seta tað enn hægri.

Hetta krevur gjølligar kanningar við tað, at verður lágmarkið hækkað, mugu eisini skattastigini broytast, ið hvussu er nakað upp. Og meirilutin heldur, at hetta eigur at verða gjølla kannað og setir uppskot um tað.

Hetta letur seg vel gera av tí, at broytingin í ongum føri kann koma at galda fyri hetta skattaárið.

Skattastigini viðvíkjandi landsskatti eru fyri inntøkur millum 4000

kr. og 6000 kr. frá 75 kr. uppí 315 kr. Hevur lærlingur ella skúlanæmingur vunnið sær tilíka inntøku, sum nýtt skal verða til læru, hevur sum er, ítsetilsi fingist til at gjalda skattin, og av tí at tað á fíggjarlógini eru studningar til lærlingar og skúlanæmingar, er møguleiki fyri at lata tað meira í studningi, sum skatturin er.

Meirilutin mælir annars til at tað í aðrar málar verður gjørt meira fyri lærlingar, sum t.d. við bygging av lærlingaheimum.

Minnilutin (P. M. Dam og J. Fr. Øregaard) mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

Meirilutin setir fram soljóðandi

Uppskot
til samtyktar

Málið verður sent landsstýrinum, ið verður biðið um at kanna tað og leggja fyri løgtingið uppskot um eina hækking av lágmarkinum viðvíkjandi landsskatti.

2. viðgerð 10. mai.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 6—0.
Uppskotið frá meirilutanum í nevndini samtykt 19—0.

44. Veðhald av lán til SEV.

Ár 1966, 17. mars legði lagmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løglingslóg um ábyrgd fyri láni til S.E.V.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til S.E.V. 9,5 milj. kr. frá «Investeringsfonden for Færøerne» til útbygging.

Lagtingslov om garanti for lån til S.E.V.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån til S.E.V. 9,5 mill. kr. fra «Investeringsfonden for Færøerne» til udbygning.

Til framhald av útbyggingini bæði norðurs- og sunnanfjørðs hevur olfelagið S.E.V. søkt fleggingargrunnin um lán og eru treylirnar:

a t lánið verður latið til pari kurs og 6% rentu p.a.,
a t lánið verður aftur goldið við 1/30 hvørja juni og december termin, fyrstu ferð juni termin 1970,
a t strevnprísir felagsins verða hækkaðir frá 1. april 1966 og
a t landsstýrið loyvir lántøkuna og hindir seg til at leggja fyri løglingið uppskot um landskassaábyrgd fyri láninum.

Til nærri lýsing av málinum verður viðlagt

1. skriv felagsins 26. februar 1966 til landsstýrið við umsókn um landskassaábyrgd og frágreiðing um málið,
2. skriv 1. april 1965 við rakstrar- og likviditetsætlanum um byggingina í 1964-1970,
3. broyting 10. august 1965 við broyting í byggiætlanum 1964-1970,
4. skriv felagsins 15. august 1965 til «Investeringsfonden for Færøerne» við lánaumsókn,
5. skriv 15. august 1965 viðvíkjandi broyting í byggiætlan 1964-1970 og
6. skriv 15. august 1965 við rakstrar- og likviditetsætlanum fyri raksl rakstrarárini 1965/66-69/70.

Aftrat verður viðlagt yvirlit yvir lánsábyrgdir landskassans fyri S.E.V. pr. 31. december 1965.

Av hesum skjølum framgongur, at felagið framvegis byggir út produktiónsvirki sini, og geva hesi upplýsingar um fíggjarligu støðuna, bæði viðvíkjandi møguleikum fyri ílegging og likviditeti nøkur ár fram.

Skal útbyggingin fara fram soleiðis, sum ætlanin er, og sum óivað neyðugt er, ið hvussu er til eisini tey smærru plássini hava fingið eina megi, er neyðugt hjá felagnum at taka lán.

Núverandi útbygging, serliga í Suðuroy, er komin nakað ávegis og hevur verið neyðugt longu í 1965 at útvega ilegging. Hetta er so gjørt við lántøku frá ileggingargrunninum, og samtykti landsstýrið tá at loyva felagnum at taka neyðug lán og aftrat at leggja fyri løglingið uppskot til løgtingslóg um landskassaábyrgd fyri hesum lánum tilsamans 9,5 milj. kr.

S. E. V. Skjal 1.

Vestmanna, tann 26. februar 1966.

Føroya landsstýri,
Tinganes, Tórshavn.

Viðv. løgtingsábyrgd fyri lán, 9,5 milj. kr. frá «Investeringsfonden for Færøerne.

Sum landsstýrinum kunnugt hevur stýrið fyri íleggingargrunnin játtað SEV eitt lán uppá tilsamans 9,5 milj. kr. at nýta til útbygging av virkjum elfelagsins sbr. byggiætlan fyri 1964/65-69/70, df. 20.8. 1964.

Lánitreytirnar eru hesar:

1. Lánið verður latið til pari kurs og skal rentast við 6% p.a. roknað frá gjaldsdegnum.
2. Lánið skal afturrindast við 1/30 hvørja juni og desember termin, fyrstu ferð til juni termin 1970.

Umframt verður eisini krevt, at hin ætlaða hækking av streymprísinum roknað frá 1.4.66 skal samtykkjast, og at løgtingsábyrgd verður fingin fyri alt lánið.

Príshækkingin er sum kunnugt samtykt, men enn vantar løgtingsábyrgdin.

Byggiætlanin fyri 1964-70, ið varð send landsstýrinum við skrivi df. 3.11.64, og endaliga samtykt á umboðsfundi hin 26.3.65, er sum nevnt løgd til grund fyri lánimsóknina.

Í nevnda byggiætlan verður roknað við einari lánuppteku uppá 10,5 milj. kr., og skal henda bygging fara fram:

1. Vestmanna: Liðuggerð, broyting og viðkan av vatnorku og elvirkjum	980.000,-
2. Klaksvík: Viðkan av kraftstøð, uppsetan av einum 3125 HK motori o.a., broyting og viðkan av elvirkjum	1.730.000,
3. Tórshavn: Ymisk byggiarbeiði, uppsetan av tveimum 3125 HK motorum o.a. broyting og viðkan av elvirkjum	3.370.000,
4. Botn: Nýggj stød, uppsetan av tveimum turbinum, 3000 og 1500 HK, nýggj elvirkir og turbinurør, berghol og byrging við Vatnsnes	5.570.000,-
5. Tvøroyri: Ymisk byggiarbeiðir, broyting og viðkan av elvirkjum	480.000,
6. 60 kV virkir: Ymisk byggiarbeiðir, uppsetan av 1 60 kV, 10 MVA transformarum, elvirkir o.a.	1.700.000,-
Tilsamans	13.830.000,-
7. Streymoy, Eysturoy, Vágoy, Klaksvík og Suðuroy: Viðkan av 20, 10 og 0,4 kV býtingarvirkjum o.a.	3.160.000,
8. Sandoy, Norðoyggjar, Nólsoy, Hestur, Koltur, Mikines, Skúvoy og Dímun: 10 og 0,4 kV leiðslur, sjókaðal, trafostøðir og lokalar máttarstøðir	1.050.000,
9. Ólmálarar: Nýggir málarar og útskiftan av gomlum málarum	1.390.000,-
10. Felagsvirkir o.a.m.	570.000,
Tilsamans	9.170.000,
Framleiðslu- og býtingarvirkir v.m.	23.000.000,

Virkiskostnaðurin er ætlaður sbr. dagsprís í fyrstu helvt av 1961, og sjálvt um roknað verður við at hækka streymprisin við 20% frá 1.1.66, varð torført at fáa raksturin at bera neyðug nýggj virkislán (sí byggiætlan, skjal nr. 4). Skarvað varð tí mest møguligt burtur av, og bleiv helst metl í minna lagi, av tí at íleggingargrunnurin ikki kundi ventast at geva størri lán enn raksturin kundi bera.

Orsøkin til hesar umstøður eru tær stóru kapitalútreiðslur, ið standast av, at SEV í komandi árum framvegis má bera kostnaðin av teimum fyrstu langfreistaðu virkislánum (upp til 40 ára lán), samstundis sum nýggj lán mugu gjaklast yvir stutta tíð. Her kann serliga verða nevnt

1. dollarslánið, 27 milj. kr., 6,02%, fritt fyri avgjøld í 3 ár. Hetta lán skal afturrindast yvir 12 ár, fyrsti avdráttur 1.5.67.
2. exportkreditturin til motorar, 3.41 milj. kr., 5%. Hetta lán skal rindast yvir 5 ár, fyrsti avdráttur hin 26.1.65.

Til tingingarnar, fyrst við «Det rådgivende udvalg vedrørende Færøerne» og seinni við stýrið fyri «Investeringsfonden for Færøerne», vóru síðani gjørdar hesar uppstillingar:

1. Reviderede drifts- og likviditetsbudgetter, df. 1.1.65.
2. Ændring af byggeprogram 1964-70 samt revision af anlægsomkostninger, df. 10.8.65.
3. Ændring af byggeprogram 1965-70 samt revision af anlægsomkostninger, df. 15.8.65.
4. Drifts- og likviditetsbudgetter for 1965-70, df. 15.8.65.

Hin fyrsta broylinganuppstillingin er send landsstýrinum við skrivi df. 5.4.65, meðan tær 3 seinastu, ið vóru latnar beinleiðis til stýrið fyri fleggingargrunnin, eru av misgáu onganlið sendar fram. Avrit verða hjáløgd hesum skrivi.

Av umnevndu uppstillingum sæst m.a., at inntøkurnar fyri 1964/70 sbr. tær seinastu royndir eru hækkaðar við gott 11%, og at byggikostnaðurin pr. 10.8.65 er mettur soleiðis roknað í sama rað sum framman fyri standandi uppstilling:

1. Vestmanna	1.580.000,-	
2. Klaksvík	2.330.000,-	
3. Tórshavn	3.770.000,-	
4. Botn	6.350.000,-	
5. Tvøroyri	490.000,-	
6. 60 kV virkir	1.940.000,-	16.460.000,-
7. Gl. økið o.a.	3.210.000,-	
8. Nýtt øki	4.090.000,-	
9+10. Málarar o.a.	1.910.000,-	9.210.000,-
	Tilsamans	25.700.000,-

Úrslitið av tingingunum varð sum nevnt, at stýrið fyri fleggingargrunnin játtaði SEV tilsamans 9,5 milj. kr., ið sbr. «Drifts- og likviditetsbudgetter» df. 15.8.65 skuldi brúkast til hetta endamál:

1. Til gjalding av byggikreditium pr. 1.4.65	4,00 mill. kr.
2. Til liðuggerð av Bolnvirkinum	3,61 mill. kr.
3. Til 60 kV virkir	1,89 mill. kr.
Tilsamans	9,50 mill. kr.

Hin prinsipiella støðan var annars tann, at ileggingargrunnurin í framtíðini bert vildi lata lán til ávís størri framleiðslu- og 60 kV virkir, meðan SEV av rakstraravlopi sjálvt máttí liggja øll onnur virkir.

Vísandi til frammanfyri standandi frágreiðing loyvir stýrið fyri SEV sær at søkja um løgtingsábyrgd fyri lán, stórt 9,5 milj. kr. frá «Investeringsfonden for Færøerne».

Við hávirðing
Elfelagið S.E.V.
sv.
H. Winther.

Skjøl:
Reviderede drifts- og likviditetsbudgetter, df. 1.4.65.
Rev. af byggeprogram f. 1964/70 samt af anlægsomkostn., 10.8.65.
Rev. af byggeprogram f. 1965/70 samt af anlægsomkostn., 15.8.65.
Reviderede drifts- og likviditetsbudgetter, df. 15.8.65.
Skriv til Investeringsfonden for Færøerne df. 15.8.65.

Elfelagið S.E.V. Skjal 2.

Reviderede drifts- og likviditetsbudgetter for byggeprogram 1964/70 af 20.8.64.

Forudsætningerne er de samme som for de oprindelige budgetter; men der er gjort følgende ændringer:

1. Produktion og indtægter for driftsåret 1964/65 bliver henholdsvis 5 og 8% større end anslået, hvorfor der for de efterfølgende driftsår er regnet med højere indtægter.
2. Eksportkredit og diesclanlæg er flyttet til indeværende driftsår.
3. Rente for dollarslån I for tiden 1.1.64—1.4.64 er konteret som byggerente.
4. Exportkreditrente for 1964/65 og 65/66 er konteret på drift.
5. På grund af de stigende omkostninger er anlægsudgifterne forhøjet fra 23 til 24 mill. kr.

	64/65	65/66	66/67	67/68	68/69	69/70
Driftsbudgetter						
Indtægter	6300	7300	8500	9300	10300	11000
Adm. + drift	1910	2000	1900	1910	2000	2100
Olie m.m.	350	250	100	200	600	1100
Renter	1800	2950	3200	3100	2800	2700
Afskrivninger	2240	2120	3000	3160	3200	3200
Overskud	60	÷ 320	300	900	1700	1900
Likviditetsbudgetter						
Eldebitorer	1760	2060	2200	2500	1000	1100
Indtægter, indgået	4300	5100	6000	8300	9200	9800
Adm., drift, renter	4060	5200	5200	5240	5400	5900
Afdrag på lån	980	1680	2100	1460	4500	4500
Disponib. af indtægter	1020	280	900	1100	300	500
Kasse & bank	380	40	60	300	100	100
Lager disponibelt	÷ 430	300	100	—	—	-
Debitorer, kreditorer	÷ 2040	100	-	-	-	-
Indskud kommuner	50	280	340	200	-	-
Tilskud landskassens	700	700	400	—		-
Dollarlån II	6300	—	—			—
Exportkredit	3410	-	- -	-		-
Nødvendige lån	2000	5000	2000		500	-
Disponibelt for anlæg	11390	6700	3800	1600	900	600
Anlægsomkostninger	11350	6640	3500	1500	800	300
Kasse & bank, årsafsl.	40	60	300	100	100	300

Skjal 3.

Elfelagið SEV 10.8.65.

Ændring af byggeprogram for 1964-70 af 20.8.64.
samt revision af anlægsomkostninger i 1000 kr.

	64/65	65/66	66/67	67/68	68/69	69/70	64-70
Primære anlæg:							
Vestm. elværker	1400	70	100	10			1580
Botnværket	2840	3400	100	10		-	6350
Tveråværket	360	90	30	10			490
Klaksvigværket	2030	240	40	20	-	—	2330
Tórsh.værket	3000	650	100	20	—		3770

Kobl. Vestmanna	60	10	790	.	.		860
Kobl. Tórshavn	10		450	—	--	-	460
Kobl. Skálabotn	70	20	480				570
60 kV linien	10	30	10				50
	9780	4510	2100	70	.	.	16460
Sekundære anlæg:							
Fordelingsanlæg + småværker:							
1. Gl. område + Klaksvig, Suðuroy	540	800	750	500	300	320	3210
2. Nyt område	620	580	1180	1000	500	210	4090
Målere, fællesanlæg, værktøj m.m.	630	260	590	180	170	80	1910
Lagerbeholdning	520	30	+520	—		-	30
	2310	1670	2000	1680	970	610	9240
Anlæg ialt	12090	6180	4100	1750	970	610	25700

Skjal 4.

S.E.V. Vestmanna, tann 15.8.1965.

Investeringsfonden for Færøerne
Statsministeriet
Slotsholmsgade 10
København K.

Vedr. andragende om lån.

Under henvisning til møde i Vestmanna den 14. ds. med bestyrelsen for Investeringsfonden fremsendes hoslagt:

1. Ændring af byggeprogrammet for 1965/70 samt revision af anlægsomkostningerne af 15.8.65.
2. Tilsvarende drifts- og likviditetsbudgetter af 15.8.65.

Af likviditetsbudgetterne fremgår, at man for at kunne gennemføre det reviderede byggeprogram yderligere skal optage lån på ialt 5,5 mill. kr.

Under henvisning hertil anmodes bestyrelsen for Investeringsfonden udover det allerede ydede lån på 4,0 mill. kr. at yde SEV et lån på ialt 5,5 mill. kr., der ønskes optaget således:

2,5 mill. kr. pr. 1.10.65
2,0 mill. kr. pr. 1. 4.66
1,0 mill. kr. pr. 1.10.66

5,5 mill. kr. ialt.

Lånene (inkl. de 4,0 mill. kr.) ønskes så vidt muligt optaget på følgende vilkår: 6% rente, 20 års afdragstid med de 5 første år afdragsfrie.

Med højagtelse
Elselskabet S.E.V.
p.b.v.

Skjal 5.

S.E.V

Vestmanna 15.8.1965.

Ændring af byggeprogram for 1964/70 af 20.8.64 samt revision af anlægsomkostninger i 1000 kr.

	65/66	66/67	67/68	68/69	69/70	64-70
Primære anlæg:						
Vestm. elværker	70	100	10	—		180
Botnværket	3400	100	10	—	—	3510
Tveråværket	90	30	10		—	130
Klaksvigværket	240	40	20	—	—	300
Tórsh. værket	650	100	20	—	—	770
Kobl. Vestmanna	10	790	—		—	800
Kobl. Tórshavn	—	450	—	—	—	450
Kobl. Skálaboin	20	480		—	—	500
60 kV linien	30	10	—	—	—	40
	4510	2100	70	—		6680
Sekundære anlæg:						
Fordelingsanlæg + småværker:						
1. Gl. område + Klaksvig, Suðuroy	800	750	500	300	320	2670

2. Nyt område	580	1180	1000	500	210	3170
Mälere, fællesanlæg, værktøj m.m.	260	590	180	170	80	1280
Lagerbeholdn.	30	+ 520	.	—	—	+ 490
	1670	2000	1680	970	610	6930
Anlæg ialt	6180	4100	1750	970	610	13610

Skjal 6.

S.E.V. Vestmanna 15.8.1965.

Drifts- og likviditetsbudgetter
for driftsåret 1965/66-69/70
1000 kr.

Forudsætningerne er de samme som for budgetterne af 1.1.65.

Lån fra Investeringsfonden for Færøerne regnes forrentet med 6% og afdragne over 20 år, således at de første 5 år er afdragsfrie.

	65/66	66/67	67/68	68/69	69/70
Driftsbudgetter					
Indtægter	7300	8500	9300	10300	11000
Adm. + drift	1800	1900	2000	2100	2200
Olie m.m.	300	200	300	700	1200
Renter	3000	3230	3140	2950	2720
Afskrivninger	2500	3050	3200	3250	3300
Overskud	+ 300	120	660	1300	1580
Likviditetsbudgetter					
Eldebitorer	2100	2200	2500	1000	1100
Indtægter, indgået	5100	6000	8300	9200	9800
Drift, renter	5100	5330	5440	5750	6120
Afdrag på lån	1680	1700	3990	4000	4020
Disp. af indtægter	420	1170	1370	450	760
Kasse og bank	250			.	.
Lager disponibelt	100	70			.
Debitorer 1.4.)					
Indskud komm.)	1630	740	200		

Tilskud landskasse)						
Kreditorer 1.4.	÷ 4100	÷ 1380	÷ 500	: 500	: 1020	
Lån, investeringsfond	4000	—	—	—	—	
Disp. for anlæg	2300	600	1070	: 50	÷ 260	
Nye lån	2500	3000	—	—	—	5500
Ialt disponibelt	4800	3600	1070	÷ 50	÷ 260	
Botn elværk	3400	100	10	—	—	3510
60 KV anlæg	60	1730	—	—	—	1790
Andre premiære anlæg	1050	270	60	—	—	1380
Sekundere anlæg	1670	2000	1680	970	610	6930
Anlæg ialt	6180	4100	1750	970	610	13610
Kassekredit	1380	500	680	1020	870	

Lántakari	Lángevari	Lániár	Upprunalig lánistødd kr.	Restlán pr. 31/12 1965 kr.
Elektricitetsfelagið S.E.V.	Før. sparikassi	1950	2.000.000	1.389.338,17
— —	— —	1955	1.000.000	832.106,67
— —	— —	1958	500.000	438.616,18
— —	— —	1947	500.000	288.171,07
		1955	340.552,43	144.811,44
— —	— —	1956	600.000	447.633,72
— —	— —	1956	500.000	421.884,02
—	Norð. sparikassi	1958	100.000	50.002,00
— —	— —	1950	100.000	74.001,46
— —		1950	100.000	56.700,34
— —	— —	1956	300.000	165.449,30
—	Suð. sparikassi	1957	100.000	87.166,16
— —	Før. Banki	1949	500.000	138.506,45
— —	— —	1953	1.000.000	552.500,36
—	Ríkiskassin	1954	7.000.000	5.553.333,00
— —	— —	1964	27.350.000	27.350.000,00
— —	Oblán	1953	1.000.000	598.000,00
— —	—	1961	1.000.000	840.000,00
— —	—	1962	1.000.000	880.000,00
— —	—	1963	1.700.000	1.561.000,00

—	—	Kreditfor. af komm. i Danmark	1956	159.000	176.151,18
	—	— —	1956	1.041.000	1.041.000,00
—	—	— —	1958	436.000	170.289,21
—	—	— —	1958	1.564.000	1.564.000,00
—	—	Sparekassen f. København & Om.	1959	2.500.000	1.999.999,96
—	—	Nye Danske af 1864	1950	250.000	100.000,00
—	—	Statsanst. for Livsforsikring	1951	500.000	258.333,43
				87.405,43	47.182.294,12

1. viðgerð 21. mars og 25. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Allir ræðarar undir 1. viðgerð styðjaðu málið, sjálvt um eisini var hildið, at óneyðugt átti at verið við løgtingsveðhaldi til felag, sum allar kommunnir í Føroyum standa aftanfyri.

Sum tað sæst í viðmenkingunum frá landsstýrinum er ein treyt, at landsstýrið loyvir lántøkuna og bindir seg til at leggja fyri løgtingið uppskot um landskassaábyrgd fyri lánunum. Útfrá hesi treyt mælir figgjarnevndin einmælt til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. og 3. viðgerð 29. mars.

Landsstýrisins uppskot samtykt 24—0.

45. Veðhald fyri láni til gerð av ringnót

Ár 1966, 17. mars legði Karsten Hoydal landsstýrismaður fram sóljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um ábyrgd av láni til gerð av ringnót.	lagtingslov om garanti for lån til fremstilling af en ringnot.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at taka ábyrgd av láni upp til 200.000,- kr. til gerð av einari ringnót.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån på indtil 200.000,- kr. til fremstilling af en ringnot.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1966.	Denne lov træder i kraft 1. april 1966.

Viðmerkingar:

Garnavirkið á Oyri, Martin Frederiksen, Tórshavn, ið flætlar og tvinnar nyloutráð til trol og tilíkt og Olaf Samuelsen, sum er kønur í at seta ringnótir undir, hava í hyggju at fara undir at gera ringnótir til sildabátarnar.

Takið hjá teimum verður at gera ta fyrstu nótina og fáa hana royndu. Henda nótin ætlast at fara at kosta um 200.000,- kr.

Vegna keyp av ymsum maskinum afturat til nevndu virki má ætlast, at ikki verður farið undir at gera nótina, fyrr enn aftur til heystar. Tað vil taka um 3 mánaðir at gera ta fyrstu nótina.

Munnliga hava virkini heitt á landsstýrið um at ganga í veð fyri virði av teirri fyrstu nótini, sum roynt verður at selja, tá ið hon er royndur.

Av tí at nótin er so kostnaðarmikil og tilfar og arbeiðsløn skulu latast, meðan hon verður gjørd, vildi veðhald frá tí almenna lætt um fíggjanina av royndarnótini, og fingið gongd á henda ídnaðn.

Einki er at ivast í, at brúkið av ringnótum verður vaksandi í komandi árum, og ógvuligá uttanhanda vil tað vera, at vit ikki sjálvir kunnu gera nótirnar av nýggjum og tørvandi stykkir til at bøta tær við.

Virkini siga seg vera før fyri at gera og umvæla nótir eins bíliga og í útheiminum.

1. viðgerð 21. mars og 25. s.m. legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

I viðmerkingum landsstýrisins verður gjøllliga sagt frá, hvat endamálið við lógini er, og sum tað sæst av § 2 í uppskotinum er ætlanin, at hon skal fáa gildi frá 1. apríl komandi.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at úttala, at hetta er eitt gott tiltak, at styðja royndir at gera eisini ringnótir í Føroyum, og mælir nevndin einmælt til at styðja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 29. og 3. viðgerð 30. mars.
Landsstýrisins uppskot samtykt 24- -0.

46. Kanning av kommunalu lóggávuni

Ár 1966, 24. mars legði Niels Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

U p p s k o t
til
lógtingslóg um nevnd til kanna av kommunalu lóggávuni.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at setta 5-mannanevnd til kanna av kommunalu lóggávuni í Føroyum, herundir møguleikanum fyri at leggja kommunur saman.

Nevndin gevur frágreiðing og tilmæli til landsstýrið.

lagtingslov om udvalg til revision af kommunelovgivningen.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et udvalg på 5 medlemmer til revision af den kommunale lovgivning på Færøerne, herunder undersøgelse af mulighederne for kommunesammenlægning.

Udvalget afgiver betænkning og indstilling til landsstyret.

§ 2.

Tær útreiðslur, ið standast av nevndararbeiðnum, verða goldnar úr landskassanum.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Udgifter i forbindelse med udvalgsarbejdet afholdes af landskassen.

§ 3.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Lógin um bygdakommunurnar í Føroyum er frá 1872 og hon um Tórshavnar bý frá 1908.

Í millumverandi tíðarskeiði er so nógv broytt, at neyðugt má vera at fáa hesar lógir kannaðar og, har tað er neyðugt, broyttar soleiðis, at tær koma at svara til nútíðina.

Onkrar broytingar eru gjørdar í hesum lógum, men bert tá átroðkandi neyðugt hevur verið, eitt nú í 1965 tá ið vallógin fyri Tórshavnar bý varð broytt og uppskotið um broyting í vallógini fyri bygdakommununurnar, sum liggur á tingborði nú, men er hetta ikki nóg mikið til, at lógirnar í síni heild eru tíðarhóskandi.

Viðurskiftini hjá kommununum eru stórliga broytt síðan tær fyrstu kommununurnar vóru skipaðar, tí tá vóru bert fáar kommununur, og krøvini til tær vóru smá, mett við tey, sum nú eru.

So við og við eru kommununurnar býttar sundur, og eru tær nú helst ov smáar og harav ov nógvar í tali. Hetta sama hevur verið í hinum Norðurlondum, men tey seinru árini hava tey lagt kommununur saman aftur í størri eindir. Í Svøriki varð hetta gjørt í 1952 og í Noreg í 1956/57. Í Danmark eru teir við at leggja saman, fyribils gera kommununurnar tað sjálvbodnar sínamillum, men aftaná 1970 verður sannanleggingin tvungin.

Landsstýrið heldur, at vert hevði verið at kanna møguleikarnar fyri líknandi sannanlegging í Føroyum, og er tí ætlanin at lata hesa nevnd gera kanningar samstundis við at hon kannar flest møglig mál sum viðvíkja føroyska kommununum og lóggávu teirra, og skal nevndin so geva landsstýrinum frágreiðing og tilmæli um broytingar.

1. viðgerð 29. mars og 1. apríl legði kommunala nevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin tekur undir við landsstýrinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 15. og 3. viðgerð 18. apríl.
Landsstýrisins uppskot samtykt 19—0.

---

47. Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin

Ár 1966, 24. mars legði Niels Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

U p p s k o t
til
fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 1966/67.

I n n t ø k u r:	rokn.skapur 1965/66	fíggjarætlan 1166/67
1. Endurgjald fyri fíggjend	7.800,00	7.800,00
2. Studningur úr landskassanum	160.000,00	300.000,00
3. Ogn pr. 1/4-1965	52.127,00	
4. Ætlað ogn pr. 31/3-1966		45.000,00
	219.927,00	352.800,00
Ú t r e i ð s l u r:		
A. Umvælingar av kirkjur	96.211,00	175.000,00
B. Kirkjugarðar	2.000,00	25.000,00

C. Preslaflutningur	20.676,00	25.000,00
D. Nýggjar kirkjur	40.000,00	60.000,00
E. Tryggingar	6.631,00	7.500,00
F. Kirkjubøar kirkja		24.000,00
G. Ogn pr. 15/3-1966	54.409,00	
	31/3-67	36.300,00
	219.927,00	352.800,00

Viðmerkingar:

ad A. Umvælingar:

1962/63	51.022,00
1963/64	62.668,00
1965/66	96.211,00

miðal um kr. 70.000,--.

Uppi í er 4. ratan uppá kr. 16.000,00 av 5 ára játtan til restaurering av Ólavs kirkju í Kirkjubø.

Sum eisini tilskilað í viðmerkingunum til figgjarætlanina 1965/66 var nakað lagt uppfyri á figgjarætlanini fyri 1963/64 til eina stærri umvæling av Sands kirkju. Nýggj tekja er gjørd og eftir standa ymiskar umvælingar sum ællast lidnar í summar.

ad E. Nýggjar kirkjur:

4. ratan uppá kr. 40.000 av 5 ára játtan uppá tilsamans kr. 200.000,00 til Christianskirkjuna í Klakksvík og 2. ratan uppá kr. 10.000,00 av 3 ára játtan til bønhús í Øravík.

Haraflurat kemur sum eykajáttan til Christianskirkjuna fyrsta ratan uppá kr. 10.000,00 av 3 ára játtan eftir umsókn frá kirkjuráðnum í skrivi frá 21. februar 1966.

ad F. Kirkjubøar kirkja:

Tá ið fyrsta ratan uppá kr. 16.000,00 av 5 ára játtan var sett á figgjarætlanina 1963/64 var restaureringin mett at kosta kr. 250.000,00.

Nú er kostnaðarætlan við tekningum komin og eftir henni fer restaureringin at kosta tilsamans kr. 500.000 og umsókn er inni um eykajáttan

úr landskassanum uppá tilsamans kr. 120.000,00 soleiðis at landskassans partur verður tilsamans kr. 200.000,- (smbr. undir E.) at játta yvir 5 ár við kr. 24.000,00 um árið.

Skilað verður til, at restaureringin av hesi kirkjuni kemur eisini undir reglurnar um forminni og hevur so slatt eina serstøðu í spurninginum um landskassans part.

Umsókn er send landsstýrinum í skrivi frá kirkjustjórnini dagfest 17. februar 1966 við kostnaðarætlan og teknningum (F. L. 2000-1-6).

1. viðgerð 28. mars og 1. apríl legði kirkjunevndin fram soljóðandi

ALIT

Nevndin hevur haft fund um málið og er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 15. apríl.

Landsstýrisins uppskot samtykt 22- 0.

48. Hvíldartíð á föroyskum fiskiskipum

Ár 1966, 24. mars, legði Leon Joensen, løgtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 5 frá 28. februar 1956, sum broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 1957 og løgtingslóg nr. 56 frá 28. juni 1963.

§ 1.

Í § 1, 1. stk. í løgtingslóg nr. 5 frá 28. februar 1956, sum broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 1957 og løgtingslóg nr. 56 frá 28. juni 1963 verður aftaná «8 tíma» sett «óbrotnað» og orðini in fine «soleiðis at 6 tímar av hesi hvíld verða óbrotnar» ganga út.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændringer i lagtingslov nr. 5 af 28. februar 1956, som ændret ved lagtingslov nr. 36 af 30. april 1957 og lagtingslov nr. 56 af 28. juni 1963.

§ 1.

I § 1, 1. stk. i lagtingslov nr. 5 af 28. februar 1956, som ændret ved lagtingslov nr. 36 af 30. april 1957 og lagtingslov nr. 56 af 28. juni 1963 indføjes efter ordene «8 timers» «sammenhængende» og ordene in fine «således at 6 timer af denne hviletid er sammenhængende» udgår.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Royndir hava vist, at tað er misjavnt, hvussu hesar hvíldartiðir verða hildnar, og eru tað bert nøkur heilt fá skip, sum halda sunnudagshvíld.

Viðvíkjandi 8 tíma hvíldini gerandisdagur er at sigu, at í bestu førum verða hesir 8 tímarnir slitnir sundur í teir 6 og 2 tímarnar, sum lógin nevnir, og tá minkar virði teirra munandi, meðan tað í verstu førum lítið og einki verður hirt um hesar hvíldarreglur.

Um 2x6 tíma hvíldina á trolarum er at siga, at hetta vaktarskifti yvirhøvur verður hildið á øllum trolarum.

Grundirnar fyri broytingunum eru hesar:

Fiskiveiða føroyinga verður rikin hart, dag um dag og all árið, serliga tá hugsað verður um saltfiskaveiðu. Veiðuferðirnar taka um 3 - 4 mánaðir og er ofta stutt millum túrarnar. Kroppsliga slit fólksins verður hareftir, og tað er uttan iva so, at fiskimaður, sum er á slíkari veiðu og sum ikki fær la fullu hvíld, lógin heimilar honum, hann overvar seg.

Av hesum er skiljligt, at spurningurin um hvíld á fiskiskipum er ikki

einans mál, ið varðar hin einstaka fiskimannin og fiskimannastettin, tað er uttan iva eisini ein týdningarmikil spurningur fyri fiskivinnuna sum heild og eisini ein samfelagsligur spurningur.

Fyri búskapin sum heild er tað tap, at menn missa vinnuorku sína í bestu árum, og fyri fiskivinnuna er tað stórt tap at missa menn, ið hon annars skuldi havt á skipum sínum.

Veruleikin er so eisini tann, at góð og nýggj fiskifør verða lítið og illa mannað á saltfiskaveiðu.

Tí má haldast, at vit við smávegis broytingum í lógini um hvíldartíð á fiskiskipum kunnu vinna meira og missa minni — bæði fyri hin einstaka fiskimannin, lítt einstaka fiskiskipi og annars fyri fiskivinnuna og samfelagið sum heild.

Broytingin snýr seg um hvíldartíðina hjá fiskimonnum á skipum á saltfiskaveiðu.

Á øllum skipum, ló ikki trolarum, skal 8 tíma hvíldin, sum fiskimenn nú hava rætt til, gerast til skyldu. Skulu hesir 8 tímarnir gera fult gagn, verða teir at vera óslitnir, so sum lítskilað í uppskolinum.

Tað er á saltfiskaskipunum, at túrarnir eru longstir og mest slítandi, tað er á saltfiskaveiðu tað er torførast at manna skipini — serstakliga línuskipini — og tað er á hesum skipum, at gjørligt er at sela reglur um hvíld frá vinnuni, uttan at hetta á nakran hátt kann minka um úrfokum hjá bæði skipi og manning. Tí verður hvíldartíðin fyri fiskimenn á hesum skipum gjørd til skyldu.

1. viðgerð 28. mars og beint í fiskivinnunevndina.

49. Avhending av grundstykkjum til Suðuroyar sjúkrahús

Ár 1966, 25. mars legði løgmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

løgtingslóg um avhending av ávísum grundstykkjum	lagtingslov om afhændelse af visse grundstykker.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað at avhenda matr. nr. 356d, 367c og 369c Froðbiar bygd til Suðuroya sjúkrahús.	Landsstyret bemyndiges til at afhænde matr. nr. 356d, 367c og 369c Froðbiar bygd til Suðuroya sygehus.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi beinan vegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

I samband við byggingina av Suðuroya sjúkrahúsið og við heimild í lóg nr. 293 frá 27. april 1949 «om bemyndigelse for Færøernes landsstyre til ekspropriation af grunde til anlæg af sygehuse i Tverå og Thorshavn» keypti landsstýrið hesi matr.nr.:

356d til støddar 1150m2
367c til støddar 1673m2
369c til støddar 4090 m2

Kommununnar í Suðuroynni býttu síðani keypspeningin sínámillum eftir fólkatalinum.

Umfram nevndu matr.nr. er sjúkrahúsið eigari av matr.nr.375, 376, 693a, 693b, 694a, 695 og 696c Froðbiar bygd.

I samband við keyp av matr. nr. 695 frá Føroya jarðarráð, treytaði ráðið, at hetta matr.nr. verður lagt saman við teimum uppatliggjandi. Henda samanlegging letur seg bert gera um sami eigari er tinglisin.

Suðuroya sjúkrahús er undir lóg fyri Føroyar nr. 76 frá 15. mars 1939 «om sygehuse».

1. viðgerð 29. mars, 2. 1. apríl og 3. viðgerð 15. apríl.

Landsstýrisins uppskot samtykt 20—0.

---

50. Studningur til bryggju í Tórshavn

Ár 1966, 25. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

9. mars 1966 var løgd fram á lingi umsókn frá Tórshavnar býráð um studning til gerð av bryggju á Eystaruvág, og varð umsóknin beind í fíggjarnevndina.

Umsóknin, sum er dagsett 7. mars í ár, er soljóðandi:

Til Føroya løgting!

Seinasta útbygging av nakrum lýðningi av Tórshavnar havn fór fram í árunum 1950—54.

Henda útbygging umfatað 100 m leingjan av eystara bringarði við tilsvarandi afløgubryggju á 7,0 m vatndýpi, ein stuttan bringarðsstubba vestanfyri, umframt o. u. 143 m av afløgubryggju á 8,25 m vatndýpi og oljubrúnna. Henda bygging var finnsiernað á tann hátt, at løgtingsstudningur og statsstudningur, ávikavist 50 og 25%, bert var givin til byggjan av sjálvum bringørðunum, meðan kommunan sjálv, umframt sínt 25% av hesum bar allar útreiðslur til gerð av bryggjum, havnarplássi o. t.

Hóast omanfyri nevnda útbygging gav havnini nummuli meira bryggjupláss og hervið skapti væl betri arbeiðsviðurskifti, vísti tað seg skjótt, at skipaferðslan bæði hvat tal og stødd viðvíkir vaks meira enn

vænlað, soleiðis, at tað skjótt aftur gjørdist ógvuliga trongligt og óarbeiðsligt við bryggjurnar.

Nevnast kann sum dømi um hetta, at í 1954 var havnin vitjað av 4.348 skipum við tilsamans 394.029 NRT., meðan hesi tøl í 1965 vóru vaksin til 5.528 skip við tilsamans 580.834 NRT.

Hetta at ov lítið bryggjupláss er, førir umfram aðrar trupulleikar við sær, at havnin ikki kann vísa teim nógvu strandfaraskipum fast pláss, men má vísa teimum til at liggja her og har eftir sum umstøðurnar eru. Sjálvsagt er helta til miklan ampað fyri bæði strandfaraskipini og ferðafólkið og hevur Tórshavnar havn tí latið gera projekt til leingjan av eystaru bryggju inneftir. Sjálv bryggjan verður, sum hjálagda skitsuprojekt vísir, longd við o.u. 46,0 m og verður haraftrat bygdur ein «pirur» uppá 54,0 m.

Henda útbygging vil, umframt at bøta um viðurskiftini sum heild, gera tað, at havnin kann ávísa øllum strandfaraskipum fast pláss í framtíðini.

Eftir teim gjørdu kostnaðarætlanum vil henda útbygging koma at kosta o. u. 1.700.000,— kr. og skal Tórshavnar býráð tí, vísandi til tað sum omanfyri er framført loyva sær at søkja Føroya løgting um vanligan studning uppá 50% ella kr. 850.000,— til nevndu arbeiði.

Ætlan býráðsins er at lata arbeiðið bjóða út í licitation og fáa tað gjørt í ár, og skal býráðið tí loyva sær at heita á Føroya løgting um at fáa málið avgreitt eftir umstøðunum skjótast gjørligt og vónar tað verður viðgjørt við vanligari vælvild.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at lata umbidna studning, 50% av tí arbeiðið kostar sambært hjálagda skitsuprojekt, tó hægst 50% av kr. 1.700.000.

Studningurin verður útgoldin eftir treytum, sum landsstýrið fyrisetur.

Av tí at umsóknin er innkomin, eftir at viðgerðin av fíggjarlógini var lokin, verður fyrsta ársgjaldið at lata í fíggjarárinum 1967/68.

Studningurin verður goldin í 10 eins stórum ársgjøldum.

Býráðið hevur ikki biðið um veðhald fyri byggilánum.

Fíggjarnevndin setir tí fram einmælt soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um studning til atløgubryggju í Tórshavn.	lagtingslov om tilskud til anlægsbro i Tórshavn.
§ 1.	§ 1.
Úr landskassanum verður veittur Tórshavnar kommunu studn-	Af landskassen ydes Tórshavn kommune tilskud til anlægsbro i

ingur til atløgubryggju á Eystaruvág. Studningurin verður 50% av byggipeninginum, tó hægst 50% av kr. 1.700.000 og verður at rinda við eins stórum ársgjøldum í 10 fylgjandi figgjarár frá figgjarárinum 1967/68 at rokna.

§ 2.

Eingin studningur verður goldin ella settur iveð, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, fyri eini góðkenning av byggiætlanini, eru loknar.

§ 3.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

Eyslaruvåg. Tilskudet andrager 50% af anlægsudgifterne, dog højst 50% af kr. 1.700.000, og udbetales i lige store årlige rater i 10 på hinanden følgende finansår fra finansåret 1967/68 at regne.

§ 2.

Ingen del af tilskudet kan udbetales eller stilles som sikkerhed, førend alle betingelser, landsstyret måtte stille for en godkendelse af projektet, er opfyldt.

§ 3.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

2. viðgerð 14. og 3. viðgerð 22. apríl.

Lógaruppskotið samtykt 27—0.

51. Ábyrgd av láni til Tórshavnar kommunu

Ár 1966, 30. mars legði Niels Winther Poulsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um ábyrgd fyri láni til Tórshavnar kommunu.	lagtingslov om garanti for lån til Tórshavn kommune.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrið verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni úr ríkiskassanum til Tórshavnar kommunu uppá 4.710.000 kr. til vatnverk og ognartøku av økjum til hospitals- og skúlabyggiug.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån af statskassen til Tórshavn kommune på 4.710.000 kr. til vandværk og ekspropriation af arealer til hospitals- og skolebyggeri.
§ 2	§ 2
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Undir samráðingunum um bygging av statshospitalinum og lærarastúlanum átók Tórshavnar kommuna sær at lata grundøkir til hesar byggingar, men treytaði hon sær samstundis, at um torført fór at verða at fáa lán, skuldi landsstýrið ella ríkisstýrið vera kommununi til hjálpar í hesum og eisini útvega kommununi lán til at gera tað vatnverk liðugt, sum farið var undir, tí treyt fyri tí stóru sjúkrahúsbygging yvirhøvur í Tórshavn var, at vatn var í tørvandi mongdum, og at tað var reinsað.

Tað hevur royndst illa at fáa ueyðtarvulig lán, og lungu tíð var ikki hugsandi um at fáa lán úr ríkiskassanum vegna kreditstrammingina. Kommunan hevur tí lagt væl av peningi til av tí tøka peningi, hon hevði, og aftrat tikið stuttfrestað arbeiðslán við tí ársliti, at kommununnar likviditetur er vorðin soleiðis, at nú stendur í botni.

Eftir upplýsingunum frá býráðnum fer vatnverkið ætlandi at

kosta	7.400.000 kr.
og ekspropriasjónin	1.310.000 kr.
tilsamans	8.710.000 kr.

Til vatnverkið hevur kommunan fingið 2 lán úr Kreditforeningen av kommuner í Danmark netto..	4.000.000 kr.
soleiðis at fresta:	4.710.000 kr.

og hevur ríkiskassin nú givið tilsøgn um at lána kommununi hendu pening soleiðis, at 3.400.000 kr. fara til vatnverkið at afturrinda í 25 ár og til vanliga marknaðarrentu, meðan 1.310.000 kr. eru fyri grundøkini. eisini at afturrinda í 25 ár, men til 6½% rentu, og eru bæði lánini til pari kurs.

Kommunan hevur í løtuni føst lán	.....	kr. 7.727.224,55
kassakredit	.....	kr. 1.000.000,00
leysa skuld (kk. o. a.)	.....	kr. 2.623.511,92
		kr. 11.350.736,47

Herav hevur landskassin ábyrgd fyri tilsamans kr. 4.763.806,29 (upprunaliga var ábyrgdin 5.650.000 kr.).

Umframt eru lán hjá havnarverkinum men hesi hvila í sær sjálvum.

Í tí vøkstri Tórshavnar kommuna nú er, hevur hon allan tøkan pening neyðugan fyri at fylgja við vøkstrinum, og er tí neyðugt hjá kommununi at taka lán til tílíkar lleggingar, sum frammanfyri umrøtt. Hon hevur lagt nógv út av likvida peningi sínum, og er nú høvi at fáa hendu pening aftur og at rinda ta leysu skuld, herundir stuttfrestað lán, sum tikin eru sum arbeiðslán.

Ein treylin fyri lánveitingini frá ríkiskassanum er, at landskassin veðheldur fyri lánunum.

1., 2. og 3. viðgerð 1. apríl

Landsstýrisins uppskot samtykt 24 0.

52. Útbygging av havnini í Leirvík

Ár 1966, 31. mars legði Frederik Hansen, løgtingsmaður, fyri tingmenninar í Eysturoyuni soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um útbyggjan av havnini í Leirvík.	lagtingslov om udbygning af havnen i Leirvik.
§ 1.	§ 1.
Úr landskassanum verður veittur studningur til útbyggjan av Leirvíkar havn við 50% av byggipeninginum tó hægst 50% av kr. 3.900.000,— at rinda við eins stórum ársgjøldum í 10 fylgjandi figgjarár frá og við figgjarárinum 1969/70 at rokna.	Af landskassen ydes der tilskud til udbygning af Leirvikar havn med 50% af byggesummen dog højst 50% af kr. 3.900.000,— at udrede med lige store årsrater i 10 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1969/70.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Leirvíkar kommuna hevur við skrivi dagfest 4. mai í fjør til Føroya løgtings søkt um studning til útbyggjan av havnini í Leirvík.

Henda útbyggjan er lýst í einum skitsuprojekti, sum var viðlagt umsóknini, og sum Landsbyggifelagið p/f hevur gjørt og metir at kosta kr. 3.900.000,—.

Vísandi til tað, sum er flutt fram í umsóknini loyva undirritaðu Eysturoyar tingmenn okkum hervið at leggja hetta mál fram, samstundis sum vit seta uppskot um løgtingslóg fram samsvarandi hesum.

1. viðgerð 14. apríl og 9. mai legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Eftir § 1 í uppskotinum skal landskassin til útbyggingar av Leirvíkar havn lata 50% av hægst kr. 3.900.000 í 10 eins stórum ársgjøldum, fyrstu ferð í figgjarárinum 1969/70.

Við í málinum liggur projekt frá Landsbyggifelagnum.

Løgtingsmál nr. 57/1965 var lagt á ting 1. apríl 1966 av J. P. Davidsen

og Fr. Hansen. Undir 1. viðgerð 18. apríl varð málið leint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum skal landskassin lata 3/4 av kr. 500.000 til dýping av bátahylinum í Skopun og 3/4 av 500.000 kr. til leingjan av pierinum í Skálavík.

Eftir uppskotinum skal peningurin verða fingin til vega við láni og landskassans partur skal ikki verða býttur út á fleiri ár, men gjaldast í einum.

Í seinastu løgtingssetu samtykti løgtingið lóg um studning til Skopunnar havn, ið er lýst sum lóg nr. 37 av 28. mai 1965. Eftir hesi lóg skal latast til framhald av havnarbygging í Skopun í mesta lagi 50% av kr. 250.000, men peningur var ikki á fíggjarlógini avsettur til hetta mál, tí hon var samtykt og lýst áðrenn.

Fíggjarnevndin vil undir viðgerðini av eykafíggjarlógini 1965/66 laka henda pening við, og verður tá peningur tøkur til framhaldan av byggingini í Skopun.

Í fíggjarnevndina er eisini vist umsókn frá Fuglafjarðar kommunu um meira studning til havnarbygging. Projekt hesum viðvíkjandi er í Havna- og veganevndini.

Á tingi hevur eisini verið umsókn frá Tvøroyrar kommunu um studning til havnabygging, men er hetta mál í havna- og veganevndini.

Løgtingið hevur í hesi tingsetu latið uppiskoytisstudning til ávisar havnir, har fyrr játtaður studningur ikki rækkur til tær gjørdu ætlanir, og annars til havnabygging, har hetta er ein treyt fyri útbygging av fiska- og sildaídnaða á landi.

Undir hesum kom eisini Fuglafjørður við serligari lóg, har veittur var studningur upp til 50% av 4 milj. kr.

Sum tingmonnum kunnugt, eru tað eisini aðrar kommunur, sum høvdu havt sent tinginum umsóknir um studning, um ikki hesar kommunur høvdu la uppfatan, at ongar játtanir verða veittar fyrrenn núverandi 10-ára ætlan fer úr gildi fíggjarárið 1968/69.

Viðvíkjandi Skálavík skal viðmerkjast, at løgtingið hevur játtað pening til útbygging av bátahyli har.

Meirilutin (Kjartan Mohr, Sámal Petersen, Hanus við Høgadalsá, Knút Wang og Andrias Djurhuus) heldur, at tað er ikki rætt at taka einstakar kommunur burtur úr nú, í eini komandi havnaætlan, men heldur tá at gera eina fullfíggjaða havnaætlan longu nú til avloysing av galdandi havnaætlan og taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar um ríkisins part og annars lata landsverkfræðingsskrivstovuna karma tey innsendu projekt og síðani lata gera projekt fyri tær útbyggingar, har tílík ikki fyriliggur.

Sum er, fer ein partur av útbyggingini av sínáum havnum yvir lend-

ingajáttanir. Beinari hevði verið at gjørt eina áthyggingaraetlan fyri størri havnir og eina fyri smærri havnir, og royndt at fingið hesar seinru undir somu treytir sum fyri stórar havnir, og annars havt lendingarjáttaninar til tað, ið tær upprunaliga vóru ætlaðar til, nevniliga úthyggingar, sum av ymiskum grundum, hvørki kunnu koma undir størri ella smærri havnaúthyggingar.

Vísandi til frammanfyristandandi setir meirilutin fram uppskot um at senda málini til landsstýrið og áleggja ti at gera uppskot til eina nýggja havnaætlan — møguliga eina fyri størri og eina fyri smærri havnir.

UPPSKOT

til samtyktar

Vísandi til tað í álitinum framførda verður landsstýrinum álagt at gera uppskot til nýggja havnaætlan ella havnaætlanir og leggja lógaruppskot hesum viðvíkjandi aftur fyri løgtingið.

Minnilutin (P. M. Dam og Haldor Hansen) setir uppskot um at samtykkja tey upprunaligu uppskotini í báðum málum.

2. viðgerð 10. mai.

Lógaruppskotið fall 9—0.

Broytingaruppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt 20—0.

53. Ymisk kunngerðarmál

Ár 1966, 30. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

1) *Kunngerð uttanríkismálaráðsins frá 30. juni 1965 viðvíkjandi: «Single Convention on Narcotic Drugs, 1961».*

Hesin millumlanda sáttmáli er samtyktur á F.N. fundi í New York 30. mars 1961 og ratificeraður av Danmark 9. mai 1964.

Tað sera tiltrongda millumfólkaliga eftirliti við norkotika, hevur higartil hvílt á ymiskum sáttmálum, sum hesin loysir av. Umsitingin av sáttmálanum er hjá F.N. og ræturmál hoyra undir tann millumfólkaligu dómstól.

Landslæknin heldur tað hava áhuga, at sáttmálin verður galdandi í Føroyum. Landsstýrið mælir til tað sama.

2) *Kunngerðir uttanríkismálaráðsins frá 19. juli 1964, 1. oktober 1953, 28. oktober 1964 og 23. november 1964 viðvíkjandi:*

Landsstýrið mælir eisini til, at hesar ministeriellu kunngerðir verða lýstar at galda í Føroyum.

Lógarnevndin hevur havt málini til viðgerðar og mælir til hesa

Samtykt

Lýstar verða hesar kunngerðir:

1) Bekendtgørelse af 19. juli 1964 af den mellem Verdenssundhedsorganisation (WHO) og den danske regerings afsluttede overenskomst om *rettigheder og immuniteter m.v.*
Denne lov træder i kraft den 1. august 1966 dog således, at de i loven indeholdte bestemmelser først finder anvendelse på det enkelte skib fra det tidspunkt, da det første gang efter lovens ikrafttræden afgår fra færøsk havn eller red, dog senest 6 måneder efter lovens ikrafttræden. I tiden, indtil lovens bestemmelser kan træde i kraft for det enkelte skib, gælder de hidtidige bestemmelser.

2. stk. Samstundis fara úr gildi lóg nr. 50 frá 28. februar 1916, lóg nr. 201 frá 1. april 1919, lóg nr. 73 frá 31. mars 1928, lóg nr. 131 frá 15. mars 1939, løgtingslóg nr. 31 frá 22. oktober 1954, løgtingslóg nr. 6 frá 25. februar 1958, løgtingslóg nr. 57 frá 3. november 1959, løgtingslóg nr. 7 frá 24. mars 1960 og løgtingslóg nr. 47 frá 13. juni 1963.

Stk. 2. Samtidig ophæves lov nr. 50 af 28. februar 1916, lov nr. 201 af 1. april 1919, lov nr. 73 af 31. marts 1928 og lov nr. 131 af 15. marts 1939, lagtingslov nr. 31 af 22. oktober 1954, lagtingslov nr. 6 af 25. februar 1958, lagtingslov nr. 57 af 3. november 1959, lagtingslov nr. 7 af 24. marts 1960 og lagtingslov nr. 47 af 13. juni 1963.

§ 36.

Sjóvinnubrøv, fiugin áðrenn henda lóg fær gildi, heimila innihavarum sama rætt sum higartil, eins og lógin ger onga broyting í givnum undantaksloyvum.

§ 36.

De forinden ikrafttrædelsen af nærværende lov erhvervede sønæringsbeviser hjemler deres indehavere samme ret som hidtil, ligesom loven ikke gør ændring i meddelte dispensationer.

2. stk. Landsstýrinum verður heimlað at seta treytir, so innihavarar av sjóvinnubrøvum eftir 1. stk. fáa sama rætt sum innihav-

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte vilkår, hvorunder indehavere af sønæringsbeviser som de i det foregående stykke

arar av vinnubrøvum eftir hesi lóg.

3. stk. Sjóvinnubrøv fingin eftir sjóvinnulógini frá 28. februar 1916 við seinri broytingum og mannningarlógini frá 22. oktober 1954 við seinri broytingum verða hildin at svara til tey eftir hesi lóg tilskilnaðu, sum her sagt frá:

omhandlede opnår adgang til at erhverve lige ret med indehavere af de i nærværende lov omhandlede beviser.

Stk. 3. De i henhold til sønæringsloven af 28. februar 1916 med senere ændringer og hemandingsloven af 22. oktober 1954 med senere ændringer erhvervede sønæringsbeviser anses at svare til de i nærværende lov omhandlede, som nedenfor angivet:

Vinnubrøv sum	sama sum	Bevis som	svarer til
Heimaskipari	helmaskipari	Kystskipper	kystskipper
Bestimaður	bestimaður	Bedstemand	bedstemand
Fiskiskipari á 1. stigi	skipari	Fiskeskipper af 1. grad	skipper
Skipari	skipari	Skipper	skipper
Skipsførari	skipsførari á 1. stigi	Skibsfører	skibsfører af 1. grad
Stýrimaður	stýrimaður á 1. stigi	Styrmand	styrmand af 1. grad
Maskinpassari	skipsmaskinistur	Maskinpasser	skibsmaskinist
Motorpassari	skipsmaskinistur	Motorpasser	skibsmaskinist
Undirmeistari	skipsmaskinmeistari á 2. stigi	Undermester	skibsmaskinmester af 2. grad
Maskinmeistari á 2. stigi	skipsmaskinmeistari á 1. stigi	Maskinmester af 2. klasse	skibsmaskinmester af 1. grad
Maskinmeistari á 1. stigi	skipsmaskinstjóri	Maskinmester af 1. klasse	skibsmaskinchef

4. stk. Vinnubrev sum motorpassari gevur ikki rætt at inna tænastu á dampskipi undir viðurskiftum, har vinnubrev sum skipsmaskinistur krevst.

§ 37.

Til árslok 1970 verða royndir eftir lógini um «navigationsundervisningen» frá 28. februar 1916 við seinni broytingum ella lóg frá 19. mars 1930 um «eksaminer for skibsmaskinister m.m.» javnmettar við royndir, sum eftir hesi lóg verða kravdar fyri at fáa sjóvinnubrev, sum her sagt frá:

Stk. 4. Bevis som motorpasser giver ikke ret til at gøre tjeneste i dampskib under forhold, hvor bevis som skibsmaskinist kræves.

§ 37.

Indtil udgangen af året 1970 ligestilles eksaminer aflagt i henhold til lov om navigationsundervisningen af 28. februar 1916 med senere ændringer efter til lov af 19. marts 1930 om eksaminer for skibsmaskinister m.m. med de eksaminer, der i henhold til nærværende lov kræves til erhvervelse af del enkelte sønæringsbevis, som nedenfor angivet:

	verður javnmett við:		ligestilles med:
Heimaskiparaproyndin	heimaskiparaproynd	Kystskipperprøven	kystskippereksamen
Stýrimannsproyndin	stýrimannsproynd	Styrmandseksamen	styrmandseksamen
Skipsførarayndin	skipsførarayndin	Skibsførereksamen	skibsførereksamen
Maskinpassaraproyndin	maskinistproynd	Maskinpasserprøven	maskinisteksamen
Motorpassaraproyndin	maskinistproynd	Motorpasserprøven	maskinisteksamen
Vanlig maskinistproynd	maskinmeistaraproynd	Den almindelige maskinisteksamen	maskinmesterksamen
Størra maskinistproyndin	Størru maskinmeistaraproynd	Den udvidede maskinisteksamen	udvidet maskinmesterksamen

2. stk. Hann, ið hevur staðið motorpassaraproynd, kann bert fáa vinnubrev sum skipsmaskinistur,

Stk. 2. Den der har bestået motorpasserprøven, vil dog kun kunne erhverve bevis som skibsma-

um hann kann prógva, at hann hevur verið í arbeiði í minsta lagi 24 mánaðir á smiðju- ella maskinverkstaði og herafturat hevur arbeitt við motori í minsta lagi 3 mánaðir. Vinnubræv eftir hesum, sum skipsmaskinistur gevur bert rætt at inna tænastu á motorskipi.

skinist, såfremt han godtgør at have arbejdet mindst 24 måneder på et smede- eller maskinværksted samt at have deltaget i mindst 3 måneder i betjening af motor. Et i henhold til denne bestemmelse erhvervet bevis som skibsmaskinist giver alene ret til at gøre tjeneste i motorskib.

Viðmerkingar:

Galdandi reglur um manning av føroyskum skipum eru lógfeslar í løgtingslóg nr. 31 frá 22. oktober 1951 við seinni broytingum. Har verður fyriskipað, nær føruri skal vera á skipi og hvat sjóvinnubræv hesin skal hava, treytirnar fyri at fáa lað, talið av stýrimonnum og sjóvinnubrøv teirra. Eisini eru reglur fyri maskinmanningina, men verður tó eftir gr. 16 skilað til, at soleingi maskinlæran er ikki yvirtikið sermal, eru viðkomandi reglur í ríkislóggávu framvegis í gildi og verður víst til lóg «om sømæring» frá 28. februar 1916 við broytingum. Umfram eru generellar reglur fyri doksmanning og hjálparmanning í maskinu, meðan sjálvt talið ikki er tilskilað, men verður fyriskipað eftir sáttmála ella avgerð og undir ábyrgd skiparans.

Reglurnar eru í mongum førum ógreiðar og ófullfiggjaðar og tí tungar at fyrisita. Hesi viðurskifti gera seg serliga galdandi fyri maskinyvirmenn, síðani sjóvinnulógin frá 1916 bert tekur tær maskinroyndirnar við, sum lært var til áðrenn 1958 og ikki tær eftir nógaldandi lóggávu. Afturat hesum kemur, at í summum førum eru reglurnar strangari enn eftir dansskari lóg t.d. fyri maskinmanningina á farmaskipum, til hindurs í kappingarføri nýggja farmaskipaflotans.

Við tí endamáli at tryggja mannalív á sjónum og at fáa greiðari manningarreglur at ganga eftir, hevur landsstýrið samráðst við Føroya Maskinistfelag, Føroya Motorpassarafelag, Føroya Reiðarafelag, Føroya skipara- og Navigatørfelag og við ymsar eigarar av farmaskipum, við í samráðingunum hava fyristøðunemnir á Føroya Maskinskúla og Føroya Sjómansskúla eisini verið. Meðan semja varð millum ávarandi felog um tann partin av manningini, har læra í navigatión krevst, varð ikki semja í øllum førum viðvíkjandi maskinmanningini; hesar reglur eru, har semja ikki var, settar upp í samráð við maskinskúlan. Síðani nógvir føroyingar sigla við fremmandum skipum, serliga danskum, er tað fyri hesar av týðningi, at føroyskar ásetanir ikki víkja ov mikið frá, danska manningarlógin er tí nýtt sum fyrimynd, lóg nr. 208 frá 7. juni 1958 við broytingum.

Meðan navigatiónslæran er yvirtikið føroyskt sermál, er maskinlæran tað ikki, henda er tí enn undir ríkisstýrinum.

Tær royndir, sum eru treytirnar fyri at fáa tey ymsu sjóvinnubrøvini, eru fyri navigatiónina skiparar í løgtingslóg nr. 8 frá 19. mars 1951 um sjómansskúla og sjómanslæru við broytingum og fyri maskinlæruna lóg nr. 209 frá 7. juni 1958 «om eksaminer for skibsmaskinmestre m.v.» Afturat teimum royndum, sum eru tilskilaðar eftir seinast nevndu lóg, verður eftir avtalu við ríkisstýrið á Føroya Maskinskúla lært og roynd hildin til serliga føroyska maskinroynd. Læran til hesa er lagað serliga eftir teimum krøvum, tey nýggju línuskipini við rettiligari stórari høvnósmaskinu og heldur viðgongdum hjálpimaskinum seta maskinmanningini til køna og forsvarliga røkt. Ætlanin er, at henda royndin skal geva rætt at loysa sjóvinnubrævi sum maskinmeistari á so at siga øllum fiskiskipum á øllum leiðum og tó meira avmarkaðan rætt á farma- og ferðamannaskipum.

Síðani trot hevur verið á mannum við tørvandi sjóvinnubrævi, er skrivað mongd av serloyvum. Viðvíkjandi navigatiónini skuldi hetta ikki nær til veri so neyðugt longur, tveir eru sjómansskúlarnir, har lært verður á øllum navigatiónsstigum, og talið av lesandi er rættiliga stórt so stórt, at ikki so lítil partur fer í fremmanda vinnu. Viðvíkjandi maskinmonnum er støðan ein heilt onnur. Meðan Føroya Sjómansskúli til nýggja lógin um maskinlæruna kom í gildi í 1958, lærdi til «almindelig maskinisteksamen», maskinpassararoynd og motorpassararoynd hevur ongin undirvising verið síðani, fyrenn Føroya Maskinskúli á vári 1965 fer undir at undirvisa til maskinistroynd og føroyska maskinroynd. Á hesum umráði mugu tí serloyvir gevast, ið hvussu er tey fyrstu árini.

Aðalreglan í fyriliggjandi uppskoti er eftir § 3, at á øllum førum skal vera førari og hinafturat um borð tann manning, ið neyðug er at tryggja mannalív á sjónum. Í §§ 4 og 5 er nærri tilskilað, hvørji minstakrøvini eru eftir hesi reglu sett upp í yvirlitinum á tann hátt, at tá ein veit bruttotonsatal, hestakraft og siglingarleið, frøngongur hvørji sjóvinnubrøv yvirmenn skulu hava, og hvussu nógvir teir skulu vera. §§ 6—9 tilskila talið fyri aðra manning, radioavgreiðslumenn, kokkar, deksmanning, kyndarar og motormenn. Sjóvinnubrøvini eru umrødd í §§ 10—28. Í samráðingunum var borið uppá mál at broyta lærunna soleiðis, at aðrar royndir enn lær, sum eru, kunnu takast. Síðani hetta er ein spurningur fyri seg, er í uppskotinum bert roknað við galdandi royndum. Almennuligar reglur eru í §§ 29—31 m.a. um, hvør skrivar sjóvinnubrøvini, undir hvørjum treytum sjóvinnubrøv kann verða tikið aftur, hvussu skipsførarin skal fyrihalda seg, um hann missir nakran av manningini í havn úr Føroyum og frávik frá manningarreglunum bæði fyri skip og fyri ávísan persón. §§ 35—37 innihalda fyribils fyriskipanir, tær lógin fer gildi, at sjóvinnubrøv fingin áðrenn geva sama rætt sum higartil, at hon

ongar broytingar ger í givnum undantaksloyvum og javnmeting millum eldri vinnubrøv og vinnubrøv eftir lógini.

1. viðgerð 15. april og 11. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Lógarnevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja lógaruppskotið við einstøkum smábroytingum, sum bera við sær, at manningarkrøvini verða eitt sindur linkað, og at krøvini til aldur og siglingartíð hjá skiparum og hjá skipsførarum verða minni:

a d § 2:
Pkt. 8 fær hetta orðaljóð:
«Norðhavssigling»: Heimasigling og sigling á Atlantshavinum norðanvert 30° n.br.
Dansk tekst.: «Nordhavssejlads»: Kystfart samt fart i Atlanterhavet nord for 30° n.br.

a d § 4:
Orðið «kystskipper» kemur staðin fyri «hjemmeskipper» í øllum talvum.
I talvu A fara tær ovastu rammurnar í øllum teigum burtur.
I talvu B fellur tekstin í 2. teigi, niðastu rammu, burtur. eftir orðini «stýrimaður á 2. stigi» í 3. teigi, næstniðastu rammu, kemur «bestmaður» (dansk tekst: «bedstemand»), og orðini «sunnanfyri 35° n.br. tó 2 stýrimenn á 2. stigi» falla burtur í báðum tekstum í 4. teigi, næstovastu rammu.
I talvu C verða fylgjandi tøl í fyrsta teigi broytt á hendu hátt:
næstovasta ramma: 50 verður 100,
3. ovasta ramma:: 50 verður 100, og 150 verður 500,
3. niðasta ramma: 150 verður 500, og 500 verður 800,
2. niðasta ramma: 500 verður 800.
Nýggj ramma kemur:
Norðhavssigling við 500-800 t. skipum við sama tekst sum undir óskerdari sigling.

a d § 5:

Í talvunum A og B verður í fyrsta teigi 500 broytt til 600 og 800 broytt til 1000, og yvirskriftin í 3. teigi verður: Heimasigling og norðhavssigling (Kystfart og nordhavssejlads).

Í talvu B kemur í 3. teigi, næstovasta rammu, orðið «maskinhjálparmaður við sveinabrævi» (maskinassistent med svendebrev) afturat, í 4. teigi, ovastu rammu, «2 skipsmaskinistar» «skipsmaskinistur», og afturat kemur maskinhjálparmaður við sveinabrævi (skibsmaskinist, maskinassistent med svendebrev) og í 4. teigi, næstovastu rammu, verður «skipsmaskinistur» «maskinhjálparmaður við sveinabrævi» (maskinassistent med svendebrev).

Í talvu C, 1. teigi, verður talið «400» «600».

Í talvu C, 2. teigi, næstovastu rammu, verða orðini «2 skipsmaskinmeistarar á 3. stigi» «skipsmaskinmeistari», «maskinhjálparmaður við sveinabrævi».

Dansk tekst: «Skibsmaskinmester», «maskinassistent med svendebrev».

a d § 9:

1 a) fellur seinasta punktum burtur í báðum tekstum, talið «500» verður «600».

Í b) fella 1) og 2) burtur í báðum tekstum, talmerkingin «3)» fellur burtur.

a d § 14 b: talið 18 verður 12.
a d § 14 d: talið 23 verður 21.
a d § 17 b 1): talið 24 verður 12, og 12 verður 6.
a d § 17 b 2): talið 60 verður 36, og 36 verður 18.
a d § 17 d: talið 25 verður 23.
a d § 28: Seinna punktum fellur niður á báðum tekstum.
a d § 29: Greinin fellur niður.
§§ 29 — 37 verða §§ 28 — 36.

2. og 3. viðgerð 12. mai.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá nevndini:

Ad § 5, talvu A — Fiskiskip — bls. 6 í lógaruppskotinum
Í fyrsta puntinum verður «600» broytt til «500» og í øðrum puntinum verða «600» broytt til «500» og «1000» til «800» í háðum tekstunum.

Broytingaruppskotið (3. viðg.) samtykt 20—0.
Lógaruppskot sum broytt við 2. og 3. viðgerð samtykt 21—0.

---

57. Eykastudningur til havnina í Skopun og Skálavík

Ár 1966, 1. april legði J. P. Davidsen løgtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um eykastudning til havnabygging í Skopun og leingjan av bryggjuni í Skálavík.

§ 1.

Til dýpan av bátahylinum í Skopun og «regulering» av innsiglingini til hylin verður úr landskassanum játtað 3/4 av kr. 500.000, og til leingjan av «pierinum» í Skálavík 3/4 av kr. 500.000.

Um neyðugt verður landsstýrið heimilað at taka lán til rindan av besi peningahædd.

§ 1.

Til uddybning av bådehavnen i Skopen og regulering af indsejlingen til samme bevilges af landskassen 3/4 af kr. 500.000, og til forlængelse af pieren i Skålevig 3/4 af kr. 500.000.

Landsstyret bemyndiges til, om nødvendigt, at optage lån til betaling af beløbet.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerking:

Siglingin uppá Sandoynna um Skopun fer nú fram við so smáum føruan vegna havnin har er ov grunn at taka móti størri skipum, at skipstilsýnið hevur talað at og kraft, at ferðafólkatalið við bátunum, ið sigla, ikki verður hægri enn loyvt í lógini. Hetta hevur borið við sær tnupulleikar, sum vaksa sum fólkið og ferðahugurin økist.

Heldur ikki í Skálavík kann størri skip eun Ritan leggja at. Tað er tí í hægsta stig neyðugt, at havnin í Skopun verður gjørd djúpari og bryggjusporin í Skálavík longdur út á djúpari sjógv.

Hetta arbeiðið er lívsneyðugt at verða gjørt beinanvegin fyri at kunna nýta eitt størri far enn Rituna. Men strandfarasljórin sigur, at tað ikki ber til at data teknin gera til nýtt far og útbjóða tað, fyrr enn vissa er fingin fyri, at skipið kann verða brúkt, altso hesi arbeiðini gjørd.

1. viðgerð 18. april og 9. mai legði figgjarnevndin fram álit, ið er endurgivið undir tingmáli nr. 52: Útbygging av havnini í Leirvík.

2. viðgerð 10. mai.

§ 1 í tingmáli nr. 57 var sett undir atkvøðu við navnakalli:

Ja atkvøddu: J. Lindenskov, J. H. Danbjørg, Gunnar Poulsen, J. P. Davidsen, O. Schrøter, Fr. Hansen, E. Patursson, Poul J. Olsen, Johan Simonsen og Haldor Hansen.

Atkvøddu ikki: K. Wang, P. Petersen, P. Christiansen, M. Johannesen, Niels Holm Jacobsen, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, R. Thomsen, Kj. Mohr, Hans Lützen, H. J. Ellingsgaard, S. Joensen, H. v. Høgadalsá og Sámal Petersen.

Burtur: J. Fr. Øregaard, H. Iversen og V. Nielsen.

Uppskotið fall 10 0.

58. Almennur partapeningur til stovnsetan av virkjum

Ár 1966, 19. apríl legði P. M. Dam løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg um heimild til landsstýrið og kommunurnar at seta partapening í virkir.

§ 1.

Landsstýrið verður heimilað at seta partapening í virki sum hjálp til stovnseting av teimum.

Hesin partapeningur kann verða goldin úr landskassanum av møguligum rakstraravlopi ella við lántøku.

§ 2

Við samma endamáli sum í § 1 nevnt verður kommunum heimilað at seta partapening í arbeiðsskapandi virkir, ið lørvur er á í avvarðandi kommunu fyri at basa arbeiðsloysi, ið ger, at fólk í stórum tali má rýma av plássinum fyri at seta búgv í útheiminum ella aðrastaðni, har ið arbeiði og lívsuppihaldandi innløgur eru at vinna.

Hevur avvarandi kommuna ikki tøkan pening til hetta endamál, er hon heimilað at taka lán.

§ 3.

Um avvarandi kommuna ikki kann fáa tey undir § 2 nevndu lán uttan landskassans veðhald, er landsstýrið heimilað at geva hetta veðhald.

løgtingslov om hjemmel til landsstyret og kommunerne at tegne akitekapital i vinksomheder.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges at tegne aktiekapital i virksomheder som hjælp til etablering af disse.

Aktiekapitalen kan afholdes af landskassen af eventuelt driftsoverskud eller med optagelse af lån.

§ 2

Med samme formål som i § 1 nævnt bemyndiges kommunerne at tegne aktiekapital i virksomheder, som er tiltrængt i vedkommende kommune, for at bekæmpe arbejdsløshed, der forårsager, at folk i stort tal flytter fra sin hjembygd til udlandet eller andet sted, hvor der er beskæftigelse og indtægtsmuligheder.

Har vedkommende kommune ikke disponibel kapital til dette formål, er den bemyndiget til at optage lån.

§ 3.

Kan vedkommende kommune ikke få de i § 2 nævnte lån uden landskassens garanti, bemyndiges landsstyret at garantere.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 4.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Mong stórpláss og at kalla øll smáplássini liggja illa fyri við arbeiði. Her eru bara tvinnir kostir í at velja. Annaðhvørt er land at flýggja ella at fáa sett arbeiðsskapandi virki á stovn.

Har, ið privatur peningur er til stoðis og hugur hjá privatum monnum og felagum at seta virkir á stovn, javna tey eingu viðurskiftini seg, so tað verður møguligt at liva í heimbygdini. Men har ið bæði peningur og kanska eisini dirvi til verka trýtur hjá teimum, ið vanliga hava kosið sær tað í lívinum at fáast við arbeiðsskapandi virki, eru einastu ráðini, at hitt almenna tekur sær um reiggj og er fúst at vera við munandi partapeningi, tá ið maður ella menn og samtøkur av virkishugaðum, sum ikki hava nóg nógvan pening at uppfylla tær vanligu treytirnar fyri at fáa lán frá lánistovnum her á landi sum niðri í Danmark.

Tað er í hesum tilfelli, at frammanfyri standandi uppskot skal hjálpa teimum virkisfúsu monnum og kvinnum, sum sita fyri ti almenna og skylda at gera tað, ið møguligt er fyri at gera korini á plássum teirra livilig, so tey kunnu koma undan at noyðast at fara av plássinum út av landinum fyri at vinna sær til lívsins uppihald.

Undir hugtakinum «tað almenna» falla bæði løgting og kommunur.

1. viðgerð 20. apríl og 9. mai legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Eftir § 1 í uppskotinum skal landsstýrinum verða heimilt at seta partapening í virki og eftir § 2 kunnu kommunur seta partapening í virki og og uttan løgtingssamtykt fáa veðhald fyri lánum.

Fíggjarnevndin hevur, eftir at hava viðgjørt málið, býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Kjartan Mohr, Sámal Petersen, Hanus við Høgadalsá, Knút Wang og Andrias Djurhuus) setir einki uppskot fram.

Meirilutin heldur, at tað er løgtingið, sum í hvørjum einstøkum føri eigur at taka avgerð um at seta partapening í virki, og løgtingið hevur altíð verið lagaligt í slíkum førum, tá tílík hjálp hevur verið neyðug viðvíkjandi arbeiðsskapandi virkjum.

Tað má eisini haldast at vera ov leyst, at tílíkur partapeningur skal

gjaldast av avlopi landskassans ella við lánum. Tilík ílegging má í hvørjum einstøkum føri tilpassast løgtingsins figgjarlóg og íleggingarætlanum annars. Heldur ikki er í uppskotinum nakað mark fyri, hvussu nógvur peningur kann nýtast í hvørjum einstøkum føri ella tilsamans fyri hvørt figgjarár.

Kommunur hava, sum er loyvi, um stýrini samtykkja tað, at seta pening í virki, og har løgtingsvedhald er neyðugt, má tað vera løgtingið, sum samtykkir tað sum higartil.

Meirilutin er í hvørjum einstøkum føri fyri at styðja, har tað er neyðugt og forsvarligt.

Minnilutin (P. M. Dam og J. Fr. Øregaard) mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 10. mai.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 6—0.

---

59. Útróðrarstudningur (fluttningur)

Ár 1966, 21. apríl legði P. M. Dam løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg um studning til flutning av útróðrafiski.

§ 1.

Úr landskassanum av kassans avlopi ella við láni, sum landsstýrið verður heimilað at taka, verður veitt útróðramonnum á bygd ein studningur pr kilo av avreiddum fiski, sum svarar til

lagtingslov om tilskud til transportudgifter vedr. hjemmefiskeri.

§ 1.

Af landskassens overskud eller med lån, som landsstyret bemyndiges at optage, ydes hjemmefiskere et tilskud pr. kg. af indhandlet fisk, som svarer til transportudgifterne fra det sted båd-

flutningsgjaldið frá útróðrarplássinum til avskipingarhavnina.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

fiskeriet finder sted til afskibningshavnen.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað er ikki tvírætt, at útróðrarmaðurin á bygd eigur at fáa sama fiskapris sum útróðrarmaðurin á teimum stóru plássunum við teimum størri føruum og í mongum lutum betri róðralíkindunum. Fyri at halda fólkinum á heimstaði sínum, tí tað fólkaliga og landshúsarhaldsliga hevur stóran týðning, er tað neyðugt at gera tað so vinnuligt, høggligt og handugt at liva í bygd sini, at fyrimunirnir fyri lann einstaka at flyta til stórplássini skulu verða minst møguligir. Uppskotið um eykastudning til útróðramennirnar á bygd, so teir fáa sama fiskaprísin sum menn á stórplássunum, miðar ímóti hesum rettvísa máli.

1. viðgerð 26. april og 10. mai legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Meirilutin (Niels Holm Jacobsen, Frederik Hansen, Johan Simonsen og Leon Joensen) er av teirri áskoðan, at fyrst má dentur leggjast á at útvega flest møguligum bygdum so góðan og rationellan møguleika sum gjørligt til at taka ímóti fiski, soleiðis at mest møguligt arbeiði kann fáast á staðnum, har sum fiskurin kemur á land.

Meirilutin vísir til løgtingslóg um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirki frá 25. april 1960 og tað í seinastu tingsetu samtyktu lóg um veðhald fyri smærri idnaðarvirkir.

Vísandi til tað, sum er ført fram, er møguleiki fyri at skapa smærri kulda- og frystivirkir á teimum plásstum, sum annars einki er frammanundan.

Meirilutin kann vísa á, at á Eiði er bygt eitt flakavirki, og hevur avhjálpt eimum stórum øki, sum annars einki var frammanundan.

Í Skopun eru menn eisini farnir at byggja eitt virki, og í Nesi í Hvalba er ein frystigoymsla væl á veg.

Í Vági eru menn eisini farnir at stíla fyri at fáa bygt eitt flakavirki.

Meirilutin heldur, at tað er lann rætti vegurin at ganga at stuðla til

at fáa virkir upp, sum ikki bara geva møguleika fyri betur prisi fyri fisk, men eisini skapa arbeiði, har sum eingi arbeiði er.

Meirilutin setur so statt eingi uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Poul J. Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 11. mai.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 7—0.

---

60. Agnstudningur til línufiskiskap

Ár 1966, 19. apríl legði P. M. Dam løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t
til

løgtingslóg um angstudning til línufiskiskap.	lagtingslov om agntilskud til langlinefiskeri.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrið verður heimilað til úr landskassanum, um hann hevur rakstraravlop, ella við løgtingsláni, sum landsstýrið verður heimlað at taka, at rinda línuskipum til rakstrarlætta ein studning, ið svarar til 35 % av agnútreiðslun-	Landsstyret bemyndiges til af landskassen, om der er driftsoverskud, ellers med lagtingslån, som landsstyret bemyndiges til at optage, at betale lineskibe et driftsunderskud, der svarer til 33 % af agnudgifterne, om skibet har

um, um skipið hevur rakstrarhall við vanligum avskrivingum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

driftsunderskud med sædvanlige afskrivninger.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Línufiskiskapurin er sum kunnugt ein hin dýrasti fiskiskapur, sum er. Men hann verður munandi deivin av okkara fiskimonnum. Hann eins og snøris- og snellufiskiskapurin er neyðugur fyri at fáa fyrstaflokks klipp- og saltfisk. Ein stórur táttur í útreiðslunum er agukeypið. Mong skipini hava ilt við at bera seg. Viðvikjandi agninum liggur á sama hátt við teirri ovurdýru rentuni. Ein lætti her er ikki bara góður hjá skipi og manning at fáa, men hann er neyðugur fyri at sleppa undan hjá honum, sum er fyri óhappi og ringum fiskiskapi. Uppskotið miðar ímóti at geva henda lætta, ið kemur fiskimanninum líka vel til hjálpar sum skipacigaranum. Og skipini geva tessverri manger ferðir so lítið til fiskimannin, at hann lítlan og ongan hug hevur at halda fram við skipinum til línufiskiskaps, ið er ein hin strævnasti fiskiskapur, sum okkara fiskimenn fáast við.

1. viðgerð 21. apríl og 9. mai legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Meirilutin (Niels Holm Jacobsen, Frederik Hansen og Johan Simonsen) vísir fyrst og fremst á teir møguleikar, sum eru skaptir til at veiða sild í stórum nøgdum við kraftblokki, helst nú ið sildin stendur so nær við oyggjarnar, eisini eru betri møguleikar at goyma sild, nú stór frystivirkir verða reist og kann nevnast tað stóra virki, sum er komið í Klakksvík, eisini á Tvøroyri er í umbúnað at byggja eitt nýtt flaka- og frystivirki, so hervið skuldi verið betri møguleikar at fingið bíligari agn.

Útlitið fyri at fiskaprísurin verður ikki verri í ár enn í farna ári, skuldi gjørt, at rentabiliteturin skuldi verið nógv betri nú enn fyri 3 árum síðani, tá var besti prísur 90 pund fyri fousið, har tað nú er 145 pund.

Vist verður eisini til, at seinastu árini eru ymisk gjøld frá skipaflotanum til landskassan avtikin, sum verkaragjald og útflutningsgjald og

avgjøld til lønjavningargrunnin fyri saltfisk landaðan í Føroyum eru avtikin.

Somuleiðis eru innflutningsgjøld á útgerð til fiskiskip avtikin.

Meirilutin setir tí einki uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Poul J. Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

Minnilutin (Leon Joensen) ger hesar viðmerkingar):

Fiskiskapurin hevur tíbetur í seinastuni verið reiðiliga góður, meðan hann bert fyri fáum árum síðani var soleiðis, at tey dýru nýggju fiskiskipini høvdu ilt við at bera seg. At viðurskiftini eru batnaði sæst best av, at tað í seinastuni ikki eru komnar áheitanir frá fiskivinnuni til ta almenna um stuðul.

Um viðurskiftini skuldu broytt seg, so tað gerst neyðugt at styðja vinnuna frá ti almenna, so vil sambandsflokkurin altíð verða fúsur at koma hesari vinnu til hjálpar. Sjálvt um nøkur av gjøldunum hava ligið á fiskivinnuni, nú eru avtikin, so hvíla enn gjøld á hesi vinnu, og heldur sambandsflokkurin, at betri vegurin er at lætta vinnuna fyri øll gjøld, um tað skuldi gjørst neyðugt, áðrenn gingið verður studningsvegin, og sambandsflokkurin er fúsur at taka spurningin upp um viðurskiftini skuldu broytt seg og áheitanir komið frá fiskivinnuni til tað almenna.

2. viðgerð 10. mai.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 5—0.

61. Rentustudningur

Ár 1966, 19. apríl legði P. M. Dam løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um rentustudning til nýggj fiskiskip.

§ 1.
Landsstýrið verður heimilað at veita ánarum av nýggjum skipum, sum hava rakstrarhall, ein rentustudning, ið svarar til munin millum 3 % og la renta, sum verður goldin av lánum til ileggingar og rakstur skipinum viðvíkjandi. Í rakstrinum verður roknað við teimum lógligu avskrivingunum.

§ 2.
Peningurin verður at rinda av rakstraravlopi landskassans ella við láni, sum landsstýrið verður heimilað at taka.

§ 3.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om rentetilskud til nye fiskeskibe.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til at yde ejere af nye fiskeskibe, der har driftsunderskud, rentetilskud svarer til forskellen mellem mellem 3% og den rente, som betales vedrørende skibets financiering og drift.

I driftsregnskabet regnes med de lovlige afskrivninger.

§ 2.
Tilskudet betales af landskassens driftsoverskud eller med lån, som landsstyret bemyndiges til at optage.

§ 3.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Hitt sterkast møguliga ávarp til fiskimenn og allar virkislugaðar kreftir er gingið og gongur frá tí almenna um at fara undir nýggjar driftir, tí tílíkar er eingki minni enn ein treyt fyri, at samfelag okkara kann halda fram.

Ein hópur av monnum og sanntøkum eru farin undir nýggjar driftir. Men tað hevur ikki verið teimum nøkur lett uppgáva. Skipini hava verið ov dýr. Rentan hevur verið og er hægri, enn menn vita um. Ofta hevur óhapp rakt. Tað sleppst ikki undan.

Men alt saman um tíkið hevur gjørt driftina ov tunga. Hann og felog

hava mangan tross hin besta vilja, ikki kunna borið boðini heim, men eru farin av knóranum.

1. viðgerð 21. apríl og 9. mai legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ALIT

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilutu og tveir minnilutar.

Meirilutin (Niels Holm Jacobsen, Frederik Hansen og Johan Simonsen) vísir á, at í uppskotinum verður sagt, at studningurin skal veitast av yvirskotinum ella við lántøku, men sigur einki um, hvussu lánið skal rindast aftur. Figgjarlógin er samtykt og eftir tí, sum fyriliggur, hava umboðsmenn fyri javnaðarflokkin, sum eru í figgjarnevndini einki uppskot havt um, hvussu hesi lán skulu rindast aftur.

Undir hesum landsstýri hevur áður verið sett fram uppskot um at hjálpa skipum, sum vóru komin illa fyri eins og landsstýrið við serligari skipan hevur hjálpt øðrum skipum, sum tey ið keypt vóru úr Eystur-Týsklandi, við fullari undirtøku frá figgjarnevndini.

Meirilutin ivast ikki í, at sama vil verða gjørt í framtíðini, um skipaeigarar einstakir sum samtøkur koma illa fyri av ávum, viðkomandi ikki sjálvir eru sekir í, utan at meirilutin hervið heldur verða neyðugt at samtykkja lóg um generellan rentustudning.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum inniber eisini bara møguleika fyri at veita studning.

Meirilutin setir tí einki uppskot fram í hesi syftu.

Minnilutin (P. J. Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

Minnilutin (Leon Joensen) vísir til sínar viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 60/1965: Agnstudningur til línufiskiskap.

2. viðgerð 9. maí.

Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall 7—0.

62. Ábyrgd av láni til Klakksvíkar kommunu til vatn

Ár 1966, 15. apríl legði Niels Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni 500.000 kr. til Klakksvíkar kommunu til vatnveiting.	lagtingslov om garanti for lån 500.000 kr. til Klaksvikar kommune til vandforsyning.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp í 500.000 kr. fyri Klakksvíkar kommunu til vatnveiting.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegna at garantere for lån indtil 500.000 kr. til Klaksvikar kommune til vandforsyning.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 60/1963 viðgjørdi løgtingið umsókn frá Klaksvíkar kommunu um landskassaábyrgd fyri láni 1 mill. kr. til vatnveiting.

Umsóknin varð samtykt og kunngjørd í løgtingslóg nr. 30 frá 29. apríl 1964.

Í skrivi 25. oktober 1965 sigur kommunan frá, at veitingin fer at kosta um 1,5 mill. kr., og at Føroya banki hevur játtað lán uppá 500.000 kr. aftrat, men krevur landskassaábyrgd. Kommunan søkir tí um, at landskassin veðheldur fyri hesum láni.

Kommunan varð biðin um at greiða nærri frá málinum og senda nýggja kostnaðarætlan.

Hetta er gjørt í skrivi 18. marts 1966 frá landsbyggifelagnum soleiðis:

«*Viðvíkjandi vatnveiting í Klaksvík.*

Í skrivi frá Føroya landsstýri til kommununa dagfest 2. november 1965 verður kommunan biðin um at greiða nærri frá, hví ynskt verður

at fáa landskassaábyrgd fyri meirláni í P/f Føroya Banka uppá ½ mill. kr. til nevnda arbeiði.

Kommunan hevur sent okkum avril av nevnda skrivi og biður okkum svara uppá spurningarnar í skriviunum, har biðið verður um nýggja kostnaðarætlan og at greiða meiri frá, hvussu til ber, at arbeiðið verður so nógv dýrari.

Orsøkirnar til, at brúk verður fyri meiri peningi til arbeiði, eru,

1. at atkomuvegurin longd 260 m, ið nú verður gjørdur úr Uppsølum og niðan til har goymslubrunnarnir skulu standa, ikki varð roknaður uppí fyrstu kostnaðarætlanina,
2. at útreiðslur til elektricitetslinjur til ljós og megi við brunnarnar ikki heldur var við í fyrstu ætlanini,
3. at goymslubrunnarnir verða settir hægri fyri at fáa nóg mikið av vatntrýsti til hægstu byggiøkini, ið kommunan nú er við at planleggja.

4. at fyrsta kostnaðarætlanin varð grundað á eitt skitsuprojekt. Arbeiðsstøddin var tí ikki kend út í ætir,
5. at nevnda kostnaðarætlan varð gjørd í februar 1964, og pristalið innan fyri bygging síðani tá er hækkað við í minsta lagi 20 %. Arbeiðslønin alcina er hækkað við 33 %.

Nýggj kostnaðarætlan grundað á prislagið nú:

Atkomuvegur	95.000,00
El-linjur	15.000,00
Innlopsbrunnur	85.000,00
Goymslubrunnar	630.000,00
Vatnleiðingar	480.000,00
Útriðslur, ið standast av verandi kloakkum, vatnleiðingum, kaðalum, v.m. verða eftir ætli settir til	75.000,00
	1.380.000,00
Projektering, arbeiðsleiðsla og ókent	120.000,00
Tilsamans:	1.500.000,00

Annars er at siga, at arbeiðið úti byrjaði 7. 1 h.m.»

Landsstýrið skal vísa á teir upplýsingar, sum givnir vórðu í løgtingsmáli nr. 60/1963 og skal mæla til, at umsóknin verður játtað.

2. viðgerð 20. og 3. viðgerð 22. apríl.

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 27—0.

---

63. Broyting í rúsdrekkalógini

Ár 1966, 15. apríl legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Eftir galdandi rúsdrekkalóg skal maðnr hava greitt alla skuld sína til kommunu og landskassa, um bann skal flytn inn rúsdrekka. Hendaskuld kundi kommununn viðvíkjandi vera m.a. alimentatión og fátækrahjálp umfram skattur, husaleiga, søla av sandi, gróti ella øðrum. Nú er t.d. alimentatión og fátækrahjálp ikki útriðsur, sum kommununar lata ella skulu krevja inn aftur. Tað maðnr nú kann skylda kommunu verður skattur, húsaleiga og meguliga sandur, grót ella annað tilfar, sum kommunan selur.

Váttan krevst bæði frá kommunu og gjaldstovu, men tá nú innkrevjingin av kommununskatti er løgd undir gjaldstovuna, og bert fá skylda eldri skatt til kommununa, átti í flestu førum bert verið neyðugt at fingið váttan frá gjaldstovuni, síðan onnur fallin skuld til kommunu enn skattur sjálvdan skuldi fyrikomið.

Tá ið nýggja skattgjaldingin varð sett í gildi fyri tveimum árum síðani,

var ætlanin at broyta skipanina við váttarum til rúsdrekkainnflyting soleiðis, at gjaldstovan frá kommunum fekk yvirlit yvir eftirstøður og skuld, so gjaldstovan gav váttanir til allar teir, sum ikki høvdu gamla skattaskuld, soleiðis at menn sluppu undan at heita bæði á kommunu og gjaldstovu eftir hesi váttan.

Eftir broytingini til § 7, jbr. løgtingslóg nr. 28 frá 8. mai 1958 varð straffurin fyri brot móti lógini gjørdur strangari frá bót til bót, hefti og fongsul og herafturat varð minstamarkið fyri bótina sett til 10 ferðir vinningin. Minstamarkið var sett eftir uppskoti frá landfútanum, jbr. Løgtingstíðindi 1957, bls. 224.

Nøkrir dómar eru síðani sagdir, har straffurin hevur verið bót 10 ferðir vinningin. Síðani teir, sum hava brotið seg móti lógini, helst ongantíð figgjarliga eru serliga væl fyri, hevur verið søkt um náðing við tí úrsliti, at bótin er lækkað niður í ¼ ella ⅕.

Landfútin hevur nú skotið upp, at minstamarkið verður tikið av, og sorinskrivarin tekur undir.

Bæði eftir 1928 og eftir 1958 lógini er tað ein fyritreyt fyri at konfiskera rúsdrekka, at viðkomandi fyrr er komin undir sekt fyri handil við, útskourking ella útflýgging av rúsdrekka; er rúsdrekkað brúkt ella á annan hátt ikki til, kemur mótvirðið í peningi undir inndrátt. Heuda treytin fyri konfiskatión heldur landfútin vera órímiliga, hann heldur tí, at konfiskatiónin eigur at vera obligatorisk, meðan inndrátturin bert fakultativur, sama heldur sorinskrivarin.

Nevndin setur fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í rúsdrekkalóggávuni.	lagtingslov om ændring i ædruelighedslovgivningen.
§ 1.	**§ 1.**
Lóg fyri Føroyar nr. 115 frá 4. apríl 1928 «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.» við seinni broytingum verður broytt soleiðis:	Lov for Færøerne nr. 115 af 4. april 1928 om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m. med senere ændringer ændres således:
1) § 3, 4. stk. verður orðað soleiðis:	1) § 3, 4. stk. affattes således:
«Rúsdrekka, sum verður flutt inn, verður ikki latið út, fyrr enn móttakarin hevur víst skrivliga	«Berusende drikke, som indføres, må ikke udleveres, forinden modtageren har forevist skriftligt

váttan um, at hann ikki skyldar gjaldkomnan skatt til kommununa ella landskassan. Viðkomandi skattavald hevur skylda, tá ið biðið verður um tað og uttan óneyðugan sleðg, at geva váttan um hetta.»

2) § 7, verður orðað soleiðis:

1. stk. Hann, sum brýtur hesa lóg og tær fyriskipanir, sum hava heimild í hesi lóg, kemur undir bót, hefti ella fongsul.

2. stk. Við dómi fyri ólógligan handil, útskonking ella útflýgging av rúsdrekka, kemur tað rúsdrekka, sum finst hjá viðkomandi, undir upptøku ella, er hetta brúkt ella á annan hátt ikki at finna, kann mótvirði í peningi koma undir inndrátt alt til frama fyri landskassan.

bevis for, at han ikke skylder forfalden skat til kommunen eller landskassen. Vedkommende skattemyndighed er pligtig til på begæring uden unødigt ophold at afgive attest herom.»

2) § 7, affattes således:

Stk. 1. Overtrædelse af denne lov og de i henhold til loven udstedte bestemmelser, som har hjemmel i denne, straffes med bøde, hæfte eller fængsel.

Stk. 2. Ved dom for ulovlig handel, udskænkning eller udlevering af berusende drikke, bliver det spiritus, der forefindes hos vedkommende, at konfiskere eller, såfremt dette er forbrugt eller på anden måde ikke forefindes, kan et beløb svarende til værdien deraf inddrages alt til fordel for landskassen.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin, og fer samstundis løgtingslóg nr. 28 frá 8. mai 1958 úr gildi.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft, og samtidig udgår lagtingslov nr. 28 af 8. maj 1958.

2. Viðgerð 19. og 3. viðgerð 20. apríl.

Lógaruppskotið frá nevndini samtykt 24 0.

63. Brúgv um Hvannasund

Ár 1966, 21. april legði Poul J. Olsen løgtingsmaður fram fyri javnaðarflokkin soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um brúgv um Hvannasund.	lagtingslov om bro over Hvannasund.
§ 1.	§ 1.
Kostnaðarætlan og uppdráttur verður at gera yvir brúgv um Hvannasund.	Overslag og projekt udarbejdes vedrørende bro over Hvannasund.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tá Norðuroyar fjallaholini eru við at verða gjørd, og tað verður koyrandi frá Klakksvík til Norðdepil er ein partur av vegsambandinum í Norðoyggjunum loystur.

Men Klakksvíkingar og menn eystan Múla vildi fegnir sæð, at vegamálið nú varð viðari fört, so tað kann verða koyrandi frá Klakksvík til Hvassasund og Viðareiðis. Fyri at hetta kann verða, má gerast brúgv yvir Hvannasund.

1. viðgerð 26. april og beint til havna- og vegnanevndina.

65. Býti av bjargingarlön

Ár 1966, 22. apríl legði Sigurð Joensen løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um býti av bjargingarløn o.ø.

§ 1

Tá føroyskt fiskifar á veiðuferð veitir fari bjarging ella hjálp, her undir sleiping, verður bjargiløn ella samsýning býtt millum skipsútgerðarinnar, skiparans og manningarnar á sama hátt sum veiða eigur at verða býtt á sama veiðuferð.

§ 2.

Endurgjald fyri skaða á ti bjargaudi skipinum, sum beinleiðis stendst av bjargingini ella hjálparveitingini líknast útgerðini av óbýttum, meðan aðrir frádráttir eru ikki loyvdir.

§ 3.

Henda lóg kemur beinanvegin í gildi.

lagtingslov om fordeling af bjærgningsløn m.v.

§ 1.

Når færøsk fiskefartøj under fangsttur yder fartøj bjærgning eller assistance, herunder i slæbning fordeles bjærgningsløn eller vederlag mellem rederiet, mandskabet og skipperen på samme måde som fangst skal fordeles på samme fangsttur.

§ 2.

Erstatning for skade på det bjærgende skib, som direkte forårsages af bjærgningen eller assistancen, bliver forlods at godtgøre rederiet, medens andre fradrag ikke er tilladt.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Vanligt býti fyri bjargingarløn, samsýning fyri hjálparveiting, her undir sleiping, eftir sjólógini er tað, at skipið fær ½, skiparin ¼ og øll hin manningin tilsamans ¼.

Hesa býtingarreglu hava menn hildið vera ólnóskiliga fyri fiskifor, og í sáttargerð, ið Føroya reiðarafelag og Føroya fiskimannafelag gjordu 4. apríl 1959, varð henda semja gjørd:

«Feløgini eru samd um at mæla lóggávuvaldinum til at broyta lóggávuna viðvíkjandi bjarging og hjálparveiting, her ímillum sleiping, verður býtt eftir lønarsáttmálunum á viðkomandi fiskiskipi.»

Tað má vera rímligt at ganga hesum ynski útgerðarmanna og fiskimanna á møti, og verður uppskot lagt fram hesum viðvíkjandi.

Grein 1 í uppskotinum inniheldur sjálva sáttargerð felaganna, meðan grein 2, ið sigur, at endurgjald fyri skaða á ti bjargandi skipinum, sum beinleiðis stendst av bjargingini ella hjálparveitingini, líknast útgerðini av óbýttum, meðan aðrir frádrátlir eru ikki loyvdir, má haldast vera neyðugt uppískoyti.

1. viðgerð 26. apríl og 13. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Undir 1. viðgerð varð ført fram, at soleiðis sum skipanin er í løtuni viðvíkjandi býti av bjargiløn, eru sjómenn lítið fúsir at fara skipum til hjálpar, sum ikki klára seg sjálv.

Spurningurin um býti av bjargiløn við skipum, eitt nú hvalabátum, har manningin hevur fasta mánaðarløn og harumframt ávísa procent av hvørjum hvali, var eisini til umrøðu.

Harnæst var ívi hjá summum, um tað mundi vera heimilt hjá løgtinginum at lóggeva um býti av bjargiløn, við tað at tær galdandi reglurnar um hetta eru at finna í donsku sjólógini.

Tað má ásannast, at har sum við fiskiskipi menn, eitt nú maskinyvirmenn og kokkur, ella við hvalabátum allir umborð, eru løntir við fastari hýru umframt part ella procent av veiði, sigur lógaruppskotið ikki greitt hvussu býtið skal vera, hvat teiri føstu hýruni viðvíkur. Tulkingartrupulleikar áttu tó ikki at staðist av hesum, tá ið havt verður í huga, at lóggrundin er tann, at á fiskiflotanum er støðan uttan undantak tann, at tann fasta lønin hevur heilt lítlan týdning sambarið við fiskipartin. Við býti millum útgerðarmenn og teir, sum við eru, verður tá bjargilønin ella samsýningin at býta millum partanna, sum um tað var annaðhvørt av óbýttum, um fanu fasta lønin gongur av óbýttum, ella av parti útgerðarmansins, um hann lønar teinum.

At tær verandi býtisreglurnar standa í sjólógini man ikki hava týdning fyri spurningin, um lóggávuheimild løgtingsins, men hitt, at hetta eru fongur. Sundurbýtið teirra millum verður sum nú «i forhold til enhvers løn», men í mun til tu føstu hýruna má teinum sum slíka hava líknast arbeiðis- og lønarviðurskifti, sum tað sama kundu staðið í sjómannalógini, ið er yvirtikið sermál.

Ein meiriluti Poul Petersen, Trygve Samuelsen og Sámal Petersen vilja halda, at spurningurin um býti av bjargiløn, sum lóggivið er um í sjólógini, sum er ríkislóg, og sum annars í hesum eins og í flestum

øðrum er samsvarandi við lóggávuna í øllum hinum norðanlonduntum, er ríkismál, sum løgtingið ikki hevur heimild til at lóggeva um.

Ein minniluti Sigurð Joensen og Poul Jacob Olsen mælir sostall til at samlykkja uppskotið.

2. viðgerð 13. og 3. viðgerð 14. mai.

Lógaruppskotið samtykt 16 0.

---

66. Partapeningur í P-F Suðurfisk í Vági

Ár 1966, 28. april legði J. H. Danbjørg løgtingsmaður fyri javnaðar- og sambandsflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

Løgtingslóg um partapening í p/f Suður-Fisk, Vági.	Løgtingslov om at tegne aktier i a/s Suður-Fisk, Vági.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrið verður heimlað landskassans vegna at seta kr. 150.000 í p/f Suður-Fisk , Vági.	Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i a/s Suður Fisk, Vági, med et beløb på kr. 150.000.
Peningurin verður at rinda úr landskassanum ella við lání, ið landsstýrið verður heimlað at taka landskassans vegna.	Beløbet erlægges af landskassens midler eller ved lån, som landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Vágs bygd hevur eins og so mangar aðrar bygdir í Føroyum verið fyri tí óhappi, at flest av bygdarinnar stórvirkjum eru farin. Hetta hevur skapt eitt stórt virkisloysi fyri heimafólkið.

Nú hava menn tikið seg saman at royna at fáa sett á stovn eitt stórt flakavirki í Vági. Men hóast teir hava fingið væl av peningi at seta í sum partapening, tróta enn einar 150.000 kr. í at náa upp í la bædd, sum neyðug er fyri at svara til tað, sum vanliga verður krav av einum felag fyri, at hitt almenna kann vera við og tey tørvandi lán kunnu fáast.

Talan er um ein samlaðan partapening uppá í minsta lagi hálva millión.

1. viðgerð 11. mai og 13. s.m. legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Eftir grein 1 í uppskotinum skal landsstýrinum verða heimilt at seta 150.000 kr. sum partapening í p/f Suður-Fisk, Vági.

Í viðmerkingunum til málið eru fáir upplýsingar, men nevndini er sent skitsuprojekt, og annars hevur nevndin frá Finn Johansen, ið hevur við stovnsetingina av virkinum at gera fingið ymsar upplýsingar m.a. lógir felagsins, sum eru viðlagdar málinum.

Har verður m.a. sagt frá, hvørjir stovnararnir eru og eftir grein 3 at partapeningur felagsins er 500.000 kr., býttur uppá partabrøv kr. 500,-, kr. 1.000,- ella kr. 10.000,-. Felagið tekur við virki sínum, tá ið í minsta lagi 1/10 er inngoldin uppá hvørt partabrøv. — Allur partapeningurin skal vera inngoldin í seinasta lagi 1. august 1966, og fyrra helvtin í seinasta lagi 1. mai 1966.

Í grein 10 verður sagt m.a.: Í nevndini eru 7 limir. Ein verður valdur av Vágs kommunu, ein av arbeiðsmannafelagnum Framtíðini, og hinir 5 verða valdir av hinum partaeigarunum, sum eru umboðaðir á aðalfundinum.

Nevndini er kunnugt, at Vágs kommuna hjá landsstýrinum hevur umsókn um loyvi til at seta 150.000 kr. í felagið.

Hildið verður, at tað er rætt at hjálpa bygdum, sum eingi virki hava, um tílík virki ikki kunnu fáast upp á annan háll, men hin almenni parturin eigur at standa í hóskiligan mun til tann pening, sum kann útvegast á plássinum.

Ynskiligt var, at enn gjølligari upplýsingar kundu fingist og rímuligt er, at landsstýrið útvegar hesar upplýsingar, áðrenn peningurin verður settur í felagið, og verður uppskot sett um tað.

Nevndin má viðmerkja, at umsóknin um partapening úr landskassanum átti at verið komin frá felagnum sjálvum.

Nevndin mælir til at styðja málið, men í staðin fyri upprunaliga uppskolið at samtykkja

Uppskot
frá

løgtingslóg um partapening í p/f Suður-Fisk, Vági.	lagtingslov om aktier i p/f Suður-Fisk, Vági.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 150.000 kr. í p/f Suður-Fisk, Vági, og at leggja út peningin úr landskassanum.	Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i p/f Suður-Fisk, Vági, med et beløb på indtil 150.000 kr. og at disponere over beløbet af landskassens midler.
§ 2.	§ 2.
Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.	Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales før alle betingelser, landsstyret måtte stille, er opfyldt.
§ 3.	§ 3.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

2. og 3. viðgerð 13. mai.

Lógaruppskotið frá nevndini samtykt 26—0.

67. Eykafíggjarlögtingslóg 1965-66

Ár 1966, 27. apríl legði Erlendur Patursson landsstýrismaður fram soljóðandi:

UPPSKOT

til

eykafíggjarlögtingslóg fyri árið 1965/66
lagtingslov om tillægsbevilling for året 1965/66

		Fíggjarløgtingslóg 1965/66 Finanslagtingslov		Uppískoytisjáttan 1965/66 Tillægsbevilling		Tilsamans falt	
		Útreiðslur Udgifter	Inntøkur Indtægter	Útreiðslur Udgifter	Inntøkur Indtægter	Útreiðslur Udgifter	Inntøkur Indtægter
§ 1.	Skattir Skatter		20.200.000,00		2.060.000,00		22.260.000,00
§ 2.	Toll- og framleiðslugjøld Told- og fremstillingsafgifter		29.400.000,00		4.566.000,00		33.966.000,00
§ 3.	Onnur gjøld Andre afgifter		1.971.000,00		348.000,00		2.319.000,00
§ 4.	Inntøkur av spæli Indtægter ved spil		20.000,00		÷ 4.000,00		16.000,00
§ 5.	Rentur og vinningsbýti v.m. Renter og udbytte m.v.	÷	1.653.000,00		593.000,00	÷	1.040.000,00
§ 6.	Landsstovnar Landsvirksomheder		273.500,00		÷ 223.500,00		50.000,00

§ 7.	Partur av avlopi danska tjóðarbankans Andel i den danske nationalbanks overskud		150.000,00	325.000,00	475.000,00
§ 8.	Ymsar inntøkur Diverse indtægter		5.000,00	÷ 3.100,00	1.900,00
§ 10.	Løgtingið Lagtinget	(778.500,00)		(101.120,00)	(879.620,00)
	1. Løgtingsmenn Lagtingsmænd	561.000,00		127.000,00	688.000,00
§ 10.	2. Løgtingshúsið Lagtingshuset	48.500,00		÷18.500,00	30.000,00
	3. Løgtingstiðindi og kunngerðarsavn Lagtingstidende og kundgørelsessamling	44.000,00		÷19.000,00	25.000,00
	4. Grannskoðan Revision	125.000,00		2.500,00	127.500,00
	5. Landsskattanevndin Landsskatteudvalget	00,00		9.120,00	9.120,00
§ 11.	Landsumsitingin Landsadministrationen	(3.348.314,00)		(575.936,00)	(3.924.250,00)
	1. Løgmaður og landsstýri Lagmand og landsstyret	214.000,00		16.000,00	230.000,00

2. Landsskrivstovan Landskontoret	516.000,00	÷56.000,00	460.000,00
3. Fiskivinnustovan og -ídnaðarstovan Fiskerikontor og -laboratorium	134.500,00	÷19.500,00	115.000,00
4. Umboð uttanlands Repræsentation udenlands	147.237,00	32.763,00	180.000,00
5. Likningarráð og kommunalt eftirlit Ligningsråd og kommunalt tilsyn	216.500,00	13.500,00	230.000,00
6. Mantalsstovan Folkeregistret	59.300,00	000,00	59.300,00
Tað hevur verið heldur tvørligt, at ongin regla var í lógini, at mál eftir hesi lógini kundu fara fram sum politimál, sum m.a. hevði tað við sær, at verjari skuldi uppnevnast smámálum. Eftir stk. 2 í uppskotinum er tað fyriset, at málini fara fram sum politimál og at verjari bert verður uppnevndur, tá ið talan er um dóm uppá fongsul smbr. § 2 í løgtingslóg nr. 30 frá 19. mai 1963.

ad § 32, stk. 2: Henda reglan er ætlað neyðug at byrgja fyri eitt nú útleggingum at gera misbrúk av kærumálsreglunni eftir sonnu §.

1. viðgerð 3. mai og 11. s.m. legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Uppskotið hækkar ikki tollin á vørum uttan við einum undantaki, har tað er ein rætting (kakao).

Eftir uppskotinum verður toll-lógin í mongum førum lættari at umsita, eins og tað eftir tí verður heimilt at seta tariferingarnevnd.

Eftir uppskotinum verða settar gjøllari reglur fyri smugling og líknandi lógarbrot.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Fíggjarnevndin mælir somuleiðis til, at gjaldstovan prentar lógina uppaftur, so at fólk hðani kunnu fáa serprent av henni.

2. viðgerð 11. og 3. viðgerð 12. mai.

Landsstýrisins uppskot samtykt 22—0.

---

72. Útvarp Føroya

Ár 1966, 2. mai legði Niels Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um lán til Útvarp Føroya.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd fyri láni til Útvarp Føroya upp í kr. 1.800.000 til útbyggjan av Útvarp Føroya.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om lån til Útvarp Føroya.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån til Útvarp Føroya indtil kr. 1.800.000 til udbygning av Útvarp Føroya.

§ 2.

Denne lov træder strakt i kraft.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur í longri tíð arbeitt við at fingið bøtt um hoyrilíkindini hjá útvarpinum. Samráðingar hava verið við tekniska umboðsmannin hjá Generaldirektoratet for Post og Telegrafvæsenet, tá ið hesin í ørindum hevur verið í Føroyum. Úrslitið, ið «Generaldirektoratet» er komið til, er, at einasta rætta er at fáa FM-sendarar uppsettar.

Landsstýrið skrivaði til «Generaldirektoratet» tann 8. oktober í fjør um, at tað ynskti, at royndir við at bøta um hoyrilíkindini hildu fram.

Útvarpsnevndin hevur eisini heitt á landsstýrið um at fáa skipað so fyri, at útvarpið kann hoyrast betri um landið, og skrivaði landsstýrið tá, aftaná fund við útvarpsnevndina 19. januar í ár, til «Generaldirektoratet» tann 26. s.m. um skjótast gjørligt at fara undir fyrireikingar, soleiðis at landsstýrið kundi hava eitt uppskot greitt at leggja fyri tingið í hesi tingsetu. «Generaldirektoratet» hevur tann 23. mars í ár sent landsstýrinum uppskot, hareftir ætlanin er, at útbyggingin skal fara fram í 2 stigum.

Eftir 1. stigi skal byggjast ein høvuðsstøð á Streymoynni við Húsareyn við einum 5 kw FM-sendara og 100 m antennumastur, og somuleiðis 2 stórar umsetarastøðir, ein í Suðuroy nær Spinnum, og ein á Borðoynni í útsynning úr Klakksvík við 1 kw sendara og 30 m antennumastur.

Eftir 2. stigi skal byggjast ein umsetarastøð á Streymoynni og fleiri smáar umsetarastøðir.

Kostnaðurin av 1. stigi er ætlaður til 1,5 til 2 milj. kr. Rakstrarútreiðslurnar verða mettar til 50.000 kr. árliga, tá ið roknað verður við 5 tíma sending. Roknað verður við, at byggitíðin verður 2 ár.

2. stig er ætlað at kosta umleið 1 milj. kr., og arbeiðið ætlað at taka 2 ár.

Síðani landsstýrið hevur fingið nevnda brev frá 23. mars í ár, hava samráðingar verið við «Generaldirektoratet», sum hevur givið hesa sundurliðing av útreiðslunum viðvíkjandi útbyggingini:

1 etapa.

1. Høvuðsstøð Tórshavn	750	800.000,00
2. Umsetarastøð Suðuroy		250.000,00
3. do. Klakksvík		350.000,00
projektering, royndir, óvæntaðar útreiðslur og fyrisiting		400.000,00
Tilsamans		1.800.000,00

ad 1 3	1	2	3
hús	75.000,00	10.000,00	10.000,00
el-installatión	25.000,00	75.000,00	15.000,00
mastur	200.000,00	10.000,00	10.000,00
antennukápul	20.000,00	10.000,00	10.000,00
fjarstýring	25.000,00	20.000,00	20.000,00
sendari	110.000,00	75.000,00	75.000,00
antenna	100.00,00	15.000,00	100.000,00
móttakaraantenna		5.000,00	5.000,00
instrumentir	50.000,00	25.000,00	25.000,00
installatiónskostnaður	50.000,00	25.000,00	25.000,00
programkápul frá studiinum	100.000,00	-	-
detailprojektering	25.000,00	10.000,00	10.000,00
tilsamans	780.000,00	250.000,00	350.000,00

II. etapa

Umsetarastøð	250.000,00
10 smáumsetarar á 50.000 kr.	500.000,00
Ymist	250.000,00
tilsamans	1.000.000,00

Samhært yvirlitið verður so roknað við 1,8 milj. kr. til nevndu útbygging, og uppi í hesum er so roknað við detailprojektering upp á kr. 45.000,00.

Landsstýrið heldur tað vera avgjørt neyðugt at farið verður undir 1. stig av nevndu útbygging so skjótt sum yvirhøvur møguligt, og landsstýrið mælir til at samtykkja frammanfyrinevnda uppskot.

Um uppskotið verður samtykt, er tað ætlanin, at landskassin skal bera útreiðslurnar av sjálvari útbyggingini, meðan rakstrarútreiðslurnar, sum standast av útbyggingini, verða bornar av útvarpinum sjálvum.

1. viðgerð 3. og 11. mai legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Nevndin er samd um, at landskassin eigur at bera kostnaðin av út-

byggingini av útvarpinum, so at tað hoyrist vel um alt landið, men at útvarpið sjálvt ber raksturin.

2. viðgerð 11. og 3. viðgerð 12. mai.

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 21 0.

---

73. Lán til telefonverkið

Ár 1966, 2. mai legði løgmaður fram setjóðandi

UPPSKOT
til

Løgtingslóg um lán til Telefonverk Føroya Løgtings.

§ 1.

Telefonverk Føroya Løgtings verður heimilað at kena uppí 3.200.000,00 kr. til fremjingar av automatiseringini og til útbyggjan av linjunetinum. Av lánum verður landsstýrinum landskassans vegna heimilað at veðhalda fyri uppí 1.350.000 kr., sum verða at nýta til útbyggjan av linjunetinum.

Lagtingslov om lån til Telefonverk Føroya Løgtings.

§ 1.

Telefonverk Føroya Løgtings bemyndiges til at optage indtil 3.200.000,00 kr. i lån til gennemførelse af automatiseringen og til udbygning af linjenettet. Af lånene bemyndiges landsstyret til på landskassens vegne at garantere for indtil 1.350.000,00 kr., der anvendes til udbygning af linjenettet

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 2

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1963, jbr. løgtingsmál nr. 74, vendi landsstýrið sær til løgtingið um heimild at veðhalda fyri 1.600.000 kr. í láni til telefonverkið, at nýta til víðkan av automatsløðunum og linjunetinum. Heimildin varð givin jbr. løgtingslóg nr. 37 frá 9. mai 1964.

Nevndu arbeiðir eru lið í eini størri ætlan, telefonverkið hevur gjørt í samráð við felagið L. M. Ericson í Stockholm til fullautomatisering av telefonsambandinum fyri alt landið, soleiðis at felagar á teimum ymsu støðunum kunnu ringja beinleiðis sínámillum bæði innan- og utlanbiggja. Henda ætlan letur seg ikki fremja, fyrr enn linjunetið bæði í bygdunum og millum bygdir lýkur tær teknisku fyrifreytirnar. Á hesum fyrsta stigi av ætlanini varð víðkanin av teimum verandi automatstøðunum tikin við, møguleikarnir fyri at seta fleiri felagar til vóru so at siga uppbrúktir.

Nevndu arbeiðir eru nú gjørd, tó vórðu ymisk øðrvísi enn upprunaliga ætlað, og onnur linjuútbygging er komin afturat.

Í august 1964 søkti telefonverkið «Investeringsfonden for Færøerne» um 10.810.000 kr. í láni í 7-ára skeiðinum 1964/65—1970/71 til fremjingar av umtalaðu heildarætlan.

Frá grunninum er komið endaligt svar í mars 1966. Vegna teknisk ivamál heldur grunnurin seg í fyrsta umfari bert kunna taka støðu til 1. útbyggingarstig, sum er automatisering av trafikkinum millum automatstøðirnar, ið eru. Hetta stigi verður gjørt í samarbeiði við post- og telegrafverkið, ríkistelifonina, síðani tað eisini umfatar automatisering av felags ríkis- og millumbiggjastøð í Tórshavn.

Kostnaðurin var í sínu tíð metur til 2.700.000 kr., av hesum skuldi post- og telegrafverkið rinda 500.000 kr. fyri tilfar, soleiðis at bruttofleggingin hjá telefonverkinum varð 2.200.000 kr. Telefonverkið roknaði tó við í hesum sambandi at selja ognina á Bryggjubakka fyri kr. 300.000, soleiðis at íleggingarútreiðslan varð 1.900.000 kr.

Til hetta byggjastigið lænir grunnurin verkinum upp til 1.850.000 kr. svarandi til 2/3 av útreiðslunum kr. 2.765.000, eftir nýggjari kostnaðarætlan frá 22. februar 1966, í hesi ætlan er partur post- og telegrafverksins ikki tikin við. Lánið verður at reuta við 6,5% p.a. og at rinda aftur við 1/30 í hvørjari juni og december termin. Grunnurin setur sum treyt

fyri lánið, at takstirnir verða hækkaðir, so verkinum verður tryggjað møguleikar at rinda sín part av investeringini og at rinda lánið aftur.

Sum longu greitt frá í løgtingssetuni 1963 er tað ein fyritreyt fyri automatiseringini, at linjunetið er útbygt og moderniserað, so tað er fært fyri at bera trafikkin. Ætlanin sum varð løgd fyri løgtingið í nevndu setu, umfataði ikki alt linjunetið, men hevur telefonverkið nú gjørt ætlan, har tær linjurnar, ið ikki vóru við í 1963 eru uppi og herafturat meirkostnaðurin av broytingum í ætlanini frá 1963. Tá ið hesi arbeiðir eru gjørd, skuldi linjunetið verið fult útbygt og moderniserað nøkur ár fram í tíðina. Hesi arbeiði og herafturat kurstap av lánum er mett soleiðis:

Nýggjar millumbygdalinjur, við luft- og jørðkaðal, sjókaðal og luftlinjur	444.505,00
Nýggir innanbiggja jarðkaðalir	560.230,00
Nýggir innanbiggja luft- og jørðkaðalir	54.135,00
Broytingar í 1963-ætlanini	108.630,00
Kurstap av lánum	182.500,00
	1.350.000,00

Í løgtingsmáli nr. 17/1965: Broyting av telefongjøldum hevur løgtingið umframt at hækka telefongjøldini m.a. samtykt:

1. Seta verkføðing at standa fyri tí tekniska arbeiðinum.
2. Telefonverkið yvirtekur raksturin av bygdastøðunum og hoðstøð-unum, ið fáa lønarsømdir, ið svara til tær, sum galda fyri automatstøðir.

Fyri at fáa greiði á hvørjar avleiðingar hesar tvær samtyktirnar hava fyri raksturin, hevur landsstýrið bóðið sær ummæli frá telefonverkinum. Hesi dagfest 27. og 28. apríl 1966 eru viðløgd.

Avleiðingarnar eru, at verkið við teimum takstum, ið nú eru samtyktar, fær eitt beinleiðis kassaundirskot uppá 1.636.500 kr. og eitt rekstrarhall uppá 2.379.000 kr. Síðani hækkingarnar í gjøldunum ikki fáa gildi 1. apríl 1966 men umleið eitt fjórðingsár seinri, má tað í 1966/67 afturat nevndu tølum leggjast 1/4 av 300.000 kr., sum er hækkingin fyri heilt fíggjarár, ella 75.000 kr. og herafturat løn til ein verkfræðing. Skal hallið greiðast, mugu allir takstir hækkast við 40% afturat tí samtyktu hækkingini, og skal landsautomatiseringin fremjast, má eykahækkingin verða 60% í minsta lagi. Verða gjøldini ikki hækkaði, má verkið fáa í studningi árliga 2.379.000 kr., um rekstrarhall ikki skal vera.

At fara undir nakra útbygging, nú telefonverkið ikki er fært fyri at

bera rakstrarútreiðslurnar, er ógjørligt, jbr. m.a. treytina hjá investeringsgrunninum.

Tað er tí ein fyritreyt hjá landsstýrinum fyri hesum lógaruppskoti, at løgtingið tekur nevndu samtyktir til viðgerðar av nýggjum.

TELEFONVERK
FØROYA LØGTINGS Tórshavn, 27. 4. 1966.

Um tey fólk, ið nú reka úlbodnar støðir fyri samsýning í mun til talið av felagum, samtalum o.ø. saman við teirra hjálparfólki, skulu gerast starvsfólk, lønað eftir sonnu treytum sum starvsfólkið á bygdaavgreiðslunum á automatstøðunum, mugu tey eisini koma undir sonnu treytir sum annað starvsfólk í almennari tænastu, hvat viðvíkur arbeiðstíð, frítíð o.a.

Hetta ber við sær, at tær støðir, ið hava felagar og tí hava telefontíð fyri hesar frá kl. 8 — kl. 21, í hvørt fall mugu hava 3 fólk á støðini, meðan tær stóru støðirnar í hvørt fall mugu hava 5. Kanska kunnu tær støðir ið ongar felagar hava og tí hava telefontíð frá kl. 8 — kl. 20 noyðast við 2 fólk, men so mugu hesi fáa yvirtíðargjald fyri sunnu- og heiligdagstænastu. Tað eru 7 støðir uttan felagar.

31 støðir við frá 1 — 50 felagar
6 støðir við frá 51—100 felagar
6 støðir við yvir 100 felagar

7 fyristøðufólk á kr.	18.000,-	=	126.000,-	árliga
7 hjálparfólk á kr.	15.000,—	—	105.000,-	árliga
31 fyristøðufólk á kr.	24.000, -	=	744.000,-	árliga
62 hjálparfólk á kr.	15.000,	—	930.000,	árliga
6 fyristøðufólk á kr.	24.000,	=	144.000,	árliga
12 hjálparfólk á kr.	15.000,	—	180.000,	árliga
6 fyristøðufólk á kr.	27.000,	=	162.000,	árliga
24 hjálparfólk á kr.	15.000,	=	360.000,-	árliga
155 starvsfólk			2.751.000,	árligt
Samsýningin til støðirnar er nú kr.			410.000,	
		meirútreiðsla kr.	2.341.000,-	árliga

Afturat hesum kemur so úlreiðslan til heli, brenni og ljós, sum kommunurnar nú lata til støðirnar við kr. 38.000, árliga.

Afturat hesum koma so tær útreiðslur, ið standast av, at telefonverkið skal halda boðfelagar í bygdum, har eingin støð er.

Frammanfyri nevndu lønir eru roknaðar eftir lønarlagnum 1.1 1966. Tær skulu pristalsviðgerðast og hvørt ár skulu starvsfólkini hava eina aldursviðbót til tey koma á hægsta lønaraldur. Eisini má roknast við, at lønirnar fara upp, um tær 13 sáttmálaviðbøturnar, talan er um, at lærarar o.a. skulu hava frá 1.1. 1966, tí so skulu starvsfólk eisini hava tær.

Løgið kann tað tykjast, at uppskot um yvirtøku av bygdastøðunum — skipanin hevur verið í gildi í seinastu 60 árini — kemur júst nú, og tað frá mannum, sum principielt hava bildið fast um hesa skipan, ikki minst, táið hugsað verður um, at automatiseringsætlanin innan 7 ár fer at føra við sær, at bygdastøðirnar verða niðurlagdar. Skal lógin um yvirtøku av bygdastøðunum førast út í lívið, munna tær taksthækkingar, ið eru samtyktar, hvørki til meiriútreiðslurnar, ið standast av nevndu yvirtøku, og tíansheldur til fremjing av automatiseringsætlanini, og lætt er at skilja, at tekniska útbyggingin av verkinum í ongan mun kennur at kunna svara til tey íðiliga vaksandi krøvini.

Fyri at kunna greiða tey krøv, lógin um yvirtøku av bygdastøðunum stillar telefonverkinum, má tað, fyri ikki at skerja um útbyggingina, fáa loyvi til einaferð enn at hækka takstirnar, eisini millum bygdasamtalugjaldið, munandi, um ikki tingið skal lata munandi studning á figgjarlógini árliga, inntil landsautomatiseringin er fullførd.

TELEFONVERK
FØROYA LØGTINGS

Tórshavn, 28.4. 1966.

	1966/67	
Inntøkur	4.055.000,—	
Stovnaðargjald o.a. ið ikki verður krevd	105.000,	
	3.950.000,	
Rakstrarútreiðslur		2.707.500,
Avskrivingar		850.000,—
Vinningur		392.500,
kr.	3.950.000,-	3.950.000,-
Avskrivingar og vinningur		1.242.500,
Avdráttir uppá lán		500.000,—
at ráða yvir		742.500,

Løn til starvsfólk á bygdastøðum		2.751.000,–
+ samsýning íroknað rakstrarútreiðslur		410.000,–
		2.341.000,–
Samsýning fyri høli, ljós og brenni		38.000,–
		2.379.000,–
Telefonverkið at ráða yvir		742.500,–
	Hall	1.636.500,–

Sambært hetta má telefonverkið sleppa landsautomatiseringsætlanini, tí fleggingargrunnurin krevur eina árliga sjálvfíggjan uppá kr. 300.000,– fyri at veita lán. Øll onnur nýbygging má eisini steðgast, eisini innleggving av nýggjum feløgum, tí telefonverkið fær ikki tær kr. 540.000,– roknað varð við í fíggjaretlanini til hetta endamál. Hóast ongar nýbyggingar verða gjørdar, verður eitt hall uppá kr. 1.636.500,–.

Um telefonverkið skal greiða hetta hall mugu allir takstir, eisini samtalulakstir, telegrantakstir og boðpeningur, hækkast við 40 % afturat tí hækking, ið kemur í gildi 1. juli 1966. Um telefonverkið skal fremja landsautomatiseringina og gera aðra nýbygging, ið tørvar, má hækkingin verða 60 % í minsta lagi.

Um ikki hækking skal fara fram, má verkið fáa ein árligan stuðning uppá kr. 2.379.000,–.

1. viðgerð 3. og 13. mai legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Eftir § 1 í uppskoti landsstýrisins verður Telefonverkinum heimilað at lána upp í 3.200.000 kr. til fremjingar av automatiseringini og til útbygging av linjunetinum, og landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at veðhalda fyri upp í 1.350.000 kr. til útbygging av linjunetinum.

Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Í viðmerkingum landsstýrisins verður eisini komið inn á tær avleiðingar, ið standast av leim samtøkum, sum gjørdar eru í løgtingsmáli nr. 17/1965: Broyting av telefongjøldum, har samtykt var – umfram lóg um gjaldshækkan – at seta verkfræðing at standa fyri tí tekniska arbeiðnum, og at telefonverkið yvirtekur raksturin av bygdastøðunum og boðstøðunum, ið fáa tær lønarsøndir, ið svara til tær, sum galda fyri automatstøðir.

í nevnda máli var av landsstýrinum greitt frá, at taksthækkingarnar, ið ætlast at geva 300,000 kr. pr. ár, eru ætlaðar til tann partin av útbyggingini, sum Telefonverkið skal gjalda av rakstrinum, og sum eru ein beinleiðis treyt fyri at fáa tey í hesum máli umtalaðu lán til útbyggingina.

Tað kann tí ikki hava verið ætlan tingsins, at tað sum fæst inn av taksthækkingum, skal fara til annað endamál enn útbygging, ella á annan hátt at vikna um figgjarorku Telefonverksins, so at tann ætlaða útbyggingin ikki kann fremjast.

Tað fyriliggja ikki í málinum upplýsingar um, hvat ein tekniskur leiðari fer at kosta aftrat, og verður hetta sjálvsagt at kanna.

Viðvikjandi lønarbatanum má ætlanin hava verið at bøla inn lønarviðurskiftini hjá bygdastøðum og boðstøðum, men á ein slíkan hátt, at Telefonverkið annaðhvørt kann bera hetta uttan at nerva útbyggingina, ella at peningurin má fáast til vega á annan hátt.

Av tí, at tingið skal fara heim í hesi vikuni, verða ikki stundir til at fremja eitt komplicerað lógaruppskot, men nevndin hevur samráðst við stjóran um at fáa framt tær lønarábøtur, sum kunna verða framdar administrativt pr. 1. juli og annars gjølligari kanna henda spurning. Stjórin hevur á fundi í nevndini upplýst, at tá automatiseringin fyri alt landið er framd um 6—7 ár koma allar bygdastøðirnar at verða automalstøðir, og tá verður bara talan um boðstøðir. Telefonverkið hevur havt raksturin av bygdastøðum, men kommununurnar hava latið gjald fyri høli o.t. — Boðstøðir eru service hjá fólkum, sum ikki hava telefon, og tað verður ein spurningur, um tað er beint at leggja útreiðslurnar av hesum á tey, sum frammanundan sjálvi gjalda fyri at hava telefon.

Nevndin hevur viðgjørt spurningum, um tað ikki var rettast at broytt skipanina fyri telefonverkið, so at ikki lóggávuvaldið sum higartil skal taka støðu til hvørt smáting. Løgtingið verður tó í øllum føratn hægsta vald. Men av sonnu grundum, sum nevnd frammanfyri, eru heldur ikki stundir at fremja tílíka lóg nú, men verður skotið upp, at løgtingið ger uppskot hesum viðvikjandi at leggja fram í komandi tingsetu.

Í málinum er lagt brev frá landsstýrinum dagsett 20. apríl viðvikjandi lánum til telefonverkið. Hetta brev var tá vist til kunngerðarmál.

Tær broytingar, sum her verða settar til uppskot til samtyklar frá telefonnevndini í broytingauppskoti dagsett 20. apríl og samtykt á tingi 22 apríl, skulu ætlandi hava kvalifiseraðan meirihluta og mælir nevndin tinginum til at samtykkja broytingarnar.

UPPSKOT

til

samtyktar

frá allari nevndini:

Føroya løgting samtykkir í staðin fyri uppskot til samtyktar punkt 3 frá telefonnevndini í broytingaruppskoti dagsett 20. apríl og samykt á tingi 22. apríl fylgjandi:

1. Telefonverkið Føroya løgtings verður álagt innan 1. juli 1966 eftir samráðing við bygda- og hoðstøðirnar at gera eina lønarskipan.
2. Landsstýrinum verður álagt í komandi tingsetu at leggja fram lógaruppskot um nýggja skipan fyri Telefonverk Føroya løgtings.

2. viðgerð 13. og 3. viðgerð 14. mai.

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 27-0.
Uppskotið frá nevndini I samtykt 27—0.
Uppskotið frá nevndini II samtykt 26—0.

74. Broyting í lóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum

Ár 1966, 2. mai legði Vilhelm Nielsen løgtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 48 frá 30. mai 1964 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.	lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 48 af 30. maj 1964 om fornyelse af fiskerflåden.
§ 1.	§ 1.
Í § 6 gangi út orðini: «tá skipið er ikki eldri enn 40 ár».	I § 6 udgår ordene: «såfremt skibet ikke er over 40 år gammelt».
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1966.	Denne lov træder i kraft 1. april 1966.

Viðmerking:

Studningslán til maskinur og aðrar tekniskar innleggingar til gomul skip hava verið veitt í 9 ár. Hetta hevur verið ein góður stuðul fyri tey fiskifør, ið hava fingið maskinu og aðrar tekniskar innleggingar.

Í 1964 er lógin endurnýggjað við tí broyting, at studningur ikki verður veittur til skip eldri enn 40 ár. Fyri at broyta hetta aldursmark og gera tað møguligt at veita øllum gomlum skipum studning, verður her sett fram broytingaruppskot.

1. viðgerð 9. og 2. viðgerð 11. mai.

Uppskotið frá Vilhelm Nielsen og Leon Joensen fall 9 -0.

75. Ymisk kunngerðarmál

Ár 1966, 9. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

I. *Millumlanda sáttmálar a) um somu løn fyri sama arbeiði hjá kvinnum og monnum og b) um jamrættindi manna til arbeiði og vinnu.*

Hesir sáttmálar eru ratificeraðir í Danmørk og lýstir har. Landsstýrið mælir í skrivi dagfest 12. februar 1966 løgtinginum til at samtykkja, at lær verða lýstar í Føroyum. Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag eru spurd. Hitt fyrra mælir til. Hitt seinna «vil heldur bíða eftir, hvussu aðrir greiða hesi mál» hóast «tankin um eins løn fyri arbeiði av sama virði er í sjálvum sær rættur.»

Lógarnevndin, sum hevur havt málið til viðgerðar, viðmerkir, at sáttmálin júst er ein almenn viðurkenning av hesum princippi og tað er hvørt samfelag sær sum ætlar um, hvussu og hvussu skjótt princippið fast gjøgnumført.

II. *Broyting í sjólógini viðvíkjandi hægstamarki fyri reiðaraábyrgd.*

Broytingin sum var kunngjørd í Danmørk 12. juni 1961, er tann, at hámarkið sum var kr. 145,00 fyri hvørt tann, er sett til 1000 gullfr. fyri hvørt tonn og minst 150.000 gullfr. tilsamans. «Tonns» í hesum høpi eru ey sonn sum higartil í lógini.

III. Tvær kunngerðir og ein fyriskipan viðvíkjandi F.N. konventión og norðurlendskari konventión sum skal lætta um inndriving av uppihaldspeningi frá uppihaldsskyldugum persónum búsettum uttanríkis.

IV. Broyting í lógini um upplivsrættin.

Lógarnevndin hevur havt hesi mál til viðgerðar og mælir til at lýstar verða í Føroyum:

a. konvensjón nr. 100 frá 1957 «om lige løn til mænd og kvinder for arbejde af samme værdi» og konvensjón nr. 111 frá 1958 «om forskelbehandling m.h.t. beskæftigelse og erhverv».
b. «Bekendtgørelse» frá 12. juni 1964 um broyting í sjólógini (lóg nr. 159 frá 27. mai 1964).
c. Kunngerð frá uttanríkisráðnum nr. 69 frá 24. august 1962 «af den

af De forenede Nationer vedtagne konvention af 20. juni 1956 om inddrivelse af underholdningsbidrag i udlandet»,

Kunngerð frá utanríkisráðnum nr. 21 frá 29. juli 1963 «af nordisk konvention af 23. marts 1962 om inddrivelse af underholdningsbidrag» og Kgl. fyriskipan nr. 432 frá 17. december 1965 «om anerkendelse og fuldbyrdelse af afgørelser om underholdsbidrag i henhold til Haagerkonventionen af 15. april 1958 om underholdspligt over for børn.»

d. Anordning (frá 18. november 1963) om ændring i anordning om anvendelse af lov om ophavsretten til litterære og kunstneriske værker og lov om retten til fotografiske billeder i forhold til andre lande m.v.

2. viðgerð 10. mai.

Uppskotið frá nevndini samtykt 22—0.

76. Kunngerðarmál

Ár 1966, 13. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur sent løglinginum lann norðurlendska samstarvssáttmálan frá 1. juli 1962 uttan aðra viðmerking enn, at tað viðmælir, at hann verður lýstur at galda í Føroyum.

Lógarnevndin hevur havt málið til viðgerðar.

Tað er at siga, at Danmark hevur ratificerað sáttmálan uttan at spyrja tað føroyska «heimastýrið» eftir.

Eftir sini náttúru er sátmálin eitt fólkarættarligt skjal.

Ein meiriluti (Poul Petersen, Sámal Petersen, Poul Jacob Olsen og Trygvi Samuelsen) mælir til, at løgtingið samtykkir at sáttmálin verður lýstur at galda í Føroyum.

Ein minniluti (Sigurð Joensen) skal viðmerkja:

Hesin sáttmáli er ein vælskrivað stevnuskrá fyri áframhaldandi norrønt samarbeiði, ein staðfesting av aldargomlum samarbeiðsvilja, sum longu hevur borið góða frukt, eitt nú í samskipaðari lóggávu, hugvekjandi hjá hvørjum manni í norðurlondum, sum eftir hesum hátíðarliga sáttmála eru fimm, fimm lond, fimm mál, bar uppií finskt. Tað er týðiligt, at meðan vit ikki hava lóggávurætt og ikki samráðingarrætt, hevur hesin sáttmáli ikki áhuga.

Minnilutin aftrar seg við at mæla løgtinginum til at samtykkja kunngering í Føroyum av hesum sáttmála, og harvið yvirfyri leinum norrønu londunum vátta tu fullkomiligu ómyndiggering, sum tann danska ríkislógin frá 23. mars 1948 ber við sær, og sjálvir útiloka okkum frá samvinnuheimildini við norðurlondini, sum vit annars vegna skyldskapar kanska høvdu havt gagn av.

Uppskotið frá meiralutanum í nevndini samtykt 17 7.

77. Limaskapur EFTA

Ár 1966, 13. mai legði marknaðarnevndin fram suljóðandi

ÁLIT

I. Forsøga.

Longu meðan seinasti veraldarbardagi leikaði, fóru menn at hugsa um búskaparliga og peningaliga samvinnu og handil tvørtur um landamark. Á sumri í 1944 varð IMF (international Monetary Fund) og IBRD (International Bank for Reconstruction and Development) stovnað (11 lond). 1947 varð GATT (General Agreement on Tarifs and Trade) skipað (23 lond). - Í 1948 varð OEEC (Organisation for European Economic Co-operation) stovnað av 16 londum (og so Vestur-Týskalandi). Hesin felagsskapur hevði fyrst og fremst til endamáls at skifta Marshallhjálpina úr USA til endurreisingar av Europa; men sum fráleið varð høvuðsstarv samgongunnar meira og meira at royna at loysa handilin og gjaldingarnar limalandanna millum. Hesin felagsskapur hevur fingið mest úrslit av øllum tílíkum millumlanda samvinnustovnum millum suveren lond við vetoretti hjá hvørjum einstøkum limalandi. Felagsskapurin vandi londini til rúmari samvirki enn áður, men møktaði ikki at loysa landbúnaðarhandilsmálini og heldur ikki tollavloku ella tollløkingar (1961 varð hesin felagsskapur umskipaður til OECD - Organisation for Economical Co-operation and Development).

Við hesum trupulleikum í hyggju var tað, at tey 6 londini, Belgia, Frakland, Italia, Luxembourg Niðurlond og Vestur-Týskaland í 1955/56 byrjaðu tingingar um skipan av einum felagsmarknaði sum eitt tollfelag. Hesi sonu lond vóru longu í 1951 samd um at skipa ein felagsmarknaða við koli og stáli (ECSC - - European Coal and Steel Community). Sáttmáli um felagsmarknaðin (EEC - European Economic Community) varð undirskrivaður í Roma 25. mars 1957 og kom í gildi 1. januar 1958; sama dag varð sáttmáli gjørdur um nýtslu av atomnegi millum hesi sonu lond (Euratom - European Atomic Energy Community). Eftir Roma-sáttmálanum skulu tollur og restriktiónir limalandanna millum lakast av sum frá fýra (í 12 - 15 ár) samstundis sum snevurt samvirki verður á mongum øðrum umráðum.

Ætlingin við og grundirnar fyri felagsmarknaðinum vóru ikki bert økonomiskar, men eisini politiskar, so at hesin felagsskapur so við og

við skuldi vinna fram til eina unión ella eintá eina eind av hesum seks londum.

OEEC-londini, ið nú stóðu uttanfyri EEC, komu at standa illa fyri. So hvørt sum EEC lækkaði tollin og tók av restriktiónir, var vanli fyri at útflutningurin hjá OEEC-londunum til EEC fór at minka.

Í 1956, longu áðrenn Roma-sáttmálin var gjørdur, legði Bretland uppí og royndi at fáa eitt frihandilsumráði skipað millum øll vesturevropeisk lond, tey seks uppíroknað. Bágsteinarnir fyri samhandil í hesum «stóra» frihandilsumráði skuldu flytast burtur í sonn ferð sum innanfyri teir seks. Hesar samráðingar førdu ikki til úrslit og endaðu á heysli 1958. At so varð, gjørdu bæði økonomisk og politisk viðurskifti. Meiningarnar vóru ov ójavnar. Miltum annað fingu serliga Svøríki og Schweiz, men eisini Eysturríki av neutralitetstradiliónum ikki luttikið í aðrari samvinnu enn økonomiskari. Heldur ikki Roma-londini vóru ovurhugað fyri hesari samgongu, sum tey hildu fór at koma tvørt fyri í royndunum at skapa politiska integratión í Europa.

Á vári 1959 vann hugsanin fram, serliga í Bretlandi og Svøríki — nú eink gjørdist við hitt «stóra» frihandilsumráðið — áttu OEEC-londini uttanfyri tey seks at finna saman í eitt frihandilsfelag. Málið var fyri á fundi millum Bretland, Danmark, Eysturríki, Noreg, Portugal, Schweiz og Svøríki aftaná at samráðingarnar í Paris vóru loknar úrslitaleysar.

Í Saltsjøbaden havdu embætismenn fund í juni 1959 eftir innbjóðing Svøríkis. Uppskot var evnað til frihandilsfelagsskap, men ríkisstjórnirnar vóru ikki heftar av hesum. — Aftur í juli sama ár vóru ráðharrar úr hesum sjey londum á fundi Saltsjøbaden og samdust um at viðmæla ríkisstjórunum at skipa frihandilsumráði. Embætismenn fingu boð um at gera uppskot til sáttmála eftir juni-uppskotinum.

Á embætismannafundinum í Stokkhólmi í september var Føroya landsstýri umboðað. Á fundi 20. november 1959 vóru ráðharrar samdir um at parafera sáttmálan, ið seinni er undirskrivaður av ríkisstjórnunum, seinast av ríkisstjórn Svøríkis tann 4. januar 1960 sum sáttmáli um europeiska frihandilssamtakið (EFTA-European Free Trade Accociatión).

II. EFTA-sáttmálin.

Eftir innihaldinum ber til at skifta sáttmálan (14 artiklar) sundur í hesar 10 partarnar:

1. Ein preambul og 2 art. um stovning av felagsskapinum og endamál hansara,
2. 3.—9. art. um avtøku av inn- og útflutningstolli og spurningarnar um ymisk tollstig limalandanna,
3. 10.—12. art. um avtøku av kvantilutivum inn- og útflutningsrestriktiónum,

4. 13.—17. art. um kappingarreglurnar,
5. 18.—20. art. um viðurskifti, ið tala fyri undantaki frá sáttmálanum aðramáta,
6. 21.—25. art. um landbúnaðarvørur,
7. 26.—28. art. um handil við fiski og úrdráttum úr havinum,
8. 29.—30. art. um fjaldar transaktiónir og flutningar og hin økonomiska politikkin,
9. 31. art. um vanliga ráðlegging og klagurettarviðgerð,
10. 32.—44. art. um innanfelagsreglur um ráðið, nevndir og skipan, um ratifikatión (undirskrift og viðurkenning) gildi, territoriala nýtslu, broytingar, uppsøgn o.s.fr.

Samb. 43. art., 1. gr. (sbr. sáttmálans skjal F) umfatar sáttmálin hesi ríki og europeisk umráði, hvørs millumlandamál limaloondini hava ábyrgdina av:

1. Bretland og Norður-Írland (Kanaloyar og Man uppíroknaðar, men Gibraltar og Malta uttanfyri),
2. Danmark (Grønland nú uppíroknað),
3. Eysturríki,
4. Noreg (Svalbard uppíroknað),
5. Portugal (Asoroyar og Madeira uppíroknaðar),
6. Schweiz,
7. Svørík.

Seinni eru aftratkomin Liechtenstein (við serprotokol) og Finland (assosierað).

Føroyar eru ikki lutur av EFTA-umráðnum, men kunnu gerast tað við frásøgn frá Danmark (43. art., 2. gr.).

III. Føroyar– EFTA

I hesum sambandi eru spurningarnir um fiskiskap og handil við fiski og fiskavørum høvuðsmálið. Í sini heild hevur ikki verið greitt, hvørm týdning og hvørja ávirkan limaskapur kemur at fáa fyri Føroyar. Í 1965 hava kanningar og tingingar verið millum Føroya landsstýri og utanríkisráðið um rikisumboðið um ávirkan og møguligar treytir, og til at fáa at vita hvørjar løgtingslógir, kunngerðir og aðrar reglfarreglur samtykkja ikki við EFTA-sáttmálan. Niðurstøðan av hesum tinginum eru lagdar fyri marknaðarnevnd Føroya løgtings, ið hevur havt fundir um málið.

1. Sáttmálans greinir um fiskavørur.

Sáttmálans generellu reglur um avtøku av tolli og innflutningsrestriktiónum fyri vørur framleiddar í frílandilsumráðnum galda samb. 26. art. iløki fyri teir úrdráttir úr havinum, ið taldir eru í sáttmálans skjal E. — Hesar vørur eru nú (aftaná smávørri broytingum):

fiskur, feskur (livandi ella deyður), køldur ella frystur, djúpfrystur fiskaflak undantikin,
fiskur, saltaður, lakasaltaður, turkaður ella royktur,
krabbadýr, við ella uttan skel, fesk (livandi ella deyð), køld, frystur, saltað, lakasaltað ella turkað; krabbadýr við skel, kókað í vatni.

2. Føroyskar útflutningsvørur (uttanfyri sáttmálans skjal E).

Hesar vørur verða EFTA-viðgjørdar, tað er avtøka av tolli og innflutningsrestriktiónum:

Djúpfrystur fiskafløk
Fiskaslógv (frystur minkafóður)
Sildarolja (rá ella reinsað)
Livrafýsi
Fiskahermetikkur
Fiskamjøl
Sildarmjøl
Minkaskinn (rá ella garvað)
Ullvørur (troyggjur)
Skip

Tollurin, EFTA-landanna millum, fyri hesar vørur er nú 20% av basistollinum og skal vera heilt avlikin 31. desbr. 1966. Viðvikjandi kvantitativum innflutningsrestriktiónum er ikki beinleiðis sett upp nøkur formell avtøkutabell. Restriktiónirnar skulu takast av so við og við og vera heilt burtur 31. desbr. 1966.

Bretland hevur (samb. seravtalu, sáttmálans skjal 5) viðurkent, at fiskafløk er ídnaðarvøra og tí umfatast av sáttmálans generellu reglum um avtøku av tolli og kvant. restriktiónum treyttað av, at útflutn. Danmarkar (Føroyar uppíroknaðar, koma her uppí EFTA), Noregs og Svø ríkis til Bretlands eitki ár fyri 1. januar 1970 fer upp um 21.000 tons árliga (1959/60 var hesin útflutningur 5.000–6.000 tons árliga) og at vøksturin verður javnur og líðandi. Um so skuldi verið, at Bretland heldur tað vera vøntandi, at hesin útflutningur fer upp um 21.000 tons, skulu hesar fýra ríkisstjórnirnar heinanvegin fingast um støðuna. Verður eingin semja, skal málið leggjast fyri EFTA-ráðið til loysnar. Evdnast

hetta heldur ikki, kann Bretland broyta tolllækkingarnar, sum longu eru gjørdar, um so skuldi verið neyðugt til tess at sleppa undan trupulleikum á bretska marknaðinum. Kortini hevur bretska stjórnin ikki í hyggju at fáa innflutningin niður um 24.000 tons.

Tað ljóðar, at bretska stjórnin, sum er, fylgir vel við lagnum í útflutninginum av djúpfrystum fiskafløkum til Bretlands, og at ríkisstjórnin heldur, at vøksturin á hesum útflutningi í 1964/65 var í meira lagi. So stutt er væntandi, at Bretland fer at kalla til fundar til tingingar um støðuna.

Svenski úlflutningurin av fiskaflaki hevur lítið at týða, meðan Noreg árliga til Bretlands flytir út 8/9.000 tons. Útflutningur Danmarkar var í 1964 umleið 13.000 tons (1965: 6.500 tons fyra hálvár).

Tá so er, er væntandi, at Bretland, skuldu Føroyar komið sær uppi EFTA, fer at vissa sær, at úflutningurin tilsamans fer ikki upp um 24.000 tons. Tað ber so aftur í sær, at eitt býti má fara fram og ógjørligt er at siga nakað um, hvussu stórur útflutningur lutast hvørjum einsløkum útflutningslandi, heldur ikki Føroyum. Herafturat kemur, at Ísland heldur ikki enn hevur avgjørt sína støðu til EFTA

Áðrenn árslok 1969 skulu reglur um handil við djúpfrystum fiskafløkum aftaná 1. januar 1970 vera gjørdar.

Kønir útflutningsmenn halda, at Føroyar, sleppa fær sær upp í EFTA, eiga at vissa sær í hvussu er ein árligan útflutning uppá 3.000 tons av fiskaflaki til Bretlands. Bretski fiskamarknaðurin hevur týdning fyri Føroyar, serliga tí at hann tekur støg av flaki, ið ringt er at selja á øðrum marknaðum, og tí at hann er so mikið nær, at flutningurin liggur vel fyri, bæði viðv. hóskandi frystiskipum og lítlum avskipingum. Í 1965 var útflutningurin bert 528 tons, men líkindi eru at hekka hendu útflutning nakað og harumframi kemur, at fyrsti hekkutrolarin, sum serliga fer at hava áhuga í hesum marknaði, longu er keyptur. Hesin trolari fær væntiliga 12/1300 tons av flaki árliga. Áðrenn endalig støða verður tikin til EFTA, verður neyðugt at tingast fyrst og fremst við Danmark, men eisini Bretland, so gjølliga fæst at vita hvørja nøgd Føroyum lutast.

Á sumri 1965 gjørdu Føroya reiðarafelag og útflutningsfeløgini sáttmála við «British Fishing Industry Committee on Imports of Fish from the Faroes». Sáttmálin kom í gildi 1. oktober 1965 og stendur við í 5 ár. Eftir hesum sáttmála kunnu Føroyar flyta út djúpfryst flak til Bretlands fyri stpd. 200.000 (stpd. 300.000) árliga. Hetta svarar til eina útflutningsnøgd upp á umleið 1.700 tons. Tað er ikki greitt, hvørja ávirkan limaskapur í EFTA fær á heuda sáttmála, og um hann stendur við.

Bretland hevur annars eisini vissað sær at fáa tikið tilsøgnina um at rokna fiskafløk fyri iðnaðarvøru aftur, um so er, at stórvegis broyting

hendir í kappingarlíkindunum í fiskivinnuni. Bretland hevur boðað frá undir lingingunum, at her verður sipað til ein og hvønn útflutning av fiskimarkinum, harímillum útflutning av føroyskum og grønlendskum fiskimarki til bága fyri bretskan fiskiskap. Imóti hesum hava Danmark og Noreg flutt fram, at órimiligt hevði tað verið, um Bretland tekur tilsøgnina aftur, um so er, at fiskimark verða útflutt samb. millumlanda avtalu.

3. Føroyskar útflutningsvørur (sáttmálans skjal E).

Hesar vørur eru:

ísfiskur
Hemari
Síld
Saltfiskur
Klippfiskur
Saltsild

Fyri innflutning av hesum fiskavørum, ið vanligu reglurnar um avtøku av tolli og kvantitativum restriktiónum galda ikki, hava limalondini — kortini ikki Bretland — landið seg til ikki at hækka tollin ella seta í verk ella nøra um kvant. restriktiónir. Bretland hevur ikki kunnað gingið undir hesa regla, men hevur váttað, at landið hevur ikki í hyggju at hækka tollin ella seta í verk kvant. restriktiónir fyri hesar vørur.

4. Mál og mið fyri samhandli við fisk.

I 27. art. er sett upp generell mál og mið fyri samhandli við fiski. Felagsins endamál er limalandanna nationali politikkur og serlig viðurskifti tikin við í metingunum at vaksa um samhandilin við fiski og øðrum úrdráttum úr havinum og skapa rímiliga javnvág hjá limalondunum, hvørs búskapur serliga hongur í útflutningi av hesum vørum.

Eftir 28. art. átti EFTA-ráðið áðrenn 1. januar 1961 at hava eina kanning av samhandlinum við fiski (Skjal E-vørum). Henda kanning skuldi verið endað innan 1. januar 1962, men er ikki komin í lag enn, bæði tí at summi EFTA-lond (Bretland, Danmark) hava tingast við EEC og tí at menn høvdu vónað, at Kennedy-fingingarnar bóru á mál og harvið vóru skaptir møguleikar fyri lætta í samhandilskorunum fyri fiskavørur yvirhøvur.

5. *Innflutningsgjøld.*

Samb. løgtingslóg nr. 23 av 11. februar 1950 við seinni broytingum verður kravt innflutningsgjald av nógvum vørum (27 høvuðspos. við 82 undirnr.) og harumframt eitt generelt innflutningsgjald (Umsetningsgjald) uppá 5% (løgtingslóg nr. 9 av 27. apríl 1961 við seinni broytingum) við mongum undantøkum, eitt nú: Mjøl, sukur, grovt salt, kraftfóður, brenni, brenniolja, gass, skip, tunnustavir, medisinvørur; bøkur; tíðarrit, blað, fiskireiðskapur og skipaútgerð. Harafturat verður kravt framleiðslugjald av øli, mineralvatni o. t., chokolatu- og sukurvørum. Hetta framleiðslugjald er væl lægri enn innflutningsgjaldið á hesum vørum. Tað kann sigast, at øll hesi gjøld verða kravd av fiskalum grundum og eru at kalla innanlendis óbeinleiðis skatting, ið av praktiskum grundum verða kravd við innflutningi. Men hesin uppkrevjingarháttur kann føra við sær ein verju av føroyskari framleiðslu í løtuni og komandi framleiðslu, háast hetta ikki beinleiðis er endamálið við hesum innflutningsgjøldum. Framleiddar í Føroyum verða eisini summar vørur, ið einki framleiðslugjald verður kravt fyri, men einans vanligt innflutningsgjald av tilfarinum, nevnast kunnu klædnavørur, fiskahermetikkur, mjólk (Konserves), køkur og møblar.

Tað er væntandi, at EFTA-londini ikki uttan viðari kunnu góðkenna núgaldandi skipan viðvíkjandi uppkrevjing av innflutningsgjøldum, gerast Føroyar lutur í EFTA. Limalondini fara uttan iva at flyta fram, at skipanin fremur verju av føroyskari framleiðslu, ið í summum førum er rættuliga lýðandi. Hetta kann bert sigast um vørur, ið eru roknaðar upp í sáttmálans skjal D (Landbúnaðarvørur) og E ella um vørur, sum Danmark annars hevur undirgivið sáttmálans greinir um tollavløku samb. bilaterala avtalu millum Danmark og onnur limalond.

Høvuðsreglan verður, at føroyskar vørur magu bera sonnu gjøld, sum tær útlendsku EFTA-vørurnar og tær vørur, ið Danmark hevur veitt øðrum limalondum EFTA-tollviðgerð. Tað ber til á hesar vørur at leggja innanlendis umsetningsgjald, ið samantalt við innflutningsgjøldunum av innflutum tilfari, verur tað sama sum samlaða innflutningsgjaldið á útlendskum vørum. Eitt stig á hesi leið er framleiðslugjaldið, ið longu er lagt á summar føroyskar vinkaðar vørur. Og annars kann javnvág fáast til vega við avtøku av teim innflutningsgjøldunum, sum bera verju við sær, við øðrum orðum munin millum innflutningsgjøldini á útlendskum vørum og teim byrðum, ið føroyskar vørur bera. S EFTA er annars sjónarmiðið tað, at tollur ella gjald er ikki «fiskalt» frá teirri stund, at vørur verða framleiddar at *selja*, hvussu lítil framleiðslan nærmáta er.

Listi eigur at verða gjørdur yvir allar lær vørur, ið virkaðar verða í

Føroyum, og sum koma undir reglurnar um tollavtøku, og yvirlit yvir hvørji gjøld, ið lagd eru á innflutlar vørur av hesum slagi og hvørji gjøld tær føroysku bera. EFTA-londini krevja sær slíkan lista lagdan fram. Við hesum grundarlagi ber til at kanna og lingast um og royna at fáa í lag serskipan, t.d. liðandi og longri avtøku av gjøldunum yvir longur tíðarskeið enn sáttmálin annars fyrisetur.

EFTA fer annars at krevja, um innflutningsgjøldini fyri vørur, framleiddar í Føroyum skulu standa við, at ein periodisk kanning fer fram av framtøkuni av føroyskari framleiðslu og ídnaði til tess at vissa sær javnvág millum úflendskar og føroyskar vørur. Annars eru líkindi til, skuldu Føroyar ynskt toll ella aðra verju fyri føroyskum vørum í framtíðini, ið ikki nú verða framleiddar í Føroyum, at fáa í lag serligar avtøkuskipanir av tolli og/ella øðrum gjøldum, so Føroyar kundu fingið longu ryvirgangstíð fyri ídnaði sínum, ið ætlast at standa á veikum føti, og t.d. fáa frávik frá EFTA-sáttmálans basisdato fyri tey innflutningsgjøld, ið annars skulu avtakast, soleiðis at avtøkan verður liðandi og roknað út frá núgaldandi føroyskum gjøldum.

6. Kvantitativar innflutningsrestriktiónir.

Føroyska valutaskipanin (Løgtingslóg nr. 26 av 24. februar 1950) hevur til endamáls at tryggja, at innflutningur landsins hvílir á tryggum grundarlag og at gjaldingarorkan er sum hon eigur. Hetta verður framt gjøgnum valutaráðið, ið veitir innflutnings- og gjaldingarloyvi til allan innflutning úr útlondum. Innflutningurin úr Danmørk — burtursvið frá skipum yvir 20 br.reg. t. og motorakførum — er frælsur. 1% verður krevt í valutagjaldið (Løgtingslóg nr. 37 av 16. mars 1950). Valutagjald verður latið fyri innflutning av vørum á bundnum lista úr Danmørk og øllum innflutningi úr øðrum londum.

Innflutningsrestriktiónirnar er meira eftirlits- og registreringsatgerðir enn handilsligar atgerðir, men eru kortini seinastu árini nýttar til tess at forða innflutningi av gomlum fiskiskipum og norskum sildutunnum.

Slíkar restriktiónir samrýma ikki við EFTA-sáttmálans forboð um kvantitativar restriktiónir og koma undir sáttmálans reglur um avtøku av slíkum.

Vilja Føroyar uppihalda hesum reglum verður neyðugt at broyta rættargrundvøllin undir teim føroysku innflutningsrestriktiónunum, so eingin ivi verður um, at tær einans hava eftirlits- og registreringsendamál, so tær kunna koma undir EFTA-sáttmálans undantaksreglu viðvíkjandi slíkum atgerðum, sbr. 12.art., d.

Vilja Føroyar framvegis uppihalda innflutningsrestriktiónir til tess at fyribyrgja innflutningi av ávísum vørum, verður neyðugt at søkja EFTA-ráðið um serloyvi til hetta samstundis sum umhiðið verður at

gerast lutur av EFTA. Treytin fyri slíkum serloyvi verður, at EFTA-londini treyta sær, at stigvis liberalisering fer fram.

Valutagjaldið má væntiliga takast av, tí samb. EFTA-sáttmálans 3. art., 1. gr. skulu slík gjøld takast av samb. sáttmálans vanligu reglur.

7. Innflutningsgjøld.

Samb. EFTA-sáttmálans 8. art. er flutningstollur og gjøld bannað. Løgtingslógirnar nr. 12, 13 og 14 av 29. mars 1963 tóku av gjøldini til landskassan bæði útflutningsgjaldið og vrakigjaldið; eftir at gjaldið til Lønjavningargrunn skipsfiskimanna av saltfiski og ísfiski, landaður í útlendskari havn, og harumframmi verður grunninum veittur studningur á figgjarløgtingslógini.

Lønjavningargrunnurin hevur til endamáls bæði at veita (føroyskum fiskimonnum) ískoyti til fiskaprísin og at vissa teimum minstuløn. Henda skipan hevur reist ivamál í samband við EFTA-sáttmálan bæði viðvíkjandi útflutningsgjøldunum og studninginum til ískoyti til fiskiprísin. Við tað at prísískoytið verður latið til alla veiðina og ikki bert til fiskavørur, ið útfluttar verða, verður hildið at studningsskipanin kann samrima við EFTA-sáttmálan. Tað skal leggjast afturat, at 13. art. bannar rikisstudning. Limalondini eru kortini samd um, at almennur studningur til fisk, og hóast djúpfryst fiskafløk verða framleidd av hesi rávøru og eru ikki tald á E-skjalinum, skal ikki koma undir hesa sáttmálagrein.

Lønjavningargrunnurin og grønlendski konjunkturjavningargrunnurin hava felags eyðkenni, báðir hava sosialpolitiskt endamál. Tá ið Grønland (í 1961) gjørdist lutur av EFTA-umráðnum varð gjørd undantaksavtala við EFTA viðvíkjandi grunninum. Slík seravtala fæst kanska eisini í lag viðvíkjandi lønjavningargrunninum, um Føroyar søkja limaskap í EFTA og fær vilja uppihalda útflutningsgjøldum ið annars samrima ikki við EFTA-sáttmálan.

8. Kvantitativar útflutningsrestriktiónir.

Til útflutnings av fiski og fiskavørum krevst loyvi frá landsstýrinum (Løgtingslóg nr. 15 av 15. september 1948). Eftir EFTA-sáttmálans 11. art. er slík fyrimæli bannað, tá ið lað snýr seg um vørur, ið eru ikki taldar í sáttmálans skjal E. Sáttmálans 12. art. umtalar undantaksreglur, ið nerva ikki samhandilin, men eru neyðugar til tess at vissa sær, at lógir og onnur almenn fyrimæli verða hildin. Óvist er, um føroyskar útflutningsrestriktiónir kunnu koma undir hesa undantaksreglugrein.

Annars fyrisetur henda grein, at útflutningsbann og útflutningsrestriktiónir skulu vera avtiknar í seinasta lagi 31. desember 1961. - Fyri-

maelini í løgtingslóg nr. 26 av 24. februar 1950 um útflutningseftirlansan mugu avtøkast fyri tær vørur, ið koma undir EFTA-tollavtøku.

EFTA-land kann kortini uppihalda reglur um útflutningsloyvi, tá ið keypari ynskir at so skal vera og endaliga, tá ið restriktiónin hevur til endamáls at vissa góðsku á vørumi.

9. Endurgjald av tolli og øðrum gjaldum.

Landsstýrið hevur samb. løgtingslóg nr. 35 av 12. juni 1962 heimild til at endurrinda goldnan tolt, innflutnings- og framleiðslugjøld, tá ið vøra, framleidd í Føroyum, verður útflutt. Eftir sáttmálans 7. art. kann limaland aftaná 1. januar 1970 nokta fyri EFTA-viðgerð av EFTA-vørum, tá ið útflutningslandið hevur veitt tollendursgjald við útflutningum. Limalondini eru ikki enn sand um, hvussu 7. art. endaliga skal setast í verk.

Viðvíkjandi endurgjaldi av goldnum innflutningsgjaldi fyri ráevni, ið virkini hava nýtt til framleiðslu til føroyskan marknað skal nevnast, at verður endurgjaldið bæði latið til framleiðsluna til umsetning í Føroyum og til útflutnings, samrímar skipanin við EFTA-sáttmálan.

Eftir teirri føroysku skipan verður ikki latið innflutningsgjald fyri skip, meðan gjald er á lutum og ráevnum til skip. Endurgjaldið verður latið sum eitt fast prosentgjald (3,75%) bæði við innanlendis sølu og til útflutnings. Í tingingunum í EFTA um «draw-backs» hevur skipasmíð verið hildið uttanfyri, so hesin ídnaður skuldi ikki komið tvørt fyri, um so EFTA kortini avtekur atgongdina til tollendurgjald. Her skal leggjast afturat, at øll mál viðvíkjandi sigling og sjóferðslu (Shipping) eru uttanfyri sáttmálan.

10. Niðurseta og virkisrættur.

16. art umfatar niðursetu- og virkisrættin. Eftir hesum artikli er høvuðsreglan, at limalondini skulu viðurkenna, at restriktiónir mótvegis annaru limalanda borgarum, teirra niðursetu og økonomiska rakstri, verða ikki framdar soleiðis, at hesir borgarar fáa verri virkisumstøður enn landsins egnu borgarar. Eftir 2. gr. í løgtingslóg nr. 12 av 10. mars 1964 er tað — á landleiðini — forboðið fiskiførum, sum hava heinslað og eru skrásett í fremmandum landi og fremmandum ríkisborgarum at røkja vinnuligan fiskiskap yvirhøvur, herundir fáast við slíkt, ið stendur í samband við fiskiskap, so sum umskiping av fongi, virking, pakking ella onnur handfaring av fiski ella fiskavøru, umskiping av útgerð ella ankring við ti í hyggju seinni at taka lut í umskiping av fiski ella taka inn útgerð. Somuleiðis (3. gr.) er forboðið á landleiðini at fiska við troli, skovlváð og snurriváð. Serloyvi verður bert givið til royndarfiskiskap (vísindaligan). Hanafturat kemur, at ikki er loyvt at flyta inn fisk,

ið veiddur er við skipi, sum er ikki heimahoyrandi í Føroyum (Kunngerð nr. 21 av 25. september 1948) og tað sjálvt um fiskurin er veiddur uttan fyri fiskimark. Landleiðin er — sum er — grunnurin innanfyri linju, ið gongur 12 fjórðingar frá beinum grundlinjum. Hetta er ein stórspurningur í samband við EFTA, tí enn eru menn ikki samdir um, at fiskimarksmálið hevur fingið endaliga loysn. Tá ið talan var um at fara í EEC var hetta mál eisini frammi. Verður farið uppí EFTA er neyðugt, at vissa er fingin fyri, at fiskiskapur á landleiðini bert verður loyvdur landsins íbúgvum. Føroyskur búskapur hongur í fiskiskapinum og aðrir møguleikar til økonomiskt virksemi eru smáir.

Skuldu útlendskar fyritøkur havt hug at fáa sær støðir á landi til at reka fiskiskap frá, ber hetta bert til á landleiðini, um so er, at fiskiskipið hevur føroyskt (ella danskt) flagg og mannað við føroyingum (og/ella dønum) Viðvíkjandi fiskiskapi uttan fyri fiskimarkið er tað ein treyt fyri landing í Føroyum, at skipið er skrásett í Føroyum.

Viðvíkjandi hvalaveiðuni er líkt til, at vit fáa uppihildið serrættin til hvalaveiði sbr. lóg nr. 109 av 15. mars 1939.

Føroysku reglurnar um vinnubrævi (-rætt) og partafeløg eru so mikið líkar teim dansku reglunum, at ivaleyst kundi fingist skipan við EFTA um hesi málsøki. EFTA hevur sett eina starvsnevnd, ið hevur kannað reglurnar í 16. art. Frásøgnin er liðug, men enn ikki viðgjørd í EFTA-ráðnum og tí er ikki endalig støða tikin til hesi ivamál, heruppíroknað «framleiðsluvirksemi», sum júst nerta við teir ivaspurningar, ið reistir eru frá føroyskari síðu. Tí verður neyðugt, um Føroyar fara uppí EFTA, at fáa í lag undantaksstøðu.

11. Líkindi til sersáttmálar og útmelding.

Samb. 43. art. kann limaland seinni skjóta upp, at sáttmálin fær gildi í londum, hvørs millumlandamálum limaland hevur ábyrgdina av, uppá kor og treytir í serskipanum, tá ið skipanin skapar rettindi og treytir í bæði borð. Tá so er, skulu ráðleggingar vera millum øll limalondini og ráðið kann gera av at viðurkenna kortini og treytirnar fyri slíkum serskipanum.

6. gr. sigur, at verður land, ið hevur serskipan, suverent riki, verður skipanin í gildi um so er, at hetta nýggja riki biður um at so skal vera. Sáttmálin verður ígildi til hann heldur uppat sum fyriskrivað fyri onnur limalond, ella at landið verður viurkent samb. 41. art. sum vanligur limur.

Við 12 mánaða varsli kann limaland loysa territorium (43. art.) úr limaskapinum.

IV. Føroya handil við EFTA (EEC og aðrar marknaðir.)

Uttanlendishandilin hevur meira at týða fyri Føroyar enn flest onnur lond. Útflutningurin í 1965 var 178 milj. kr. ella umleið 5.000 kr. uppá hvønn íbúgva. Framleiðslan er eintáttað og nógv tann størsti parturin av nýtslu og framleiðsluvørum verður innfluttur. Til tess at geva eina mynd av útflutningshandlinum, hvussu hann skiftist millum 1) EFTA-lond, 2) EEC-lond og 3) aðrar marknaðir er fingið til vega yvirlit yvir okkara meginútflutningsvørur: Saltfisk, klippfisk og fløk. Av hesum vørum fóru — roknað í peningavirði — 20,95% til EFTA, 39,36% til EEC og 39,69% til aðrar marknaðir (Skjal).

Eingin vissa er fingin fyri, at Føroyar fáa fullan fyrimun av limaskapi alt fyri eitt viðvíkjandi tolllætta fyri fiskaflak og heldur nevndin, at Føroya landsstýri eigur at halda fram við tingingunum við uttanríkisráðið (og EFTA-ráið) og enda hesar tingingar í summar, so allir ivaspurningar eru loystir áðrenn 31. december 1966, tá ið flakatollurin heilt fellur burtur limalandanna millum.

Nevndin vísir til hesa frágreiðing til tingið og setir í staðin fyri landsstýrisins uppskot í løgtingsmáli nr. 40/1964: Limaskapur í EFTA fram hetta

Uppskot
til samtyktar

Føroya landsstýri verður álagt at halda fram við kanningunum um treytir fyri upptøku í EFTA og hvørjar avleiðingar limaskapur hevur fyri hesi innanlendis málsøki:

1. Innflutningsgjøldini og lóggávuna um tey,
2. Útflutningsgjøldini,
3. Lønjavningargrunnin og virki hans og prísfrykoytisskipanina,
4. Fiskimarkið,
5. Niðursetu- og virkisrættin.

Endaligu treytirnar fyri limaskapi verða at leggja fyri Føroya løgting á ólavsøku 1966.

Útflutningur Føroya 1965: Saltfiskur, klippfiskur og fryst fiskafløk, skipaður eftir marknaðum

	E-FTA						EEC						AÐRIR MARKNAÐIR					
	Saltfiskur		Klippfiskur		Fryst fløk		Saltfiskur		Klippfiskur		Fryst fløk		Saltfiskur		Klippfiskur		Fryst fløk	
	tons	1000kr.	tons	1000kr.	tons	1000kr.	tons	1000kr.	tons	1000kr.	tons	1000kr.	tons	1000kr.	tons	1000kr.	tons	1000kr.
Danmark	545	1212	110	303	190	565												
Noreg	6113	15648	—	—	200	900												
Svøriki *)	—	—	—	—	129	596												
Bretland	1080	2074	—	—	528	1928												
Italia	...	...	...	...	...	...	11553	28205	400	1139	—	—						
Grikkaland	...	...	...	...	...	...	4875	12548	—	—	—	—						
Vesturtýskaland	...	...	...	...	...	...	20	47	—	—	425	1697						
Spania	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	6641	18421	1015	4295	—	—
Eysturtýskaland	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	—	—	—	—	41	81
Tjekkoslovakiið	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	—	—	—	—	95	219
U.S.A.	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	—	—	—	—	1407	5521
Brasilia	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	...	—	—	3535	15463	—	—
	7738	18934	110	303	1047	3989	16448	40800	400	1139	425	1697	6641	18421	4550	19758	1543	5821

	Saltf. 1000 kr.	Klippf. 1000 kr.	Fløk 1000 kr.	Tils.		
EFTA	18.934	303	3.989	23.226	=	20,95%
EEC	40.800	1.239	1.697	43.636	=	39,36%
Aðrir marknaðir	18.421	19.758	5.821	44.000	=	39,69%
	78.155	21.200	11.507	110.862	=	100 %

*) Umfram hesi 129 tonsini av flaki til Svøríkis hevur p/f Dávur í Gerðum latið 45 tons fyri fob-virði kr. 185.000 til «K.F.» Svøríki.

2. viðgerð 13. mai.

Uppskotið frá nevndini samtykt 26-0.

---

78. Broyting í lögtingslóg um frítíð við lön

Ár 1966, 13. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er reist av Føroya arbeiðarafelag. Lagt fram av Petur Mohr Dam, løgtingsmanni, beint í umsóknarnevndina og haðani í lógarnevndina.

Við løgtingslógini frá 3/5 1957 varð frítíðarlønin broytt frá 4% til 6%, samstundis sum frítíðarlønin varð longd frá 14 døgum til 3 vikur.

Síðan er tað hent, at í Noreg og Svøríki er frítíðin longd til 4 vikur og frítíðarlønin til 9 og 9½%.

Í Danmark er frítíðarlønin framvegis 3 vikur, men tann danska frítíðarlógin setir frítíðarlønina til 7¼%.

Lógarnevndin hevur havt málið til viðgerðar og spurt, hval viðkomandi felløg halda. Føroya handverkarafelag tekur undir við Føroya arbeiðarafelag, meðan Føroya arbeiðsgevarafelag og Føroya handverksmeistarafelag føra fram, at núgaldandi sáttmálar byggja á núgaldandi frítíðarløn.

Eftir íslendska frítíðarlógini frá 1961 er frítíðarlønarprocentið 7.

Ein minniluti, Sigurð Joensen og Poul Jacob Olsen heldur ikki nakra grund vera til, at frítíðarlønin í Føroyum skal verá minni enn í hinum

leimum norrønu londunum, og mælir til, at frítíðarlønin, sum støðugt hevur verið ásett við løgtingslóg, nú verður sett til 7%.

Viðmerkjast mó tó her, at tey 7% í frítíðarløn hjá íslendingum, hvat viðvíkur eftirvinnu, næstur- ella halgidagsvinnu, verða voldin av teirri upphædd, sum greidd hevði verið, um tað hevði verið dagvinna, eftir tí ið upplýst er.

Meðan hetta mál hevur verið á tingi, hevur Føroya fiskimannafelag við skrivi dagf. 15. apríl 1966, undirskrivaðum av formanninum og teimum finm nevndarlimunum, lagt skriv inn á ting um, at fiskimenn fáa sonn søndir, hvat frítíðarløn viðvíkur, sum arbeiðsmenn á landi, bæði hvat frítíðarprocenti viðvíkur og í tann máta, at fiskimenn eisini fáa frítíðarløn av øllum forvinningi eins og arbeiðsfólk á landi.

Tað er at siga, at meðan frítíðarløn arbeiðsmanna hevur verið skipað við lóg, hevur hon hjá fiskimonnum hígartil verið skipað við sáttmáluan millum fiskimannafelagið og útgerðarmannafelagið.

Eftir sáttmálanum millum Føroya fiskimannafelag og reiðarafelagið, sum gekk út 1. april 1966, var frítíðarlønin 6% roknað av í mesta lagi 1.350 kr. um mánaðin. Undir samráðingunum kravdi Føroya fiskimannafelag 6% í frítíðarløn av óavmarkaðari inntøku. Seningsmannauppskotið varð, at frítíðarlønin skuldi vera 6% av í mesta lagi 1.600 kr. um mánaðin. Bæði fiskimannafelagið og reiðarafelagið góðtóku hetta seningsmannauppskotið, ið umframt broytingina viðvíkjandi frítíðarlønini innihelt ymsar aðrar broytingar.

> Um hetta skrivar Fiskimannafelagið í skrivi sínum til løgtingsins: «Seningsuppskotið innihelt ikki ta avtøku av «frítíðarlønarloftinum», sum vit høvdu vónað, men møguleikar vóru bert annaðhvørt at taka við ella havna seningsuppskotinum. Til tess at fyribyrgja vinnusteðgi tóku vit við í tí treysti, at Føroya Løgting eftir áheitan fer at lata tær fyriskipanar, sum lóggávuvaldið fyriskipar vinnufólkinum til hata, eisini at galda fyri fiskimenninar.
>
> Loyva vit okkum tí við hesum at heita á Føroya Løgting um at lata komandi frítíðarlønar-procent, roknað av allari løn, eisini at galda fyri fiskimenn.»

Tað má ásannast, at eftir at løgtingið við lógini nr. 41 frá 23. juni 1960 hevur fört ta principbroyting inn í frítíðarlógina, at frítíðarlønin verður goldin av øllum forvinningi, sum er undir skattaskyldu, er tann grundin til at hava nakað loft yvir frítíðarløn fiskimanna burtur. Ein royndverulig grund til at taka hetta sama loft av er tann, at sum nú er, verður tað júst tey skipini, sum leggja minst til góðar, ið koma undir at gjalda fulla frítíðarløn, meðan tey skip, har hýran er kr. 1.600,— ella meira pr. túr pr. mánaða og sostatt vituliga hava lættari við at gjalda frítíðarløn,

sleppa undan at gjalda frítíðarløn í mun til tað, sum liggur omanfyri kr. 1.600,— um mánaðin.

Sami minniluti mælir tí til at ganga ynskjum fiskimannafelagsins á møti og setir fram fylgjandi uppskot við teirri viðmerking, at skiparin eigur ikki at falla inn undir heiti «mynstraður fiskimaður».

Løgtingslóg
um
broyling í løgtingslóg nr. 31 um frítíð við løn
frá 19/3 1951 við seinni broytingum.

§ 1.

§ 1, 3) í lógini fær hetta iskoyti: sbr. tó § 7 1. stk. 2. pkt.

§ 5, 1. stk. í lógini fær hesa broyting: 6% verður 7%.

§ 7, 1. stk., fær hetta iskoyti sum nýtt 2. punktum:

Mynstraðir fiskimenn eru undir hesi lóg, og er frammanfyristandandi punktum ikki galdandi fyri teir.

§ 2.

Henda løgtingslóg gongur í gildi beinanvegin.

Donsk text: § 1:

§ 1, 3) i loven får denne tilføjelse: jfr. dog § 7 1. stk. 2. pkt.

§ 5, 1. stk. i loven ændres således: 6% ændres til 7%.

§ 7, 1. stk.: får den tilføjelse som nyt 2. punktum:

Mønstede fiskere omfattes af denne lov, medens foranstående punktum ikke gælder for deres vedkommende.

§ 2: Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Ein minniluti Sámal Petersen mælir til broytingina viðv. § 5, 1. stk., at 6% verður 7%.

Ein minniluti: Poul Petersen og Trygve Samuelsen heldur, tað ikki verða rætt, at tingið tokur fram í verandi sáttmáler, hvat frítíðarløn fiskimanna viðvíkur uttan, at annar parturin er spurður. Setur tí einki uppskot fram.

2. og 3. viðgerð 14. mal.

Broylingaruppskotið til § 7, stk. 1 var sett undir atkvøðu við navnakall:

Ja atkvøddu: J. Lindenskov, J. H. Danbjørg, J. Fr. Øregaard, Gunnar Poulsen, Leon oensen, J. P. Davidsen, O. Schrøter, Fr. Hansen;

E. Paturssøn, P. J. Olsen, H. J. Ellingsgaard, S. Joensen, Johan Simonsen og Høldur Hansen.

Atkvødd á ikki: K. Wang, P. Petersen, Petur Christiansen, M. Johannesen, N. Holm Jacobsen, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, Reinold Thomsen, Hans Iversen, Kj. Mohr, Hans Lutzen; Hanus við Høgadalsá og S. Petersen.

Burtur J. Fr. Øregaard.

Uppskotið fall 14—0.

3. viðgerð 14. mai.

Lógaruppskotið so broytt samtykt 16—0.

---

79. Kunngerðarmál

Ár 1966, 14. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur lagt hetta mál fyri løgtingið við frásøgn um, at landsstýrið einki hevur at viðmerkja til, at fyriskipanin verður galdandi í Føroyum.

Á S. T. fundi í Geneve í 1958 varð undirritaður millumlandasáttmáli viðvíkjandi í «kontinentala soklinum». Henda kgl. fyriskipan ásetur nú, hvussu hesin sokkul verður avmarkaður, hvat Danmark viðvíkur, og at «dansk højhedsret» skal valda har.

Viðvíkjandi gransking og vinning av evnum í landgrunninum krevst eftir hesi sonu fyriskipan loyvi eftir ríkislógini frá 8. mei 1950. Tann lógin sigur í § 1:

«Råstoffer i kongeriget Danmarks undergrund, som ikke den 23. febr. 1932 har været undergivet privatøkonomisk udnyttelse her i landet,

(3) tilhører den danske stat. Efterforskning og indvinding af sådanne råstoffer forbeholdes staten».

Lógin er lýst í Føroyum.

Tað er at siga, at «råstoffer i undergrund» eftir heimastýrislógini er B-mál, og at mál er til viðgerðar á løgtingi um, at hetta eins og hini B-málini skulu vera A-mál.

Vísandi til tað, sum tilskilað er í álitinum mælir meirilutin (Poul Jacob Olsen, Poul Petersen, Samuel Petersen og Trygve Samuelsen til, at nevnda kunngerð verður lýst at galda í Føroyum.

Ein minniluti Sigurð Joensen má mæla tinginum frá at samtykkja hesa kunngering.

2. viðgerð 14. mai

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 17—7.

Fyrispurningur til lögmannin!

16. mars 1666

Harra løgmaður!

Sum tingmaður valdur fyri Suðurstreymoyar valdømi fari eg at loyva mær at koma við tveimum spurningum til tað háttvirda landsstýri, og við tað, at spurningarnir snúgva seg um ferðskumál, verða teir stíladir til løgmans.

Tann fyrsti spurningurin er um dýping av Streyminum.

Í tingsetuni 1961 varð uppskot til lóg um dýping av Streyminum samtykt við stórum meiriluta, og í gr. 1 í uppskotinum verður millum annað tikið soleiðis til: «Í Streyminum í Sundalagnum verður siglingarrenna dýpkað so mikið, at stór før fáa siglt ígjøgnum».

Í álitinum stendur, at málið var til viðgerðar í fíggjarnevndini, og at nevndin var á staðnum saman við Indsverkfrøðinginum, sókranstýrinum í Sunda sókn og øðrum skilamonnum har á staðnum. Menn vóru har samdir um, at bestu ráðini vóru at spreingja burtur á bæði borð, so at rennan verður bein. Hetta eru einir 100—150 metrar um at gera, og nevndin heldur tað vera eina yvirkomuliga uppgávu og mælir til at samtykkja uppskotið. Uppskotið var eisini samtykt við 21 atkvøðum móti ongari, men síðani er onki frætt aftur um málið.

Tí er tað, undirritaði loyvir sær at spyrja, hví onki er gjørt við hetta enn, og um ætlanin ikki er at seta hesa tingsamtykt í verk í summar?

Hin spurningurin er um atløgubryggju í Kirkjubø.

Í tingsetuni 1960 var hetta mál á tingi, og fylgjandi uppskot varð samtykt: «Landsstýrið verður biðið at útvega kostnaarætlan til gerð av atløgubryggju í Kirkjubø og fáa ummælir frá kommununum í Sandoy og Vágum um luttøku í útreiðslunum av tilíkari bryggju».

Tó at 5 ár eru liðin, síðani hetta varð samtykt, er onki frætt aftur um málið, tað tingmenn vita av.

Undirritaði loyvir sær tí at spyrja, um nakað er hent og hvat, og nær í málið kann ætlast at vera lagt aftur fyri tingið?

Á Føroya løgtingi 6. mars 1966.

Við hávirðing
Marius Johannesen

E. S. Sí Løgtingstíðindi 1962 bls. 208 og tingtíðindi bls. 24.

Fyrispurningur til rikisumboðsmannin!

17. mars 1966

Vil háttvirdi ríkisumboðsmaður svara mær uppá henda spurning:

Sambært samráðingar millum Føroya landsstýri og Natomyndugleikarnar yvir Føroyum, viðvíkjandi tí parti av Oyggjarvegnum, ið Nato eigur.

Nær kunnu vit vænta endaliga avgerð um ognarrættin, so almenn ferðsla kann fara fram við at binda landsvegin, frá Skeiðsá fyri norðan og Sundshálsi fyri sunnan, saman.

Tórshavn, hin 7. mars 1966.

Kjartan Mohr, løgtingsmaður.

Fyrispurningur til landsstýrismann Erlend Patursson!

1. apríl 1966

Harra landsstýrismaður!

Av tí at ein heldug framtíðar loysn av flogsambandinum við útheimin er av allar størsta týdningi fyri okkara samfelag, skal eg loyva mær at føra fram fylgjandi:

Sum øllum kunnugt varð flogvøllurin í Vágum av fyrsta sinni gjørdur av Bretum sum eitt kriggstiltak undir síðsta heimsbardaga. Tá ið kriggið var lokið, og Bretar fóru higan av landi, varð flogvøllurin av teimum handaður Føroya løgtingi sum ogn Føroya fólks. Flogvøllurin lá so ónýttur í mong ár, bert hendinga flogfar kom av og á og setti seg á vøllin. Um regluligt flogsamband var so statt ikki talan. Regtulig rutuflúgving millum Føroyar og útheimin byrjaði á sumri í 1963. Flúgvingin byrjaði seinru helvt av juli mánað og helt á í 2 mánaðar. Áðrenn hetta hendi, vóru ymisk tiltøk viðvíkjandi áhøtur á vøllin, bygging av avgreiðsluhúsum, uppseting av ymiskari útgerð o. a. farin fram; kostnaðurin var tilsamans um 780.000 kr., herav rindaði ríkiskassin teir tríggjar partarnar og landskassin tann eina.

Á vári 1963 hevði «Ministeriet for offentlige arbejder» heitt á luftfartsdirektoratið at kanna, um ikki var beinari at leggja ta endaligu lufthavnina aðrastaðni í Føroyum. Frágreiðingin frá hesi kanning varð landsstýrinum í hendi í januar 1964. Men hóast tað, lat landsstýrið ikki við seg koma og lá í meira enn eitt ár á rapportinum frá luftfartsdirektoratinum uttan at virða tingið so fræt, sum at senda tí eina frágreiðing viðvíkjandi úrslitinum av kanningunum. Tað skuldi einki minni enn ein løgtingssamtykt til fyri at fáa hana fram.

3. febr. 1965 samtykti løgtingið við 24 st. 0 fylgjandi uppskot, sum fíggjarnevndin einmælt hevði sett fram.

Uppskotið var soljóðandi:

«Tingið heitir á landsstýrið um at geva tí greinilígar upplýsingar um tað, sum fram er farið í flogmálinum».

Nú skuldi ein trúð, at tað bar ikki val til hjá landsstýrinum at tiga málið burtur longur. Ikki fyrr enn o. u. 2 mánaðir aftaná løgtingssamtyktina, tann 7. apríl 1965, kemur frágreiðingin frá landsstýrinum (sbr. løgtingsmál nr. 81/1964: Frágreiðing í flogmálinum).

Direktoratið meinar ikki, at tann flúgving, sum fór fram sumunarið

1963, er ognað at geva grundarlag fyri eini lýsing av tørvinum á flogsambandi millum Føroyar og útheimin, men við at meta viðurskiftini í Føroyum við viðurskiftini í Hetlandi og Orknoyggjunum, sum bæði hava flogsamband við útheimin, kemur tað til vissar konklusiónir, soleiðis t. d. at flogvøllurin eigur at verða 1600 m langur.

Tey pláss, tekin kann verða um at byggja tíðkan flogvøll á, eru leysliga teknisk og økonomisk kannaði, og eru hesi:

Í Eysturoynni: sunnan fyri Toftavatn.
Í Sandoynni: vestan fyri Sandsbygd.
Í Streymoynni: a) Norðan fyri Havnina í Hoyvikshaga, b) vestan fyri Glyvursnes, c) norðan fyri Kirkjubønes.

Luftfartsdirektoratið kom til tað úrslit, at mest talaði fyri at leggja hesa permanentu lufthavn sunnan fyri Toftavatn í Eysturoy; men direktoratið nevnir eisini í sama viðfangi, at tað hevur ikki verið gjørligt at taka øll relevant viðurskiftir við í kanningunum. Av tí, at direktoratið sigur, at ein nýggj lufthavn ikki verður liðug til brúks fyrr enn 3—4 ár aftaná, at játtan av byggipeningi fyriliggur, heldur landsstýrið vera rættast at lata allar møguleikar kanna gjøllari, hvar so flogvøllurin enn verður bygdur, sjálvt um hetta førir við sær, at bíða verður eftir endaligari avgerð í eini tvey ár. Landsstýrið endar sína frágreiðing soleiðis: «Landsstýrinum kunnugt hevur direktoratið søkt um játtan til áðurnevndu gjøllari kanning í sambandi við permanenta lufthavn, og verður tí roknað við, at hesar eisini byrja móti sumri».

Nú fari eg at loyva mær at spyrja háttvirda landsstýrismann: Er nakað hent í hesum máli — síðan vit fingu frágreiðingina tann 7. apríl í fjør — viðvíkjandi tí gjøllari eftirkanning, her er talan um og hvat er hent?

Á løgtingi, 22. mars 1966.

Virðingarmest

Johan M. Fr. Poulsen.

LANDSKASSIN

Rakstrarroknskapur

og

fíggjarstandur 1964-65

Rakstrarroknskapur landskassans fyri fíggjarárið 1964-65

(Samandráttur)

INNTØKUR:	Roknskapur	Fíggjarlóg
§ 1. Skattir	16.806.843,86	16.110.000,00
§ 2. Toll- og framleiðslugjøld	31.202.915,99	24.850.000,00
§ 3. Onnur gjøld	2.172.765,88	1.756.000,00
§ 4. Inntøkur av spæli	11.232,50	20.000,00
§ 5. Rentur og vinningsbýti	+882.721,62	+1.658.000,00
§ 6. Landsstovnar	68.774,70	+89.000,00
§ 7. Partur av avlopi danska tjóðarbankans	54.193,38	100.000,00
§ 8. Ymsar inntøkur	9.700,69	10.000,00
	49.443.705,38	41.099.000,00

ÚTREIÐSLUR:	Roknskapur	Fíggjarlóg
§ 10. Løgtingið	663.293,83	705.000,00
§ 11. Landsumsitingin	3.135.201,14	2.886.414,00
§ 12. Heilsumál	3.962.415,40	4.094.548,00
§ 13. Samferðslumál	6.279.731,62	6.300.000,00
§ 14. Skúlamál	5.816.274,62	5.782.850,00
§ 15. Vísind, bókmentir og list	685.964,81	714.800,00
§ 16. Fiskivinna, sigling o. t.	5.833.931,02	4.629.400,00
§ 17. Landbúnaður og matrikulering	1.380.467,57	1.337.300,00
§ 18. Handil, ídnaður o. t.	1.237.884,20	1.228.500,00
§ 19. Almenn forsorg	6.850.738,03	8.585.500,00
§ 20. Pensiónsútreiðslur	63.709,80	68.000,00
§ 21. Útr. í samb. við effektivar veðhaldsbindingar	11.056,10	400.000,00
§ 22. Aðrar og óvissar útreiðslur	119.889,61	115.000,00
§ 23. At leggja í ymsar grunnar v. m.	2.369.719,67	390.000,00
§ 24. Avdráttarburturleggingar	4.336.832,47	3.100.000,00
§ 25. Avskrivingar	309.130,10	697.000,00
§ 26. Ymsar ognarútreiðslur	+372,24	20.000,00
§ 27. Kassamunur	+540,15	
§ 28. Sett av móti tapi av lánum og veðhaldum	2.388.377,78	
§ 29. Yvirskot	4.000.000,00	44.688,00
	49.443.705,38	41.099.000,00

Fíggjarstøða landskassans pr. 31. mars 1965

(Samandráttur)

OGNIR

30.	Fastar ognir (hús v. m.)	10.945.711,40
31.	Skip	1.840.578,83
32.	Virðisskjøl	647.701,00
33.	Útlán	15.398.077,58
34.	Kassa, banka-, sparikassa- og giropeningur	13.944.219,58
35.	Tilgóðar í millumrokning	7.722.856,72
	Aðrar millumrokningar, forskot og ágóðar	2.446.833,11
36.	Inntøkueftirstøður	5.874.102,04
37.	Inntøkur viðv. 1964/65 aftaná 1. april 1965	9.110.528,04
	Goldið útreiðslur viðv. 1965/66 áðrenn 1. april 1965	1.583.738,12
38.	Aktivir hjá grunnum	26.688.082,91
39.	Aktivir hjá deponentum	885.857,27
	Ileggingarútreiðslur til avskrivingar yvir fleiri ár	17.882.809,28
		114.971.095,88

SKULD

40.	Lán			26.586.893,77
41.	Skuld í millumrokning			3.253.551,47
42.	Deposita			959.442,11
43.	Inntøka viðv. 1965/66 áðrenn 1. april 1965			509.329,58
	Útreiðslur viðv. 1964/65 aftaná 1. april 1965			10.955.752,74
44.	Ymsir grunnar			50.140.138,34
45.	Burturleggingar og avskrivingar			3.572.896,11
46.	Kapitalkonto			17.575.515,23
47.	Rakstraravlop í 1964/65		4.000.000,00	
	50% fl. í grunn til endurnýggjan av skipaflotanum	2.000.000,00		
	50% fl. til kapitalkonto	2.000.000,00	4.000.000,00	0,00
50.	Vinnulánsgrunnurin			1.417.576,53
				114.971.095,88

Ábyrgdir pr. 11/12 1964, smb. spesifikatión kr. 92.637.502,24.

FØROYA GJALDSTOVA, tann 21. oktober 1965.

N. Rasmussen.

Spesifikatiónir

til rakstrarroknskapin fyri fíggjarárið 1964—65

INNTØKUR

			Roknskapur	Fíggjarlóg
§ 1. SKATTIR				
1. Landsskattur:				
1. Høvuðsálikning : barnatilskot		15.252.138,00		
2. Tilflytarar		426.847,20		
3. Hækkanir		612.478,30		
		16.291.463,50		
4. Lækkanir og dupult skattað	434.647,66			
5. Strikað vegna andlát ella giftu	14.605,92			
6. Strikað vegna búfluttning	267.820,90			
7. Føroya Landsstýri eftirg.	66.276,08			
8. Úrslitaleys innbeintan	9.875,53	793.226,09		
			15.498.237,41	13.460.000,00
2. Fólkapensiónsskattur:				
1. Høvuðsálikning		1.384.442,40		
2. Tilflytarar		42.264,73		
3. Hækkanir		11.525,79		
		1.438.232,92		
4. Hækkanir og dupult skattað	16.783,75			
5. Strikað vegna andlát ella giftu	2.697,47			
6. Strikað vegna búfluttning	24.980,87			
7. Føroya landsstýri eftirg...	6.824,63			
8. Úrslitaleys innbeintan ..	465,48	51.752,20		
		1.386.480,72		
11. Sjómannskattur		48.539,80		
		1.435.020,52		
flutt til fólkapensión § 19-1-2		1.435.020,52	0,00	1.200.000,00
3. Avfanisgjald:				
1. Høvuðsálikning		346.110,60		
2. Tilflytingar		10.566,19		
3. Hækkanir		2.881,44		
		359.558,23		
4. Hækkanir og dupult skattað	4.195,92			
5. Strikað vegna andlát ella giftu	674,36			
At flyta	4.870,28	359.558,23	15.498.237,31	14.660.000,00

			Roknskapur	Figgjarlóg
Flutt	4.870,28	359.558,23	15.498.237,41	14.660.000,00
6. Strikað vegna búflutning	6.245,21			
7. Føroya landsstýri eftirgivið	1.706,15			
8. Úrslitaleys innheintan ..	116,37	12.938,01		
		346.620,22		
11. Sjómannsskattur		12.142,20		
		358.762,42		
flutt til konto f. avlamisgjald (rikiskassin)		358.762,42	0,00	300.000,00
4. Sjómannsskattur:				
1. Inngingin sjómannsskattur			720.255,00	650.000,00
5. Rentuskattur:				
1. Inngoldin rentuskattur ..			588.351,45	500.000,00
			16.806.843,86	16.110.000,00
§ 2. TOLL- OG FRAMLEIÐSLUGJØLD:				
Tollinntøkur:				
1. Innflutningstollur		28.812.291,75		
1a Bensintollur		1.703.849,44		
1b Ferðagóðstollur frá tolleftirlitnium		35.917,49		
		30.552.058,68		
÷ Afturrindan av tolli		÷28.766,39	30.523.292,29	24.250.000,00
2. Framleiðslugjald:				
1. Øl og mineralvatn		627.555,00		
1a Sukurvørur		186.272,49	813.827,49	600.000,00
3. Partur landskassan í tollsektum			18.032,50	
4. Tøkupeningur			3.192,71	
			31.358.344,99	
5. Finansministeriið, postverkið o. a.			÷ 155.429,00	
			31.202.915,99	24.850.000,00
§ 3. ONNUR GJØLD:				
1. Stuttleikaskattur			372.284,90	310.000,00
2. Gjald fyri spiritusskamtanarkort			26.640,00	20.000,00
3. Valutagjøld			643.759,50	550.000,00
4. Lestagjald av skipum			88.805,25	75.000,00
5. Loyvisgjøld			49.800,00	50.000,00
6. Motorgjøld			711.849,30	600.000,00
7. Gjøld viðv. sølu av motorakførum			165.654,90	110.000,00
8. Bøtur			554,03	1.000,00
9. Arvagjøld			84.891,67	40.000,00
10. Útflattningsgjøld			28.526,33	
			2.172.765,88	1.756.000,00

		Roknskapur	Fíggjarlóg
§ 4. INNTØKA AV SPÆLI:			
1. Gjøld við útgjalding av happardráttarvinningi		11.232,50	10.000,00
2. Avlop av happadráttí (fl. í grunn)		0,00	10.000,00
3. Gjald av totalisatori		0,00	0,00
		11.232,50	20.000,00
§ 5. INNTØKA AV RENTUM OG VINNINGSBÝTI:			
1. Renfuinntøkur:			
1. Sektarrentur av landsskatti	143.389,86		150.000,00
2. Pantigjald	4.300,15		5.000,00
		147.690,01	(155.000,00)
3. Rentur av banka-, sparikassa- og giropeningi		320.142,81	30.000,00
4. Rentur av útláni og øðrum ágóða		362.417,09	150.000,00
5. Rentur av obligatiónum		0,00	0,00
6. Vinningsbýti av partabrøvum		7.000,00	7.000,00
		837.249,91	342.000,00
2. Rentuútreiðslur:			
1. Rentur av føstum lánum	628.655,35		
2. Rentur av 1958 brævalánum	82.059,03		
3. Rentur av 1959 brævalánum	44.188,31		
4. Rentur av 1962 brævalánum	63.080,88		
5. Rentur av 5×4 mill. lánum	857.562,50		
6. Rentur av 1963 brævalán. (veðbaldslánið)	44.425,46	÷1.719.971,53	÷2.000.000,00
		-: 882.721,62	÷1.658.000,00
§ 6. LANDSSTOVNAR:			
1. Strandfaraskip landsins:			
1. Útreiðslur (undirskot) ..		-: 238.445,61	: 275.000,00
2. Tjalduns Apotekið:			
1. Inntøkur (yvirskot)		39.936,98	100.000,00
3. Telefonverkið:			
1. Inntøkur (yvirskot)		165.551,90	100.000,00
4. Útvarp Føroya:			
1. Inntøkur (yvirskot)		4.230,79	30.000,00
5. Oljugoymslurnar:			
1. Inntøkur (yvirskot)		66.294,00	70.000,00
6. Hvalastøðin við Áir:			
1. Útreiðslur (undirskot) ..		-:12.953,16	-: 10.000,00
7. Sildaoljuverksmiðjan:			
1. Inntøkur (yvirskot)		2.450,00	: 4.000,00
8. Flogvøllurin:			
1. Inntøkur			5.000,00
2. Útreiðslur			: 5.000,00
		0,00	(0,00)
At flyta		27.064,90	11.000,00

		Roknskapur	Fíggjarlóg
Flutt		27.064,90	11.000,00
9. M/S Leivur Øssursson:			
1. Inntøkur (yvirskot 1962—63)	108.932,68		
2. Útreiðslur (undirskot 1963—64 og 1964—65).....	÷67.032,88	41.899,80	÷100.000,00
10. Asfalteringsverk:			
2. Útreiðslur		÷190,00	0,00
		68.774,70	÷89.000,00
§ 7. 1. PARTUR AV TJÓÐARBANKANS AVLOPI:		54.193,38	100.000,00
		54.193,38	100.000,00
§ 8. 1. YMSAR INNTØKUR			
Traðarleiga	550,00		
Hvalagjald	1.102,90		
Søla av bókum	450,00		
Grindainntøkur	7.557,73		
Annað	40,06	9.700,69	10.000,00
		49.443.705,38	41.000.009,00

ÚTREIÐSLUR

§ 10. LØGTINGIÐ:			
1. Løgtingsmenn:			
1. Tingmannalønir	466.187,46		485.000,00
2. Dagpening til nevndar limir	6.028,46		15.000,00
3. Ferðaútreiðslur	24,00		5.000,00
4. Aðrar útreiðslur	100,00		0,00
		472.339,92	(505.000,00)
2. Løgtingshúsið:			
1. Hiti, ljós og reingerð	11.488,37		10.000,00
2. Viðlíkahald	19.949,81		25.000,00
3. Aðrar útreiðslur	12.746,93		6.000,00
		44.185,11	(41.000,00)
3. Løgtingstíðindi og kunngerðarsavn:			
1. Prenting	32.444,60		50.000,00
2. ÷ Inntøkur av sølu	4.840,80		6.000,00
		27.603,80	(44.000,00)
4. Grannskoðan:			
1. Statsautoriserað revisjón		119.165,00	115.000,00
		663.293,83	705.000,00
§ 11. LANDSUMSITINGIN:			
1. Løgmaður og landsstýri:			
1. Lønir	174.162,12		175.000,00
At flyta	174.162,12		175.000,00

		Roknskapur	Fíggjarlóg
Flutt	174.162,12		175.000,00
2. Borðfæ	15.000,00		15.000,00
3. Innbúgv v. m.	2.342,70		5.000,00
		191.504,82	(195.000,00)
2. Landsskrivstovan:			
1. Tænastumenn	213.501,19		203.000,00
2. Skrivstovufólk	137.007,27		166.000,00
3. Honorarir	3.450,00		4.000,00
5. Skrivstovulutir	42.554,65		24.000,00
6. Porto, telefon, telegr. og lýs.	32.566,41		23.000,00
7. Aðrar útreiðslur	6.788,75		5.000,00
		435.868,27	(425.000,00)
3. Fiskivinnuskrivstovan & idnastova			
1. Tænastumenn	51.550,42		66.000,00
2. Skrivstovufólk	35.421,65		28.000,00
5. Skrivstovulutir	2.874,86		4.000,00
6. Porto, telefon, telegr. og lýs.	21.342,40		10.000,00
7. Aðrar útreiðslur (ferða- og dagp.)	1.197,58		1.000,00
8. Royndir	1,10		2.000,00
		112.388,01	(111.000,00)
4. Umboð uttanlanda:			
1. Tænastumenn	27.772,92		27.800,00
2. Skrivstovufólk	23.595,96		22.000,00
4. Húsaútreiðslur av egnum og øðrum hølum	11.574,33		6.500,00
5. Skrivstovulutir	1.984,29		1.500,00
6. Porto, telefon, telegr. og lýs.	35.379,96		25.000,00
7. Aðrar útreiðslur	1.904,65		2.100,00
8. Ferða- og dagpeningaútreiðsl.	24.467,60		5.500,00
9. Útiviðbót.	21.000,00		21.000,00
10. ÷ Leiguinntøka	÷763,20		÷763,00
		146.916,51	(112.163,00)
5. Likningarráðið og komm. eftirlit:			
2. Skrivstovufólk	129.108,42		146.000,00
3. Honorarir og samsýningar	3.000,00		3.000,00
5. Skrivstovulutir	21.090,90		10.000,00
6. Porto, telef., telegr. og lýs.	4.069,51		3.500,00
7. Aðrar útreiðslur	2.473,79		5.500,00
8. Útr. í samband við nýggju skattalógina	23.124,43		60.000,00
		182.867,05	(228.000,00)
6. Manntalsstovan:			
2. Skrivstovufólk	31.900,55		28.000,00
3. Honorarir til kommunalar manntalsskrivarar	12.301,15		12.500,00
5. Skrivstovulutir	4.032,55		3.500,00
At flyta	48.234,25	1.069.544,66	1.115.163,00

			Roknskapur	Fíggjarlóg
Flutt		48.234,25	1.069.544,66	1.115.163,00
6. Porto, telef., telegr. og lýsingar		712,59		500,00
7. Aðrar útreiðslur		93.00		100,00
			49.039,84	(44.600,00)
7. Gjaldstovan:				
1. Tænastumenn		136.584,61		174.000,00
2. Skrivstovufólk		516.323,01		405.000,00
3. Honorarir og samsýningar		2.400,00		2.400,00
4. Húsaútreiðslur		52.115,13		37.000,00
5. Skrivstovulutir		146.317,85		80.000,00
6. Porto, telef., telegr. og lýsingar		79.480,74		75.000,0
7. Aðrar útreiðslur		12.421,68		10.000,00
		945.643,02		
8. ÷ Endurgjald Jarðarráðsins	4.000,00			÷4.000,00
9. ÷ Endurgjald Ríkiskassans	215.312,83			÷194.850,00
11. ÷ Endurgjald komm. fyri skattainnkrevjing	80.391,69	÷299.704,52		
10. Endurgjald til sýsluskrivstovurnar		645.938,50		
fyri skrivstovuhald		55.356,60		46.000,00
			701.295,10	(630.550,00)
8. Gjaldstovudeild í Klakksvík:				
2. Skrivstovufólk		43.681,98		44.000,00
4. Húsaútreiðslur		8.647,95		13.000,00
5. Skrivstovulutir		1.879,02		1.000,00
6. Porto, telefon og lýsingar		1.598,82		1.500,00
7. Aðrar útreiðslur		144,50		1.000,00
			55.952,27	(60.500,00)
9. Tolleftirlitið:				
1. Tænastumenn		174.960,56		243.000,00
2. Hjálpitollarar		59.387,12		
3. Honorarir		20.150,00		13.000,00
4. Húsaútreiðslur		11.617,13		20.500,00
5. Skrivstovulutir		3.510,70		500,00
6. Porto, telefon, telegr. og lýsingar		5.023,30		4.500,00
7. Aðrar útreiðslur		5.942,57		8.000,00
8. Ferða- og dagpeningur		10.309,03		5.500,00
			290.900,41	(295.000,00)
10. Valuta- og prísráðið:				
2. Skrivstovufólk		74.246,69		81.000,00
3. Honorarir og samsýningar		9.700,00		9.150,00
4. Húsaútreiðslur		7.801,80		6.000,00
5. Skrivstovulutir		6.208,08		3.000,00
6. Porto, telefon, telegr. og lýsingar		3.953,53		3.500,00
7. Aðrar útreiðslur		337,00		200,00
8. Ferða- og dagpeningur		7.226,94		12.000,00
			109.474,04	(114.850,00)
11. Landsverkfræðingsskrivstovan:				
1. Landsverkfræðingurin o. a.		350.653,21		388.000,00
2. Skrivstovufólk		115.747,35		108.000,00
At flyta		466.400,56	2.276.206,32	2.712.663,00

			Roknskapur	Fíggjarlóg
Flutt		466.400,56	2.276.206,32	2.712.663,00
4. Húsaútreiðslur		38.639,51		30.000,00
5. Skrivstovulutir		24.478,90		15.000,00
6. Porto, telef., telegr. og lýsingar		13.972,88		12.000,00
7. Aðrar útreiðslur		11.055,84		12.000,00
8. Ferða- og dagpeningur		32.884,81		30.000,00
		587,432,50		
9. ÷ Leiguinntøka	1.123,20			÷1.123,00
10. ÷ Endurgjald frá kommununum vegna havnaprojekt.	85.831,19	÷ 86.954,39		÷200.000,00
			500.478,11	(393.877,00)
12. Lønarráðið:			2.952,44	2.000,00
13. Búskaparráðið:			63.738,83	70.000,00
14. Ferða- og dagpeningur:				
1. Ymiskur ferða- og dagpeningur			93.466,18	35.000,00
15. Innheintingarútreiðslur:				
1. Innheintingarútreiðslur		5.469,53		
2. Bankakostn. av inngj. av skatti		6.271,05	11.740,58	3.000,00
16. Ognin Tinganes:				
1. Ljós, brenni, teingerð v. m.		48.138,85		42.200,00
2. Viðlikahald og ymiskar umbyggingar ..		88.072,06		70.000,00
3. Aðrar útreiðslur		4.408,50		5.000,00
		140.619,41		
4. Leiguinntøkur frá fremmandum		÷ 13.715,00		÷15.300,00
			126.904,41	(101.900,00)
17. Hagtal:				
1. Skrivstovufólk		54.356,27		55.000,00
5. Skrivstovulutir		5.348,00		7.500,00
6. Porto, telefon og lýsingar		0,00		2.000,00
7. Aðrar útreiðslur		10,00		1.000,00
			59.714,27	(65.500,00)
			3.135.201,14	2.887.940,00
§ 12. HEILSUMÁL:				
1. Landssjúkrahúsið (D. A. H.) útreiðslur ..		5.150.997,28		5.138.065,00
÷ Sjúklingagjald	652.021,66			÷615.250,00
÷ Ríkisstudning	1.839.396,85			÷1.655.640,00
÷ Aðrar inntøkur	136.509,84	2.627.928,35		÷115.000,00
			2.523.068,93	(2.752.175,00)
2. Klakksvíkar sjúkrahús, útreiðslur		1.544.773,30		1.186.100,00
÷ Sjúklingagjald	210.177,40			÷235.400,00
÷ Ríkisstudning	625.139,10			÷433.755,00
÷ Aðrar inntøkur	126.737,60	962.054,10		÷ 30.100,00
			582.719,20	(486.845,00)
3. Suðuroyar sjúkrahús, útreiðslur		1.099.151,36		1.066.400,00
÷ Sjúklingagjald	113.947,16			÷ 117.800,00
÷ Ríkisstudning	416.547,45			÷357.210,00
÷ Aðrar inntøkur	21.750,92	572.245,53		÷ 16.300,00
			526.905,83	(575.090,00)
At flyta			3.632.693,96	3.814.110,00

	Roknskapur	Fíggjarlóg
Flutt	3.632.693,96	3.814.110,00
4. Tuberklastøðin	59.503,85	63.338,00
5. Læknaútreiðslur	62.891,57	50.000,00
6. Ljósmøður	68.752,38	65.000,00
7. Útreiðslur viðv. farsóttum	868,83	2.500,00
8. Karantenuútreiðslur	75,00	100,00
9. Sjúkrahjálp	1.445,00	3.000,00
10. Studningur til hvíldarheimið »Naina«	50.000,00	50.000,00
11. Studningur til skúlatannlæknastovur	80.000,00	40.000,00
12. Útreiðslur til barnakonuferðir	1.925,00	2.000,00
13. Difteritis- & stívkrampakoppseting	4.259,81	4.500,00
	3.962.415,40	4.094.548,00

§ 13. SAMFERÐSLUMÁL:

1. Vegir og brýr:				
1. Nýggir vegir og vegabrýr		1.998.490,93		2.500.000,00
2. Breiðkan av brúm og rættan av sniðum		117.466,67		100.000,00
3. Til vegagrunnin:				
3a. Bilgjøldini	711.849,30			600.000,00
3b. Helvtin av Benzingjaldinum	851.924,72			500.000,00
3c. Játtan (4 × 250.000,00) 2. rata	250.000,00			250.000,00
		1.813.774,02	3.929.731,62	(3.950.000,00)
2. Studningur til havnagerðir:				
Útgoldin studningur 64/65		292.757,28		
Flutt rest játtan 1964/65 til status fyri játtaðan havnastudning		907.242,72	1.200.000,00	1.200.000,00
3. Studningur til lendingar:				
Útgoldin studningur 64/65		350.649,95		
Flutt restjáttan 1964/65 til status fyri játtaðan lendingarstudning		49.350,05	400.000,00	400.000,00
4. Flogvøllurin:				
Játtan flutt í grunn til byggjan av flogvølli			250.000,00	250.000,00
5. Strandferðslan:				
1. Flutt í grunn fyri nýbygging			500.000,00	500.000,00
			6.279.731,62	6.300.000,00

§ 14. SKÚLAMÁL:

1. Fólkaskúlin:				
1. Læraralønir		2.734.451,40		2.814.000,00
3. Skúlaráðgevin & skúlakonsulentur (løn v. m.)		33.522,95		25.000,00
4. Útr. viðv. skulabarnafluttningi		68.570,16		38.000,00
5. Eftirlønarstudningur		5.329,21		
6. Studningur til eftirlønargrunn lærananna		70.036,21		64.350,00
7. Afturrindan til kommunur fyri útr. av 8. og 9. skúlaklassa		13.584,00		23.500,00
8. Onnur rata fyri skúlabøkur til fólkaskúlan		20.000,00		
			2.945.493,93	(2.964.850,00)
At flyta			2.945.493,93	2.964.850,00

			Roknskapur	Fíggjarlóg
Flutt			2.945.493,93	2.964.850,00
2. Læraraskúlin:				
1. Næmingastudningur		15.000,00		15.000,00
2. Studningur til lestrargrunn		10.000,00		10.000,00
			25.000,00	(25.000,00)
3. Studentaskúlin:				
1. Lærarar		712.309,52		660.000,00
3. Studningur til næmingar		30.000,00		30.000,00
4. Søvnini		10.027,70		10.000,00
5. Ognarútreiðslur		51.599,25		43.000,00
6. Aðrar útreiðslur		14.060,45		12.000,00
		817.996,92		
7. Kostdeildin:				
8a. Lønir	30.822,50			
8b. Matur	46.170,77			
8c. Innbúgv	2.656,58			
8d. Brenni og ljós	4.280,01			
8e. Aðrar útreiðslur	12.339,29			
	96.269,15			
8f. Næmingagjald	÷42.705,00	53.564,15		48.300,00
		871.561,07		
8. ÷ Leiguinntøka av gamla húsi í Heydølum		÷6.720,00		÷ 10.100,00
		864.841,07		
9. Keyp av bókasavn.		40.696,00		40.000,00
			905.537,07	(833.200,00)
4. Føroya sjómannaskúli:				
1. Løtir		255.422,30		262.000,00
2. Amboð		4.723,58		8.000,00
3. Ognarútreiðslur		32.403,34		59.700,00
4. Aðrar útreiðslur		48.521,13		30.000,00
			341.070,35	(359.700,00)
5. Klakksvíkar sjómannaskúli			20.000,00	20.000,00
6. Føroya Fólkahásskúli:				
1. Rakstrarstudningur		83.600,00		83.600,00
2. 1. Byggistudningur til háskúlan		25.000,00		25.000,00
2. Rentustudningur		10.000,00		10.000,00
3. Næmingastudningur		44.640,00		46.000,00
			163.240,00	(164.600,00)
7. Kvøldskúlar			37.195,75	30.000,00
8. Ítróttur:				
1. Studningur til fimleikargrunnin		15.000,00		15.000,00
2. Studningur til Í. S. F.		10.000,00		10.000,00
Eykastudningur vegna 25 árs jubilæum		10.000,00		10.000,00
3. Landsstýrinum at ráða yvir til friferðir innanoyggja		18.795,00		20.000,00
			53.795,00	(55.000,00)
At flyta			4.491.332,10	4.452.350,00

			Roknskapur	Fíggjarlóg
Flutt			4.491.332,10	4.452.350,00
9. Ymiskir studningar:				
1. Studningur til lærdan lestur í grunn		60.000,00		60.000,00
2. Studningur til annan lestur í grunn		40.000,00		40.000,00
3. Studningur til uttanbygdanæmingar ..		30.000,00		30.000,00
4. Studningur til lærlingar í grunn.....		110.000,00		110.000,00
5. Studningur til jarðabrúksnæmingar		1.860,00		4.000,00
6. Studningur til háskúlagongd		2.350,00		4.000,00
7a. Studningur til skúlabarnaferðir uttanlands		16.000,00		20.000,00
7b. Studningur til skúlabarnaferðir innanoyggja		15.096,00		5.000,00
8. Studningur til skúlabyggigrunn		500.000,00		500.000,00
9. Ymiskir studningar		3.010,00		3.000,00
10. Læraraskeið		2.500,00		2.500,00
11. Næmingastudningur til listanemn		4.300,00		5.000,00
12. Byggigrunnur studenta & kostskúlaus		500.000,00		500.000,00
13. Føroyskt skúlasavn		5.000,00		5.000,00
14. Studningur til lærugrunn Føroya		10.000,00		10.000,00
15. Meginfelag føroyska studenta		16.900,00		17.000,00
16. Skúlastjórnin at ráða yvir		2.026,52		10.000,00
17. Landsstýrinum at ráða yvir		5.900,00		5.000,00
			1.324.942,52	(1.330.500,00)
			5.816.274,62	5.782.850,00
§ 15. VÍSIND, BÓKMENT OG LIST:				
1. Landsbókasavnið:				
1. Tænastumenn..		29.976,92		30.000,00
2. Aðrar lønir		43.006,93		49.000,00
3. Bókakeyp og innbinding		63.250,13		60.000,00
4. Ognarútreiðslur		19.654,57		20.000,00
5. Skrivstovulutir		3.149,95		2.500,00
6. Porto, telefon og lýsingar		4.151,65		3.500,00
7. Aðrar útreiðslur		0,00		500,00
		163.190,15		
8. Minus sektir	952,30			+1.500,00
9. Minus studningur frá Tórshavnar kommunu ..	8.600,00			+8.600,00
		9.525,30		
2. Bókasøvn á bygd:			153.664,85	(155.400,00)
1. Løn fyri eftirlit		2.105,65		2.800,00
2. Rakstrarstudningur		24.756,00		25.000,00
			26.861,65	(27.800,00)
3. Skjalasavnið:				
1. Lønir		26.176,00		26.000,00
4. Húsaútreiðslur		2.210,96		2.000,00
5. Skrivstovulutir		102,10		500,00
6. Porto, telefon og lýsingar		462,41		600,00
7. Aðrar útreiðslur		619,51		1.000,00
8. Ferða- og dagpeningur		0,00		300,00
			29.570,98	(30.400,00)
At flyta			210.097,48	213.600,00

		Roknskapur	Figgjarlóg
Flutt		210.097,48	213.600,00
4. Forminnisavnið:			
1. Lønir	24.674,00		25.000,00
2. Útgrefstur	26.777,48		15.000,00
3. Staðarnavnasavn	0,00		500,00
4. Húsaútreiðslur	17.211,19		6.000,00
5. Aðrar útreiðslur	13.122,67		7.000,00
6. Umsiting av forminninum	11.759,59		20.000,00
7. Bygging á skansanum í grunn	10.000,00		10.000,00
8. Røkt av skansanum	2.539,30		5.000,00
9. Amboð og umskipan	4.641,00		7.000,00
	110.725,23		
10. ÷ atgongupeningur	0,00		÷500,00
		110.725,23	(95.000,00)
5. Fiskirannsóknarstovan:			
1. Tænastumenn	38.961,24		37.000,00
2. Annað starvsfólk	52.849,78		50.000,00
4. Leiga av førum, amboð, hjálp o. t.	88.607,00		115.000,00
5. Húsaútreiðslur	2.880,00		3.000,00
7. Aðrar útreiðslur	5.487,98		4.000,00
8. Ferðaútreiðslur	5.290,52		6.000,00
	194.076,52		
9. Ríkiskassans endurrinding	76.218,04		÷75.000,00
		117.858,48	(140.000,00)
6. Fuglakanningarstøð:		3.800,00	3.000,00
7. Náttúrgripasavnið:			
1. Lønarendurgjald til ríkiskassan	23.130,21		24.000,00
4. Húsaútreiðslur	1.401,94		5.000,00
5. Skrívstovuútlit	1.261,35		1.500,00
6. Aðrar útreiðslur	233,15		300,00
7. Ferðapeningur v. m.	11.740,43		14.000,00
	37.767,08		
÷ Atgongupening	: 431,30		
		37.335,78	(44.800,00)
8. Ymiskir studningar:			
1. Barnabløð	1.200,00		1.200,00
2. Tórshavnar musikkskúli	10.000,00		10.000,00
3. Mentunnargrunnurin (M. F. L.)			
1. Til stovnsfæið	10.000,00		10.000,00
2. Til útgávu av bókum o. ø.	20.000,00		20.000,00
4. Føroya Listasavn	8.044,00		8.000,00
5. Savnan av føroyskum orðatilfari	1.000,00		1.000,00
6. Útgáva av tingbókum	3.000,00		3.000,00
7. Útgáva av Ilionskvæðnum	10.000,00		10.000,00
8. Útgáva av Føroya Kvæði I	3.243,00		3.300,00
		66.487,00	(66.500,00)
9. Sømdarpeningur:			
1. Til skald og listamenn		22.400,00	22.400,00
10. Landsstýrinum at ráða yvir:		20.680,68	20.000,00
At flyta		589.384,65	605.300,00

		Roknskapur	Fíggjarlóg
Flutt		589.384,65	605.300,00
11. Í grunn til lærdan stovn í føroyskum		20.000,00	20.000,00
12. Til doyvan av radioóljóði		39.849,37	32.000,00
13. Studningur til skúlabókaútgávu (til skúlabókagrunn)		10.000,00	10.000,00
14. Útvarpsgrunnur		4.230,79	25.000,00
15. Keyp av filmi		22.500,00	22.500,00
		685.964,81	714.800,00
§ 16. FISKIVINNA, SIGLING o. t.			
1. Vrakarastovnurin:			
1. Løn til yvirvrakara og eftirlitsmenn ..	183.468,39		205.000,00
2. Ferðaútreiðslur v. m.	39.007,54		45.000,00
	222.475,93		
3. Endurgjald fyri skriving av avskipingarskjølum	÷3.600,00		÷3.600,00
		218.875,93	(246.400,00)
2. Nautisk royndarkamar:			
1. Útreiðslur	4.032,10		5.000,00
2. ÷ Inntøkur	1.680,00		÷2.000,00
		2.352,10	(3.000,00)
3. Sjómannsheim uttanlanda		37.500,00	37.500,00
4. Vaktar- og bjargingarskip:			
Útreiðslur:			
Vaktutskip, rakstrarhall	64.352,75		
J. C. Svabo, rakstrarhall	133.352,13		
	197.704,88		
Partur fiskirannsóknarst. í rakstri	÷40.000,00		
		157.704,88	475.000,00
5. Ymist eftir landsstýrisins avgerð:			
G. Gerhardsen professari, ...	13.914,78		
Janus Kamban, myndahøggari	2.500,00		
Saltfiskanevnd	18.892,78		
Ísfiskanevnd	12.205,47		
Lønjavningargrunnurin	4.165,00		
Umboðan	3.134,91		
Annað	5.454,77		
		66.267,71	30.000,00
6. Studningur til lønjavningargrunnin:			
1. Goldin studningur 1964/65	1.800.000,00		1.800,000.00
Rest fyri 1962/63	300.000,00		0,00
		2.100.000,00	(1.800.000,00)
7. Studningur til heimaútróður:			
1. Goldin studningur til lønjavningargr. ..	2.503.635,23		1.500.000,00
Rest fyri 1962/63	217.193,75		0,00
		2.720.828,98	(1.500.000,00)
8. Studningslán til bátar:			
Útgoldin lán		33.566,51	50.000,00
9. Byggistudningur til Klakksvikar Sjómannsheim:		5.000,00	5.000,00
10. Studningur til endurnýggjun av skipaflotanum		460.000,00	460.000,00
At flyta		5.802.096,11	4.606.900,00

		Roknskapur	Figgjarlóg
Flutt		5.802.096,11	4.606.900,00
11. Grindir:			
1. Útreiðslur	44.787,65		
2. Inntøkur	28.402,70		
		16.384,95	5.000,00
12. Oyðing av kópi		12.950,00	15.000,00
13. Eftirlit við ymsum trolarafeløgum		2.499,96	2.500,00
		5.833.931,02	4.629.400,00
§ 17. LANDBÚNAÐUR OG MATRIKULERING:			
1. Tænastumenn o. a.:			
1. Landbúnaðarráðgevi løn v. m.	42.480,05		37.500,00
2. Djórulæknin, løn v. m.	55.072,25		57.500,00
3. Seyðaráðgevi	6.155,00		6.000,00
4. Ullvøruvraking	1.800,00		1.800,00
		105.507,30	(102.800,00)
2. Útskifting & Matrikulstova:			
Lønir	340.152,80		
Bønafólk	41.822,48		
Húsaútreiðslur	33.722,24		
Porto, telefon og lýsingar	7.610,99		
Tilfar til skrivst. tekn.	13.341,72		
Tilfar til uppmáling	8.047,48		
Kortprenting, fotoarb. o. t.	64.713,12		
Ferða- og dagpeningur	47.723,26		
Tól, keyp	37.424,68		
Tól, umsiting og endurnýgging	1.097,03		
Annað	2.367,05		
	598.022,85		
÷ Inntøkur	275.768,89		
		322.253,96	417.500,00
3. Royndarstøðin í Hoyvík:			
Útreiðslur:			
Fólkahald	48.840,72		
Bygningar	9.611,86		
Leysafæ	11.911,53		
Innistøða	3.960,35		
Fóður	10.745,75		
Sáð	77,40		
Tøð	1.147,75		
Skattur og leiga	396,95		
Bókasavn	21,20		
Skrívstovuútreiðslur + prenting	3.941,47		
Ferðaútreiðslur + koyring	136,00		
Borðfæ	800,00		
Ísáðingarstøðin	47.370,07		
Løn til fyristøðumann	31.902,00		
	170.863,05		150.000,00
At flyta	170.863,05	427.761,26	670.300,00

			Roknskapur	Figgjarlóg
Flutt		170.863,05	427,761,26	670.300,00
3. Inntøkur:				
Hagin	11.408,82			
Fjósið	18.184,00			
Bøurin	325,00			
Aðrar inntøkur	10.510,05			
Húsaleiga frá fyristøðumanni	3.600,00			
Ísáðingarstøðin	4.960,00	48.987,87		26.000,00
			121.875,18	(124.000,00)
Traðardalur á Sandi, leigu			÷100,00	0,00
4. Fyriskipanir móti munn- og kleyvsótt			757,00	1.000,00
5. Ymiskir studningar:				
1. Húsdjóraaling		70.000,00		70.000,00
2. Nýdyrking		100.000,00		100.000,00
3. Rentustudningur til landbúnaðarlán ..		10.000,00		10.000,00
4. Studningur til ílegging í landbúnaðin ..		200.000,00		200.000,00
5. Studningur til neylahald		316.612,81		200.000,00
6. Súrhoyggjbrunnar		100.306,62		75.000,00
7. Træplanting		6.000,00		6.000,00
8. Oyðing av ravní og kráku		1.545,00		1.000,00
9. Landsstýrinum at ráða yvir		25.709,70		30.000,00
			830.174,13	(692.000,00)
			1.380.467,57	1.337.300,00

§ 18. HANDIL, ÍDNAÐUR O. T.:

1. Ravmagnsmál:				
1. Ravmagnsnevndin		1.200,00		3.000,00
2. Studningur til S. E. V. at leggja í grunn		877.000,00		877.000,00
3. Grunnurin ravmagnsverk á smábygdum		10.000,00		10.000,00
			888.200,00	(890.000,00)
2. Fabriks- og ketilumsjón			18.679,19	15.000,00
3. Motorkønur eftirlitsmaður:				
1. Útreiðslur		32.169,90		24.000,00
2. Inntøkur		29.337,00		÷24.000,00
			2.832,90	(0,00)
4. Skipaskráseting og uppmáling:				
1. Skipaskrá		1.557,00		1.300,00
2. Skipauppmáting:				
Útreiðslur	9.530,60			8.000,00
Inntøkur	4.464,90	5.065,70		÷8.000,00
			6.622,70	(1.300,00)
5. Semingsmannaskipanin			5.579,05	5.200,00
6. Kolagrefstur:				
1. Kolagrefstur		179.517,12		
2. Vegastudningur		52.630,99		
			232.148,11	200.000,00
7. Føroya Ferðamannafelag			25.000,00	25.000,00
At flyta			1.179.061,95	1.136.500,00

			Roknskapur	Figgjarlóg
Flutt			1.179.061,95	1.136.500,00
8. Ymist eftir avgerð landstýrisins:				
Politiskr., útlagt		110,50		
Fotokopi v. m.		598,02		
M. Poulsen, studning		5.500,00		
			6.208,52	20.000,00
9. Læruráðið			17.715,17	24.000,00
10. Nevndin til kannan av øktum virkismøguleikum			34.898,56	48.000,00
			1.237.884,20	1.228.500,00
§ 19. ALMENN FORSORG				
1. Fólkapensión:				
1. Útgoldin fólkapensión		11.758.159,02		
2. ÷ Fólkapensiónsskatt		1.435.020,52		
		10.323.138,50		
÷ Endurgj. ríkiskassans	5.898.936,28			
÷ Partur kommununna	723.562,16	6.622.498,44		
			3.700.640,06	5.090.000,00
2. Avlamispensión:				
1. Partur landskassans (1/2)		2.369.242,58		
2. ÷ Partur kommununna		394.873,76		
			1.974.368,82	2.340.000,00
3. Onnur almenn forsorg:				
1a Alimentasjónsútreiðslur (partur landskassans)		87.625,56		
1. Einkjubarnastyrkur	369.410,00			
2. ÷ endurgj. ríkiskassans ..	184.705,00	184.705,00		
		272.330,56		
4. Einkjupensjón	371.377,94			
÷ Endurgjald ríkiskassans ..	185.688,97			
		185.688,97		
5. 1. Onnur hjálp	475.797,98			
÷ Endurgjald ríkiskassans ..	118.949,50			
		356.848,48		
2. Barnaforsorgsútreiðslur, útlagt av teimum 46 smáu kommununum	85.703,03			
3. Barnaforsorgsútreiðslur, útlagt av teimum 4 stóru kommununum	147.049,22			
		232.752,25		
		1.047.620,26		
÷ Partur kommunanna		174.603,37		
			873.016,89	852.000,00
6. Styrkveitingar			45.348,26	50.000,00
7. Barnaheim:				
Rakstrarstudningur			90.000,00	90.000,00
At flyta			6.683.374,03	8.422.000,00

		Roknskapur	Figgjarlóg
Flutt		6.683.374,03	8.422.000,00
8. Aldursheim:			
Tórshavnar aldursheim . .		25.864,00	22.000,00
9. Studningur til A. L. V.		20.000,00	20.000,00
10. Ymiskir studningar:			
1. Fráhaldsfeløgini	10.000,00		10.000,00
2. Felagið »Reyði Krossur«	1.500,00		1.500,00
3. Óarbeiðsførir fiskimenn . .	50.000,00		50.000,00
4. Barnahjálpargrunnurin . .	10.000,00		10.000,00
5. Sjúkragrunnur verkamanna	50.000,00		50.000,00
		121.500,00	(121.500,00)
		6.850.738,03	8.585.500,00
§ 20. EFTIRLØNIR			
1. 1. Eftirlønir	43.509,72		48.000,00
2. 1. Biðipeningur	20.200,08		20.000,00
		63.709,80	(68.000,00)
		63.709,80	68.000,00
§ 21. ÚTREIÐSLUR Í SAMBANDI VIÐ EFFEKTIVAR VEÐHALDSBINDINGAR		11.056,10	400.000,00
		11.056,10	400.000,00
§ 22. AÐRAR ÓVISSAR ÚTREIÐSLUR			
1. Útreiðslur av vali		4.894,00	15.000,00
2. Landsstýrið at ráða yvir:			
Ymiskir studningar	30.476,00		
Fundargjøld	5.407,90		
Vanlukkutryggingarráðið	6.598,50		
Annað	16.846,09		
	59.328,49		
2. Fremmandavitjan	49.244,08		
		108.572,57	100.000,00
3. 1. Faðirskapssakir		3.027,94	
2. Skipan av tingbók fyri Sørvág		3.395,10	
		119.889,61	115.000,00
§ 23. AT LEGGJA Í YMSAR GRUNNAR V. M.			
1. 1. Avlopið hjá apotekinum lagt í apotekuragrunnin	39.936,98		100.000,00
2. Avlopið frá telefonverkinum	165.551,90		100.000,00
3. Avlopið frá utvarpinum	4.230,79		30.000,00
4. Til kirkjugrunnin	160.000,00		160.000,00
5. Sett av til byggjan av nýggjum vaktarskipi	2.000.000,00		
		2.369.719,67	(390.000,00)
		2.369.719,67	390.000,00
§ 24. AVDRÁTTARBURTURLEGGINGAR			
Goldin avdr. av uppt. lánum	3.201.810,62		
Avskriving uppá aktivir, finansierað við lán	1.135.021,85		
		4.336.832,47	3.100.000,00
		4.336.832,47	3.100.000,00

		Rekneskapur	Fíggjarlóg
§ 25. AVSKRIVINGAR			
Avskrivingar, bygningar og anlegg		309.130,10	697.000,00
		309.130,10	697.000,00
§ 26. YMSAR OGNARÚTREIÐSLUR			
Ymsar ognarútreiðslur	3.641,76		
÷ goldin leiga (Lab. + yvirlæknahús) ..	4.014,00		
		÷372,24	20.000,00
		÷372,24	20.000,00
§ 27. KASSAMUNUR			
		÷540,15	0,00
		÷540,15	0,00
§ 28. SETT AV MÓTI TAPI AV LÁNUM OG VEÐHALDUM			
Sett av móti tapi av lánum og veðhaldum ..		2.388.377,78	0,00
		2.388.377,78	0,00
§ 29. YVIRSKOT			
Yvirskot		4.000.000,00	44.688,00
		4.000.000,00	0,00
		49.443.705,38	41.099.000,00

Spesifikatiónir til statusroknskapin

Konto nr.	Tekst		Scrupphæddir	Samtals
30	FASTAR OGNIR V. M.			
	Sethús:			
30—1—1	Matr. nr. 1026a (Grundøki)		10.077,00	
30—1—2	Húsini í Stórustovu saldo 1/4 1964	102.122,06		
	Avskrivað	7.212,25	94.909,81	
30—1—3	Húsið við Landavegin, saldo 1/4-64	49.500,00		
	Avskrivað	1.725,00	47.775,00	
30—1—4	Matr. nr. 1025a (Müllers trøð)		315.000,00	
				467.761,81
30—2	Ognir í almennari nýtslu:			
30—2—1	Bróstsjúkrahúsið (Er ein partur av Føroya hægri skúla)		200.000,00	
30—2—2	Yvirlæknahús við Bróstsjúkrahúsið			
	Saldo 1/4-64	40.286,53		
	Avskrivað	4.028,65	36.257,88	
30—2—3	Løgtingshúsið		48.283,43	
30—2—4	Landsbókasavnið		70.000,00	
30—2—5	Laboratoriið við studentaskúlan,			
	saldo 1/4-64	75.414,47		
	Avskrivað	7.541,45	67.873,02	
30—2—6	Skúlabarakkin í Kongagøtu,			
	saldo 1/4-64	80.854,71		
	Avskrivað	16.170,94	64.683,77	
30—2—7	Varðhaldshúsið (Skansin)		8.000,00	
30—2—8	Umboðsmannahúsið í Aberdeen,			
	saldo pr. 1/4-64	126.047,22		
	Avskrivað	10.604,72	115.442,50	
30—2—9	Tinganesognirnar, saldo pr. 1/4-64	807.054,10		
	Avskrivað	70.705,41	736.348,69	
30—2—11	Formminnissavnið, saldo pr. 1/4-64	274.400,21		
	Avskrivað	13.720,00	260.680,21	
30—2—12	Føroya Sjómannasskúli, saldo 1/4-64	2.128.941,90		
	Avskrivað	81.157,68	2.047.784,22	
				3.655.353,72
30—3	Hús í gerð:			
30—3—2	Studenta- og kostskúli, saldo 1/4-64	3.088.691,43		
	Útlagt í 64/65	1.668.488,90	4.757.180,33	
30—3—4	Byggjan av maskinistskúla, saldo			
	saldo 1/4-64	76.098,95		
